# Almannamálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 23. desember 2019
Mál nr.: 17/00644
Málsviðgjørt:
Eftirkannað:

**Løgtingsmál nr. xx/2019: Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (Vælferðarlógin)**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**almannatrygd og vælferð**
**(Vælferðarlógin)**

## Kapittul 1
## Endamál og skyldur myndugleikans

**§ 1.** Endamálið við hesi løgtingslóg er at menna og endurmenna við at veita:
1) ráðgeving til tess at fyribyrgja sosialum trupulleikum,
2) veiting til persón, ið ikki á annan hátt kann útvega sær og familjuni tað neyðuga til uppihald, og
3) endurbót og sosialar tænastur til tess at fyribyrgja og bøta um avleiðingar vegna brek, sjúku ella víðfevndar sosialar trupulleikar.

*Ráðgevingarskylda*

**§ 2.** Almannaverkið skal veita persóni sosialfakliga ráðgeving um, hvør hjálp kann veitast sambært hesi løgtingslóg og í mun til aðra almannalóggávu.
*Stk. 2.* Ráðgevingin skal veitast, so at persónur í størst møguligan mun gerst sjálvbjargin og sjálvur kann loysa verandi og framtíðar fíggjarligar avbjóðingar, undir hesum møguleikar fyri arbeiði ella útbúgving, ella at minka um fastar útreiðslur, ið fíggjarligt rúm ikki er fyri.
*Stk. 3.* Ráðgevingin skal eisini fevna um, hvør tænasta kann veitast sambært hesi løgtingslóg og í mun til tænastustøði, eins og Almannaverkið skal vísa á møguleikar fyri hjálp hjá øðrum myndugleikum og sjálvsognarstovnum. Ráðgevingarskyldan fevnir um ráðgeving til persónin sjálvan og til avvarðandi.
*Stk. 4.* Er talan um barn, ið hevur fingið brek ella varandi sjúku, skal Almannaverkið veita skjóta ráðgeving um, hvør hjálp kann veitast barninum og familjuni.
*Stk. 5.* Ráðgevingarskyldan hjá Almannaverkinum fevnir somuleiðis um uppleitandi arbeiði til persónar við víðfevndum sosialum trupulleikum.

*Sosialfaklig meting, ætlan o.a.*

**§ 3.** Hjálp sambært hesi løgtingslóg skal veitast soleiðis, at persónur í størst møguligan mun megnar at uppihalda sær sjálvum og liva eitt so sjálvstøðugt, støðugt og innihaldsríkt lív, sum til ber. Dentur verður lagdur á hesi viðurskifti hjá persóni:

1) persónlig viðurskifti,
2) uppihaldsgrundarlag,
3) virkisføri,
4) bústaðarviðurskifti,
5) sálarlig og kropslig heilsa og
6) onnur sosial viðurskifti.

*Stk. 2.* Almannaverkið ger av, á hvønn hátt hjálpin sambært hesi løgtingslóg skal veitast. Avgerðin tekur støði í tørvi og ynski hjá tí einstaka, sosialfakligari meting og fíggjarliga rásarúminum fyri tænastu hjá myndugleikanum.
*Stk. 3.* Við støði í stk. 1 og 2 skal ein ætlan gerast fyri hvønn einstakan persón, sum hevur umfatandi og samansettan tørv á hjálp. Ætlanin verður gjørd í samráði við tann einstaka og skal fevna um, hvørjar veitingar og tænastur persónurin hevur tørv á, umframt endamálið við hesum. Ætlanin skal eisini fevna um væntaða longd á fyriskipanum, umframt skiftið frá einum lívsskeiði til næsta.
*Stk.4.* Almannaverkið hevur ábyrgd av, at ætlanin sambært stk. 3 verður gjørd, og at hjálp og stuðul sambært hesi lóg, løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, løgtingslóg um almannapensjónir, og løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. verða samskipað. Í tann mun, at persónur eisini er undir fyriskipan ella ætlar undir fyriskipan hjá øðrum myndugleika ella sjálvsognarstovni, skal Almannaverkið samstarva og samskipa við myndugleikan ella sjálvsognarstovnin.

*Fráboðanarskylda*

**§ 4.** Starvsfólk, ið útinnir almenna tænastu ella starv, skal boða Almannaverkinum frá, tá tað í yrki sínum fær kunnleika um, at persónur hevur tørv á hjálp sambært hesi løgtingslóg.
*Stk. 2.* Fráboðanarskyldan er galdandi, tá persónur hevur tørv á ráðgeving, uppihaldshjálp, endurbót ella sosialari tænastu, orsakað av likamligum ella sálarligum breki, varandi sjúku, ella um viðkomandi á annan hátt livir undir ónøktandi viðurskiftum, eitt nú vegna víðfevndar sosialar trupulleikar.

## Kapittul 2
## Virkisøki

**§ 5.** Henda løgtingslóg er galdandi fyri persón, ið lógliga uppiheldur sær í Føroyum, og sum ikki hevur rætt til tænastu sambært aðrari lóggávu, og sum ikki kann uppihalda sær við øðrum inntøkum ella veitingum. Samanber tó §§ 6, 7 og 11.
*Stk. 2.* Hóast ásetingina í stk. 1 kann persónur í fólkapensjónsaldri, ið er fevndur av løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m., framhaldandi fáa tænastu sambært hesi løgtingslóg, um endamálið við tænastuni framhaldandi verður rokkið, tó undantikið tænastu sambært §§ 37 og 38.

**§ 6.** Persónur, ið uppiheldur sær uttan fyri Føroyar, hevur ikki rætt til veiting ella tænastu sambært hesi løgtingslóg. Landsstýrismaðurin kann tó áseta reglur um, hvørjar tænastur og veitingar fyribils kunnu veitast í øðrum landi og undir hvørjum treytum.
*Stk. 2.* Hevur persónur serligt tilknýti til Føroyar og á hesum grundarlagi ynskir at uppihalda sær í Føroyum í longur tíð, kann Almannaverkið, hóast persónurin, tá søkt verður, ikki er búsitandi í Føroyum, gera av at veita persóni hjálp sambært hesi løgtingslóg eftir, at hann er fluttur til Føroyar.

*Uppihaldsveiting til útlendingar*

**§ 7**. Bert persónur við donskum heimarætti, ella persónur, ið hevur rætt til

ikki tíðaravmarkað uppihaldsloyvi, hevur rætt til longurvarandi uppihaldsveiting sambært hesi løgtingslóg. Tað sama er galdandi fyri persón, ið er fevndur av sáttmála við onnur lond.
*Stk. 2.* Hevur útlendingur, ið ikki er fevndur av stk. 1, tørv á longurvarandi uppihaldsveiting, kann Útlendingastýrið, eftir áheitan frá Almannaverkinum, gera av at senda persónin heim.
*Stk. 3.* Persónur, fevndur av norðurlendska sáttmálanum um almannahjálp og tænastur, ið hevur tørv á longurvarandi uppihaldsveiting, kann sendast heim, um familjuviðurskifti, tilknýti til heimlandi og viðurskiftini annars ikki tala ímóti hesum. Persónur, ið hevur búð í Føroyum seinastu trý árini, kann ikki sendast heim.
*Stk. 4.* Persónur, sum ikki hevur lógligt uppihald í Føroyum, ella sum bara hevur rætt til at uppihalda seg í Føroyum í upp til 3 mánaðir, kann bert fáa fíggjarligan stuðul til ferð til heimlandið.

**§ 8.** Persónur, ið hevur rætt til uppihaldsveiting sambært hesi løgtingslóg, kann fáa fíggjarligt ískoyti til flyting og ferð til útlandið, tá:
1) persónur við at flyta til útlandið er tryggjaður støðugt arbeiði, ella
2) persónur er ríkisborgari í ella hevur serligt tilknýti til útlandið.

*Stk. 2.* Hóast ásetingina í stk. 1 kann fíggjarligt ískoyti veitast persóni, ið er fluttur til Føroyar úr Danmark, Grønlandi ella øðrum Norðurlandi, og sum ynskir at flyta heimaftur.

**§ 9.** Fíggjarligt ískoyti til heimferð til Føroyar kann veitast persóni, ið hevur lógligt uppihald í Føroyum, tá hesin er komin í fíggjarliga trongstøðu í útlandinum, og viðurskiftini tala fyri at veita fíggjarligt ískoyti til heimferð.

## Kapittul 3
## Uppihaldsveiting

**§ 10.** Persónur hevur skyldu at uppihalda sær sjálvum, sínum hjúnafelaga og børnum, yngri enn 18 ár.
*Stk. 2.* Uppihaldsskyldan mótvegis hjúnafelaga heldur uppat við sundurlesing og hjúnaskilnað.
*Stk. 3.* Uppihaldsskyldan mótvegis børnum, yngri enn 18 ár, heldur uppat sambært hesi løgtingslóg, tá barnið sjálvt hevur uppihaldsskyldu mótvegis hjúnafelaga ella egnum barni.
*Stk. 4.* Almannaverkið kann, hóast uppihaldsskylduna hjá foreldrum, veita gentu, yngri enn 18 ár, ið er við barn, hjálp í viðgongutíðini. Hjálpin kann veitast frá tí, at 8 vikur eru til ásetta føðing.

**§ 11.** Persónur, ið orsakað av sjúku, viðgongu og føðing, samlívssliti, vantandi arbeiðsmøguleikum ella øðrum broytingum í sínum viðurskiftum, og sum í avmarkað tíðarskeið ikki megnar at uppihalda sær og síni familju, kann fáa fyribils uppihaldsveiting, um almannahendingin hevur við sær, at liviumstøðurnar versna munandi.
*Stk. 2.* Persónur, sum heilt ella partvíst er í fyriskipan hjá tí almenna eftir §§ 45 og 46 ella eftir aðrari lóggávu, kann fáa fyribils uppihaldsveiting.
*Stk. 3.* Persónur skal ikki megna at svara hvørjum sítt við øðrum inntøkum, og allir arbeiðsmøguleikar og inntøkumøguleikar skulu vera troyttir soleiðis:
1) at persónurin ikki hevur eitt hóskandi arbeiðstilboð ella tilboð um fyriskipan sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, og
2) at persónurin ikki kann átaka sær inntøkugevandi arbeiði, orsakað av arbeiðsbúgving sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, og
3) tá tað av lækna er váttað, at persónurin er óarbeiðsførur, orsakað av sjúku ella skaða, ella framhaldandi arbeiði hevur við sær sannlíkindi fyri viknandi heilsustøðu, ella
4) tá persónur, ið hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, ikki kann arbeiða vegna vantandi barnaansing.

**§ 12.** Fyribils uppihaldsveiting sambært § 11, stk. 1 verður veitt soleiðis:

1) Persónur, sum býr einsamallur og hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 90% av hægstu uppihaldsveiting.
2) Persónur, ið er sambúgvandi og hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 70% av hægstu uppihaldsveiting.
3) Persónur, 25 ár og eldri, ið býr einsamallur og ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 75% av hægstu uppihaldsveiting.
4) Persónur, 25 ár og eldri, ið er sambúgvandi og ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 50% av hægstu uppihaldsveiting.
5) Persónur yngri enn 25 ár, ið ikki býr hjá einum ella báðum foreldrum og ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 40% av hægstu uppihaldsveiting.
6) Persónur, yngri enn 25 ár, ið býr hjá einum ella báðum foreldrum og ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 22% av hægstu uppihaldsveiting.
7) Persónur, sum er varðhaldsfongslaður ella settur í varðhaldslíknandi fyriskipan, situr dóm, ella er undir aðrari frælsisskerjandi fyriskipan sambært dómi, fær 7% av hægstu uppihaldsveiting. Um viðkomandi ikki hevur møguleika at arbeiða, meðan viðkomandi er í fyriskipan, er veitingin 13% av hægstu uppihaldsveiting.

*Stk. 2.* Persónur, sum fær fyribils uppihaldsveiting sambært § 11, stk. 2, fær 60% av hægstu uppihaldsveiting.
*Stk. 3.* Fyribils uppihaldsveiting verður veitt frá 1. í mánaðinum eftir, at umsóknin er móttikin, og staðfest er, at treytirnar eru loknar. Veitingin er til uppihalds frameftir.
*Stk. 4.* Sambúgvandi sambært stk. 1, nr. 2 og 4 er persónur, sum býr saman við øðrum vaksnum persóni.
*Stk. 5.* Hægsta uppihaldsveiting sambært stk. 1 og 2 er ásett í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

*Varandi uppihaldsveiting*

**§ 13.** Persónur, sum hevur varandi tørv á veiting til sítt og familjunnar uppihald, fær varandi uppihaldsveiting, ið samsvarar við 75% av hægstu fyribils uppihaldsveiting, tó ikki hægri enn veiting sambært § 12, stk. 1.

**§ 14.** Treytin fyri at fáa tillutað varandi uppihaldsveiting sambært § 13 er, at persónur, av heilsuligum, sosialum ella øðrum orsøkum, ikki kann ávísast arbeiði.
*Stk. 2.* Verður mett, at hjúnafelagin við eini útbúgving kann geva eitt munandi íkast til familjunnar uppihald, kann stuðul til útbúgving veitast sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

*Fíggjarligt ískoyti til bústaðarútreiðslur*

**§ 15.** Persónur, ið fær veiting sambært § 11, samanber § 12, stk. 1, nr. 1 og 2, og sum hevur fleiri enn tvey børn at uppihalda, kann í serligum føri fáa fíggjarligt ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur.
*Stk. 2.* Persónur, ið fær veiting sambært § 11 ella § 13 og sum vegna týðandi likamligt ellar sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar má hava ávísan bústað, kann fáa fíggjarligt ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um treytir fyri tillutan av fíggjarligum ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur sambært stk. 1 og 2.

**§ 16.** Fíggjarligt ískoyti kann fyribils veitast at rinda grundaðar útreiðslur til húsaleigu, tá persónur er í vanda fyri at verða settur úr leigubústaði. Treytin er, at persónur ikki hevur møguleika at rinda húsaleiguna við inntøku, ogn ella láni, og at ein fíggjarlig meting vísir, at húsaleigan ikki rúmast í fíggjarætlanini. Almannaverkið kann í mesta lagi veita fíggjarligt ískoyti til húsaleigu tveir

mánaðartil sama persón. Almannaverkið kann seta sum treyt fyri at veita ískoyti til húsaleigu, at umsitingarlig avtala verður gjørd ella, at persónur á annan hátt ger sítt til at fáa tamarhald á sínum fíggjarligu viðurskiftum.
*Stk. 2.* Fíggjarligt ískoyti sambært stk. 1 skal serliga veitast barnafamiljum og persónum við víðfevndum sosialum og sálarligum trupulleikum. Almannaverkið kann rinda peningin beinleiðis til útleigara.

**§ 17.** Persónur, sum fær veiting sambært § 11, stk. 2, samanber § 12, stk. 2, kann fáa fíggjarligt ískoyti til húsaleigu sambært § 48.

*Fíggjarligt ískoyti til persón í varðhaldi*

**§ 18.** Persónur, ið fær veiting sambært § 11, samanber § 12, stk. 1, nr. 7, kann fáa fíggjarligt ískoyti til rímiligar bústaðarútreiðslur, um so er, at tað hevur týdning fyri sosialu støðuna frameftir at varðveita bústaðin í sambandi við "útfaringarloyvi" ella eftir leyslating. Ískoyti verður bert veitt, um viðkomandi ikki á annan hátt hevur møguleika at halda útreiðsluna. Ískoyti verður veitt til verandi bústaðarútreiðslur, tó ikki til avdráttir til húsalán.
*Stk. 2.* Er dómurin longri enn 12 mánaðir, verður ískoyti sambært stk. 1 ikki veitt.
*Stk. 3.* Persónur, ið fær veiting sambært § 11, samanber § 12, stk. 1, nr. 7, ið hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, og sum veruliga uppiheldur barninum, kann fáa fíggjarligan stuðul til uppihaldið, tó í mesta lagi upphædd, ið samsvarar við vanliga barnagjaldið sambært lov om børns retsstilling.
*Stk. 4.* Persónur, ið er settur í gjald sambært lov om børns retsstilling, er ikki fevndur av stk. 2.

*Fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslu*

**§ 19.** Persónur, sum hevur verið fyri almannahending sambært § 11, stk. 1, og persónur, sum fær veiting sambært § 13, kunnu fáa fíggjarligt ískoyti til neyðuga og rímiliga grundaða stakútreiðslu, um so er, at viðkomandi ikki sjálvur er førur fyri at halda útreiðsluna.
*Stk. 2.* Persónur, sum hevur útreiðslur til sjúkuviðgerð, heilivág, tannviðgerð og líknandi útreiðslur, kann fáa fíggjarligt ískoyti at halda útreiðsluna. Ískoytið er treytað av, at viðgerðin er fevnd av avtalu við Heilsutrygd.
*Stk. 3.* Treytin fyri at veita fíggjarligt ískoyti sambært stk. 1 og 2 er, at persónur og familja hansara við at rinda útreiðsluna frameftir verða munandi avmarkað at gerast fíggjarliga sjálvhjálpin.

*Ognarviðurskifti*

**§ 20.** Fyribils uppihaldsveiting sambært § 11, stk. 1 og varandi uppihaldsveiting sambært § 13 kunnu ikki veitast, um persónurin ella hjúnafelagi eiga ogn, sum kann nýtast til uppihald.
*Stk. 2.* Hóast ásetingina í stk. 1 verður sæð burtur frá tøkum peningi til og við 30.000 kr.
*Stk. 3.* At meta sum ogn sambært stk. 1 er til dømis reiður peningur, innistandandi, virðisbrøv, útgoldin eftirlønaruppsparing og ognir umframt egin bústaður, so sum sethús, summarhús og aðrar fastognir, umframt kostnaðarmikið innbúgv.
*Stk. 4.* Sum ogn er ikki at meta:

1) ogn vegna endurgjald fyri varandi mein og ikki fíggjarligan skaða,
2) skaðabót vegna hættisliga sjúku ella skaða upp til 150.000 kr., ið verður útgoldin í einum. Upphæddin verður ikki roknað sum ogn í 5 ár eftir, at hon er útgoldin, og
3) ogn frá eftirgjaldi av almannaveitingum, í tvey ár eftir, at eftirgjaldið er útgoldið.

*Stk. 5.* Í sambandi við fyribils uppihaldsveiting er vinnutól, ið kann

brúkast til framhaldandi uppihald, ikki at meta sum ogn. Fyribils uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi er tó ikki fevnt av hesum undantaki.

*Lækking av veiting*

**§ 21.** Hjá persóni, sum fær fyribils uppihaldsveiting ella varandi uppihaldsveiting, og sum hevur aðra inntøku, verður hendan drigin frá uppihaldsveitingini.
*Stk. 2.* Egininntøka, sum ikki er skattskyldug, verður faldað við 1,5 og síðani drigin frá uppihaldsveitingini.

*Stk. 3.* Persónur, sum fær fyribils uppihaldsveiting sambært § 11, stk. 2, kann hava skattskylduga inntøku upp til 1.000 kr. um mánaðin, áðrenn fyribils uppihaldsveitingin verður lækkað.
*Stk. 4.* Veiting sambært løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl., veiting sambært løgtingslóg um familjuískoyti og stuðul frá privatum hjálparfelagsskapum verður ikki tikin við sum inntøka sambært stk. 1.

*Skylda at taka av tilboði sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk*

**§ 22.** Persónur, sum fær fyribils uppihaldsveiting sambært § 11, stk. 1 vegna arbeiðsloysi, skal taka av tilboði um fyriskipan sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.
*Stk. 2.* Persónur, sum fær fyribils uppihaldsveiting sambært § 11, stk. 1 vegna sjúku ella øðrum broytingum í sínum viðurskiftum, skal taka av tilboði um fyriskipan sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, um tað kann sameinast við sjúkuna ella avbjóðingarnar hjá viðkomandi.
*Stk. 3.* Persónur, sum fær fyribils uppihaldsveiting sambært § 11, stk. 1 vegna sjúku, skal fylgja møguligum ávísingum frá lækna.
*Stk. 4.* Almannaverkið steðgar fyribils uppihaldsveiting sambært § 11, stk. 1, um persónur uttan haldgóða orsøk noktar at taka av tilboði um fyriskipan sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um at steðga veiting sambært 1. pkt.

*Eftirmeting*

**§ 23.** Almannaverkið skal í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir, at ein persónur hevur fingið játtað fyribils uppihaldsveiting, meta, um grundarlag er fyri hjálp sambært aðrari lóggávu, undir hesum um viðkomandi lýkur treytirnar fyri at koma í fyriskipan sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

## Kapittul 4
## Endurbót vegna brek ella varandi sjúku

*Endurgjald fyri meirútreiðslur*

**§ 24.** Persónur, sum í heiminum uppiheldur barni við likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku, hevur rætt til at fáa endurgoldið neyðugar meirútreiðslur, ið eru ein beinleiðis avleiðing av brekinum ella sjúkuni. Meirútreiðslur eru:
1) Uppihaldsútreiðslur, ið standast av brekinum ella sjúkuni.
2) Útreiðslur til viðgerð, ið er fevnd av sáttmála við Heilsutrygd.

*Stk. 2.* Treytin fyri at fáa endurgjald fyri meirútreiðslur sambært stk. 1, nr. 2 er, at viðgerðin er neyðug og sambært tilmæli frá viðkomandi lækna. Stuðulin kann tó endurnýggjast við støði í meting frá honum, ið hevur viðgjørt barnið.
*Stk. 3.* Fíggjarligur stuðul til leypandi meirútreiðslur verður játtaður fyri í mesta lagi eitt ár í senn. Í tann mun, tørvurin hjá barninum er varandi og støðugur, kann fíggjarligur stuðul veitast fyri longur tíðarskeið enn eitt ár í senn.

*Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku*

**§ 25.** Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku kann veitast í hesum førum:

1) tá tað vegna likamligt ella sálarligt brek ella varandi sjúku er neyðugt at ansa barni í heiminum, ella at vera hjá barni í ávíst tíðarskeið í sambandi við viðgerð,
2) tá persónur undir fólkapensjónsaldri, sum ynskir at doyggja heima, verður ansaður av persóni, sum ein hevur eitt serligt og tætt tilknýti til, ella
3) tá persónur undir fólkapensjónsaldri við seinheilaskaða, sum vegna vantandi pláss á bústaði sambært §§ 45 ella 46, verður ansaður í heiminum av persóni, sum ein hevur eitt serligt og tætt tilknýti til.

*Stk. 2.* Fær barn samdøgurstilboð sambært hesi løgtingslóg ella løgtingslóg um barnavernd, kunnu foreldur ella fosturforeldur, hóast ásetingina í stk. 1, nr. 1, fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku í sambandi við viðgerð barnsins á sjúkrahúsi ella aðrari viðgerð, tá tað er neyðugt, at foreldur ella fosturforeldur eru um barnið í sambandi við viðgerðina.
*Stk. 3.* Endurgjald sambært stk. 1, nr. 1 kann veitast til foreldur ella fosturforeldur. Um foreldur vegna sjúku, føðing o.t. ikki kunnu uppihalda barninum, kann endurgjald veitast øðrum, sum viðvirka til uppihald av barninum.
*Stk. 4.* Tað er ein treyt fyri at fáa endurgjald fyri inntøkumiss sambært stk. 1, nr. 2, at persónurin, sum verður ansaður, er røktarkrevjandi, sjúkrahúsviðgerð er útlitaleys, og livitíðin væntast at vera stutt.
*Stk. 5.* Rætturin til endurgjald sambært stk. 1 dettur burtur, tá ansingin steðgar. Tó verður rætturin til endurgjald sambært stk. 1, nr. 1 varðveittur í upp til tríggjar mánaðir, um barnið doyr. Rætturin til endurgjald sambært stk. 1, nr. 2 og 3 verður varðveittur í 14 dagar eftir, at tann ansaði doyr.
*Stk. 6.* Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært stk. 1 verður ikki veitt fyri tann partin av inntøkuni, ið er hægri enn 25.000 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn og bundna eftirlønargjaldið sbrt. løgtingslóg um eftirløn. Upphæddin verður javnað sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.
*Stk. 7.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um treytir og útrokning av endurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku.

*Fíggjarligur stuðul til bil*

**§ 26.** Stuðul verður veittur til keyp av bili til persón við varandi avmarkaðum likamligum ella sálarligum førleika, ið munandi skerjir møguleikarnar at ferðast, ella ger tað trupult at fáa ella halda fast um eitt arbeiði ella eina útbúgving uttan brúk av bili. Stuðulin verður veittur sum eitt rentufrítt lán, sum í mesta lagi er 180.000 kr.
*Stk. 2.* Gera serlig viðurskifti seg galdandi í sambandi við avmarkaða førleikan, kann eitt rentufrítt og avdráttarfrítt lán veitast til at gjalda munin millum stuðulin sambært stk. 1 og prísin fyri at útvega ein dýrari bil.
*Stk. 3.* Stuðul verður veittur til meirútreiðslur til vektgjald á bili, skrásettur áðrenn 1. januar 2017, við eginvekt oman fyri 1300 kg. Hetta er eisini galdandi, verður bilur sambært 1. pkt. endurskrásettur eftir 1. januar 2017.
*Stk. 4.* Stuðul verður veittur til meirútreiðslur til umhvørvisgjald á bili við $CO_2$ útláti oman fyri 120 gramm pr. kilometur. Stuðul verður bert veittur til bil við eginvekt oman fyri 1300 kg.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um:

1) treytir og umstøður fyri at fáa stuðul eftir stk. 1 og 2,
2) afturrindan av láni, herundir freistir fyri afturrindan og treytir fyri at eftirgeva lán umframt inntøkugrundarlagið fyri at afturgjalda,
3) møguleikan at fáa stuðul til at útskifta ein bil, ið stuðul er veittur til, sambært stk. 1 og 2,
4) stuðul til neyðuga innrættan o.a.,
5) í hvønn mun, stuðul kann veitast til at gjalda koyrifrálæru o.a.,

6) stuðul til persón, ið kemur inn í landið og hevur ein bil við,
7) treytir fyri at játta stuðul til vektgjald ella umhvørvisgjald eftir stk. 3 og 4, og
8) árliga prístalsjavning av upphæddini í stk. 1.

*Stuðul til bústaðarbroyting*

**§ 27**. Stuðul verður veittur til at innrætta bústað til persón, ið hevur týðandi og varandi skert virkisføri, tá ið bústaðarbroytingin er mett neyðug til tess at gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald.
*Stk. 2.* Hevur bústaðarbroytingin sambært stk. 1 eina munandi virðisøking við sær, verður tann parturin av stuðlinum, ið samsvarar við virðisøkingina, veittur sum eitt rentufrítt og avdráttarfrítt lán, ið fellur til gjaldingar við eigaraskifti. Almannaverkið letur meting gera av virðinum á bústaðnum áðrenn og aftaná bústaðarbroytingina.
*Stk. 3.* Í teimum heilt serligu førunum, har stuðul sambært stk. 1 ikki verður mettur at vera nøktandi til at gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald, kann stuðul veitast til at gjalda útreiðslurnar at útvega annan bústað. Hesin stuðul er treytaður av, at annar bústaður ikki kann ávísast, ið nøktar tørvin hjá viðkomandi.
*Stk. 4.* Tann partur av stuðlinum sambært stk. 3, ið samsvarar við munin millum virðismetingina av fyrrverandi bústaði og útvegaða bústaðnum, verður veittur sum eitt rentufrítt og avdráttarfrítt lán, ið fellur til gjaldingar við eigaraskifti.
*Stk. 5.* Almannaverkið kann gera av, at umsókn um stuðul til ávísa bústaðarbroyting ikki verður gingin á møti:
1) um søkt verður um stuðul til bústaðarbroyting eftir, at bústaðurin er umbygdur, ella annar bústaður er útvegaður eftir, at tørvurin hjá persóni er staðfestur, og tað er eyðsýnt, at hettar ikki hevur gjørt bústaðin betur egnaðan sum tilhald hjá viðkomandi,
2) um søkt verður um stuðul til bústaðarbroyting, og farið er í gongd við umbygging av bústaðnum ella útvegan av bústaði, áðrenn umsóknin er liðugt viðgjørd, og stuðul er játtaður, og tað er eyðsýnt, at hettar ikki hevur gjørt bústaðin betur egnaðan sum tilhald hjá viðkomandi, og
3) umsøkjarin er ella átti at verið vitandi um hesi viðurskifti, ið nevnd eru í nr. 1 og 2, at bústaðarbroytingin sambært nr. 1 og 2 hevur ein munandi kostnað við sær, og at viðurskiftini undir einum kunnu metast sum grovt ósketni.

*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um:
1) treytir og umstøður fyri at veita stuðul sambært stk. 1 og 3, og
2) nær stuðulin skal rindast aftur, í hvønn mun afturgjaldskylduga upphæddin kann tryggjast við veðhaldi í ognini, og
3) um fyrning, undir hesum áseting um prosentmark fyri virðisøking í mun til lán til bústaðarbroyting.

*Bústaðarsosialur tørvur*

**§ 28.** Persónur, ið hevur bústaðarsosialan tørv sambært reglunum í leigulógini, kann av Almannaverkinum verða ávístur leigubústað.
*Stk. 2.* Útreiðslurnar eftir reglunum í leigulógini verða bornar sambært hesi løgtingslóg.

*Hjálparráð*

**§ 29.** Hjálparráð verður veitt persóni við virkistarni orsakað av likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku, um hjálparráðið:
1) er neyðugt fyri, at persónur fær ella varðveitir tilknýti til arbeiðsmarknaðin,
2) munandi bøtir um avleiðingar av sjúkuni ella brekinum, ella
3) munandi lættir um gerandisdagin í heiminum.

*Stk. 2.* Við virkistarni, orsakað av likamligum ella sálarligum breki ella sjúku, eru at skilja, at útlit ikki eru fyri, at heilsuviðurskiftini fara at betrast, og at tað

frameftir fer at vera varandi tørvur á at bøta um brekið ella sjúkuna.
*Stk. 3.* Hjálparráð sambært stk. 1 verður ikki veitt persóni, ið býr á ellis- og røktarheimi ella eldrasambýli, ið er skipað sambært løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., uttan so, at hjálparráðið er persónligt tillagað.
*Stk. 4.* Hjálparráð sambært stk. 1 kann í serligum førum varðveitast, hóast persónurin er fluttur á bústað, ið er skipaður sambært hesi løgtingslóg ella barnaverndarlógini, um hjálparráðið:
1) er neyðugt til tess at varðveita møguleikan fyri atkomu ella uppihaldi á bústaðnum, har persónurin er fluttur frá, og
2) er neyðugt við atliti til at varðveita tilknýtið millum persónin og foreldrini ella onnur, ið standa honum nær.

*Stk. 5.* Hjálparráð sambært stk. 4 kann í mesta lagi varðveitast fyri 12 mánaðir í senn. Áðrenn játtanarskeiðið endar, skal Almannaverkið hava gjørt eina nýggja meting av tørvinum á at varðveita hjálparráð sambært stk. 4.
*Stk. 6.* Vanligt innbúgv ella brúkslutir eru ikki at meta sum hjálparráð. Hjálparráð, ið kann endurnýtast, verður veitt sum útlán.
*Stk. 7.* Fíggjarligur stuðul til meirútreiðslur til serkost og serlig klæðnapløgg verður veittur sum hjálparráð til persón, ið er 18 ár ella eldri.
*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um:
1) Hvørji hjálparráð kunnu veitast og varðveitast, hvørji hjálparráð stuðul kann veitast til, umframt møguligar treytir í hesum sambandi.
2) Rakstur, viðlíkahald, umvæling og endurnýggjan av hjálparráðum.
3) Egingjøld og minstu upphæddir fyri hjálparráð, undir hesum hjálparráð, ið verður veitt frá privatum veitara.
4) Markamót í mun til virksemi hjá øðrum myndugleika.

*Hoyritól*

**§ 30.** Persónur, har hoyrnin á betra oyranum í mesta lagi er 30dB, mált sum miðalvirðið fyri frekvensirnar 1000, 2000 og 4000 Hz, hevur rætt til hoyritólsviðgerð.
*Stk. 2.* Persónur, sum er 18 ár ella eldri, skal rinda egingjald á 2.000 kr. fyri hvørt hoyritólið, ið verður veitt frá tí almenna.
*Stk. 3.* Persónur, sum er 18 ár ella eldri, kann fáa fíggjarligan stuðul at keypa hoyritól frá góðkendum privatum veitara. Mesti stuðulin til hoyritól er 4.000 kr. fyri hvørt hoyritólið, tó ikki hægri enn kostnaðurin á hoyritólinum.
*Stk. 4.* Persónur, sum áður hevur fingið hoyritól sambært stk. 1 ella fíggjarligan stuðul sambært stk. 3, kann endurnýggja hoyritól 4. hvørt ár.
*Stk. 5.* Eftir ítøkiligari meting frá lækna kann víkjast frá avmarkingunum í stk. 1, 2 og 4, um heilt serlig atlit tala fyri tí, vísandi til § 29, stk. 1.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um játtan av hoyritóli og fíggjarligum stuðli sambært stk. 1-5.

## Kapittul 5
## Tænastur

**§ 31.** Sosialar tænastur sambært hesi løgtingslóg verða veittar við tí endamáli, at persónur eftir førimuni fær ment sínar førleikar, varðveitt verandi førleikastig og fær neyðuga endurbót, umsorgan og røkt.
*Stk. 2.* Sosial tænasta verður veitt við støði í førleikum, ið persónur hevur, og tí menniskjaliga tilfeingi, ið er kring hann, so at avvarðandi ella onnur kunnu hjálpa honum at røkja síni áhugamál.

*Umsorganarskylda*

**§ 32.** Almannaverkið skal veita persóni, ið ikki er førur fyri at røkja egin áhugamál, neyðuga tænastu sambært hesi løgtingslóg, uttan mun til um viðkomandi er førur fyri at geva samtykki til tess. Tænastan kann tó ikki veitast við tvingsli, uttan so, at tvingsilin hevur heimild í løgtingslóg.

*Virkisætlan*

**§ 33.** Tá tænasta verður veitt sambært hesi løgtingslóg, skal ein virkisætlan leggjast fyri einstøku tænastuna, ið m.a. fevnir um:
1) hvørji mál og lutmál strembast skal eftir at røkka,
2) uppgávubýti og ábyrgdarbýti millum persón og starvsfólk í mun til at røkka settum málum,
3) mett tíðarskeið fyri at røkka málunum, og
4) eftirmeting og tillaging av ásettum málum.

*Stk. 2.* Tá tvingsil verður framdur sambært §§ 6, 10, 14, 15, 16, 18, 19 og 23 í tvingsilslógini, skal ein virkisætlan leggjast fyri einstaka persónin, ið hevur til endamáls í mestan mun at forða fyri, at tvingsil verður nýttur frameftir.

*Heimaráðgeving*

**§ 34.** Heimaráðgeving verður veitt persóni, ið hevur dagliga umsorgan fyri barni við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku.

*Stk. 2.* Heimaráðgeving sambært stk. 1 fevnir um:
1) undirvísing í mun til brekið ella sjúkuna, og
2) vegleiðing, námsfrøðilig og onnur faklig amboð at handfara ítøkiligar avbjóðingar í gerandisdegnum hjá barninum og familjuni.

*Stuðulstænasta*

**§ 35.** Stuðulstænasta verður veitt persóni við likamligum ella sálarligum breki ella persóni, sum er 18 ár ella eldri við víðfevndum sosialum trupulleikum til tess at veita persóni ein virknan og innihaldsríkan gerandisdag. Stuðulstænasta verður m.a. veitt sum:
1) námsfrøðilig leiðbeining í mun til at røkka yvirskipað persónlig mál,
2) umsorgan og praktisk hjálp til dagligar uppgávur og fíggjarviðurskifti,
3) fylgjari til sosial tiltøk, og
4) vøka og hjávera, ið er uttan fyri ábyrgdarøki hjá kommunu og heilsuverki.

*Stk. 2.* Stuðulstænasta verður ikki veitt persóni, sum fær tænastu á bústaði sambært §§ 45 og 46 í hesi løgtingslóg.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um:
1) skipan av stuðulstænastu,
2) tillutan av stuðulstímum, undir hesum mesta tal av stuðulstímum, og
3) rindan av útreiðslum fyri stuðulsfólk, eitt nú til ferðing og sosial tiltøk.

*Borgarastýrd stuðulstænasta*

**§ 36.** Stuðulstænasta sambært § 35, stk. 1, nr. 2-4 kann veitast soleiðis, at persónur, ið fær stuðulstænastu, sjálvur ger av, hvør skal virka sum stuðulsfólk, hvat stuðulstænastan kann nýtast til og nær.

*Stk. 2.* Stuðulstænasta sambært stk. 1 kann veitast persóni, 18 ár ella eldri, ið megnar at umsita stuðulstænastuna. Stuðulstænasta sambært stk. 1 kann veitast barni, yngri enn 18 ár, tá tann, ið hevur dagligu umsorganina av barninum, megnar at umsita stuðulstænastuna.

*Stk. 3.* Persónur, sum hevur tætt tilknýti til persón, sum sambært stk. 1 fær stuðulstænastu, kann ikki setast sum stuðulsfólk.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um:
1) skipan av stuðulstænastu sambært stk. 1, undir hesum treytir fyri stuðulstænastuni,
2) tillutan av stuðulstímum, undir hesum minsta og mesta tal av stuðulstímum, og
3) rindan av útreiðslum fyri stuðulsfólk, eitt nú til ferðing og sosial tiltøk.

*Endurvenjing*

**§ 37.** Endurvenjing verður veitt persóni í aldrinum 18 ár upp til fólkapensjónsaldur, sum vegna mistan førleika tørvar endurvenjing. Endurvenjing verður veitt við tí endamáli, at persónur:

1) kann fáa ella varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin, ella
2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

*Stk. 2.* Persónur, niður í 16 ára aldur, kann í serligum førum fáa endurvenjing, tá endurvenjingin er ein liður í arbeiðsbúgvingarætlan sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

*Stk. 3.* Hjálparráð sambært § 29, stk. 1 kann veitast í sambandi við endurvenjing sambært stk. 1 og 2.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um endurvenjing, undir hesum treytir fyri at fáa endurvenjing og reglur um endurvenjingarætlan og samstarv við sjúkrahúsverk og kommunur ella kommunal samstarvsøki.

*Viðlíkahaldsvenjing*

**§ 38.** Viðlíkahaldsvenjing verður veitt persóni í aldrinum 18 ár upp til fólkapensjónsaldur, sum orsakað av breki ella sjúku hevur ella er í vanda fyri at fáa týðandi og varandi skert virkisføri, ið munandi víkir frá aldurssvarandi virkisføri, og hevur týðandi ávirkan á sjálvhjálpni.

*Stk. 2.* Viðlíkahaldsvenjing verður veitt við tí endamáli at tryggja verandi virkisførleika og fyribyrgja og útseta, at virkisførleikin versnar soleiðis, at persónur:

1) kann fáa ella fasthalda tilknýti til arbeiðsmarknaðin, ella
2) klárar seg uttan, ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

*Stk. 3.* Viðlíkahaldsvenjing kann í mesta lagi játtast fyri 24 mánaðir í senn. Áðrenn játtanarskeiðið endar, skal Almannaverkið hava tikið nýggja avgerð um viðlíkahaldsvenjing. Almannaverkið ger av, hvussu viðlíkahaldsvenjing verður veitt, undir hesum tal av tímum til viðlíkahaldsvenjing.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um viðlíkahaldsvenjing, undir hesum treytir fyri at fáa viðlíkahaldsvenjing og reglur um viðlíkahaldsvenjingarætlan og samstarv við sjúkrahúsverk og kommunur ella kommunal samstarvsøki.

*Virknistænasta*

**§ 39.** Pláss á dagstovni og frítíðarheimi verður veitt barni við likamligum ella sálarligum breki, ið ikki kann vera á kommunalum dagstovni ella frítíðarheimi, sum er skipað sambært løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta foreldragjald fyri pláss á dagstovni og frítíðarheimi. Gjaldið kann ikki vera hægri enn kommunalt pláss á dagstovni og frítíðarheimi, sum er skipað sambært løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt.

*Stk. 3.* Stendst ivi um, hvørt barn skal hava pláss á dagstovni ella frítíðarheimi sambært hesi løgtingslóg, tekur Almannaverkið avgerð eftir tilmæli frá óheftari fakligari nevnd.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin setir fakligu nevndina sambært stk. 3. Fakliga nevndin verður mannað við trimum limum og trimum varalimum, ið verða valdir 4. hvørt ár. Limir manna nevndina, til nýggir limir eru valdir.

**§ 40.** Virknistænasta verður veitt persóni við likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum.

*Stk. 2.* Virknistænasta verður veitt við tí endamáli at tryggja persóni ein virknan og innihaldsríkan gerandisdag soleiðis, at hann varðveitir og mennir sínar persónligu og sosialu førleikar.

*Stk. 3.* Virknistænasta kann t.d. veitast sum:

1) frítíðartilboð,
2) vardur verkstaður,
3) verkhús, ella
4) arbeiðsrættað fyriskipan.

*Stk. 4.* Persóni í virknistænastu, ið er at meta sum framleiðsluvirki, verður veitt samsýning, sum í minsta lagi er 6% av grundløn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, frítíðarløn ikki íroknað.

*Umlætting*

**§ 41.** Umlætting verður veitt:
1) Tí, ið hevur dagligu umsorganina av persóni við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum.
2) Persóni við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum, ið ikki fær fyribils bústað sambært § 45 ella vardan bústað sambært § 46 í hesi løgtingslóg.

*Stk. 2.* Umlætting verður veitt sum:
1) Náttarumlætting, ella
2) samdøgursumlætting í ávíst tíðarskeið.

*Stk. 3.* Umlætting verður veitt eftir tørvi hjá og í samráð við tann, ið skal hava umlætting.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann krevja gjald fyri umlætting.

*Tulkatænasta*

**§ 42.** Tulkur verður veittur persóni við ongari ella niðursettari hoyrn ella persóni, sum hevur teknmál sum mál, og sum tí hevur tørv á tulki, tá samskift verður við onnur.
*Stk. 2.* Tulkur verður veittur soleiðis, at persónur kann taka lut í samfelagslívi og sosialum lívi á jøvnum føti við onnur.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir reglur um treytir fyri at veita tulkatænastu, tal av tulkatímum, undir hesum býtislykil millum brúkarar og gjald fyri avleiddar útreiðslur.

*Flutningstænasta*

**§ 43.** Flutningstænasta verður veitt persóni til og frá tænastu sambært hesi løgtingslóg. Flutningur í sambandi við tænastu verður veitt persóni, sum ikki sjálvur kann nýta almennar ella privatar flutningsskipanir ella koyra í egnum bili til tænastu.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um flutningstænastu, undir hesum treytir fyri fáa flutningstænastu, skipan av flutningstænastu, gjald fyri flutningstænastu og markamót til aðrar flutningsskipanir.

*Hjálp í sambandi við harðskap*

**§ 44.** Fyribils gisting á kreppumiðstøð, umsorgan, ráð og vegleiðing verður veitt persóni vegna harðskap í parlagi ella nærsambondum.
*Stk. 2.* Kreppumiðstøðin tekur avgerð um innskriving.
*Stk. 3.* Persónur, ið gistir á kreppumiðstøð, rindar fyri uppihaldið.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur og kann veita fíggjarligan stuðul til kreppumiðstøð, sambært stk. 1, eftir nærri ásettum treytum.

## Kapittul 6
## Bústaðir

*Fyribils bústaður*

**§ 45.** Fyribils bústaður verður veittur persóni við likamligum ella sálarligum breki ella sosialum trupulleikum.
*Stk. 2.* Endamálið við fyribils bústaði er m.a. at menna persónligar og sosialar førleikar soleiðis, at persónur megnar at liva eitt so sjálvstøðugt lív, sum tilber, undir hesum at fáa ella varðveita tilknýti til skúla og arbeiði.
*Stk. 3.* Tænastan á fyribils bústaðnum fevnir m.a. um:
1) námsfrøðiliga leiðbeining í mun til at røkka yvirskipað persónlig mál,
2) umsorgan og praktiska hjálp til dagligar uppgávur og fíggjarviðurskifti,
3) fylgjara til sosial tiltøk,
4) vøku og hjáveru,
5) persónliga røkt,
6) endurvenjing, og
7) viðlíkahaldsvenjing.

*Stk. 4.* Fyribils bústaður sambært stk. 1 verður veittur:
1) á bústovni og viðgerðarstovni, ella
2) í stovnslíknandi fyriskipan.

*Stk. 5.* Tænastan sambært stk. 2 verður skipað sum:

1) grundtænasta, sum verður veitt øllum búfólkum, og
2) einstaklingarættað tænasta, sum verður veitt einstaka búfólkinum.

*Stk. 6.* Persónur, ið fær fylgjara sambært stk. 3, nr. 3, kann sjálvur gera av, hvør skal virka sum fylgjari, hvat fylgjarin skal brúkast til og nær. Persónur, sum hevur tætt tilknýti til persón, sum sambært stk. 3, nr. 3 fær fylgjara, kann ikki setast sum stuðulsfólk.

*Vardur bústaður*

**§ 46.** Vardur bústaður verður veittur persóni, sum hevur týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar og hevur tørv á hjálp og stuðli til vanligt dagligt virksemi umframt møguliga røkt.

*Stk. 2.* Endamálið við vardum bústaði er at veita persóni eitt heim, har viðkomandi kann liva eitt sjálvstøðugt, støðugt, innihaldsríkt og virkið lív.

*Stk. 3.* Tænastan á varda bústaðnum fevnir m.a. um:
1) námsfrøðiliga leiðbeining í mun til at røkka yvirskipað persónlig mál,
2) umsorgan og praktiska hjálp til dagligar uppgávur og fíggjarviðurskifti,
3) fylgjara til sosial tiltøk,
4) vøku og hjáveru,
5) persónliga røkt,
6) endurvenjing, og
7) viðlíkahaldsvenjing.

*Stk. 4.* Vardir bústaðir sambært stk. 1 verða veittir:
1) í búfelagsskapi, ella
2) á sambýli.

*Stk. 5.* Tænastan sambært stk. 3 verður skipað sum:
1) grundtænasta, sum verður veitt øllum búfólkum, og
2) einstaklingarættað tænasta, sum verður veitt einstaka búfólkinum.

*Stk. 6.* Persónur, ið fær fylgjara sambært stk. 3, nr. 3, kann sjálvur gera av, hvør skal virka sum fylgjari, hvat fylgjarin skal brúkast til og nær. Persónur, sum hevur tætt tilknýti til persón, sum sambært stk. 3, nr. 3 fær fylgjara, kann ikki setast sum stuðulsfólk.

*Serlig bútilboð*

**§ 47.** Serligt bútilboð verður veitt persóni við víðfevndum sosialum trupulleikum, sum ikki er førur fyri at útvega sær ella fasthalda ein varandi bústað.

*Stk. 2.* Endamálið við serligum bútilboði er at veita persóni umsorgan og hjálp til dagligt virksemi. Serlig bútilboð kunnu umframt bútilboð eisini skipast sum dagtilboð og náttartilboð.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um serlig bútilboð og um stuðul til sjálvbodnar felagsskapir, sum skipa serlig bútilboð.

*Húsaleiga og felags útreiðslur o.a.*

**§ 48.** Persónur á fyribils bústaði sambært § 45 og á vardum bústaði sambært § 46 rindar fyri húsaleigu, íroknað streym og olju, umframt felags útreiðslur.

*Stk. 2.* Húsaleiga á fyribils bústaði og vardum bústaði verður ásett í mun til stand á tí leigaða, samlað fermetratal, ið persónur hevur at ráða yvir, íroknað felagshøli, umframt viðlíkahald vegna slit og elli. Húsaleiga, frároknað streym og olju, verður javnað á hvørjum ári sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

*Stk. 3.* Felags útreiðslur á bústaði sambært stk. 1 verða ásettar í mun til, hvørjar útreiðslur eru felags. Felags útreiðslur skulu í minsta lagi fevna um endurnýggjan av felags innbúgvi. Felags útreiðslur verða ásettar í reglugerð fyri einstaka bústaðin.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um m.a. áseting av húsaleigu, nær húsaleigan kann lækkast, grundað á inntøkuviðurskifti leigarans, felags útreiðslur, foreldragjald, leigureglur og reglur um skilhald.

*Móttøkuskylda og tryggjaðar búfyriskipanir*

**§ 49.** Almannaverkið hevur skyldu at veita sosialnámsfrøðiliga viðgerð og fyribils bústað sambært § 45 ella vardan bústað sambært § 46 til persón:

1) sum sambært rættarúrskurði skal sinniskannast,
2) sum sambært rættarúrskurði ella dómi skal setast í vardan bústað ella vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settur í vardan bústað, ella
3) sum treyt fyri ákæruafturtøku ella royndarleysgeving verður settur í vardan bústað, ella skal vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settur í vardan bústað.

*Stk. 2.* Almannaverkið hevur skyldu at veita sosialnámsfrøðiliga viðgerð og fyribils bústað sambært § 45 ella vardan bústað sambært § 46 til persón, ið er dømdur sambært § 74 a í revsilógini.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um sosialnámsfrøðiliga viðgerð, ætlan, samstarv og samskipan við aðrar myndugleikar o.a.

**§ 50.** Almannaverkið kann leggja tilmæli sambært § 51 fyri tvingsilsnevndina um, at Almannaverkið veitir persóni fyribils bústað sambært § 45 ella vardan bústað sambært § 46, sum eina tryggjaða búfyriskipan.
*Stk. 2.* Ein tryggjað búfyriskipan sambært stk. 1 er ein fyriskipan, ið alt ella nærum alt samdøgrið hevur læstar úthurðar og læst vindeygu.
*Stk. 3.* Ein tryggjað búfyriskipan sambært stk. 1 kann vera skipað sum ein fyribils bústaður, vardur bústaður ella sum ein sjálvstøðugur partur av slíkum bústaði.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin góðkennir, at tryggjaðar búfyriskipanir sambært stk.1 verða skipaðar.

**§ 51.** Almannaverkið leggur tilmæli fyri tvingsilsnevndina um, at Almannaverkið veitir persóni tryggjaða búfyriskipan sambært § 50, tá:

1) Almannaverkið sambært dómi ella rættarúrskurði skal veita vardan bústað sambært § 49, stk. 1, nr. 1-3, ella
2) Almannaverkið metir, at avgerðin er neyðug til tess at forða fyri, at persónur ger skaða á seg sjálvan ella onnur, og
3) viðurskiftini í tí einstaka førinum gera tað neyðugt til tess, at persónur kann fáa neyðuga hjálp, stuðul og røkt sambært hesi løgtingslóg, og
4) endamálið ikki kann røkkast við øðrum sosialnámsfrøðiligum tiltøkum.

*Stk. 2.* Í tilmælinum sambært stk. 1, samanber § 50, stk. 1, skal í minsta lagi:

1) greiðast frá grundgevingini fyri, hví myndugleikin metir, at tryggjað búfyriskipan er neyðug,
2) greiðast frá meting um tíðarkarmin fyri uppihaldinum á tryggjaðu búfyriskipanini,
3) greiðast frá viðkomandi heilsuupplýsingum ella øðrum viðkomandi upplýsingum,
4) upplýsast, hvør stuðul, hjálp og røkt higartil er veitt,
5) upplýsast, hvussu stuðul, hjálp og røkt framhaldandi verður veitt, umframt nær persónur skal flytast, og
6) upplýsast, hvørjar viðmerkingar persónurin sjálvur, verji, hjúnafelagi, maki ella onnur avvarðandi hava til ætlaðu avgerðina.

*Stk. 3.* Kann tryggjað búfyriskipan ikki veitast í Føroyum, skal tilmælið fevna um, hvør fyriskipan í øðrum parti av ríkinum verður mett hóskandi, samanber § 67, stk. 2.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um skipan og góðkenning av tryggjaðum búfyriskipanum, umframt nærri reglur um treytir, gildistíð, uppihald og karmar kring tryggjaðar búfyriskipanir.

**§ 52.** Skal persónur setast á fyribils ella vardan bústað í Føroyum ella í øðrum parti av ríkinum sambært § 49, stk. 1, nr. 1-3, og setir persónur seg ímóti hesum, veitir

løgreglan eftir áheitan frá Almannaverkinum hjálp at flyta persónin á bústaðin.

## Kapittul 7
## Upplýsingarskylda, reglur um afturgjald o.a.

*Upplýsingarskylda og reglur um afturgjald*

**§ 53.** Persónur, ið skal hava hjálp sambært hesi løgtingslóg, skal eftir áheitan frá Almannaverkinum lata neyðugar upplýsingar til málið, undir hesum at lata seg kanna av lækna ella líknandi og at geva samtykki til, at upplýsingar verða umbidnar frá øðrum myndugleika, lækna, sjúkrahúsi, peningastovni, sálarfrøðingi, arbeiðsgevara og øðrum privatum. Hesir myndugleikar og privat hava tá skyldu at lata umbidnu upplýsingarnar. Verða upplýsingarnar ikki latnar, kann Almannaverkið krevja rættarliga avhoyring sambært § 1018 í lov for Færøerne om rettens pleje.
*Stk. 2.* Í málum um uppihaldshjálp, fíggjarligt ískoyti, fíggjarligt endurgjald og fíggjarligan stuðul kann Almannaverkið, hóast samtykki ikki verður givið sambært stk. 1, krevja upplýsingar frá øðrum almennum myndugleikum um fíggjarlig viðurskifti hjá persóni og hjúnafelaga.
*Stk. 3.* Í málum um afturgjaldskyldu sambært § 54, stk. 2, og í málum um at flyta persón á bústað ímóti hansara vilja, sambært reglunum í tvingsilslógini, kann Almannaverkið krevja upplýsingar frá myndugleikum og privatum uttan samtykki, samanber stk. 2.
*Stk. 4.* Sum liður í at fyrireika neyðuga tænastu sambært kapitli 5 og 6 í hesi løgtingslóg kunnu Almannaverkið og sjúkrahúsverkið av sær sjálvum og uttan at biðja um samtykki lata upplýsingar millum sín um innlegging á ella útskriving frá sjúkrahúsi.

**§ 54.** Persónur, ið fær hjálp sambært hesi løgtingslóg, skal boða Almannaverkinum frá øllum broytingum í persónligu og fíggjarligu viðurskiftum sínum, ið kunnu hava ávirkan á hjálpina.
*Stk. 2.* Hevur persónur av órøttum fingið uppihaldsveiting, fíggjarligt ískoyti, fíggjarligt endurgjald ella fíggjarligan stuðul sambært hesi løgtingslóg, og átti hann at verið vitandi um hetta, skal upphæddin gjaldast aftur. Tað sama er galdandi, um orsøkin er vantandi ella skeivar upplýsingar frá viðkomandi, sum hesin hevur skyldu at lata Almannaverkinum.

**§ 55.** Almannaverkið kann gera av, at persónur skal gjalda aftur uppihaldsveiting og figgjarligt ískoyti, tá persónur:
1) hevur tørv á hjálp vegna óskil í sínum fíggjarviðurskiftum,
2) uttan neyðuga orsøk hevur sagt starv frá sær, ikki hevur tikið við starvi ella sýtt at fara undir arbeiðsfremjandi tiltøk,
3) sleppur sær undan uppihaldsskylduni mótvegis hjúnafelaga og børnum, yngri enn 18 ár,
4) innan rímiliga tíð verður førur fyri at rinda hjálpina aftur,
5) hevur fingið veittan stuðul sum stakútreiðsla til ábøtur á egnan bústað, ella
6) seinni fær útgoldið endurgjald, hjúnafelagagjald ella aðra upphædd, ið kann nýtast til uppihald, og ið fevnir um sama tíðarskeið og endamál, tó undantikið endurgjald samanber § 20, stk. 4.

*Stk. 2.* Verður almannahjálp veitt við afturgjaldskyldu sambært nr. 1-5, skal Almannaverkið kunna um afturgjaldskylduna og grundarlagið fyri afturgjaldskylduni í sambandi við avgerðina um at veita hjálp.

**§ 56.** Rindar persónur ikki afturgjaldskrav sambært § 54, stk. 2 og § 55, stk. 1 áðrenn ásettu freist, verður rentutilskriving framd. Rentutilskriving er 0.7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða

rentu. Almannaverkið kann í sambandi við afturgjald gera avtalu um afturgjaldskipan.
*Stk. 2.* Afturgjaldskrav og renta, ið eru fallin til gjaldingar, kunnu krevjast inn við panting ella afturhaldast í A-inntøkuni.
*Stk. 3.* TAKS fremur panting fyri afturgjaldskrav og skuldskrivaða rentu sambært stk. 1 eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum.
*Stk. 4.* Heimilað verður TAKS at innkrevja skuld og innkrevjingarkostnað sambært hesi løgtingslóg við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum gjaldskyldugu sambært reglunum um hetta í skattalógini.

**§ 57.** Fíggjarligt ískoyti til avdráttir til egnan bústað sambært § 15, stk. 1 og 2 skal rindast aftur.
*Stk. 2.* Fíggjarligt ískoyti til goymslugjald til leigubústað sambært § 15, stk. 1 og 2 og § 19, stk. 1 skal rindast aftur.
*Stk. 3.* Hevur Almannaverkið rindað goymslugjald inn á kontu hjá útleigara, skal útleigari rinda Almannaverkinum goymslugjald aftur.
*Stk. 4.* Fíggjarligt ískoyti til avdráttir til egnan bústað verður veitt sum lán. Veðbræv verður tinglýst á ognini, og útreiðslurnar í hesum sambandi kunnu leggjast afturat láninum. Lánið fellur til gjaldingar við eigaraskifti.

*Úttøka, útgjald o.a*

**§ 58.** Fíggjarligur stuðul sambært hesi løgtingslóg verður ikki veittur til útreiðslur, ið persónur hevur sett seg fyri, áðrenn Almannaverkið hevur tikið avgerð um játtan. Almannaverkið kann í heilt serligum førum víkja frá hesum kravi, t.d. tá talan er um bráðfeingistørv, ið ger, at ikki er ráðiligt at bíða við at átaka sær útreiðsluna.
*Stk. 2.* Uppihaldsveiting og fíggjarligt ískoyti verða veitt frá tí degi, umsóknin er móttikin.

**§ 59.** Uppihaldsveiting, fíggjarligt ískoyti og fíggjarligur stuðul sambært hesi løgtingslóg kunnu ikki gerast til mál fyri úttøku ella aðrari rættarsókn. Avtalur um slík krøv eru ógildugar.

**§ 60.** Er tað eftir lov om ægteskabets retsvirkninger álagt persóni at rinda hjúnafelagagjald til persón, ið fær uppihaldsveiting sambært hesi løgtingslóg, kann Almannaverkið ganga í rættin til hjúnafelagagjaldið frá gjaldskylduga, hetta uttan mun til, um viðkomandi ikki longur hevur uppihaldsskyldu sambært § 10 í hesi løgtingslóg.
*Stk. 2.* Er tað eftir lov om børns retsstilling álagt einum persóni at rinda barnagjald o.a. til eitt barn, ið fær fyribils bústað sambært § 45 frá Almannaverkinum, kann Almannaverkið frá fyrsta uppihaldsdegi ganga í rættin til barnagjaldið frá gjaldskylduga.
*Stk. 3.* Almannaverkið kann somuleiðis ganga í rættin at krevja hjúnafelagagjald og barnagjald o.a. ásett ella at krevja gjaldið hækkað.
*Stk. 4.* Í sambandi við áseting ella hækking av hjúnafelagagjaldi og barnagjaldi o.ø. sambært stk. 1-3, kann Almannaverkið seta eina avtalu um hjúnafelagagjald og barnagjald til viks, um so er, at avtalan má metast at vera gjørd við tí endamáli at forða Almannaverkinum at fremja sín rætt sambært stk. 1-3.

## Kapittul 8
## Umsitingarligar reglur

**§ 61.** Almannaverkið tekur avgerð sambært hesi løgtingslóg, tó kunnu sjálvsognarstovnar, ið reka virksemi, ið er skipað við heimild í hesi løgtingslóg, taka avgerð um upptøku, og nær fyriskipan endar.

*Umsiting av uppihaldsveiting*

**§ 62.** Varnast Almannaverkið, at persónur ikki megnar at umsita uppihaldsveitingina, undir hesum um viðkomandi ikki megnar

at halda sínar skyldur mótvegis útleigara, kann Almannaverkið gera av, hvussu uppihaldsveitingin skal útgjaldast, undir hesum at rinda allar fastar útreiðslur hjá persóni, áðrenn restin av uppihaldsveitingini verður útgoldin.

*Útreiðslur*

**§ 63.** Landið heldur útreiðslurnar sambært hesi løgtingslóg.
*Stk. 2.* Kommunurnar afturrinda landinum tær útreiðslur, ið standast av, at:
1) Almannaverkið veitir fyribils hjálp vegna vantandi barnaansing, sambært § 11, stk. 3, nr. 4, og
2) Almannaverkið veitir stuðul til bústaðarbroyting sambært § 27 til persón í fólkapensjónsaldri vegna vantandi búpláss sambært § 14, stk. 1 í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m.

*Stk. 3.* Almannaverkið krevur peningin innaftur frá kommununum umvegis TAKS.

*Ráðgevandi ráð*

**§ 64.** Landsstýrismaðurin kann seta ráð at ráðgeva í brekpolitiskum spurningum og í viðurskiftum annars hjá fólki, ið bera brek.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir reglur um virksemi, val av nevndarlimum undir hesum, hvussu ráðið verður mannað og skipað.

*Brúkararáð*

**§ 65.** Almannaverkið skal taka stig til at stovna brúkararáð við tí endamáli at tryggja persónum, ið fáa tænastu sambært kapitli 5 og 6 í hesi løgtingslóg ávirkan á, hvussu tænastan verður skipað.
*Stk. 2.* Brúkararáðini skipa seg og sítt virksemi sjálvi.

*Loyvi og góðkenning*

**§ 66.** Landsstýrismaðurin kann eftir nærri ásettum treytum loyva og góðkenna øðrum at stovna og reka tænastur sambært kapitli 5 og bústaðir sambært kapitli 6 í hesi løgtingslóg.
*Stk. 2.* Loyvi og góðkenning sambært stk. 1 fevnir um skipan av nevndu tænastum, undir hesum málbólk, upptøka, staðseting, hølisviðurskifti, fígging, gjald og ábyrgdarbýti.

*Avtalur um veiting av tænastum*

**§ 67.** Almannaverkið kann gera avtalu um tænastu frá øðrum almennum og privatum veitara til tess at røkja sínar skyldur sambært kapitli 5 og 6 í hesi løgtingslóg.
*Stk. 2.* Um nøktandi tilboð ikki kann veitast í Føroyum, kann Almannaverkið gera avtalu við veitara uttanlands.

**§ 68.** Almannaverkið kann ímóti gjaldi veita pláss á fyribils bústaði ella vardum bústaði  til persón, ið er fevndur av løgtingslóg um heimatænastu og eldraøkt v.m.
*Stk. 2.* Almannaverkið kann ímóti gjaldi veita tænastur sambært kapitli 5 í hesi løgtingslóg til aðrar myndugleikar, ið virka sambært geiraábyrgd. Almannaverkið kann somuleiðis ímóti gjaldi veita tulkatænastu til privat, ið ikki virka sambært myndugleikaábyrgd.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann seta treytir, undir hesum um kostnað í sambandi við, at Almannaverkið veitir tænastur ímóti gjaldi sambært stk. 1-2.

*Eftirlit*

**§ 69.** Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við tænastum sambært kapitli 5 og 6 í hesi løgtingslóg, undir hesum námsfrøðiligt eftirlit. Eftirlitið kann skipast sum fráboðað og sum ófráboðað eftirlit.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um eftirlit.

*Revsing*

**§ 70.** Uttan so, at hægri revsing kann dømast sambært aðrari lóggávu, kann persónur revsast við bót, ið við grovum ósketni dylur upplýsingar ella gevur skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ið hava týdning fyri avgerð sambært hesari løgtingslóg, og harvið voldir myndugleikanum ein fíggjarmiss.
*Stk. 2.* Uttan so, at hægri revsing kann dømast sambært aðrari lóggávu, kann arbeiðsgevari revsast við bót, ið við grovum ósketni dylur upplýsingar ella gevur skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ið hava týdning fyri avgerð sambært hesari løgtingslóg, og harvið voldir myndugleikanum ein fíggjarmiss. Løgfrøðiligir persónar kunnu revsast sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

*Kærumyndugleiki*

**§ 71.** Avgerðir hjá Almannaverkinum sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.
*Stk. 2.* Kærunevndin kann víkja frá hesi freist, um heilt serlig orsøk er til tað.

*Gildiskoma og skiftisreglur*

**§ 72.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2020, tó kemur § 38 í gildi 1. januar 2021 og § 43 í gildi 1. januar 2022.
*Stk. 2.* Samstundis sum løgtingslógin kemur í gildi, fer lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsorg úr gildi.
*Stk. 3.* Umsókn sambært lov um offentlig forsorg, ið er móttikin, áðrenn gildiskomu lógarinnar, verður viðgjørd eftir higartil galdandi reglum.
*Stk. 4.* § 21, stk. 2, og §§ 35 og 36 eru bert galdandi fyri mál, ið byrja eftir gildiskomu lógarinnar.
*Stk. 5.* §§ 45 og 46 eru bert galdandi fyri bústaðir, skipaðir eftir gildiskomu lógarinnar. Bústaðir, skipaðir áðrenn gildiskomu lógarinnar, skulu innan 5 ár skipast sambært ásetingunum í hesi løgtingslóg.
*Stk. 6.* Kunngerðir við heimild í lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsorg hava framvegis gildi í tann mun, tær ikki eru í ósamsvari við ásetingarnar í hesi løgtingslóg.
*Stk. 7.* Brot á lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsorg, ið eru framd, áðrenn løgtingslóg um almannatrygd og vælferð kemur í gildi, verða revsað eftir § 37 í lov nr. 56 af 15. marts 1967 um offentlig forsorg og eftir reglum við heimild í lov om offentlig forsorg.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Uppskotið hevur til endamáls at laga vælferðarskipanin til føroysk viðurskifti.

Eins og forsorgarlógin hevur verið, verður løgtingslóg um almannatrygd og vælferð niðasta fíggjarliga trygdarnetið fyri teir borgarar, ið ikki sjálvir megna at uppihalda sær sjálvum og sínum. Fyri teir borgarar, ið hava tørv á tænastum, verður lógin karmur um teirra gerandisdag og virki.

Endamálið við lógaruppskotinum er, at samfelagið hevur eina lóggávu, har tænastur og veitingar verða veittar við støði í tørvi og ynski borgarans í mun til egna lívsstøðu og soleiðis, at borgarin, hóast tarn ella sjúku, fær eitt fyri hann nøktandi og innihaldsríkt lív.

Endamálið við uppskotinum er eisini at brynja føroyska vælferðarsamfelagið til tær avbjóðingar, ið longu eru og ikki minst standa fyri framman. Fólk liva longur, viðgerðarhættir gerast alsamt betri, og breið semja er um, at fólk ikki skulu vera á sjúkrahúsi í langa tíð, men skulu heldur hava tænastur í nærumhvørvinum so leingi sum gjørligt. Samstundis gerast alsamt færri skattgjaldarar at rinda fyri vælferðartænasturnar.

Tí er neyðugt at skipa vælferðartænasturnar soleiðis, at so nógv sum gjørligt kunnu hava og varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Hetta endamálið sampakkar væl við heimsmálini hjá ST um burðardygga menning, sum landsstýrið hevur gjørt av at virka eftir, har limalondini m.a. hava tikið undir við stigvíst at minka um ójavnan í samfelagnum.

Ein av høvuðstættunum í uppskotinum er tískil, at veitingar og tænastur skulu veitast við tí fyri eyga at gera borgaran meira sjálvhjálpnan.

Eisini tekur uppskotið hædd fyri, at familjur, sum hava barn, sum ber brek, ella ein maki hjá einum, sum hevur fingið niðursett virkisføri, skulu stuðlast í at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin og fáa neyðuga hjálp til at taka sær av sínum so leingi sum gjørligt.

Harumframt er ætlanin, at borgari skal fáa viðlíkahaldsvenjing fyri at fyribyrgja, at viðkomandi noyðist av arbeiðsmarknaðinum ella skal hava umfatandi tænastur frá Almannaverkinum.

Í uppskotinum er ein røð av møguligum amboðum, sum Almannaverkið kann velja at brúka fyri at hjálpa persónum, sum hava tørv á antin fíggjarligari hjálp ella tænastu, fyri at virka á jøvnum føti við onnur í samfelagnum.

Uppskotið fevnir um eina røð av dagføringum í mun til verandi lóggávu, eins og uppskotið gevur landsstýrismanninum heimild til at skipa nýggjar tænastur, sum tørvur er á, fyri at borgarar, sum bera brek kunnu virka á jøvnum føti við onnur í samfelagnum.

Vælferðartænasturnar skulu leggja størri dent á tann fyribygjandi tættin, og veitingar og tænastur skulu í størri mun virka og eggja til størri sjálvhjálpni.

Uppskotið er somuleiðis saman við uppskotinum til broyting í løgtingslóg um heimastænastu, eldrarøkt v.m. liður í at loysa nøkur av teimum markamótum, sum eru millum land og kommunur eftir, at kommunurnar í 2015 fingu ábyrgd av nøkrum vælferðartænastum, sum áður vórðu skipaðar undir landinum sambært forsorgarlógini.

Endamálið er at gera greiðari, hvørjar veitingar og tænastur eru, og hvørjar treytir eru knýttar at teimum.

Harumframt er endamálið, at Almannaverkið fær greiðari reglur at arbeiða út frá bæði sosialfakliga og námsfrøðiliga, og aðrir stovnar og sjálvbodnar felagsskapir, sum veita tænastur, fáa greiðari reglugrundarlag at arbeiða út frá.

Forsorgarlógin hevur í góða hálva øld verið hornasteinurin í føroyskum sosialpolitikki og undir føroysku vælferðarskipanini. Forsorgarlógin er upprunaliga donsk lóg, og varð sett í gildi fyri Føroyar í 1967.

Fyrstu ferð heitið "forsorgarlóg" varð nýtt fyri sosiallóg, galdandi í Føroyum, var í 1960, men nýggj lóg kom í 1967, og síðan er lógin vorðin broytt munandi í fleiri umførum. Í 1988 vórðu allar broytingarnar savnaðar í eini sokallaða lógarkunngerð, men framhaldandi er tað lógin frá 1967 við seinni broytingum, sum er heimildargrundarlagið.

Forsorgarlógin er smíðað í eini tíð, har vælferðartænasturnar vórðu skipaðar á annan hátt enn í dag, og sum í stóran mun bygdu á eina stovnsgerð (institutionalisering) av borgarum, ið bóru brek.

Seinnu árini hevur Almannamálaráðið arbeitt stig- og miðvíst við at dagføra løggávuna soleiðis, at løggávan er meira í samsvari við nútíðar hugsjón við atliti at viðurskiftum hjá fólki, ið bera brek. Harumframt hevur verið arbeitt við at fáa greiðari rættarstøðu og betra um løgfrøðiligu og umsitingarligu karmarnar hjá myndugleikum, sum umsita tænastur og veitingar, sum eru skipaðar sambært forsorgarlógini.

Í januar 2017 fekk tásitandi landsstýrismaðurin handað tilmæli til tænastupolitikk við heitinum "Borgarin takast uppá ráð" og frágreiðing til tilmæli.

Tilmælið er tilevnað av einum breitt fevnandi arbeiðsbólki við umboðum frá áhugafeløgum, fakfeløgum, Almannaverkinum og Almannamálaráðnum. Í tilmælinum og frágreiðingini er sjóneykan sett á verandi sosialar tænastur, og hvussu vit eiga at skipa tænastur til fólk, sum bera brek, frameftir. Løgtingið hevur í hesum sambandi havt frágreiðing um tænastur til aðalorðaskiftis í apríl 2017. Landsstýrismaðurin í almannamálum er nú komin á mál við arbeiðinum og setir við uppskotinum til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð kós fyri, hvussu partar av føroysku vælferðarskipanini skulu skipast, soleiðis at borgarar, sum ikki megna at uppihalda sær og sínum, og borgarar, sum bera brek og varandi sjúku, fáa neyðugar veitingar og tænastur til tess at virka á jøvnum føti við aðrar føroyingar.

Saman við uppskotinum til løgtingslóg um vælferð leggur landsstýrismaðurin eisini fram uppskot til løgtingslóg um tvingsil, uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd, uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. og uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna-, familju- og heilsumálum.

Samstundis verður verandi forsorgarlóg sett úr gildi.

### 1.2. Galdandi lóggáva

***Søgulig lýsing av gongdini at dagføra verandi reglur***

Fleiri broytingar eru gjørdar í forsorgarlógini síðani 1967, eins og nýggj málsøki eru tikin við. Ein nýggj forsorgarlóg hevur í fleiri umførum verið á politiska breddanum, og skiftandi landsstýri hava havt sum mál at gera eina nýggja lóg. Í 2010 var lagt á annan bógv, og farið var undir at dagføra forsorgarlógina í stigum við tí endamáli at endurskoða lógina alla, sum hon er.

Broytingarnar í forsorgarlógini í nýggjari tíð hava allar havt sum aðalreglu at fara burtur frá stovnshugtakinum til at menna og endurmenna borgaran. Dentur verður lagdur á at útvega persónum, ið bera brek, javnbjóðis møguleikar í dagsins samfelagi, hóast nakað er eftir á mál.

Arbeiðið at dagføra verandi reglugrundarlag tók dik á seg í 2010 við reglunum um stuðul til hjálparráð, har rætturin til stuðul til hjálparráð varð nágreinaður í lóggávuni. Síðani er skipanin við at veita búfólki á bústovni og ellis- og røktarheimi niðursetta pensjón strikað, og bústaðarpolitikkur tilevnaður.

Í 2013 varð lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk sett í gildi, og síðani eru reglurnar í forsorgarlógini um vardar bústaðir, virknistænastur og endurvenjing dagførdar, eins og heimatænasta og eldrarøkt eru løgd til kommunurnar at umsita.

Verandi forsorgarlóg er merkt av nógvu broytingunum, sum eru framdar.

Umframt, at lóggávan partvíst er orðað á føroyskum og partvíst á donskum, so hevur lógin ásetingar, sum ikki longur hava nakað veruligt innihald.

Bygnaðurin í verandi forsorgarlóg er góður, hóast nakað ógreiður eftir mongu broytingarnar. Sami bygnaðurin verður tí varðveittur í uppskoti til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð, tó við greiðari skilmarkingum millum evni og við fleiri kapitlum og yvirskriftum. Bygnaðurin í verandi forsorgarlóg og hesum lógaruppskoti kann býtast upp soleiðis:

- Almennar reglur og virkisøki
- Veitingar
- Endurbót
- Tænastur
- Bústaðir
- Umsitingarligar reglur

***Almennar reglur og virkisøki***

Innleiðandi ásetingarnar í verandi forsorgarlóg eru avmarkaðar og fevna í høvuðsheitum um uppihaldsskylduna hjá tí einstaka og tí almenna, og ásetingar um, hvar hjálpin kann veitast.

Ásetingarnar endurspegla ikki tann hugburð, sum í dag myndar brekpolitikkin, og sum er munandi broyttur, síðan forsorgarlógin varð smíðað. Hesin hugburður sæst tó aftur í nøkrum av teimum broytingum, ið eru framdar í forsorgarlógini seinastu árini.

Verandi forsorgarlóg hevur ikki neyvar ásetingar um upplýsingar- og ráðgevingarskylduna hjá Almannaverkinum, men veitir einans heimild fyri at áseta hesar reglur í kunngerð.

Tørvur er eisini á reglum um, t.d á hvørjum grundarlagi avgerðir um hjálp verða tiknar, herundir ynski og tørv borgarans, møguleikan hjá myndugleikanum at veita hóskandi tænastu, virkisætlan og markamót til aðra lóggávu, serliga til løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

*Virkisøki*
Verandi ásetingar um, hvør hevur rætt til hjálp sambært lógini, um hvar hjálpin kann veitast, og hvat slag av hjálp persónur, ið ikki hevur danskan heimarætt, hevur rætt til, eru ikki nóg neyvar. Nú alsamt fleiri útlendingar fáa uppihaldsloyvi í Føroyum, er tørvur á neyvum og dagførdum reglum um rættindi, og hvørja ávirkan, almannahjálpin hevur á uppihaldsgrundarlagið.

Sambært forsorgarlógini kann Ríkisumboðið gera av at senda persón úr Danmark og Grønlandi heim, um viðkomandi hevur verið í Føroyum minni enn 5 ár og liggur tí almenna til last. Henda áseting verður als ikki nýtt og verður tí ikki varðveitt í hesum lógaruppskoti.

Tó kann Ríkisumboðið, eftir samráðing við landsstýrið, gera av at senda útlending heim, ið liggur tí almenna til last. Sambært verandi forsorgarlóg hava kvinnur, ið ikki hava danskan heimarætt, sama rætt til hjálp sambært lógini, sum persónar við donskum heimarætti. Henda áseting er leivd frá gamlari tíð, tá vit ikki høvdu verandi reglur á útlendingaøkinum, og fevnir lógaruppskotið ikki um samsvarandi áseting.

***Veitingar***

*Fyribils uppihaldsveiting*
Skipanin við veitingum og umsitingin av veitingum riggar sum heild væl. Lógargrundarlagið er tó ikki nøktandi og byggir í ávísan mun á siðvenjur. Hesar siðvenjur eru grundaðar á sosialrættarligar meginreglur og royndir úr øðrum londum og hava verið nýttar í nógv ár. Tá dagføringar eru gjørdar í forsorgarlógini, hava tær bygt á hesar siðvenjur við tillagingum og broytingum.

Aðalmálið við veitingarreglunum í galdandi lóggávu er at bøta um fíggjarligu viðurskiftini hjá borgarum, ið eru fyri almannahending, og sum í einum fyribils tíðarskeiði ikki megna at uppihalda sær og sínum. Uppihaldsveiting sambært forsorgarlógini kallast forsorgarhjálp. Tey flestu, sum fáa forsorgarhjálp, fáa tað bert í avmarkaða tíð. Tað kann vera, meðan tey eru sjúk, meðan ein umsókn um fyritíðarpensjón verður viðgjørd, ella bíðað verður eftir einum tillagaðum starvi. Nøkur eru tó, sum fáa forsorgarhjálp í longru tíð ella fáa forsorgarhjálp í fleiri umførum.

Rætturin til forsorgarhjálp eftir forsorgarlógini er treytaður av, at persónur og hjúnafelagi ikki megna at uppihalda sær og familjuni við aðrari inntøku. Henda treyt er ikki galdandi fyri sambúgvandi, ið sostatt hava rætt til veiting óheft av inntøku sambúgvans.

Treytin í forsorgarlógini um, at rætturin til veiting hjá tí, sum søkir um forsorgarhjálp, er tengdur at inntøku hjúnafelagans, er grundað á ta meginreglu, at forsorgarhjálp er niðasta trygdarnetið. Onnur inntøka, ogn og uppihaldsskyldan hjá hjúnafelaganum skulu troytast fyrst, og síðan rætturin til uppihaldsveiting.

Lívsmynstrið seinastu áratíggju er broytt nógv, síðan forsorgarlógin varð orðað, og ein vaksandi partur av teimum, sum liva í samlívi, eru ikki gift.

Hóast talan er um persónar, sum í mun til felags húsarhald og uppihald annars eru í samanberligari støðu, er rætturin til veiting ymiskur, treytaður av um persónur er sambúgvandi ella livir í hjúnalagi.

Forsorgarhjálp er okkara sokallaða niðasta trygdarnet. Ikki fyrr enn allir aðrir møguleikar at uppihalda sær og sínum eru troyttir, kann forsorgarhjálp veitast. T.v.s., at um borgarin á annan hátt hevur møguleika at uppihalda sær og sínum, so skal hann tað – eisini um tað er við at brúka av síni ogn.

Tann føroyska forsorgarhjálpin er meinlík skipanum í grannalondum, so sum kontanthjælp í Danmark, sosialhjelp í Norra og ekonomisk bistånd í Svøríki. Eisini í hesum londunum er ein treyt fyri at fáa hjálp, at tað ikki skal vera gjørligt at uppihalda sær á annan hátt.

Persónur, sum fær rætt til forsorgarhjálp, fær eina upphædd, sum er treytað av uppihaldsskyldu mótvegis barni, aldri og bústøðu. Upphæddin er ásett sum ein prosentpartur av hægstu dagpeningaupphædd, og t.v.s., at hjálpin verður ikki javnað eins og aðrar almannaveitingar, men hon fylgir lønarlagnum á arbeiðsmarknaðinum. Hægsta dagpeningaupphædd er ásett sum 80 % av løn sambært sáttmála millum Føroya arbeiðsgevarafelag og Føroya arbeiðarafelag.

Veitingarnar pr. mánað sambært forsorgarlógini, galdandi frá 1. mai 2019, eru hesar:

| | **Áðrenn skatt** | **Eftir skatt** uml. |
|---|---|---|
| *Uppihaldsskyldu mótvegis børnum - búgva einsamøll* | 16.491 | 10.927 |
| *Uppihaldsskyldu mótvegis børnum – sambúgvandi* | 12.826 | 8.782 |
| *25 ár og eldri, uttan børn - búgva einsamøll* | 13.742 | 9.337 |
| *25 ár og eldri, uttan børn – sambúgvandi* | 9.162 | 6.561 |
| *Yngri enn 25 ár, uttan børn - býr ikki hjá foreldrum* | 7.329 | 5.451 |
| *Yngri enn 25 ár, uttan børn - býr hjá foreldrum* | 4.031 | 3.244 |

Upphæddirnar eftir skatt í talvuni omanfyri eru roknaðar við støði í miðal kommunuskattaprosenti og treytað av, at inntøkan er jøvn yvir eitt ár. Tey, sum hava børn, kunnu, umframt upphæddirnar omanfyri, fáa ymiskan annan stuðul so sum barnafrádrátt, familjuískoyti og barnaískoyti til stakar uppihaldarar.

Ásetingarnar eiga at lesast í samanhangi við reglurnar í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum hava til endamáls at fyribyrgja, at fólk enda varandi uttan fyri arbeiðsmarknaðin. Útgangsstøðið fyri stuðulsskipanum á arbeiðsmarknaðinum er, at tað almenna hevur skyldu til - í staðin fyri óvirkna hjálp til uppihald - at bjóða virkna hjálp sum eitt nú at útvega arbeiði og menna ella endurmenna arbeiðsevnini, soleiðis at viðkomandi kann gerast førur fyri at uppihalda sær og sínum við at arbeiða. Veitingin til tey, sum eru í fyriskipan sambært lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, er eitt vet hægri enn forsorgarhjálpin.

Fram til 2013 var forsorgarhjálpin tørvsmett, og grundhugsanin við veitingini var tá, at borgarin ikki skuldi ávirkast av sosialu hendingini – ella ávirkast so lítið sum gjørligt. Í § 9, stk. 1 í forsorgarlógini stendur, at "*der kan ydes en sådan hjælp af det offentlige, at det modvirkes, at pågældendes og familiens hidtidige levevilkår i væsentlig grad forringes*". Í 2013 varð lógin sum nevnt broytt, soleiðis at veitingarnar vórðu gjørdar fastar, men tað var einans § 9, stk. 2, sum ásetir sjálva upphæddina, sum varð broytt, meðan ásetingin omanfyri framhaldandi stendur í stk. 1. T.v.s., at tað er eitt ósamsvar ímillum stk. 1 og stk. 2, tí farið er burtur frá grundhugsanini um, at borgarin skal ávirkast sum minst.

Ein treyt fyri at fáa forsorgarhjálp er, at tað ikki skal vera gjørligt at uppihalda sær við ogn. At rokna sum ogn er t.d. tøkur peningur, virðisbrøv, fastognir umframt egnan bústað o.a. Tó kann síggjast burtur frá minni ogn, ætlað til bústað ella til útbúgving. Tey, sum hava ein nøktandi bústað, og tey, sum hava eina førleikagevandi útbúgving, kunnu sostatt ikki hava ognir fyri at móttaka forsorgarhjálp. Tað vísir seg, at tann, sum hevur innistandandi pening, í flestu førum mótvegis Almannaverkinum kann grundgeva fyri, at ognin er ætlað til útbúgving ella bústað. T.v.s., at í praksis kunnu tey, sum ikki hava ein bústað ella ikki hava eina útbúgving, eiga eina minni ogn, meðan onnur ikki kunnu.

Ásetingin um ogn er frá eini tíð, tá lítlir og ongir stuðulsmøguleikar vóru til persónar undir útbúgving, og vanligt var eisini við uppsparing til bústað á serligum kontum – t.d. í Húsalánsgrunninum. Tað ber ikki til – ella er trupult – hjá Almannaverkinum at skilja ímillum ogn, sum er ætlað hesum endamálum.

Ogn, sum stavar frá endurgjaldi fyri varandi mein o.t., verður tó ikki roknað sum ogn í sambandi við uppihaldsveiting. Men skaðabót vegna hættisliga sjúku verður roknað sum ogn. T.d. ein persónur, sum hevur fingið krabbamein og tí hevur fingið endurgjald frá tryggingarfelag, kann ikki fáa uppihaldshjálp vegna ogn (fleiri av føroysku fakfeløgunum hava avtalur, har tað vanliga verður útgoldið 150.000 kr. við hættisliga sjúku).

*Varandi uppihaldshjálp*

Almannaverkið kann gera av at veita varandi uppihaldshjálp sambært § 13 í forsorgarlógini heldur enn at veita fyribils uppihaldsveiting. Ásetingin verður sjáldan brúkt. Avgerð um at veita varandi uppihaldshjálp verður tikin, tá tað í longur tíð ikki hevur eydnast við serligum stuðli at hjálpa einum persóni til sjálvbjargni arbeiðsliga og fíggjarliga, og persónurin ikki lýkur krøvini til fyritíðarpensjón.

Sera fáir persónar fáa varandi uppihaldshjálp.

Varandi uppihaldshjálp verður ásett á sama hátt sum fyribils hjálp – sum ein prosentpartur av hægstu dagpeningaupphædd. Men tey, sum fáa varandi uppihaldshjálp, hava ein frádrátt í skattinum, sum persónar, sum fáa fyribils uppihaldsveiting, ikki hava rætt til. Talan er um sama frádrátt í skattinum, sum fyritíðarpensjónistar hava rætt til, og er orsøkin, at varandi uppihaldshjálp er ein sokallað pensjónslíknandi veiting. Uppihaldsveitingar sambært forsorgarlógini eru allar skattskyldugar, og varandi veiting er eisini skattskyldug, men hesi gjalda tó heilt lítlan part í skatti. At veitingin verður ásett á henda hátt við einum skattafrádrátti, ger veitingina ógjøgnumskygda.

Varandi uppihaldshjálp er ásett at vera 60 % av hægstu dagpeningaveiting, sum frá 1. mai 2019 er 10.994 kr. um mánaðin áðrenn skatt, og góðar 9.000 kr. eftir skatt.

*Lækking av veiting*

Forsorgarhjálp er ein ískoytisveiting, og tað merkir, at allar inntøkur verða mótroknaðar. Tað kann vera ein persónur, sum hevur heilt lága veiting frá ALS ella Barsilsskipanini, ella ein persónur, sum hevur okkurt smávegis av arbeiði, sum fær ískoytisveiting sambært forsorgarlógini.

Verandi skipan hevur við sær, at nakrar kvinnur, sum fáa forsorgarhjálp vegna barnsburð, hava eina inntøku eftir skatt, sum er nakað hægri, enn hjá øðrum, sum móttaka forsorgarhjálp. Talan er um kvinnur, sum eru í barsilsfarloyvi frá lesnaði. Kvinna, sum fær barn, meðan hon er undir

lesnaði, kann fara í barsilsfarloyvi og fáa framhaldandi lestrarstuðul í farloyvistíðarskeiðinum. Lýkur hon krøvini um t.d. inntøku hjá hjúnafelaga og ogn, kann hon fáa rætt til forsorgarhjálp aftrat lestrarstuðlinum. Lestrarstuðulin verður tá drigin frá fyrst, eins og t.d. ein lág veiting frá Barsilsskipanini hevði verið drigin frá. Munurin er tó, at lestrarstuðulin er ikki-skattskyldugur, meðan veiting frá Barsilsskipanini er skattskyldug, og tann lesandi hevur tí nakað hægri inntøku eftir skatt, enn tann, sum ikki fær lestrarstuðul.

*Dømi 1*
Sambúgvandi kvinna við einum barni fær forsorgarhjálp á uml. 12.800 kr., áðrenn skatt. Inntøkan eftir skatt er knappar 10.000 kr. (íroknað barnafrádrátt), um hon ikki hevur aðra inntøku

*Dømi 2*
Sambúgvandi kvinna við einum barni fær veiting frá Barsilsskipanini á 4.000 kr. Hon fær forsorgarhjálp á 12.800 kr. frádrigið tær 4.000 kr., svarandi til 8.800 kr. Inntøkan eftir skatt er uml. 10.000 kr. (íroknað barnafrádrátt). T.v.s. sama upphædd sum í dømi 1.

*Dømi 3*
Sambúgvandi kvinna við einum barni er í barsilsfarloyvi frá lesnaði. Hon fær lestrarstuðul á 5.437kr. (ikki skattskyldugt), umframt forsorgarhjálp. Forsorgarhjálpin er 12.800 kr. frádrigið 5.437kr., svarandi til 7.363 kr. Av forsorgarhjálpini rindar hon uml. 700 kr. í skatti (tá hædd er tikin fyri barnafrádrátti). Inntøkan eftir skatt er tí góðar 12.000 kr., sum er góðar 2.000 kr. meira enn aðrar, sum fáa forsorgarhjálp vegna barnsburð.

At forsorgarhjálpin í 2013 var broytt frá tørvsmettari ikki-skattskyldugari veiting til fasta skattskylduga veiting hevði við sær fyrimunir og vansar. Fyrimunir og vansar eru við báðum skipanum, men sum heild eru fleiri fyrimunir við verandi skipan. Sum dømini omanfyri vísa, so hevur samansetingin av skattafríum lestrarstuðli og skattskyldugari forsorgarhjálp við sær, at lutfalsliga stórur munur er á inntøku eftir skatt hjá nøkrum borgarum.

Talið av teimum, sum fáa forsorgarhjálp vegna barnsburð, meðan tey eru í barsilsfarloyvi frá lesnaði sveiggjar nakað – eisini í einum ári. Í byrjanini av 2017 vóru 40 kvinnur, sum fingu veitingina, meðan talið við ársenda varð lækkað til 22.

*Javning av uppihaldsveitingum*
Forsorgarhjálpin er ásett sum ein prosentpartur av hægstu dagpeningaveiting, og tað merkir, at tá lønin á privata arbeiðsmarknaðinum hækkar, tá hækkar forsorgarhjálpin samsvarandi. Flest allar aðrar almannaveitingar verða javnaðar sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum. Ein nýggj javningarlóg er samtykt í Løgtinginum (lm 71.2017), sum leggur javningina í fastan karm. At uppihaldsveitingar sambært forsorgarlógini og t.d. fyritíðarpensjón verða javnaðar á ymiskan hátt kann vera óheppið, tí samanhangurin og munurin millum ymsu almannaveitingarnar við tíðini kann skeiklast.

*Fíggjarligur stuðul vegna trongstøðu*
Persónur, sum hevur verið fyri almannahending, kann fáa fíggjarligan stuðul til stakútreiðslur, um hann ikki sjálvur er førur fyri at halda útreiðsluna. Talan skal vera um útreiðslu, sum er mett at vera rímilig, vanlig og neyðug. Sum dømi um rímiligar stakútreiðslur kunnu nevnast útreiðslur til húsarhaldstól, sum er gingið fyri, brillur, sum eru bráðneyðugar, barnaútgerð o.t.

Somuleiðis kann stuðul veitast til útreiðslur í sambandi við sjúkuviðgerð. Tað kann vera til fysioterapi, fótarøkt, tannviðgerð ella heilivág. Stuðul verður veittur eftir eini fíggjarligari meting – t.v.s., at stuðul verður bert veittur teimum, sum ikki sjálvi megna at halda útreiðsluna.

Stuðul verður bert veittur til viðgerðir, sum eisini eru fevndar av avtalu við Heilsutrygd. T.v.s., at stuðulin fevnir um egingjaldspartin. T.d. verður stuðul ikki veittur til heilivág ella viðgerðir, sum Heilsutrygd ikki eisini veitir stuðul til. Ásetingarnar um stuðul til stakútreiðslur eru ásettar í § 15 í forsorgarlógini, men er ásetingin ikki dagførd í sambandi við broytingar í aðrari lóggávu. T.v.s., at verandi áseting er ógreið og ikki í samsvari við praksis.

*Fíggjarligur stuðul til egingjald v.m.*
Persónar, sum eru í búfyriskipan hjá landinum, eru vanliga hægstu fyritíðarpensjónistar. Inntøkan hjá hesum persónum er uml. 13.500 kr. um mánaðin eftir skatt, og av hesum verður rindað uml. 2.500-5000 kr. húsaleigu. Hetta er ein skipan, sum er nøktandi, og búfólkini hava nøktandi fíggjarligar umstøður. Nakrir persónar eru tó, sum ikki eru fyritíðarpensjónistar. Hesi fáa forsorgarveiting á uml. 3.800 kr. um mánaðin, og fáa so stuðul sambært § 15a til egingjald og aðrar útreiðslur, sum standast av at vera í búfyriskipan hjá landinum.

Heimildin til stuðul til egingjald o.a. er galdandi fyri persónar, sum eru í fyriskipan hjá tí almenna eftir §§ 27 ella 32 í forsorgarlógini ella eftir aðrari lóggávu, og sum fáa forsorgarhjálp.

Verandi skipan er soleiðis, at stuðul verður veittur til útreiðslur, sum standast av uppihaldinum – t.v.s. húsaleigu, matarskipan og aðrar felagsútreiðslur. Tað er ymiskt, hvussu stovnarnir og búfelagsskapirnir skipa seg viðv. felagskassa og egingjaldi hjá búfólkunum. Onkur stovnur hevur eina útreiðslu við í felagskassa (og harvið verður stuðul veittur til tað), meðan á øðrum stovni skal búfólki sjálvt halda somu útreiðslu. Hetta hevur við sær, at fíggjarligu viðurskiftini hjá búfólkunum eru ymisk.

Tað eru bert fáir persónar, sum eru í búfyriskipan hjá tí almenna, men fleiri vardir bústaðir og búfelagsskapir eru á veg, og tí er tørvur á at fáa skipaðar karmar um fíggjarligu umstøðurnar hjá hesum persónum.

***Endurbót***
Verandi forsorgarlóg hevur ásetingar um fíggjarliga endurbót (kompensatión). Flest øll tænasta, ið verður veitt persónum, ið bera brek, er at meta sum endurbót. Fíggjarlig endurbót er, tá persónur antin fær fíggjarligan stuðul av ávísum slagi ella fær fíggjarligt endurgjald, og er endamálið at hjálpa borgarum at liva eitt so sjálvstøðugt lív, sum tilber, og á jøvnum føti við onnur. Fíggjarlig endurbót tekur støði í tørvi og lívsstøðu hjá tí einstaka.

Hugtakið um endurbót fyri brek er avmarkað í mun til meginregluna um líka viðferð, sum merkir, at tann einstaki skal fáa somu viðferð sum onnur. Stuðul sum endurbót verður tí veittur til serliga útgerð og serliga hjálp og til meirútreiðslur, sum persónur hevur orsakað av breki, men ikki til útreiðslur til útgerð o.a., sum persónar uttan viðkomandi brek eisini hava.

Fíggjarlig endurbót verður veitt óheft av inntøku og ogn og verður veitt óheft av hjúnastøðu.

*Endurgjald fyri meirútreiðslur*
Eftir § 17, stk. 1 í forsorgarlógini hevur persónur rætt til at fáa endurgoldið neyðugar meirútreiðslur, herundir útreiðslur til ávísar viðgerðir, ið beinleiðis standast av at uppihalda einum barni heima, ið er varandi sjúkt ella ber sálarligt ella likamligt brek. Talan skal vera um útreiðslur, sum familjan ikki hevði havt, um barnið ikki bar brek ella var sjúkt.

Stuðul verður t.d. veittur til kostískoyti, serligan kost vegna ovurviðkvæmi ella cøliaki, serligan fótbúna ella klæði, ferðaútreiðslur í sambandi við sjúkuviðgerð, blæður o.m.a.

Verandi áseting í forsorgarlógini er á donskum og er ikki dagførd samsvarandi í mun til broytingar á almannaøkinum annars og verður m.a. víst til *særforsorgens hjælpeforanstaltninger*.

*Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku*
Fíggjarligt endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku verður veitt teimum, sum í heiminum uppihalda barni við likamligum ella sálarligum breki ella sjúku. Endurgjald fyri inntøkumiss kann eisini veitast foreldrum í sambandi við kanningar og viðgerð á sjúkrahúsið. T.v.s., at talan er bæði um persónar, sum fara av arbeiðsmarknaðinum fyri í staðin at uppihalda barni fulla tíð, eins og talan kann vera um persónar, sum fara niður í lægri starvsbrøk, ella fáa endurgjald fyri styttri tíðarskeið.

Endurgjald verður veitt fyri allan inntøkumissin, men ikki fyri inntøku hægri enn 25.000 kr. um mánaðin. Hámarkið á 25.000 kr. varð sett í forsorgarlógina í 2009. Áðrenn 2009 varð fult endurgjald veitt, uttan mun til støddina á lønarmissinum. Upphæddin á 25.000 kr. er ongantíð javnað, hóast lønin á t.d. privata arbeiðsmarknaðinum er hækkað við útivið einum fjórðingi síðani 2009.

Hægst møguliga endurgjald fyri inntøkumiss er sum nevnt 25.000 kr. um mánaðin, men forsorgarlógin ásetir at upphæddin er íroknað frítíðarløn. Í praksis merkir tað, at borgarin fær uml. 22.300 kr. í endurgjaldi, meðan restin (uml. 2.700 kr.) verða fluttar í frítíðargrunn, sum verður útgoldið 1. mai. Tá fríðtíðarlønin verður útgoldin, verður onki endurgjald veitt. Endurgjaldið í praksis er sostatt í mesta lagi uml. 22.300 kr. Hetta ger skipanina ógjøgnumskygda fyri borgaran.

Endurgjald fyri inntøkumiss er, sum nevnt, ein rættur, sum einans er galdandi, til barnið er fylt 18 ár. Tað eru eisini aðrir bólkar, sum hava tørv á stuðli í sambandi við røkt av nærskyldum, t.d. persónar, sum røkta doyggjandi í heiminum, ella í sambandi við røkt av persónum við seinheilaskaða.

Fíggjarligi stuðulin í sambandi við røktina er sambært galdandi lóggávu tengdur at aldrinum á persóninum, sum tørvar røkt. Er persónurin yngri enn 67 ár, hevur hann rætt til røktarviðbót sbrt. almannapensjónslógini, sum er ætlað sum samsýning til tey, sum útinna røktina. Røktarviðbótin er 6.005 kr. um mánaðin (ikki skattskyldugt). Er persónurin 67 ár ella eldri, kann ansingarsamsýning verða veitt. Tað eru kommunurnar, sum halda útreiðslurnar til ansingarsamsýning, og verður samsýningin veitt beinleiðis til røktaran. Ansingarsamsýningin er 10.789 kr. um mánaðin (skattskyldugt). Eftir skatt er ansingarsamsýningin uml. 7.400 kr., sum er uml. 1.400 kr. meira enn røktarviðbótin.

Talið av persónum við seinheilaskaða er økt seinnu árini, og tað er ein sannroynd, at myndugleikarnir higartil ikki hava megnað at lyft uppgávuna at fáa til vega búspláss og røktarumstøður til nýggju brúkararnar.

*Fíggjarligur stuðul til bil*
Persónur við varandi niðursettum førleika kann fáa fíggjarligan stuðul í sambandi við keyp av bili. Stuðul kann verða veittur til bil. Hetta eru bilar, sum eru serútgjørdir ella til sokallaðar kassabilar (hetta eru størri bilar, sum serliga eru ætlaðir til familjur, sum hava børn, við t.d. fjølbreki, og sum brúka koyristól v.m.). Stuðul kann eisini verða veittur til vanligar bilar. Tað er persónur, sum kann brúka vanligan bil (t.v.s. bil, sum ikki hevur serútgerð), men persónurin er tarnaður soleiðis, at hann ikki kann brúka almenna samferðsukervi og annars er tengdur at bili fyri at kunna flyta seg.

*Stuðul til bústaðarbroytingar*
Reglurnar um fíggjarligan stuðul til bústaðarbroytingar eru dagførdar í 2007. Stuðul til bústaðarbroytingar varð áður játtaður við heimild í kunngerð nr. 91 frá 22. juni 2005. Lógarheimildin og leisturin at játta stuðul til bústaðarbroytingar er ásett við støði í samsvarandi danskari lóggávu og praksis.

Sum heild hevur skipanin virkað væl, men millum ár og dag hava ávís ivamál tikið seg upp í sambandi við umsitingina av reglunum. M.a. er tað spurningurin um, nær ábyrgdin hjá tí einstaka endar, og ábyrgdin hjá tí almenna tekur við, og í hvønn mun stuðul kann veitast, um tørvurin er staðfestur, áðrenn bústaður verður útvegaður. Tørvur er á at nágreina hesi viðurskifti nærri í reglugrundarlagnum.

*Stuðul til hjálparráð*
Stuðul kann verða veittur til hjálparráð til persónar við virkistarni orsakað av likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku. Hjálparráð skal stuðla undir, at persónurin kann hava ein so vanligan gerandisdag, sum gjørligt, og í so stóran mun, sum gjørligt, kann virka í samfelagnum á jøvnum føti við onnur. Talan er um endurbót, og verður stuðul til hjálparráð tí veitt óheft av inntøku og hjúnastøðu.

Hjálparráð fevnir um nógv ymisk tól, klæði, lutir o.a. Tað kann vera protesur, koyristólar, serligir skógvar, kostískoyti, hárkollar, lyftir og mangt, mangt annað.

Reglurnar um stuðul til hjálparráð eru dagførdar í 2009. Við heimild í reglunum í forsorgarlógini eru nágreinandi reglur um, hvussu stuðulin verður veittur, ásettar í kunngerð nr. 18 frá 22. mars 2010.

Við dagføringini í 2009 varð lógargrundarlagið undir skipanini við hjálparráðum greiðari at umsita, eins og skipanin er vorðin meira fíggjarliga skynsom. Ein broyting, sum serligur dentur varð lagdur á, tá lógin varð broytt í 2009, var geiraábyrgd, soleiðis at vald og gjald í størri mun nú fylgjast. Royndirnar við broyttu skipanini vísa, at skipanin í ávísum førum er ov stirvin, og at galdandi skipan ikki í nóg stóran mun tekur atlit at borgarum, sum flyta, eins neyðugt er at víðka heimildina til at fevna um endurvenjing.

*Fíggjarligur stuðul til hoyritól*
Sambært galdandi lóggávu hevur persónur, ið fær hoyritólsviðgerð, rætt til at fáa stuðul til hoyritól. Til hoyritól, ið verður veitt frá tí almenna, er eitt egingjald á 2.000 kr. fyri hvørt hoyritólið (t.v.s., at ein persónur, sum hevur hoyritól á báðum oyrum, skal rinda 4.000 kr. í egingjaldi). Fíggjarligur stuðul kann eisini verða veittur at keypa hoyritól frá privatum veitara, og tá er stuðulin 4.000 kr. fyri hvørt hoyritóli, ella í mesta lagi kostnaðurin av hoyritólinum. Møguleiki er í lógini at veita linari treytir ísv. fíggjarliga stuðulin til hoyritól, galdandi fyri persón, ið hevur likamligt ella sálarligt brek ella sjúku.

Mett verður, at ásetingin um fíggjarligan stuðul til hoyritól virkar á nøktandi hátt.

### ***Tænastur***

Tað finnast ikki hagtøl í Føroyum, sum vísa, hvussu nógv fólk bera brek. Sambært WHO og European Disability forum skal roknast við, at talan er um áleið 10 -15 % av fólkinum í einum landi. Tað samsvarar við at áleið 5.000 føroyingar bera brek. MEGD, sum er felagsskapur teirra, ið bera brek, hevur áleið 4.000 limir. Roknast kann ikki við, at allir borgarar, sum bera brek, eru limir í einum áhugafelagsskapi, og samstundis eru tað heldur ikki allir borgarar, sum bera brek, sum hava tørv á tænastum fyri at luttaka á jøvnum føti við onnur.

Sambært frágreiðing til tilmæli um tænastupolitikk, so verður leysliga mett, at tað eru millum 800 og 900 borgarar, sum fáa tænastu frá  stovnum og felagsskapum, sum eru undir málsøkinum hjá landsstýrismanninum í almannamálum, viðmerkjast skal, at talan kann vera um, at sami borgari fær tænastu frá fleiri stovnum. Hesir persónar koma frameftir at fáa tænastu sambært hesum lógaruppskoti so hvørt, sum málið hjá teimum verður endurskoðað.

Forsorgarlógin hevur ásetingar um stuðulstænastur til vaksin og børn, virknistænastur og endurvenjing, bú- og viðgerðartilboð, vardan bústað og serlig bútilboð.

Endamálið við tænastum er at kompensera fyri brekið og harvið geva borgarum møguleika fyri at luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við aðrar borgarar.

Stórur partur av ásetingum um tænastur eru dagførdar seinnu árini, og eru tænasturnar sum heild rímiliga væl reguleraðar og í samsvari við meginreglurnar í tænastupolitikkinum. Tó bera ásetingarnar brá av, at dagføringar eru framdar so hvørt og ikki samlað.

Tað eru tó eisini ásetingar um tænastur, sum ikki eru dagførdar, eins og tað eru tænastur, sum ikki eru beinleiðis ásettar í forsorgarlógini. Tænasturnar eru stovnsettar yvir tíð, og eru skipaðar eftir tørvinum og fíggjarorkuni í samfelagnum.

Trupulleikarnir við ógreiðum og vantandi reglugrundarlagi á økinum eru fleiri. Fyri borgaran merkir tað, at rættarstøðan er ógreið. Fyri Almannaverkið, sum umsitur størsta partin av skipanunum, merkir hetta ógreiðar karmar fyri virksemið. Fyri politiska myndugleikan merkir tað, at møguleikarnir at føra ein virknan sosialpolitikk eru avmarkaðir, umframt at fá amboð eru at stýra fíggjarligu útreiðslunum.

*Stuðulstænasta*
Ásetingar um stuðulstænastur eru ikki dagførdar stórvegis síðani 2003, tá stuðulstænastan fyri vaksin og stuðulsfólkaskipanin fyri børn vórðu skipaðar sambært ávikavist § 32 b og § 32 í forsorgarlógini.

Flestu stuðulstænastur verða í dag skipaðar sum toymistilboð, har bólkar av borgarum fáa sosialpedagogiskan stuðul, sum bæði kunnu hava einstaklinga og felags atlit og endamál. Tað eru faklig atlit, ið tala fyri, at ávísar tænastur verða veittar í bólkum heldur enn í ein til ein fyriskipanum.

Almannaverkið veitir t.d. børnum, sum ikki kunnu vera í kommunalum dagstovnum ella frítíðarskúlum, tilboð og vera hesi tilboð, skipað sambært §32 í forsorgarlógini.

Toymistænastur verða annars veittar sum klubbtilboð, dagtilboð, frítíðartilboð, dagtilhald og mentortoymi og umlættingartilboð.

Áhugafeløg  hava í nøkur ár víst á, at ein trupulleiki í verandi skipan av stuðulstænastum er, at hesar í ov stóran mun eru skipaðar eftir fíggjarliga rásarúminum hjá Almannaverkinum heldur enn at taka støði í ynskjunum og tørvinum hjá tí persóni, sum fær stuðulstænastu. M.a. hevur verið funnist at, at stuðulstænasturnar heldur enn at verða skipaðar sum ein til ein stuðul í alsamt størri mun verða skipaðar í toymum.

Sambært upplýsingum frá Almannaverkinum vóru tað pr. 1. oktober 2018 í alt 373 persónar sum fáa stuðulstænastu, og av hesum vóru tað 250 persónar, sum fáa ein til ein stuðul.

Landsgrannskoðanin og Løgtingsins Umboðsmaður hava víst á, at verandi heimild hjá landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um stuðulsfólkaskipanina fyri børn ikki er brúkt, og at tørvur er á at fáa greiðari reglur um serliga stuðulstænastuna til børn.

Í tilmælinum til tænastupolitikk verður mælt til, at stuðulstænastur verða varðveittar og styrktar soleiðis, at tørvurin á tænastunum verður nøktaður.

Tó verður eisini víst á, at tørvur er á gera dagføringar í mun til verandi lóggávu. Mælt verður til, at ymisku tænasturnar verða ásettar í lóggávuni soleiðis, at tað verður greitt fyri borgaran og onnur, hvør kann fáa tænastu, og hvat endamálið er við tænastuni.

Áhugafeløgini hava víst á, at føroyingar, sum bera brek, eiga at fáa møguleika fyri at fáa sokallaða BPA skipan, sum finst í grannalondum okkara.

BPA er stytting av hugtakinum “borgarastýrd persónlig atstøða”. Talan er um skipan, har borgari, sum hevur tørv á stuðli, sjálvur virkar sum arbeiðsgevari og arbeiðsleiðari hjá teimum, sum veita tænastuna.

Innihaldið í eini BPA tænastu er ikki tað sama sum ein tænasta, sum krevur sosialpedagogiskan ella heilsufakligan serkunnleika. BPA stuðulin viðvirkar til, at borgarin, sum ber brek, fær framt tær praktisku uppgávurnar, sum viðkomandi sjálvur kundi framt, um hann ikki bar brek, og at borgarin harvið kann virka á jøvnum føti við aðrar borgarar í samfelagslívinum sum heild. Starvsfólk, sum átaka sær BPA tænastu, eru ikki neyðturviliga námsfrøðingar ella heilsustarvsfólk, men eisini onnur, ið mugu metast at kunna røkja ítøkiliga tørvin hjá borgaranum.

*Endurvenjing*

Í 2015 varð farið undir at veita endurvenjing í Almannaverkinum. Endurvenjing í Almannaverkinum er skipað við heimild í § 29 í forsorgarlógini. Endamálið við endurvenjingini er at hjálpa persóni í aldursbólkinum 18-66 ár út aftur á arbeiðsmarknaðin, ella gera hann føran fyri at klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá Almannaverkinum. Í serligum føri kann persónur, sum er 16-17 ár, og sum er í arbeiðsbúgving sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, fáa endurvenjing.

Miðað verður tískil ímóti, at borgarin við endurvenjingini endurvinnur sínar førleikar lutvíst ella heilt. Endurvenjing verður veitt í eitt avtalað og avmarkað tíðarskeið.

Almannaverkið arbeiðir framhaldandi mið- og stigvíst við at skipa eina landsfevnandi endurvenjingartænastu. Í løtuni eru tvær eindir, ein í Tórshavn og ein í Runavík, har borgarar fáa eitt ávíst tal av endurvenjingartímum í eitt frammanundan avtalað tíðarskeið. Avtalur verða eisini í ein ávísan mun gjørdar við kommunur og privatar veitarar um nýtslu av hølum og tólum og/ella keyp av endurvenjingartænastu soleiðis, at tænastan, so vítt tilber, kann veitast borgarum í nærumhvørvinum.

Verður endurvenjingin í Almannaverkinum støðugt víðkað, kunnu fleiri borgarar fáa ágóða av tænastuni, samstundis sum tryggjað verður, at tænastan er á einum høgum fakligum støði. Játtanin til endurvenjing er hækkað, síðani tænastan varð stovnsett, og tørvurin á tænastuni er somuleiðis vorðin størri. Í 2018 hækkaði játtanin við 1,3 mió. kr. til fleiri terapeutar umframt taluvenjing, og er samlaða játtanin til endurvenjing knappar 5 mió. kr. Í broytingaruppskoti til fíggjarlógaruppskotið fyri 2020 er játtanin hækkað við 1 mió. kr. til at víðka um tænastuna.

Tað eru ikki allir borgarar, sum megna at brúka almenna ella privata flutningstænastur til og frá tænastuni. Almannaverkið veitir í ávísum førum endurvenjing heima hjá borgaranum, hóast borgarin kundi fingið viðgerð í endurvenjingarhølum hjá Almannaverkinum, um skipaður flutningur var til og frá tænastuni.

Í tilmælinum um samskipaða endurvenjing frá 2016 varð víst á, endurvenjing hevur elvt til trupulleikar í markamótunum millum almannaverk, kommunur og heilsuverk. Mest átrokandi trupulleikin hevur verið tann, at borgarar, ið eru viðgjørdir í einum geira og hava tørv á framhaldandi viðgerð úr øðrum geira, ikki altíð fáa framhaldandi viðgerð.

Í 2017 varð kunngerð um endurvenjing í Almannaverkinum sett í gildi, sum áleggur Almannaverkinum at samstarva við sjúkrahúsverkið og kommunurnar, sum eisini veita endurvenjing. Samstundis var eisini kunngerð um endurvenjing innan sjúkrahúsverkið sett í gildi.

Í tilmælinum um samskipaða endurvenjing varð somuleiðis víst á, at tað er ein trupulleiki, at persónar ikki hava rætt til stuðul til hjálparráð, meðan endurvenjing fer fram, tí treytin fyri at fáa stuðul er, at talan skal vera um varandi tørv. Tá ein persónur fær endurvenjing, er endamálið at endurvinna mistar førleikar og tískil ber ikki altíð til at staðfesta um talan er um varandi tørv.

Harafturat varð eisini víst á týdningin av, at viðlíkahaldsvenjing eisini verður stovnsett sum tænasta, og at rætturin hjá borgarum til viðlíkahaldsvenjing verður ásettur.

*Virknistænastur*

Verandi áseting um virknistænastur er dagførd í 2015 og fevnir um tilboð á vardum verkstaði, verkhúsi ella tilhaldsstaði hjá Almannaverkinum umframt virknistænastur, sum Sjóndepilin, Dugni og Fountainhúsið veita ymiskum málbólkum.

Persónar, ið kunnu fáa tilboð um virknistænastu, eru í høvuðsheitum fyritíðarpensjónistar, ið hava so týðandi skert likamligt ella sálarligt virkisføri, at vanligi arbeiðsmarknaðurin ella fyriskipanir sambært lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk ikki megna at veita hesum borgarum neyðugar karmar og stuðul til at megna eitt arbeiði á jøvnum føti við onnur.

Felags fyri hesar persónar er, at teir í stóran mun hava tørv á fakfólki at stuðla og vegleiða teimum bæði í mun til arbeiðsgongd og í mun til ítøkiligar arbeiðsuppgávur, ið verða tillagaðar førleikunum hjá tí einstaka. Tað kunnu t.d. vera persónar, sum hava tørv á hjálp til at samskifta, tørva serliga umsorgan og røkt ella tørva stuðul til at vera saman við øðrum fólki.

Seinnu árini hevur Almannaverkið tikið stig til átøk, sum skulu fáa fleiri út á vanliga arbeiðsmarknaðin undir skipaðum viðurskiftum.

Spurningurin um persónar, sum fáa virknistænastu, skulu hava løn, og hvussu lønin verður ásett, hevur verið nógv umrøddur. Persónar í virknistænastu fáa hægstu fyritíðarpensjón. Hægsta fyritíðarpensjón verður veitt teimum, sum ikki hava arbeiðsførleika og tí ikki kunnu hava inntøkur av týdningi aftrat pensjónini. Siðvenja hevur verið, at borgarar hava fingið samsýning, um teir luttaka í framleiðslu, meðan onnur ikki fáa løn, og hevur skipanin verið heldur tilvildarlig.

Bæði áhugafeløg og Almannaverkið hava víst á, at hóast tað er fyritíðarpensjónin, sum er uppihaldsgrundarlagið, so hevur tað týdning fyri borgaran, at hann fær samsýning fyri arbeiðið, hóast upphæddin ikki er tann stóra.

Í 2015 varð ásett í kunngerð, at borgari, sum fær virknistænastu, ið er skipað sum vart verkstað ella verkhús, kann fáa løn ella samsýning, sum í minsta lagi er 5% av eini arbeiðsmannaløn. Siðvenjan og kunngerðin eru upprunaliga stovnaðar við íblástri úr Danmark, har samsýningin var (og er tað framvegis) ásett at vera í minsta lagi 5 % av grundløn á viðkomandi arbeiðsøki.

Sambært upplýsingunum frá Almannaverkinum vóru tað 1. oktober 2018 173 persónar, sum fáa virknistænastu, og 7 á bíðilista til tænastuna.

*Umlætting*
Umlætting er ein tænasta, sum er ætlað foreldrum og hjúnafelaga/maka ella øðrum avvarðandi. Endamálið er at lætta um og gera tað møguligt hjá hesum at hava eitt so vanligt familjulív sum gjørligt og at varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin.

Umlættingin kann við at lætta um hjá familjuni stuðla undir, at barnið kann búgva longur hjá familjuni heldur enn at fáa bústað frá tí almenna.

Foreldur, sum hava barn, sum ber brek, búgvandi, kunnu hava tørv á umlætting soleiðis, at familjan megnar eitt familjulív og at luttaka á arbeiðsmarknaðinum. Umlættingin kann eisini geva familjuni tíð og orku til at taka sær av øðrum børnum og til at luttaka í sosialum tiltøkum eins og onnur foreldur, sum ikki hava barn, sum ber brek.

Tað kann eisini vera hjúnafelagi hjá persóni, sum hevur fingið heilaskaða, sum fær umlætting fyri at lætta um gerandisdagin og stuðla undir, at viðkomandi borgari kann búgva heima so leingi, sum hann og makin ynskja tað, og tað er fakliga ráðiligt.

Familjur ella avvarðandi, sum hava ein vaksnan persón, sum ber brek, búgvandi, kunnu eisini fáa umlætting. Ásannandi, at tað eru avmarkaðir møguleikar at fáa ein varandi bústað, og at føroyingar sum heild búgva leingi heima hjá foreldrum, er eisini neyðugt at møguleiki er hjá familju at fáa umlætting.

Foreldur fáa vanliga umlætting 1 – 2 vikuskifti um mánaðin. Tó er eisini møguleiki fyri at veita umlætting gerandisdagar, umframt summarumlætting eftir tørvi.

Umlætting verður harumframt eisini í nøkrum førum veitt persóni við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum, sum býr einsamallur, og sum hevur avmarkað samband við onnur fólk. Tá er endamálið, at persónurin kann fáa ment persónligar og sosialar førleikar við at fáa miðvísa og skipaða tænastu og við at vera saman við øðrum persónum.

Í oktober 2018 fingu áleið 62 persónar umlætting frá Almannaverkinum, og er talan um persónar í øllum aldri. Umlætting verður veitt bæði á umlættingarstovnum, sum einstaklingafyriskipanir í heiminum hjá fólki ella sum toymistænasta.

Almannaverkið hevur víst á, at tørvur er á at styrkja umlættingina soleiðis, at tørvurin kann nøktast. Í oktober 2018 vóru 22 fólk á bíðilista til umlætting.

Reglurnar um umlætting eru ikki neyvar, og hevur ein afturvendandi spurningur verið, hvussu leingi til ber at vera til umlætting

Harumframt hevur spurningurin um gjald fyri umlætting eisini verið umrøddur. Foreldur gjalda ikki fyri umlætting, meðan vaksin, sum koma til umlætting, rinda 134 kr. um samdøgrið, og er hetta sami kostnaður, sum persónar rinda kommununum fyri umlætting á ellis- og røktarheimum.

*Tulkatænasta*
Teknmálstulkatænastan er eind undir Almannaverkinum, ið veitir tulk í øllum sløgum av samskifti millum hoyrandi, deyv og hoyritarnað, og har almenn upplýsing og tiltøk fara fram. Harumframt hava myndugleikar, ið veita tænastur til borgara, skyldu at tryggja og rinda fyri, at tænasta verður veitt øllum borgarum, undir hesum eisini til borgarar við hoyribreki.

Teknmálstulkatænastan fær játtan á fíggjarlógini. Á fíggjarlógini fyri 2019 eru játtaðar 1.310 tús. kr., sum verður m.a. brúkt til teknmálstulkar, skrivitulk og ymiskt skrivstovuarbeiði.

Harumframt verður á fíggjarlógini lagt upp fyri at Teknmálstulkatænastan fær aðrar inntøkur á 1.061 tús. kr. fyri at teknmálstulka  fyri onnur, m.a. tíðindasendingar í KvF, tulking í skúlum og tulking fyri stovnar. Í broytingaruppskoti til fíggjarlógaruppskotið fyri 2020 er játtanin hækkað við 500 tús. kr.

Forsorgarlógin hevur ikki ásetingar um tulkatænastu.

*Hjálp í sambandi við harðskap*
Kvinnur, sum eru ella hava verið fyri harðskapi, og børn teirra kunnu gista á Kreppumiðstøðini, har tær eisini fáa hjálp og ráðgeving, herundir eisini sálarfrøðiliga hjálp. Kvinnur og børn, sum gista á Kreppumiðstøðini rinda fyri uppihaldið. Tað er Kvinnuhúsfelagið, sum rekur Kreppumiðstøðina, og eingin áseting er í forsorgarlógini um hjálp í sambandi við harðskap.

Kvinnuhúsfelagið fær stuðul á fíggjarlógini til rakstur av Kreppumiðstøðini. Sum er, er ongin kreppumiðstøð, ið bjóðar líknandi hjálp til menn.

Sambært Heildarætlanini um harðskap í parløgum og nærsambondum og Heildarætlanini um kynsligan ágang verða eisini skipað viðgerðartilboð til teirra, sum fremja harðskap móti sínum næstu og viðgerðartilboð til vaksin, sum hava seinárin, orsakað av kynsligum ágangi í barnaárunum. Almannamálaráðið hevur avtalu við sálarfrøðingar um at veita viðgerðina.

Ongar ásetingar eru í forsorgarlógini um stuðul í sambandi við harðskap í parløgum og nærsambondum.

*Vantandi tænastur*
Á almennum grundarlagi er galdandi, at tá tað snýr seg um rættin til sosialar tænastur, so er hesin rættur tengdur at játtanini á fíggjarlógini á hvørjum ári.

Støðugt trýst er á myndugleikar um at umskipa og tillaga tænasturnar, tí higartil hevur tørvurin á tænastu verið størri, enn játtanin til endamálið.

Áhugafeløg og myndugleikar, sum veita tænastur, vísa áhaldandi á trupulleikan við, at persónar, sum hava tørv á tænastu, ikki fáa hesa, orsakað av vantandi fíggjarorku.

Í løtuni er ein tann størsta avbjóðingin vantandi bústaðartilboð, og at tað koma alsamt fleiri borgarar í skipanina, sum hava umfatandi tørv á tænastum. Samlaða játtanin til tænasturnar var umleið 360 mió. kr. á fíggjarlógini 2018, og sama ár vóru tað samanlagt 188 persónar á bíðilista til tænastur og bústaðartilboð hjá Almannaverkinum.

Harumframt er eisini tørvur á tænastum, sum ikki verða veittar í dag. Tørvurin á tænastum er merktur av brekpolitiska rákinum í samfelagnum annars, og seinnu árini er alsamt størri dentur lagdur á sjálvhjálpni, og at borgarar skulu hava tilknýtið til arbeiðsmarknaðin og skulu hjálpast til at luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við onnur.

Hetta ávirkar, hvussu verandi tænastur skulu veitast, og viðførir eisini tørv á tænastum, sum ikki verða veittar í løtuni. Seinnu árini hevur tað serliga verið fokus á vantandi viðlíkahaldsvenjing, sum kann tryggja, at borgarar varðveita sínar førleikar og avmarkaðar flutningsmøguleikar hjá persónum, sum búgva heima og fáa tænastu frá Almannaverkinum.

***Bústaðir***

Reglurnar um vardar bústaðir og bú- og viðgerðarstovnar eru endurskoðaðar í 2015. Mett verður, at hesar reglur í høvuðsheitum eru nøktandi og halda áfram í hesum lógaruppskoti.

Tað eru ikki reglur um tænastu á bústaðartilboðunum, og verður tænastan veitt sambært siðvenju og royndum, sum eru.

Sum heild er innihaldið í tænastu á bústaðartilboði meinlíkt tí, sum stuðulstænastan veitir. Í frágreiðingini til Tænastupolitikkin frá 2017 verður eisini víst á, at møguleikarnir fyri at veita eina tænastu, sum tekur atlit til tørvin og ynskini hjá tí einstaka búfólkinum eru avmarkaðir av verandi hølisviðurskiftum umframt teimum atlitum, sum vanliga skulu takast til hini búfólkini, starvsfólkaorku og starvsfólkanormering í sambýlunum. Tí verður tað í Tænastupolitikkinum mælt til, at stig verða tikin til, at tænastan í vardu bústøðunum verður meira málrættað einstaka borgaranum soleiðis, at borgarin kann fáa eitt meira sjálvstøðugt lív óheft av sambúgvunum.

Aðrar reglur eru heldur ikki nøktandi. Skipanin í dag við at búfólk rinda húsaleigu fyri uppihaldið og rinda fyri felagsútreiðslur í ein felagskassa, verður skipað sambært kunngerð nr. 2 frá 3. januar 2005 um skipan av sambýlum. Gjaldið kann tó ikki fara upp um ta upphædd, sum samsvarar við veruligu útreiðsluna fyri hvørt plássið í viðkomandi sambýli, og búfólk rinda ikki fyri útreiðslur av starvsfólkum, ið veita viðgerð og námsfrøðiligan stuðul.

Tó er ymiskt frá staði til stað, hvat húsaleigugjaldið og felagskassin fevna um.

Eisini er ymiskt, hvat felagskassin fevnir um.

Útgangsstøðið er, at sambýlið krevur tað inn, sum tað kostar at reka sambýlið.

Tørvur er á meira skipaðum reglum um áseting av húsaleigu og inngjald í felagskassa fyri streym og olju, eins og pláss verður fyri, at búfólk á hvørjum einstakum bústaði sjálvi kunnu avgera hvat ið tey ynskja, at felagskassin harumframt skal fevna um.

Reglurnar um serlig bútilboð til persónar við víðfevndum sosialum trupulleikum, ið ikki megna at fasthalda ein bústað, vórðu ásettar í 2007, eftir at ein arbeiðsbólkur hevði handað landsstýrismanninum eitt tilmæli um heimleys. Reglurnar eru framhaldandi hóskandi.

*Móttøkuskylda*
Sambært galdandi reglum, hevur Almannaverkið skyldu at taka ímóti og veita bútilboð til persónar, ið

- sum sambært rættarúrskurði skulu sinniskannast,
- sum sambært rættarúrskurði ella dómi skulu setast í vardan bústað ella vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settir í vardan bústað, ella
- sum treyt fyri ákæruafturtøku ella royndarleysgeving verða settir í vardan bústað, ella vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settir í vardan bústað.

Talan er um eina skipan, har dómsvaldið hevur møguleika at døma persónar til aðra fyriskipan enn vanliga fongsulsrevsing, tí at hesir ikki eru mettir egnaðir til slíka revsing.

Móttøkuskyldan fevnir um at veita hesum persónum bústaðartilboð, ið verður skipað sambært reglunum í §§ 45 og 46.

Hóast móttøkuskylduna, eru viðurskifti kring innihaldið av slíkari skyldu ikki nágreinað nærri.

Persónsskarin, ið móttøkuskyldan fevnir um, hevur ikki einans tørv á einum bútilboði, men eisini einum víðfevndum sosialnámsfrøðiligari viðgerðartilboðið, ið hevur sum endamál at forða fyri fleiri brotsverkum og menna persónin til eina lóglýdna tilveru. Haraftrat er tørvur á

neyvari heimildum í lóg kring tryggjaðar búfyriskipanir ísv. við bústaðartilboð sambært móttøkuskylduni.

Í hesum høpi er neyðugt at fáa ásett í lóggávu, á hvønn hátt Almannaverkið kann taka sær av ungum undir 18 ár, ið eru dømd til aðra fyriskipan enn vanliga fongsulsrevsing. Lóggávan er í dag ikki neyv hesum viðvíkjandi, og Almannaverkinum vantar tey røttu amboðini at kunna fylgja innihaldinum av teimum dómum, ið snúgva seg um serliga fyriskipan til ung undir 18 ár, ið fremja álvarslig brotsverk.

Talið av persónum, ið vegna dóm ella rættarúrskurð fáa tilboð frá Almannaverkinum er vaksandi.

Rákið er, at málini gerast altsamt tyngri og samansett og teir persónar, ið Almannaverkið skal taka sær av, hava tørv á fleiri tænastum innan aðrar geirar enn almannageiran. T.d. rúsviðgerð og psykiatriska viðgerð.

Tørvur er á, at lóggávan heimilar, at hóskandi sosialnámsfrøðilig viðgerð verður sett í verk, at ein ætlan verður gjørd við hvønn einstakan persón, og at samstarv og samskipan verður sett í verk við aðrar myndugleikar, soleiðis at persónar ikki detta niðurímillum skipanir, men fáa eina samanhangandi og hóskandi viðgerðartilgongd.

### *Markamót millum forsorgarlógina og løgtingslóg um barnavernd*

Meginreglan er, at børn sum bera brek, fáa tænastu og fyribils bústað sambært forsorgarlógini, meðan børn, sum eru fyri umsorgarnarsvíki, fáa ymiskar fyriskipanir sambært barnaverndarlógini. Børn, sum eru sett heiman, fáa bútilboð sambært barnaverndarlógini.

Dømi eru um børn, sum umframt at bera brek, eisini eru fyri umsorgaranarsvíki og kunnu ivamál tá vera, um tað er land ella kommuna, sum skulu veita børnunum tænastur og bútilboð.

### *Markamót millum forsorgarlógina og løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.*

Í 2015 vórðu partar av tænastum, sum áður hava verið skipaðar sambært forsorgarlógini, fluttar frá landinum til kommunurnar at umsita, og eru hesar tænastur nú skipaðar sambært løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Í sambandi við umskipanina varð gjørt av, at heimatænastan og eldrarøkt í sínum táverandi líki skuldi flytast frá landinum til kommunurnar, og at tað framhaldandi skuldi vera tørvurin hjá borgaranum, sum skuldi vera avgerandi fyri, hvør myndugleiki hevur ábyrgdina av tænastuni.

Síðani 2015 hava kommunurnar havt ábyrgd av at veita øllum borgarum heimatænastu og at veita fólkapensjónistum búpláss á ellis- og røktarheimi ella á eldrasambýli.

Í viðmerkingunum til uppskotið til løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. varð víst á, at tað framhaldandi vóru nøkur markamót millum land og kommunur, sum ikki vórðu avgreidd og sum støða mátti takast til aftaná, at lógin varð samtykt.

Síðani eru tað serliga fylgjandi markamót, sum hava elvt til, at borgarar detta niðurímillum skipanir og tí hava verið til viðgerðar millum land og kommunur:

- Búpláss á ellis- og røktarheimi og eldrasambýli hjá kommunum og vardan bústað frá landinum.

- Dagtilhald og umlætting
- Heimatænastuna hjá kommununum og Stuðulstænastuna hjá Almannaverkinum
- Endurvenjing í sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum og kommunum og vantandi viðlíkahaldsvenjing.

***Umsitingarligar reglur***

Tær umsitingarligu reglurnar í forsorgarlógini, ið her verður sipað til, eru reglur um:

- upplýsingarskyldu,
- afturgjald av veiting, móttikin av órøttum,
- at Almannaverkið kann ganga í rættin at móttaka hjúnafelagagjald og barnagjald,
- innheintan av upplýsingum frá øðrum myndugleikum
- umsiting av uppihaldsveiting
- revsiásetingar
- kærumyndugleika
- útreiðslur
- eftirlit
- gildiskomureglur

Nevndu ásetingar halda í høvuðsheitum áfram, tó í dagførdum líki. Dagføringin hevur við sær, at ótíðarhóskandi orðingar og ásetingar, ið við tíðini hava mist sítt innihald, verða strikaðar.

Tørvur er á at dagføra verandi umsitingarligar reglur, eftirlitsreglur við tænastum, ið ávikavist Almannaverkið og sjálvsognarstovnar veita, og reglur um góðkenning, tá onnur vilja skipa tænastur sambært lógini, reglur um hvørjar tænastur, ið Almannaverkið kann keypa frá øðrum veitarum, og tænastur, ið Almannaverkið kann veita øðrum myndugleikum mótvegis gjaldi.

Eisini er heimildin at skipa óheft ráð at veita landsstýrinum ráðgeving av misgáum dottið burtur í verandi forsorgarlóg.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið er at fáa eina føroyska lóg um vælferð, sum lýkur tey krøv, sum nútíðarsamfelagið setir, og sum er lagað til føroysk viðurskifti.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið um almannatrygd og vælferð tekur støði í brekpolitisku grundreglunum um kompensatión, geiraábyrgd, samhaldsfesti og javnviðgerð, sum er grundarlagið undir Sáttmála sameindu tjóða um rættin hjá einstaklingum, ið bera brek, sum Føroyar tóku undir við í 2009.

Tað verður greiðari, hvør hevur rætt til veiting og tænastur, og undir hvørjum treytum, eins og Almannaverkið fær betri karmar kring sosialfakliga og námsfrøðiliga virksemið í mun til borgarar, sum ikki megna at uppihalda sær og sínum, ella sum hava tørv á tænastum fyri at virka í samfelagnum á jøvnum føti við onnur.

***Almennar reglur og virkisøki***

Fyrsti partur av uppskotinum um almannatrygd og vælferð hevur fleiri nýggjar ásetingar.

Lógaruppskotið hevur eina endamálsorðing. Upplýsingar- og ráðgevingarskyldan hjá Almannaverkinum verður ásett í lógini, eins og tað verður álagt Almannaverkinum at veita familjum, ið fáa barn, ið ber brek, skjóta ráðgeving. Fráboðanarskylda hjá starvsfólki í almennari tænastu verður eisini ásett við lóg.

Almannaverkinum verður álagt at gera eina ætlan fyri teir borgarar, ið hava tørv á umfatandi tænastum.

Lógaruppskotið ásetir, at hjálp skal veitast við støði í førleikum, ynski og tørvi borgarans, soleiðis, at sjálvsavgerðarrættur borgarans verður virdur, og borgari fær ávirkan á síni egnu viðurskifti. Eisini verður ásett, at Almannaverkið við støði í einari fakligari og fíggjarligari meting bæði av borgarans og myndugleikans rásarúmi - ger av, hvussu hjálpin verður veitt. Við hesum verða rættindi borgarans tryggjað samstundis, sum Almannverkið hevur frælsi til út frá eini ítøkiligari meting at seta tænastuna saman á skynsamasta hátt í mun til tørv og ynski borgarans, men har eisini verður lagt upp fyri fíggjarliga rásarúminum, ið myndugleikin hevur at ráða yvir.

*Virkisøki*

Lógaruppskotið hevur greiðar ásetingar um, hvør hevur rætt til tænastur og veitingar og hevur greiðan skilnað til aðra lóggávu. Í uppskotinum verður ásett, at tað er niðasta trygdarnetið soleiðis at skilja, at um persónur hevur rætt til tænastur og veitingar sambært aðrari lóg, so kann sama hjálp ikki veitast sambært hesum uppskotinum. Hetta merkir, at persónur, ið eitt nú er fevndur av ábyrgdarøki kommununnar sambært løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m., ikki eisini kann fáa somu hjálp frá Almannaverkinum. Sama er galdandi fyri tænastur sambært barnaverndarlógini, tá talan er um somu hjálp.

Tó verður eisini ásett í uppskotinum, at um persónur hevur fingið tænastu frá Almannaverkinum áðrenn fólkapensjónsaldur, so kann viðkomandi halda áfram at fáa tænastu frá Almannaverkinum, hóast kommunurnar hava yvirtikið ábyrgdina, hetta um tað framhaldandi tænir endamálinum. Við hesi áseting verður serliga hugsað um persónar, ið búgva á vardum bústaði hjá landinum fram til fólkapensjónsaldur, og sum kunnu halda áfram at búgva í sama bústaði og ikki noyðast at flyta á kommunalan eldrabústað.

Við hesum reglum og broytingum í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. sí tingmál nr. xx/2019 verður greiða fingin á fleiri av markamótsspurningunum millum land og kommunu.

Ásett er í uppskotinum, at lógin er galdandi fyri øll, ið lógliga uppihalda sær í Føroyum. Hóast øll, ið lógliga uppihalda sær í Føroyum, hava rætt til hjálp sambært lógini, hevur lógin áseting um, at aðrir útlendingar enn norðurlendingar ikki hava rætt til longurvarandi uppihaldsveiting.

Í ávísum førum er tørvur á at veita persóni, ið uppiheldur sær uttan fyri Føroyar, hjálp. Eisini er tørvur á at veita persóni, ið ikki hevur lógligt uppihald í Føroyum, men sum ikki hevur ráð at fara av landinum, hjálp. Uppskotið hevur eisini ásetingar um hesi viðurskifti.

Tá uppskotið varð sent til hoyringar, vóru ongar ásetingar um samanspælið millum uppihaldsveiting og at senda útlendingar av landinum. Hesar reglur eru nú í lógaruppskotinum og eru tilevnaðar saman við Uttanríkis – og Mentamálaráðnum ( áður Uttanríkis- og vinnumálaráðnum) og danska Uttanríkismálaráðnum.

*Veitingar*
Innihaldið í reglunum um fyribils- og varandi uppihaldsveiting er í høvuðsheitum framhald av verandi reglum í forsorgarlógini. Tó eru einstøku greinarnar umskipaðar nakað, eins og nakrar broytingar eisini verða gjørdar. Farið verður burtur frá hugtakinum forsorg, og heitið á forsorgarhjálpini verður broytt til uppihaldsveiting, har skilt verður ímillum fyribils- og varandi uppihaldshjálp.

Flestu borgarar, sum fáa forsorgarhjálp, fara ikki at merkja nakra broyting í sambandi við, at hetta lógaruppskotverður sett í gildi. Veitingarstøðið verður óbroytt, men aðrar broyttar treytir og ásetingar kunnu fáa týdning fyri nøkur.

Innihaldsliga eru hesar broytingar framdar:

1. Broyttar treytir viðvíkjandi ogn í sambandi við fyribils uppihaldsveiting
2. Lækking av veiting tekur hædd fyri ikki-skattskyldugum inntøkum
3. Broytt javning av uppihaldsveitingum
4. Áseting um stuðul til stakútreiðslur verður greiðari
5. Fíggjarligt ískoyti til húsaleigu
6. Veiting og stuðul til persón í búfyriskipan hjá tí almenna verður umskipað
7. Broyttar treytir viðvíkjandi inntøku hjá hjúnafelaga.
8. Varandi veiting hækkar, og frádráttur í skatti strikaður
9. Broyttar treytir til persónar, sum sita dóm

*Til nr. 1: Broyttar treytir viðvíkjandi ogn í sambandi við fyribils uppihaldsveiting*
Fyri at fáa rætt til forsorgarhjálp er tað ein treyt, at tað ikki skal vera gjørligt at uppihalda sær við ogn. Hetta verður eisini galdandi frameftir. Men í verandi forsorgarlóg er eitt undantak um, at síggjast kann burtur frá eini minni ogn, ætlað til bústað ella til útbúgving. Undantakið verður tikið burtur. Tann, sum hevur pening tøkan, sum kann brúkast til uppihalds, skal brúka peningin fyrst. Men sum nakað nýtt verður ásett, at sæð verður burtur frá tøkum peningi upp til 30.000 kr.

Ogn, sum stavar frá endurgjaldi fyri varandi mein og ikki fíggjarligan skaða, verður eins og í galdandi lóggávu, undantikin. T.v.s., at síggjast kann burtur frá hesi ognini. Eitt nýtt undantak verður sett í lógina, sum er ogn, sum stavar frá endurgjaldi upp til 150.000 kr. fyri hættisliga

sjúku. Fleiri av føroysku fakfeløgunum hava avtalur, har útgoldið verður 150.000 kr. við hættisliga sjúku. Sambært galdandi skipan eru hesi endurgjøld ikki undantikin í sambandi við forsorgarhjálp. Eitt dømi kann vera ein persónur, sum hevur fingið staðfest krabbamein. Talan er um álvarsama sjúku, sum ikki neyðturviliga er varandi, og tí er ikki vist, at viðkomandi hevur rætt til fyritíðarpensjón. Persónurin verður kanska langtíðar sjúkrameldaður, og um viðkomandi missir rættin til dagpening vegna sjúku, kann viðkomandi søkja um fyribils uppihaldsveiting. Í verandi forsorgarlóg hevði hesin persónurin ikki havt rætt til forsorgarhjálp, um viðkomandi hevði havt ogn, sum stavar frá endurgjaldi fyri hættisliga sjúku.

*Til nr. 2: Lækking av veiting tekur hædd fyri ikki-skattskyldugum inntøkum*
Verandi forsorgarhjálp er ein ískoytisveiting, og tað merkir, at allar inntøkur verða mótroknaðar, og verður hetta eisini galdandi í hesum lógaruppskoti. Í forsorgarlógini verða inntøkurnar altíð mótroknaðar krónu fyri krónu – uttan mun til um inntøkan er skattskyldug ella ikki-skattskyldug. Tann, sum hevur ikki-skattskylduga inntøku, hevur tí hægri inntøku enn tann, sum onga aðra inntøku hevur ella hevur aðra skattskylduga inntøku.

Sambært hesum lógaruppskotiverður ikki-skattskyldug inntøka faldað við 1,5 og síðani mótroknað í uppihaldsveitingini.

Tað eru serliga lesandi í barsilsfarloyvi, sum hava ikki-skattskylduga inntøku aftratuppihaldsveitingini.

Í talvuni niðanfyri eru nøkur dømi um sambúgvandi persón við børnum, sum fær forsorgarhjálp/fyribils uppihaldsveiting. Talvan skal lesast soleiðis, at fyrsta kolonnan er veiting til persón, sum ikki er lesandi (bæði í verandi forsorgarlóg og í hesum lógaruppskoti). Restin av dømunum er veitingar til lesandi í barsilsfarloyvi eftir ávikavist forsorgarlógini og hesum lógaruppskoti.

**Veitingar um mánaðin til sambúgvandi við børnum**

| | Ikki lesandi | Lesandi | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 1 barn | | 2 børn | | 3 børn | |
| | Forsorg | Forsorgl. | Vælf. lóg | Forsorgl. | Vælf. lóg | Forsorgl. | Vælf. lóg |
| Lestrarstuðul | - | 5.437 | 5.437 | 6.470 | 6.470 | 7.483 | 7.483 |
| Lestrarstuðul upproknað | - | - | 8.156 | - | 9.705 | - | 11.225 |
| Forsorghj./uppihaldsveiting | 12.826 | 7.389 | 4.671 | 6.356 | 3.121 | 5.343 | 1.602 |
| Inntøka áðrenn skatt | 12.826 | 12.826 | 10.108 | 12.826 | 9.591 | 12.826 | 9.085 |
| **Inntøka eftir skatt** | **8.787** | **10.925** | **9.165** | **11.332** | **9.026** | **11.718** | **8.890** |

*Í dømunum omanfyri er hædd ikki tikin fyri ymsum stuðlum, sum eru knýtt at barninum (barnafrádráttur, familjuískoyti, barnaískoyti til stakar uppihaldarar og barnagjald). Møguligur barnastuðul kann leggjast aftrat, men so skal tað gerast við somu upphædd í øllum dømunum, og t.v.s., at munurin millum dømini verður óbroyttur.*

Talvan omanfyri vísir at lesandi í barsilsfarloyvi í verandi skipan hava eina munandi hægri inntøku eftir skatt enn onnur, sum fáa uppihaldsveiting. Sambært lógaruppskotinum lækkar uppihaldsveitingin til lesandi í barsilsfarloyvi, og munurin til onnur, sum fáa uppihaldsveiting minkar sostatt.

Dømini omanfyri er sum nevnt fyri sambúgvandi. Hjá einum persóni í barsilsfarloyvi, men sum er stakur, er støðan áleið tann sama sum í talvuni omanfyri (tó at upphæddirnar eru eitt sindur hægri). Í 2017 var eingin lesandi í barsilsfarloyvi, sum var stakur (t.v.s. lesandi, sum eisini fingu forsorgarhjálp).

*Til nr. 3: Broytt javning av uppihaldsveitingum*
Forsorgarhjálpin er ásett sum ein prosentpartur av hægstu dagpeningaveiting (sambært løgtingslóg um dagpening vegna sjúku), og tað merkir, at veitingin fylgir lønarlagnum á privata arbeiðsmarknaðinum. Í hesum lógaruppskoti verða uppihaldsveitingar ásettar sum ein prosentpartur av hægstu uppihaldsveiting sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

Samstundis, sum hetta lógaruppskot verður sett í gildi, verður løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum broytt soleiðis, at hon eisini ásetir hægstu uppihaldsveiting. Hægsta uppihaldsveiting verður ásett til somu upphædd sum tágaldandi dagpeningaveiting soleiðis, at borgarin ikki verður ávirkaður av broytingini.

Á henda hátt verða uppihaldsveitingar javnaðar eins og aðrar almannaveitingar, og javningin verður galdandi frá 1. januar á hvørjum ári. Seinastu nógvu árini hevur javningin av almannaveitingum verið ein raðfesting og samráðingarspurningur í sambandi við fíggjarlógararbeiði, og í fleiri ár eru almannaveitingar als ikki javnaðar. Løgtingið hevur við løgtingsmáli 71/2017 samtykt løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar, sum fer at leggja javningina í fastar karmar.

*Til nr. 4: Áseting um stuðul til stakútreiðslur greiðari*
Verandi ásetingar um stuðul til stakútreiðslur eru ógreiðar. Í hesum lógaruppskoti eru lógarásetingarnar greiðari og eru ásettar í samsvari við galdandi siðvenjur, og t.v.s., at nýggja lógin ikki ávirkar borgaran.

*Til nr. 5: Fíggjarligt ískoyti til húsaleigu*
Sum ein nýggj áseting verður sett í lógaruppskotið, at persónur, ið er í vanda fyri at verða settur úr leigubústað,i kann í heilt avmarkað tíðarskeið fáa fíggjarligt ískoyti til húsaleigu. Ískoyti skal serliga veitast barnafamiljum og persónum við víðfevndum sosialum trupulleikum.

Endamálið við ásetingini er at fyribyrgja, at fólk gerast heimleys og harvið fáa enn fleiri trupulleikar og størri tørv á hjálp. Útboðið av leigubústøðum í Føroyum er avmarkað, og tí er serliga týdningarmikið at fyribyrgja heimloysi. Ásetingin er liður í “Housing First” tilgongdini, hvørs grundhugsan er, at ein tryggur bústaður er grundarlagið fyri at kunna veita aðra hóskandi hjálp.

*Til nr. 6: Veiting og stuðul til persón í búfyriskipan hjá tí almenna verður umskipað*
Persónar, sum eru í búfyriskipan hjá tí almenna, og sum ikki eru fyritíðarpensjónistar, fara við hesum lógaruppskoti at fáa hægri veiting, men samstundis skulu tey í størri mun gjalda fyri uppihaldið. Verandi skipan er soleiðis, at stuðul verður veittur til útreiðslur, sum standast av uppihaldinum – t.v.s. húsaleigu, matarskipan og aðrar felagsútreiðslur. Tað er ymiskt, hvussu heimini skipa seg viðv. felagskassa og egingjaldi hjá búfólkunum. Onkur hevur eina útreiðslu við í felagskassa (og harvið verður stuðul veittur til tað), meðan tað aðrastaðni er búfólki sjálvt, sum skal halda somu útreiðslu. Hetta hevur við sær, at fíggjarligu viðurskiftini hjá búfólkunum eru ymisk.

Frameftir hækkar veitingin eftir skatt og gjøld úr uml. 3.300 kr. upp til uml. 7.650 kr. um mánaðin (upphæddirnar áðrenn skatt er ávikavist uml. 4.000 kr. og 10.700 kr.). Stuðul verður veittur til sjálva húsaleiguna, men so skal búfólki sjálvt halda allar útreiðslur, sum koma aftrat húsaleigu.

Hjá persóni, sum fær uppihaldsveiting, verður onnur inntøka mótroknað. Men í hesum lógaruppskoti verður ásett eitt undantak fyri tey, sum eru í búfyriskipan hjá tí almenna, soleiðis at hesi kunnu hava inntøku á 1.000 kr. um mánðin, áðrenn uppihaldsveitingin lækkar. Orsøkin

til undantakið er, at hesir persónar sum partur av eini menningarætlan kunnu hava eitthvørt smávegis arbeiði og harvið eisini eina lítla arbeiðsinntøku. Um arbeiðsinntøkan verður mótroknað, er vandi fyri, at málið við menningarætlanini ikki verður rokkið.

*Til nr. 7: Broyttar treytir viðvíkjandi inntøku hjá hjúnafelaga*

Í sambandi við fyribils uppihaldsveiting verður sæð burtur frá inntøku hjá hjúnafelaga. Við hesi broyting verða hjún og sambúgvandi javnsett í mun til rættin til uppihaldshjálp óheftari av inntøku hjá ávikavist hjúnafelaga og samliva. Undantakið fevnir tó einans um inntøku hjá hjúnafelaga. Hjúnafelagin skal sum nú ikki eiga ogn, ið kann nýtast til uppihald.

Hildið verður sostatt fast við meginregluna, at fyribils uppihaldsveiting er niðasta trygdarnetið, ið bert tekur við, um persónur ikki megnar at uppihalda sær og síni familju. Hinvegin merkir avmarkaða undantakið, at hjún fáa somu rættindi til veiting sum samlivandi í mun til inntøkuviðurskifti.

*Til nr. 8: Varandi veiting hækkar, og frádráttur í skatti strikaður*

Persónur, sum fær varandi veiting sambært forsorgarlógini hevur rætt til ein frádrátt í skattinum. Veitingin er knappliga 11.000 kr. um mánaðin, sum er skattskyldugt, men hesi hava sbrt. løgtingslóg um áseting av skatti rætt til ein frádrátt í skattinum, sum er 16.200 kr. um árið hjá støkum og 10.500 kr. um árið til gift.

Við hesi lógini hækkar veitingin til persónar, sum fáa varandi veiting upp til umleið 13.750 kr. um mánaðin, men samstundis verður rætturin til frádrátt í skattinum tikin burtur, og inntøkan eftir skatt verður tí uml. tann sama, sum hon er í dag.

*Til nr. 9: Broyttar treytir til persónar, sum sita dóm*

Persónur, sum er varhaldsfongslaður ella er í varðhaldslíknandi fyriskipan, situr dóm o.s.fr. rindar ikki fyri uppihaldi, og viðkomandi fær sostatt fullan kost og logi. Harumframt hevur hesin rætt til eina veiting, sum er knappliga 2.400 kr. um mánaðin, áðrenn skatt (um so er, at treytirnar annars viðvíkjandi ogn og inntøku loknar). Persónur, sum er í fongsli, hevur harumframt møguleika at vinna eyka lummapening við at arbeiða.

Við hesum uppskoti verður veitingin lækkað til umleið helvtina. Tó verður tað soleiðis, at hjá teimum, har tað ikki er møguligt at arbeiða, verður veitingin framhaldandi uml. 2.400 kr. um mánaðin. Tað kann t.d. vera vegna sjúku, at viðkomandi er avbyrgdur, ella at fyriskipanin er á einum stað, har tað ikki ber til at arbeiða.

Persónur, sum situr dóm, kann sambært forsorgarlógini eisini fáa fíggjarligt ískoyti til bústaðarútreiðslu, um framhaldandi gjald er neyðugt fyri at kunna varðveita bústaðin. Er dómurin longur enn 12 mánaðir, hevur viðkomandi tó ikki rætt til ískoyti. Við hesum lógaruppskoti verður ásetingin herd soleiðis, at ískoyti kann bert veitast, um tað hevur týdning fyri sosialu støðuna frameftir, at bústaðurin verður varðveittur.

***Endurbót***

*Fíggjarligt endurgjald fyri meirútreiðslur*

Skipanin við fíggjarligum endurgjaldi fyri meirútreiðslur, sum standast av børnum, ið bera brek, verður í stóran mun óbroytt í mun til verandi forsorgarlóg.

*Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku*
Endurgjald fyri inntøkumiss verður veitt til tey, sum uppihalda barni við breki. Høvuðstreytirnar halda fram óbroyttar, tó at lógin verður greiðari og hægst møguliga endurgjaldi hækkar við uml. 2.700 kr. um mánaðin. Hámarkið fyri endurgjalder í forsorgarlógini ásett til 25.000 kr. um mánaðin íroknað frítíðarløn. At upphæddin er íroknað fríðtíðarløn merkir, at frítíðarlønin skal dragast frá teimum 25.000 kr., og í praksis er hægsta endurgjaldi sostatt uml. 22.300 kr. um mánaðin. Við hesum lógaruppskotið verður hámarkið óbroytt – t.v.s. 25.000 kr., men frítíðarlønin kemur aftrat. Reella endurgjaldið verður sostatt 25.000 kr. um mánaðin.

Upphæddin á 25.000 kr. er ikki javnað síðani, hon varð sett í lógina í 2009. Í hesum lógaruppskoti er ásett, at upphæddin verður javnað sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

Fíggjarligt endurgjald fyri mista inntøku verður víðkað til at fevna um tey, ið ansa doyggjandi og fólki við seinheilaskaða, ið ikki fáa pláss á vardum bústaði. Viðv. persónum í terminalstøðu er talan um, at lekjandi viðgerð skal vera steðgað, og livitíðin væntast at vera stutt. Harumframt er tað ein treyt, at persónurin skal ynskja at doyggja heima.

Viðv. persónum við seinheilaskaða er talan um eitt slag av átrokandi hjálparfyriskipan til persónar við einum akuttum og víðfevndum tørvi á røkt, har landið ikki hevur bústað tøkan. Sostatt er hetta ikki ein varandi fyriskipan fyri tann einstaka.

Í báðum førum verður endurgjald veitt fyri veruliga inntøkumissin, tó í mesta lagi 25.000 kr. um mánaðin umframt frítíðarløn og bundið eftirlønargjald sambært løgtingslóg um eftirløn. T.v.s., at persónurin, sum ansar, skal vera farin av arbeiðsmarknaðinum.

Upphæddin á 25.000 kr., sum er hægst møguliga veitingin, fer at verða javnað sambært løgtingslóg um áseting og javning.

*Fíggjarligur stuðul til bil*
Skipanin við stuðli til bil verður óbroytt í mun til forsorgarlógina.

*Fíggjarligur stuðul til bústaðarbroytingar*
Nágreinað verður nú, at um bústaðarbroytingin ella útveganin av øðrum bústaði hevur eina munandi virðisøking við sær, verður tann parturin av stuðlinum, ið samsvarar við virðisøkingina, veittur sum eitt rentu- og avdráttarfrítt lán.

Harafturat verður nú nágreinað, at umsókn um stuðul ikki verður gingin á møti undir ávísum nærri treytum. Endamálið við hesum er at avmarka ábyrgdina hjá myndugleikanum fyri viðurskiftum, ið persónurin, ið søkir um stuðul til bústaðarbroyting, greitt átti at tikið hædd fyri. Talan fyrst og fremst um viðurskifti, ið kunnu metast sum grovt óskettin og har eitt nú er farið undir umfatandi bústaðarbroyting, ið ikki ger bústaðin betur egnaðan sum tilhald.

*Rættur til bústað vegna bústaðarsosialan tørv*
Almannaverkið hevur sambært leigulógini ávísingarrætt til 5. hvønn leigubústað í almennum bústaðafelagi til fólk, ið hava serligan bústaðarsosialan tørv.

Almannaverkinum verður heimilað sambært hesi lóg at rinda fyri leigubústaðin frá tí degi, hesin er tøkur, og inntil viðkomandi persónur kundi yvirtaka bústaðin og at rinda fyri møguligan skaða á leigubústaðin, ið ikki kann rúmast innan fyri goymslugjaldið (depositum).

*Fíggjarligur stuðul til hjálparráð*
Í høvuðsheitum heldur skipanin við hjálparáðum áfram. Nágreina er nú í stk. 2, at tørvurin skal vera varandi, soleiðis at skilja, at útlit ikki eru fyri, at heilsuviðurskiftini hjá persóninum fara at betrast.

Ein munandi broyting í mun til at veita hjálparráð er tann, at persónur, sum fær bústaðartilboð sambært hesi lóg, frameftir hevur sama rætt til hjálpartól sum persónur, ið býr í egnum bústaði. Hetta er ein liður í at avtaka stovnsgerðing, soleiðis at skilja, at ein persónur býr 'heima' uttan mun til um bústaðurin er eitt alment bústaðartilboð ella talan er um egnan bústað.

Í fyrstu atløgu er omanfyrinevnda broyting einans fyri bústaðir, sum eru skipaðir sambært hesi lóg. Skipanin heldur fram óbroytt í mun til bústaðartilboð, sum kommunurnar veita sambært løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. Hetta merkir, at hjálparráð ikki verður veitt persóni, ið býr á røktarheimi ella eldrasambýli, ið ein kommuna ella kommunalt samstarv varða av. Hjálpartól eru í hesum høpi ein partur av grundútbúnaðinum á staðnum.

Ætlanin er at fara undir eina størri eftirmeting av skipanini við hjálpartólum í næstum, og tá skal støða eisini takast til, um verandi skipan á røktarheimum og eldrasambýlum eisini skal broytast.

Ásett er eisini, at hjálparráð undir nærri treytum kann varðveitast á bústaðnum, ið persónurin er fluttur frá. Talan kann eitt nú verða um eina lyftu ella rampu at stuðla atkomuviðurskiftunum. Hetta er ein kærkomin broyting, ið gevur persóninum ein veruligan møguleika at vitja foreldur síni ella onnur avvarðandi. Varðveitingin er ásett at vara í 12 mánaðir hvørja ferð. Síðani skal Almannaverkið meta um persónurin í roynd og veru fær troytt møguleikan, ella um støða hansara er broytt so mikið, at varðveitingin ikki hevur nakað endamál longur.

*Hoyritól*
Ásetingin í forsorgarlógini um fíggjarligan stuðul til hoyritól virkar á nøktandi hátt. Tær broytingar, ið eru gjørdar í hesum lógaruppskoti, eru av tekniskum og málsligum slagi, og serligu viðmerkingarnar til ásetingina eru gjørdar greiðari.

### ***Tænastur***

*Alment*
Uppskotið ásetir, at endamálið við øllum tænastum, sum verða veittar, er at kompensera fyri brekið hjá einstaka persóninum, og at persónurin gerst so sjálvbjargin og sjálvhjálpin sum gjørligt, soleiðis at hann kann luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við aðrar borgarar.

Tað er ásett, at ein virkisætlan verður løgd av borgaranum og myndugleikanum í felag fyri at tryggja endamálið við einstøku tænastuni, og hvussu tænastan skal leggjast til rættis.

Í mun til tænastur verður lógaruppskotið framhaldandi meira at meta sum ein rammulóg, ið yvirskipað veitir heimild fyri, hvørjar tænastur kunnu veitast, og verður rætturin hjá borgarum til tænasturnar framvegis tengdur at játtanini á fíggjarlógini.

Í hesum uppskoti verður umsorganarskylda myndugleikans ásett, soleiðis at borgari, sum hevur tørv á hjálp, eigur at fáa hjálp.

Almannaverkið fær heimild at velja tænastufyriskipan, sum er í samsvari við ynski borgarans og út frá eini fakligari meting best hóskandi til borgaran. Í lóggávuni er greitt nágreinað, hvørji krøv metingin er gjørd útfrá. Skipanin verður nú meira gjøgnumskygd.

Innihaldið er annars í høvuðsheitum framhald av verandi reglum í forsorgarlógini. Tó eru broytingar framdar soleiðis, at tað er greitt, hvørjar tænastur kunnu skipast sambært hesum lógaruppskoti, hvat endamálið við tænastunum er, og hvørjum tænastan er ætlað.

Uppskotið gevur somuleiðis landsstýrismanninum heimild til at skipa nýggjar tænastur, sum hava verið eftirspurdar í nógv ár.

*Stuðulstænasta*
Stuðulstænastan verður dagførd og umskipað soleiðis, at talan er um tænastu, sum verður veitt einstaklingi heldur enn í bólkum, og frameftir fevnir sama stuðulstænasta bæði um børn og vaksin.

Stuðulstænastur, sum hava verið skipaðar í toymum, verða frameftir skipaðar sambært sjálvstøðugari áseting um dagstovna- og frítíðarheim, eins og frítíðartilboð í framtíðini verða skipað sum virknistænastur. Eisini verður umlætting skipað í áseting fyri seg.

Stuðulstænasta verður framhaldandi ætlað einstaklingum, og er endamálið í høvuðsheitum at menna og viðlíkahalda sálarligar, likamligar og sosialar førleikar. Stuðulstænasta kemur at fevna um leiðbeining, fylgjara, hjálp til praktisk og fíggjarlig viðurskifti og vøku og hjáveru. Hervið er greitt, hvat stuðulin kann fevna um, og hvat endamálið við tænastuni er.

Uppskotið gevur somuleiðis landsstýrismanninum heimild til at skipa stuðulstænastu sum borgarastýrd stuðulstænasta. Talan er um skipan, sum tekur støði í hugsjónini aftan fyri sokallaðu BPA skipanum, sum eru í grannalondunum, men skipanin er ikki tann sama sum í grannalondunum, har borgarin fær játtað eina peningaupphædd, sum viðkomandi brúkar til at seta í starv ein stuðulspersón. Styttingin BPA stendur fyri Borgarastýrd Persónlig Atstøði. Við uppskotinum skal borgari sjálvur kunna gera av, hvør skal verða stuðul, hvat stuðulin skal brúkast til, og nær stuðulin skal brúkast.

Innihaldið í borgarastýrdari tænastu er ikki tað sama sum ein tænasta, sum krevur sernámsfrøðiligan ella heilsufakligan serkunnleika. Tað skal ikki fevna um røktaruppgávur, sum liggja uttan fyri tað, sum ein stuðul kann lærast upp til, ergo- og fysioterapi ella aðrar heilsufakligar seruppgávur ella sernámsfrøðiligar uppgávur, sum krevja sernámsfrøðiligar førleikar.

Stuðulin viðvirkar til, at borgarin fær framt tær praktisku uppgávurnar, sum viðkomandi sjálvur kundi framt, um hann ikki bar brek, og at borgarin kann luttaka á jøvnum føti við aðrar borgarar í frítíðar- og mentanarlívinum sum heild.

Tað verður framhaldandi Almannaverkið, sum avger, um ein borgari skal hava stuðulstænastu, hvussu nógvar tímar, hann skal hava, og um tænastan kann skipast sum borgarastýrd stuðulstænasta. Borgarin avger síðani, hvør stuðulspersónurin verður, og hvussu játtaðu tímarnir verða brúktir og nær. Stuðulspersónurin verður settur í starv í Almannaverkinum.

*Endurvenjing*
Skipanin við endurvenjing heldur áfram sum higartil, og broytingar verða ikki gjørdar í ásetingunum um endurvenjing.

Endurvenjingartænastan verður framhaldandi útbygd kring landið. Møguleikin hjá Almannaverkinum at keypa endurvenjing frá øðrum myndugleikum ella privatum veitarum verður varðveittur. Harumframt verður trupulleikin við vantandi flutningstænastu helst minni, tá flutningstænasta eftir ætlan verður skipað frá 2022.

Eisini verður møguligt at fáa stuðul til hjálparráð, meðan persónur fær endurvenjing frá Almannaverkinum, hóast talan ikki er um varandi brek. Heimildin fevnir einans um endurvenjing frá Almannaverkinum og ikki frá øðrum myndugleikum.

*Virknistænastur*
Borgarin fær framhaldandi rætt til at fáa virknistænastur sambært hesum lógaruppskoti, og stórvegis broytingar verða ikki gjørdar í mun til verandi lóggávu, sum nýliga er dagførd. Tó verða ásetingar, sum áður hava verið í kunngerð, fluttar í lógaruppskotið. M.a. verður tað nú í lógini ásett, at persónur, sum luttekur í framleiðslurættaðum tilboði, fær samsýning, ið samsvarar við 6 % av grundløn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, frítíðarløn ikki íroknað.

Borgari, sum hevur eitt meira mennandi og stimbrandi tilboð, men ikki luttekur í framleiðsurættaðum tilboði, fær ikki samsýning.

Spurningurin um samsýning verður avgreiddur í sambandi við at virkisætlanin, sambært § 33 í hesi lóg, verður gjørd saman við borgaranum.

Tað verður eisini framhaldandi møguligt hjá øðrum at veita virknistænastur. Virksemi á Dugna, Sjóndeplinum og Fountainhúsinum verður ikki broytt við hesum lógaruppskoti.

Harumframt er tað nú í lógaruppskotinum ásett, at t.d. vardur verkstaður, verkhús ella arbeiðsrættað fyriskipan kann veitast sum frítíðartilboð.

Størsta broytingin er, at virknistænasta frameftir eisini fevnir um frítíðartilboð, sum áður hava verið skipað sum toymistænastur sambært ásetingum um stuðulsfólkaskipan fyri børn og stuðulstænastu fyri vaksin í forsorgarlógini.

Frítíðartilboð kunnu viðvirka til, at borgarin samstundis, sum persónligu og sosialu førleikarnir verða styrktir, eisini fær tilknýti til aðrar borgarar, sum eru í somu støðu.

*Dagstovna- og frítíðarskúlatilboð til børn, sum ikki fáa tænastu sambært dagstovnalógini*
Meginreglan er, at børn, hóast tey bera brek, skulu hava pláss á kommunalum ansingarstovnum og skulu eisini hava frítíðarskúlatilboð frá kommununi á jøvnum føti við onnur børn í kommununi. Hetta er ásett í § 5 í dagstovnalógini.

Almannaverkið kemur framhaldandi at veita børnum, sum ikki kunnu vera á dagstovni ella í frítíðarskúla hjá kommunu, tilboð, og eru greiðar ásetingar nú í lógaruppskotinum um tænasturnar, sum eru ásettar í mun til dagstovnalógina.

Seinnu árini hevur rákið í Føroyum verið, at myndugleikar og stovnar hava lagað seg eftir brekpolitisku meginreglunum um inklusión og hava skipað almennu tilboðini soleiðis, at tey eisini kunnu fevna um fólk, sum bera brek.

Er ósemja millum kommunur og Almannaverkið, verður málið lagt fyri eina óhefta fakliga nevnd, sum er sett av landsstýrismanninum og mannað við serfrøðingum. Fakliga nevndin ger tilmæli í málinum, men tað er Almannaverkið, sum tekur endaliga avgerð í hesum málum.

Sambært upplýsingum frá Almannaverkinum eru tað tvey børn, sum fáa dagstovnapláss, meðan fýra børn fáa frítíðarskúlapláss frá Almannaverkinum.

Kommunurnar bjóða vanliga børnum til og við 3.flokk frítíðarskúlatilboð. Eftir hetta verður mett, at børnini megna at vera einsamøll heima ella at koma til og frá frítíðarítrivi. Børn, sum bera brek, hava ofta tørv á einum skipaðum og mennandi tilboði aftaná 3.flokk, tí tey ikki á sama hátt megna at verða heima einsamøll ella at koma til og frá ymiskum frítíðarítrivum.

Fyri, at børnini framhaldandi kunnu fáa eitt skipað og mennandi tilboð aftaná skúlatíð, og fyri at foreldrini kunnu halda fram á arbeiðsmarknaðinum, kann Almannaverkið bjóða børnum, sum hava likamligt ella sálarligt brek ella sosialar trupulleikar, frítíðartilboð, til tey eru 18 ár.

Nøkur av børnunum fáa tilboð hvønn dag, meðan onnur fáa tilboð nakrar dagar um vikuna.

1. oktober 2017 vóru áleið 50 børn undir 18 ár, sum fingu frítíðartilboð kring landið frá Almannaverkinum.

Foreldur gjalda ikki fyri pláss á dagstovni ella frítíðarskúla, sum Almannaverkið veitir, og heimild er ikki fyri at áseta gjald fyri hesar tænastur sambært galdandi lóg.

Uppskotið gevur landsstýrismanninum heimild til at áseta foreldragjald fyri pláss á dagstovni ella frítíðarskúla hjá landinum.

*Umlætting*
Umlætting verður framhaldandi ein tænasta, sum Almannaverkið og sjálvsognarstovnar veita. Lógaruppskotið hevur greiða áseting um, at endamálið við umlætting er at lætta um hjá foreldrum, hjúnafelaga ella øðrum, sum er umsorganarpersónur hjá einum, sum hevur likamligt, sálarligt brek ella hevur sosialar trupulleikar.

Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild til at áseta gjald fyri umlætting.

*Tulkatænasta*
Tulking er ætlað til, at persónur kann taka lut í samfelagslívi og sosialum lívi á jøvnum føti við onnur. Tá talan er um tulking í sambandi við tænastur, sum myndugleiki hevur ábyrgd av at veita, verður tað framhaldandi veitt sambært óskrivaðu reglununum um geiraábyrgd, sum merkir, at myndugleikin hevur skyldu at tryggja og rinda fyri, at tænasta verður veitt øllum borgarum. Sum dømi er skúlaverkið, sum rindar fyri tulkatænastu til næmingar, ið hava hoyribrek. Heilsutrygd rindar tulk í sambandi við læknahjálp, og Mentamálaráðið rindar fyri framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari.

*Hjálp í sambandi við harðskap*
Við hesum uppskoti verður heimild at veita persónum fyribils gisting, umsorgan, ráð og vegleiðing á kreppumiðstøð vegna harðskapi í parlagi og nærsambondum. Heimildin fevnir um persónar, ið hava verið fyri harðskapi, ella sum eru í vanda fyri at verða fyri harðskapi, eins og teirra børn. Heimild verður somuleiðis til at krevja eitt ávíst gjald fyri uppihaldið á Kreppumiðstøðini.

Hóast ásetingin fevnir um persónar, so er bert ein kreppumiðstøð í Føroyum, og hon er til kvinnur við børnum.

***Nýggjar tænastur***

Lógaruppskotið gevur somuleiðis landsstýrismanninum heimild til at skipa nýggjar tænastur, sum hava verið eftirspurdar í nógv ár.

*Heimaráðgeving*
Frameftir er ætlanin, at familjur, sum hava børn, sum bera ávís brek, skulu fáa málrættaða og dygdargóða familjuráðgeving á høgum fakligum støði.

Avbjóðingarnar hjá familjuni vísa seg ofta í gerandisdegnum, og endamálið við heimaráðgeving er at viðvirka til, at gerandisdagurin hjá familjuni verður lættari, og at familjan kann liva eitt so vanligt familjulív, sum til ber, og at barnið kann fáa neyðugan stuðul í familjuni undir røttum kørmum.

Talan er um tænastu, sum er sprottin úr "Tí góðu tilgongdini", og hava familjur, sum hava barn við autismu, fingið bjóðað autismuráðgeving síðani 2015, tá tann góða tilgongdin varð sett í verk. Hvør familja fær tá ein samskipara, sum hevur til uppgávu at samskipa tænastur frá ymiskum myndugleikum saman við familjuni í eini tvørgeiraligari ætlan, sum verður dagførd og endurskoðað á árligum netverksfundum, har familjan og allir myndugleikar, sum eru um familjuna, luttaka.

Ráðgeving til allar familjur kann fara fram í heiminum og sum bólkaundirvísing saman við øðrum familjum, um ynski er til tess. Hetta letur upp fyri, at ráðgevingin kann tillagast til einstøku familjuna og leggja upp fyri, at støðan hjá familjum kann vera ymisk. Tað eru kanska eisini einstøk evni, sum hóska seg best at umrøða saman við øðrum familjum.

Ráðgevingin tekur støði í, at familjan kennir barnið best og veit, hvørjar styrkir og veikleikar barnið hevur. Ráðgevingin kann síðani, við støði í hesum, ráðgeva og vegleiða familjuni um, hvussu farast kann fram í mun til tær avbjóðingar, sum barnið hevur.

Uppgávan hjá ráðgevanum er at hjálpa familjuni við at finna ymiskar loysnir, sum hóska til júst hesa familjuna, og at veita familjuni amboð til at handfara hesar avbjóðingar við.

*Viðlíkahaldsvenjing*
Viðlíkahaldsvenjing kann bjóðast vaksnum borgarum upp til fólkapensjónsaldur, sum hava munandi og varandi skerd virkisføri, orsakað av breki ella sjúku.

Støðan hjá borgarum, sum hava tørv á viðlíkahaldsvenjing, er varandi, og tørvurin á viðlíkahaldsvenjing verður tí aloftast eisini varandi. Ætlanin er, at skipanin verður soleiðis, at persónar, sum fáa viðlíkahaldsvenjing, fáa eina langtíðar játtan og sleppa undan at brúka óneyðuga tíð og orku til at skriva umsóknir og bíða eftir svari til hesar.

Hinvegin so kann støðan eisini broytast munandi, og tá er gott og neyðugt, at støðan hjá borgaranum verður tikin upp m.a. fyri at gera av, um tað framhaldandi tænir sínum endamáli at veita viðlíkahaldsvenjing.

Almannaverkið hevur skyldu til at taka nýggja avgerð um viðlíkahaldsvenjing, áðrenn játtanarskeiðið endar, soleiðis at forðað verður fyri, at borgari stendur uttan tilboð, orsakað av langari svartíð.

Almannaverkið avger, hvussu viðlíkahaldsvenjing verður skipað og veitt, eins og § 67 heimilar Almannaverkinum at keypa tænastur frá privatum veitarum og øðrum myndugleikum kring landið. Við hesum verður møguligt at veita borgarum tænastuna í nærumhvørvinum.

Ætlanin er at viðlíkahaldsvenjing verður skipað í Almannaverkinum sum partur av endurvenjingartænastuni, sum Almannaverkið stig- og miðvíst hevur bygt upp seinnu árini.

Fyrimunurin við, at viðlíkahaldsvenjing eisini verður staðsett í Almannaverkinum, er, at Almannaverkið hevur samband við flestu borgarar, sum hava tørv á tænastuni og kann í størri mun veita borgarum, ið tørva tað, eitt heildartilboð við sosialráðgeving, ymiskum almannaveitingum, endurvenjing, hjálpartólum, arbeiðsfremjandi tiltøkum, trivnaðartænastum og nú eisini viðlíkahaldsvenjing. Harumframt umsitur Almannaverkið eisini skipanina við hjálparráðum, sum er ein týdningarmikil liður í arbeiðinum hjá terapeutum at endurvenja og viðlíkahalda førleikar hjá borgarum, og er í summum førum avgerandi kompensatión í mun til møguleikar hjá einstaka borgaranum við breki at luttaka á jøvnum føti við aðrar borgarar. Ætlanin er, at skipanin kemur í gildi í 2021.

*Flutningstænasta*

Landsstýrismaðurin fær við hesum lógaruppskoti eisini heimild til at skipa flutningstænastu til borgarar, sum orsakað av breki ella sjúku ikki megna at koyra ella flyta seg sjálvir ella at brúka almenn ferðasambond.

Í fyrstu atløgu fevnir flutningsskipanin um flutning til tænastu, sum Almannaverkið veitir, men sum víst verður á í tilmælinum til tænastupolitikk so hava fólk, sum bera brek sum heild ikki nøktandi flutningsviðurskifti í Føroyum.

Almannaverkið hevur skyldu til at veita landsfevnandi tænastur, og ofta vísir tað seg, at landafrøðin kann vera ein avbjóðing. Nógvar tænastur eru staðsettar í býum og størru bygdunum, og má borgarin tí koyra til og frá tænastuni. Nakrir borgarar finna sjálvir loysnir saman við familjuni, meðan aðrir hava avbjóðingar í so máta.

Skipanin er ætlað soleiðis, at Almannaverkið kannar tørvin hjá persóni og visiterar til flutningstænastu í sambandi við, at borgari fær tillutað aðra tænastu frá Almannaverkinum.

Flutningstænastan kann útveitast. Veitarin skal útvega hóskandi flutningsfør og veita nøktandi koyring kring alt landið. Borgarin kemur ætlandi at gjalda fyri flutningstænastu.

Í sambandi við, at flutningstænasta verður stovnað, verður Serflutningsskipan landsins eftirmett. Serflutningsskipan landsins fevnir einans um flutning innan fyri kommunur, sum eru við og ikki millum økini, sum eru við í skipanini. Skipanin fevnir ikki um sjúkraflutning.

***Bústaðir***

Uppskot til ásetingar um fyribils bústaðir, vardar bústaðir og serlig bútilboð eru í høvuðsheitum framhald av verandi reglum. Tó verða reglurnar nágreinaðar, og ávísar ásetingar, ið áður vóru ásettar í kunngerð, verða tiknar upp í lógaruppskotið. Harumframt verður innihaldið deilt í fleiri greinar, m.a. ásetingin um, at landsstýrismaðurin kann góðkenna, at onnur stovnseta og reka vardar bústaðir og bú- og viðgerðarstovnar sambært lógini.

Ásett er nú, hvørjar tænastur persónar á fyribils bústaði og vardum bústaði fáa. Tænastan er í høvuðsheitum meinlík stuðulstænastuni sambært § 35 og fevnir m.a. um sum námsfrøðiliga leiðbeining í mun til røkka yvirskipað persónlig mál, umsorgan og praktisk hjálp til dagligar uppgávur og fíggjarviðurskifti, fylgjari til sosial tiltøk, vøka og hjávera. Persónlig røkt verður framhaldandi partur av tænastuni á fyribils – og vardum bústøðum sambært hesi løgtingslóg.

Harumframt er ásett, at endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing er partur av tænastuni á bústøðunum.

Ásett er tó, at tænastan á á fyribils- og vardum bústøðum verður skipað sum grundtænasta, sum verður veitt øllum og einstaklingarætta tænasta, sum verður veitt tí einstaka.

Lógaruppskotið ásetir harvið, at hvør bústaður sær veitir eina meira málrættaða tænastu til tey búfólk, sum búgva saman umframt, at hvørt einstakt búfólk kann fáa eina tænastu, sum í størri mun enn higartil tekur atlit til tørvin og ynskini hjá viðkomandi.

Sum nakað nýtt kann persónur eisini fáa tillutað ein fylgjara til sosial tiltøk, sum er óheftur av starvsfólkabólkinum, og sum viðkomandi sjálvur velir.

Eisini verða neyvar reglur um húsaleigu og felagskassa sett inn í uppskotið.

Húsaleiga verður frameftir ásett eftir felags leisti. Á henda hátt verður húsaleigan ásett einsæris og út frá eina rímiligari meting. Húsaleigan verður ov høg fyri einstaka búfólkið, um hon verður ásett eftir kostnaðinum at útvega hvønn einstakan bústað.

Harumframt hava vardir bústaðir skipan við felagskassa, ið búfólk skulu rinda í. Við uppskotinum verða hesi viðurskifti meira skipað, samstundis sum búfólk harumframt kunnu avgera, hvat tey ynskja, at felagskassin skal fevna um.

### *Móttøkuskylda og tryggjaðar búfyriskipanir*

Almannaverkið skal veita bústað til persón, ið er dømdur sambært revsilógini, § 16 ella § 74 a, til aðra fyriskipan enn vanliga fongsulsrevsing.

Talan er um persón við týðandi sálarligum virkistarni, har dómsvaldið metir, at onnur fyriskipan enn vanlig fongsulsrevsing er betur egnað til at fyribyrgja fleiri brotsverkum. Tað kann eisini vera persónur, yngri enn 18 ár, ið hevur framt lógarbrot, og sum hevur sosialar trupulleikar, ið best verða loystir við aðrari fyriskipan enn vanligari fongsulsrevsing.

Móttøkuskyldan hevur til endamáls at veita bústað til persón, ið ikki er egnaður til vanliga fongsulsrevsing.

Heimild verður eisini fyri, at persónur fær ein bústað, ið er skipaður sum ein tryggjað búfyriskipan, um hetta er neyðugt til tess at nøkta krav um fyribyrgjan og til tess at liva upp til ítøkliga dómsinnihaldið annars.

Ein tryggjað búfyriskipan er ein bústaður, ið hevur ymiskar trygdarfyriskipanir, eitt nú at hava læstar dyr og vindeygu – bæði part av tíðini ella støðugt.

Tryggjað búfyriskipan kann eisini undir serligum umstøðum skipast fyri persón, ið er í vanda fyri at gera skaða á seg sjálvan ella onnur og tískil hevur tørv á aðrari fyriskipan enn einum vanligum bústaðartilboði.

Móttøkuskyldan hevur eisini til endamáls at veita teimum persónum, ið Almannaverkið fær skyldu at hýsa, eina sosialnámsfrøðiliga og brotsfyribyrgjandi viðgerðarætlan, ið eisini fevnir um samstarv og samskipan við aðrar myndugleikar, t.d. rúsevnaviðgerð og psykiatriska viðgerð, ið aðrir myndugleikar veita.

*Markamót millum bústaðartilboð sambært forsorgarlógini og bú- og viðgerðartilboð sambært barnaverndarlógini*
Meginreglan um, at børn, sum bera brek, fáa tænastur frá landinum, meðan børn, sum eru sett heiman, skulu undir fyriskipan frá kommunum sambært barnaverndarlógini, verður óbroytt við hesum lógaruppskoti. Børn, sum bera brek og eru fyri umsorgarnarsvíki, kunnu fáa tænastu frá bæði landinum og kommununum.

Ásett verður, at stuðulstænasta er ikki verður veitt børnum, ið eru fevnd av barnaverndarlógini, orsakað av víðfevndum sosialum trupulleikum. Hesi børn hava tó rætt til stuðulstænastu frá Almannaverkinum eins og barnaverndartænastan veitir familjuni hóskandi hjálp sambært barnaverndarlógini, um so er, at barnið ber brek samstundis, sum familjan hevur týðandi sosialar trupulleikar.

Familjur – herundir eisini fosturfamiljur – sum umframt at hava týðandi sosialar trupulleikar, sum barnaverndartænastan hjálpir familjuni við, eisini hevur eitt barn, sum ber brek, fáa námsfrøðiliga ráðgeving frá Almannaverkinum sambært hesum uppskoti. Í slíkum føri fær familjan bæði ráðgeving frá Almannaverkinum í mun til brekið hjá barninum og frá kommunalu barnaverndartænastuni í mun til foreldraførleikar. Familjur, sum einans hava týðandi sosialar trupulleikar, og sum tí fáa ráðgeving, viðgerð ella stuðul frá barnaverndartænastu sambært barnaverndarlógini, fáa ikki námsfrøðiliga ráðgeving frá landinum.

Fosturfamilja kann fáa umlætting sambært hesum lógaruppskoti eins og biologisk foreldur, sum hava umsorgarnarábyrgd. Fosturfamilja, ið hevur trupult barn búgvandi, kann sambært § 15 stk. 1, í barnaverndarlógini fáa tilboð um umlætting hjá góðkendum fosturforeldrum til tess at lætta um. Hevur barnið týðandi likamligt ella sálarligt brek, so kann fosturfamilja fáa umlætting sambært hesum lógaruppskoti á jøvnum føti við biologiska familju.

*Búpláss á ellis- og røktarheimi og eldrasambýlum frá kommunum og vardan bústað frá landinum*
Landið hevur ábyrgd av at veita borgarum, sum hava týðandi likamligt ella sálarligt brek ella hava víðfevndar sosialar trupulleikar og eru undir fólkapensjónsaldur, búpláss sambært § 45 ella § 46 í hesum lógaruppskoti. Borgarar, sum eru undir fólkapensjónsaldur og sum hava seinheilaskaða, og borgarar, sum bera fjølbrek, eru fevndir av hesi áseting, hóast nógvir av hesum mugu metast at vera røktarkrevjandi.

Borgarar, sum hava búð í vardum bústaði hjá Almannaverkinum, áðrenn teir vórðu fólkapensjónistar, kunnu verða búgvandi í varda bústaðnum, um borgarin sjálvur ynskir tað, og um endamálið við varda bústaðnum annars framhaldandi verður rokkið.

Uppskotið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. ásetir, at kommunurnar - umframt at veita fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku, sum hava tørv á hjálp og røkt alt samdøgrið - eisini veita borgarum, sum eru undir fólkapensjónsaldur og sum hava varandi sjúku, sum er í menning og gongur afturá, búpláss á ellis- og røktarheimum ella eldrasambýlum.

Málbólkurin er m.a. fólk við Alzheimers, demens og sklerosu á øðrum stigi, sum eru sjúkur, sum elva til, at persónur gerst óafturvendiliga og alsamt meira røktarkrevjandi.

Frameftir skulu persónar, sum hava týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar, sum eru fólkapensjónistar, og sum ikki hava fingið fyribils bústað sambært § 45 ella vardan bústað sambært § 46 í hesum lógaruppskoti, fáa pláss á ellis- og røktarheimi ella

eldrasambýli í nærmumhvørvinum eins og onnur, tá tey gerast røktarkrevjandi, orsakað av ellisbreki ella varandi sjúku.

Borgari, sum hevur týðandi likamligt ella sálarligt brek ella hevur víðfevndar sosialar trupulleikar og er fólkapensjónistur, kann ikki fáa tillutað vardan bústað sambært løgtingslóg um almannatrygd og vælferð, um viðkomandi vegna ellisbrek ella varandi sjúku, hevur tørv á røkt og hjálp alt ella nærum alt samdøgrið.

*Dagtilhald og umlætting*
Landið hevur ábyrgd av at veita persónum undir fólkapensjónsaldri dagtilboð og umlætting.

Landið fer eisini frameftir at veita persónum undir fólkapensjónsaldri, sum hava Alzheimer, aðrar demenssjúkur og sclerosu á øðrum stigi, dagtilhald, umlætting og aðrar tænastur, sum kunnu stimbra likamliga, sálarliga og sosialt soleiðis, at hesir kunnu liva eitt so sjálvstøðugt, virkið og innihaldsríkt lív sum til ber.

*Heimatænastan hjá kommununum og Stuðulstænastan hjá Almannaverkinum*
Síðani 2015 hava ivamál verið millum land og kommunu um, hvør hevur ábyrgd av at veita tænastu til persónar, sum fáa stuðulstænastu og røkt.

Uppskotið ásetir, at virksemið hjá stuðulstænastuni ikki fevnir um persónliga røkt umframt tað, sum persónur sjálvur megnar við ráðgeving frá stuðulspersóni.

Í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. verður ásett, at kommunurnar hava ábyrgd av at veita øllum heimabúgvandi borgarum heimatænastu, sum fevnir um heimahjálp og heimasjúkrarøkt. Tískil er uppgávan hjá kommununi at veita heimabúgvandi borgarum, uttan mun til aldur, røkt. Børn fáa tó framhaldandi persónliga røkt sum part av stuðulstænastu frá landinum.

Tað er Almannaverkið, sum tillutar stuðulstímar, og tað er kommunan, sum tillutar heimatænastu. Partarnir kunnu framhaldandi gera sínámillum avtalur um, at t.d. stuðulstænastan veitir røktina í málum, har persónur fær umfatandi stuðul. Í slíkum førum gera partarnir sínámillum avtalur, sum m.a. eisini fevna um kostnað, hvussu nógvar tímar tænastan fevnir um, og nær tænastan verður veitt. Tað er framhaldandi neyðugt, at Almannaverkið og kommunur samskipa tænasturnar sínámillum soleiðis, at borgarin fær eina dygdargóða og samskipaða tænastu, sum er tillagað til hansara tørv og ynski.

Somuleiðis er ásett, at stuðulstænasta er ætlað persónum upp til fólkapensjónsaldur, sum hava týðandi likamligt ella sálarlig brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar. Tænastan kann halda áfram, tá persónurin er vorðin fólkapensjónistur, um tað framhaldandi tænir endamálinum við tænastuni.

Persónar, sum búgva á vardum bústaði hjá Almannaverkinum ella sjálvsognarstovni, fáa neyðuga hjálp til persónliga og sjúkrarøkt frá starvsfólkum, sum sett eru í Almannaverkinum ella í sjálvsognarstovninum.

*Endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing í Almannaverkinum og kommununum*
Uppskotið ásetir, at borgarar, sum eru úr 18 ár og upp til fólkapensjónsaldur, kunnu fáa endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing frá Almannaverkinum, og er endamálið at virka fyri, at hesir kunnu fáa og varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin og klára seg uttan ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

Í uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. verður ásett, at kommunurnar veita endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing til fólkapensjónistar, og at endamálið við tænastunum er at virka fyri, at fólkapensjónistar kunnu búgva í egnum heimi sum longst og klára seg uttan ella við minni hjálp frá kommunum. Sama uppskot gevur landsstýrismanninum heimild til at áseta nærri reglur um endurvenjing í kommununum.

Endamálið við heimildini hjá landsstýrismanninum er at áseta líknandi reglur, sum eru í kunngerðum um endurvenjing í Almannaverkinum og sjúkrahúsverkinum. Kunngerðirnar viðvirka til, at borgarar fáa eina samskipaða endurvenjing, og at myndugleikar skulu samskipa endurvenjingina yvir um geirar.

**Umsitingarligar reglur**

*Góðkenning av tænastum*

Lógaruppskotið hevur sjálvstøðuga áseting um, at landsstýrismaðurin kann loyva øðrum at stovna og reka ávísar tænastur sambært lógini. Tað hevur verið vanligt, at sjálvsognarstovnar veita tænastur sambært forsorgarlógini, men hesi viðurskifti, ið stava frá gamlari tíð, hava ikki verið nóg væl skipað, m.a hevur landsstýrismaðurin ikki havt greiðar mannagongdir fyri, hvørji krøv sjálvsognarstovnar skulu lúka til tess at kunna veita eina tænastu. Hesi vantandi krøv hava eisini havt ávirkan á, hvørji tiltøk landsstýrismaðurin kann seta í verk mótvegis einum sjálvsognarstovni.

Við hesum uppskotinum verður latið upp fyri, at onnur enn Almannaverkið kunnu stovnseta og reka virknistænastur, umlætting, flutningstænastur og samdøgurstænastur.

*Veiting av tænastum*

Við hesum lógaruppskoti verður eisini ásett, at Almannaverkið til tess at røkja sínar skyldur mótvegis gjaldi kann gera avtalur um tænastur frá almennum og privatum veitarum. Hetta kann t.d. gerast, har tað ikki er fíggjarliga skynsamt at skipa tænastur uttan fyri meginøkið. Landsstýrimaðurin fær somuleiðis heimild at keypa tænastur uttanlands, men bert í teimum førum, har nøktandi tilboð ikki kann veitast í Føroyum. At føroyingar í størst møguligan mun skulu hava tænastur í Føroyum verður við hesum greitt.

Eins og Almannaverkið kann gera avtalur um tænastur frá øðrum almennum og privatum veitarum, kann Almannaverkið somuleiðis mótvegis gjaldi veita eina røð av tænastum til myndugleikar og stovnar, sum sambært geiraábyrgdini hava skyldu at veita hesar somu tænastur.

*Eftirlit*

Lógaruppskotið hevur meira nágreiniligar ásetingar um eftirlit við teimum tænastum, ið Almannaverkið veitir, eins og eftirlitið við tænastum, ið sjálvsognarstovnar veita sambært lógini, eisini verður lógarásett.

*Revsing*

Lógaruppskotið nágreinar støddina á bótini og nágreinar undir hvørjum umstøðum revsast kann. Upphæddin á bótini skal síggjast í ljósinum av, at tað kann gera seg inn á rætstilvitskuna hjá fólkinum og álitið á vælferðarskipanina, at myndugleikin ikki hevur møguleika at geva eina munagóða revsing fyri tey viðurskifti, har ein persónur við grovum ósketni villeiðir myndugleikan og harvið fær útgoldið eina veiting á órøttum grundarlagi.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ligið til almenna hoyring á hoyringsportalinum hjá Føroya Landsstýri.

Harumframt er uppskotið sent hesum til hoyringar:

Kommunufelag Føroya
Stjórnarráðum við áheitan um at senda til viðkomandi undirliggjandi stovnar
MEGD við áheitan um at senda til limafeløgini
Heilsuhjálparafelagnum
Heilsurøktarafelag Føroya
Føroya Pedagogfelag
Føroya Lærarafelag
Felagnum føroyskir sálarfrøðingar
Ljósmøðrafelag Føroya
Starvsmannafelagnum
Fysioterapeutfelag Føroya
Ergoterapeutfelag Føroya
Sosialráðgevarafelag Føroya
Felagnum Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar
Almannaverkinum
Føroya Kærustovni
Dugna
Sjóndepilinum
Kvinnuhúsinum
Fountainhúsinum
Heilbrigdi
Frælsi
Bláa Krossi
Ráðgevingini fyri føroyingar í Danmark
Arbeiðsloysisskipanini
Dátueftirlitinum
Kriminalforsorgini
Ríkisumboðnum
Føroya Landfúta
Landsfelag Pensjónista
Fosturforeldrafelagnum
Vinnuhúsinum
Samtaki
Fakfelagssamstarvinum
Udlændinge- og Integrationsministeriet

Ummælini eru viðgjørd í fylgiskjali 1.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

Hetta lógaruppskot fer at vera, eins og forsorgarlógin hevur verið tað, ein hornasteinur í føroyskum sosialpolitikki og í føroyskari vælferð, og flestu familjur í Føroyum fara so ella so at koma í samband við skipanir, sum lógin fevnir um. Ein lutfalsliga stórur partur av útreiðslum

landskassans fara til skipanir, sum eru fevndar av verandi forsorgarlóg, og hetta lógaruppskot fer somuleiðis at hava stóran týdning fyri komandi fíggjarlógir.

Fyri at geva eina betri fatan av skipanunum, sum eru ásettar í forsorgarlógini, og fyri at lýsa málið annars, verður her fyrst gjørd ein lýsing av verandi virksemi.

***Útreiðslur til verandi skipanir - lýstar í tølum***

Samlaða játtanin til landsútreiðslurnar í 2018 verður brúkt sum grundarlag til at lýsa virksemið. Uppihaldsveitingar, stuðul til hjálparráð, meirútreiðslur vegna barn, sum ber brek o.a. verða fíggjaðar við lógarbundnari játtan. Tænasturnar verða fíggjaðar við rakstrarjáttan, sum hevur við sær, at tænastan verður veitt og skipað eftir tí førimuni, ið fíggjarligu karmarnir loyva.

Tað vóru fyri fíggjarárið 2018 játtaðar tilsamans 5,1 mia. kr. á fíggjarlóg landsins. Myndin niðanfyri vísir, at játtanin til almannamál er 1,5 mia. kr. sum samsvarar við 30 % av samlaðu landsjáttanini.

Mynd 1) Játtan til landsútreiðslur í 2018 skift á Almannamál og onnur málsøki.




Størsti parturin av samlaðu játtanini til Almannamál fer til lógarbundnar útreiðslur. Rakstrarjáttanin telur umleið 412 mió. kr. av samlaðu játtanini, samsvarandi við 27%.

Mynd 2)  Almannamál játtan 2018 skift á játtanarslag (í tús. kr.).




Almannaverkið umsitur umleið 95% av samlaðu játtanini til Almannamál.  Almannamálaráðið og aðrir stovnar umsita restina, og ein partur verður latin sum stuðul til felagsskapir.

*Lógarbundnar útreiðslur*

Myndin niðanfyri vísir, at meginparturin av lógarbundnu útreiðslunum er til pensjónir. 10% av lógarbundnu útreiðslunum eru til sokallað *vanliga forsorg*, sum eru útreiðslur, sum hoyra forsorgarlógini til.

Mynd 3) Lógarbundnar útreiðslur 2018




*Útreiðslur til forsorg*

Høvuðsparturin av lógarbundnu útreiðslunum til forsorg eru til uppihaldsveitingar. Talvan niðanfyri vísir, at útreiðslurnar í 2018 vóru býttar millum nøkur høvuðsevni:

| | |
|---|---|
| Fyribils hjálp | 35.047 |
| Fyribils hjálp vegna arbeiðsloysi | 15.444 |
| Varandi veiting | 228 |
| Stakútreiðslur | 1.614 |
| Meirútreiðslur - børn, sum bera brek | 14.281 |
| Hjálparráð | 28.223 |
| Trygdarskipanir | 6.643 |
| Hoyritól | 5.308 |
| Serligur stuðul § 15a | 3.351 |
| **Forsorg tilsamans** | **110.139** |

*Fyribils hjálp*
Umleið 50 mió. kr. vórðu útgoldnar í fyribils hjálp í 2018. Í talvuni omanfyri verður skilt ímillum fyribils hjálp vegna arbeiðsloysi og fyribils hjálp av øðrum orsøkum. Útreiðslur til arbeiðsloysisforsorg fylgir vanliga konjunkturunum í samfelagnum. Í oktober 2018 fingu 100 persónar arbeiðsloysisforsorg, meðan talið í 2012 var 218 persónar. Útreiðslurnar til arbeiðsloysisforsorg hava sostatt í nøkur ár verið lækkandi.

Fyribils hjálp av øðrum orsøkum kann vera vegna sjúku, barnsburð, samlívsslit og aðrar orsøkir. Serliga er tað fyribils hjálp vegna sjúku, sum tað eru útreiðslur til, og hevur talið av persónum, sum hava fingið veitingina, eisini verið vaksandi í fleiri ár. Í oktober 2018 fingu 193 fólk fyribils hjálp vegna sjúku. Fyri 10 árum fingu var hetta talið 110 persónar.

Tað eru lutfalsliga fáir persónar, sum fáa fyribils hjálp av øðrum orsøkum enn arbeiðsloysi ella sjúku. Tó hevur talið av persónum, sum fáa fyribils hjálp vegna barnsburð, økt nógv seinnu árini. Talan er um persónar, sum ikki fáa veiting frá barsilsskipanini, ella fáa heilt lítla veiting frá barsisskipanini. Serliga er talan um lesandi, sum fáa børn.

*Varandi veiting*
Útreiðslur til varandi veiting hevur síðstu tíðina bert verið ein viðfáningur, og hevur tað bert verið í undantaksførum, at persónar fáa játtað hesa veitingina.

*Stakútreiðslur*
Stuðul til stakútreiðslur hevur í nøkur ár verið lækkandi. Í 2017 vóru útreiðslurnar til endamálið umleið 1,6 mió. kr. Fyri 10 árum síðani vóru landsins útreiðslur til stakútreiðslur uml. 3,5 mió. kr. Seinnu árini hava tað verið uml. 200 persónar um árið, sum hava fingið játtað stuðul til stakútreiðslur.

*Meirútreiðslur – børn, sum bera brek*
Meginparturin av útreiðslunum er endurgjald til foreldur fyri mista arbeiðsinntøku. Av teimum uml. 14,2 mió. kr., sum roknskapurin í 2018 vísti, vóru uml. 7 mió. kr. veittar sum endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku. Restin av útreiðslunum er javnt deilt ímillum ymiskt virksemi so sum kostískoyti, fysio- og ergoterapi, ríðing, skeiðsluttøka o.a.

*Hjálparráð*
Útreiðslurnar til hjálparráð broytast nakað frá ár til ár, tó at útreiðslurnar seinnu árini hava havt eina vaksandi gongd. Stuðul verður veittur til nógv ymisk hjálparráð – stór sum smá.

Talvan niðanfyri vísir útreiðslur í 2018 til nøkur útvald hjálparráð

| | |
|---|---|
| Koyristólar | 3.822 |
| Ymiskur stuðul til bilar | 4.119 |
| Ortopedisk fóttoy | 2.410 |
| Hárkollar | 1.770 |
| Protesur | 1.331 |
| Broytingar í heiminum | 1.468 |
| Serseymaðir kompressiónssokkar | 856 |
| Kostískoyti | 924 |

*Trygdarskipanir*
Talan er m.a. um útreiðslur til bútilboð til persónar, sum sambært dómi ella rættarúrskurði skulu setast í vardan bústað ella vera undir eftirliti. Í mun til aðrar fyriskipanir um bústaðartilboð, er her talan um eina lógarbundna játtan. Hetta er orsakað av, at Almannaverkið hevur skyldu at veita tilboðið, tá dómsvaldið hevur tikið avgerð.

Útreiðslurnar til trygdarskipanir eru øktar munandi seinnu árini, og er tað orsakað av, at fleiri persónar vegna dóm ella rættarúrskurði hava fingið tilboð, samstundis sum fyriskipanirnar eru vorðnar dýrari. Árini 2015 til 2017 øktust útreiðslurnar úr uml. 3 mió. kr. upp í knappliga 10 mió. kr., men minkaðu aftur í 2018, tá vóru útreiðslurnar 6,7 mió. kr. Talan er um sosialpedagogisk tilboð, psykiatrisk viðgerð, skúlaundirvísing, búvenjing og meting av arbeiðsførleika.

*Hoyritól*
Útreiðslur til hoyritól hava í fleiri ár ligið millum 3 og 4 mió. kr. um árið. Tó øktust útreiðslurnar í 2018 til 5,3mió. kr. Landssjúkrahúsið, sum hevur dagligu umsitingina av hoyritólum um hendi, væntar, at í sambandi við at talið av eldri økist, fara útreiðslurnar til hoyritól eisini at økjast.

*Serligur stuðul sambært § 15a*
Stuðulin er til persónar, sum eru á stovni, men sum ikki eru pensjónistar. Útreiðslurnar fevna partvíst um egingjøld fyri stovnspláss og lummapening. Útreiðslurnar í 2018 vóru 3,4 mió. kr. og væntast at økjast samsvarandi við øktum tali av tilboðum til ung, sum ikki eru pensjónistar.

*Rakstrarúrtreiðslur*
Myndin niðanfyri vísir, at umleið 70% av rakstrarútreiðslum undir almannamálum fara til Trivnaðartænastur og endurvenjing, sum Almannaverkið umsitur, ímeðan umleið 4% fara til Dugna og Sjóndepilin. T.v.s., at meginparturin, ella 74% av rakstrarútreiðslunum, fer til tænastur, sum eru útreiðslur, sum hoyra til forsorgarlógina. Umleið 26% fara til Almannamálaráðið, ráð og nevndir, Almannaverkið og barnaverndarstovnar.

Mynd 4) Rakstrarútreiðslur 2018




Trivnaðartænastur og endurvenjing fevna um tær tænastur, sum verða veittar borgarum í Føroyum, og tænastur, sum verða keyptar uttanlands, um nøktandi tilboð ikki eru í Føroyum. Í einstøkum føri, tá borgarar, í sambandi við dómsviðgerð verða settir á tryggjaðan stovn, verður tænastan veitt við heimild í lógarbundnari játtan.

Almannaverkið umsitur harumframt eina stuðulsjáttan, sum er ætlað at stuðla skipan av serligum bútilboðum.

Almannaverkið er størsti stovnur undir §12 Almannamál og veitir tænastu til umleið 616 borgarar kring landið. Harumframt umsitur Almannaverkið barnaverndarstovnarnar, har umleið 25 børn og ung eru, og veitir endurvenjing til borgarar.

Sambært frágreiðing til tilmæli um tænastupolitikk, so verður leysliga mett, at tað eru millum 800 og 900 borgarar, sum fáa tænastu frá stovnum og felagsskapum, sum eru undir málsøkinum hjá landsstýrismanninum í almannamálum, viðmerkjast skal, at talan kann vera um, at sami borgari fær tænastu frá fleiri stovnum.

Útreiðslur til tær einstøku tænasturnar, sum Almannaverkið veitti í 2018 vóru í høvuðsheitum hesar (tkr.):

| | |
|---|---|
| Endurvenjing | 3.854 |
| Stuðulstænastur* | 43.125 |
| Virkistænastur og veristað | 33.545 |
| Bú- og viðgerðarstovnar | 15.233 |
| Búfelagsskapir | 5.062 |
| Sambýli, rakstur | 130.260 |

**íroknað Depil á Sandi og Mýrusóljan*

Tølini omanfyri fevna um beinleiðis rakstur av tænastunum. Harumframt fara áleið 16,8 mió. kr. til felags umsiting o.a. av hesum tænastum, og umleið 70 mió. kr. fara til barnavernd og keyp av tænastum uttanlands o.a.

Talvurnar niðanfyri geva eina mynd av borgarunum, sum fáa fasta tænastu frá Almannaverkinum.

**Talva 1) Tal av borgarum, býtt eftir kyni og aldri pr. 1. oktober 2018**

| | Mannfólk | Konufólk | Íalt |
|---|---|---|---|
| **Undir 18 ár** | 61 | 25 | 86 |
| **18 ár og eldri** | 276 | 254 | 530 |
| **Íalt** | **337** | **279** | **616** |

Talvan omanfyri vísir, at av teimum 616, sum fáa tænastu, eru 14% børn, og 86% vaksin.

Í bólkinum undir 18 ár, eru tað serliga dreingir, sum fáa tilboð frá Almannaverkinum, men tá tey verða eldri, verður munurin millum kynini útjavnaður aftur. Hetta kundi verið tekin um, at tørvurin á tænastu vísir seg fyrr hjá dreingjum, enn tørvurin hjá gentum.

**Talva 2) Tal av borgarum, býtt eftir kyni og málbólki pr. 1. oktober 2018**

| | Mannfólk | Konufólk | Íalt |
|---|---|---|---|
| **ADHD** | 7 | 4 | 11 |
| **Autisma** | 80 | 22 | 102 |
| **Fjølbrek** | 18 | 12 | 30 |
| **Menningartarn** | 108 | 94 | 202 |
| **Sálarsjúk** | 84 | 110 | 194 |
| **Seinheilaskadd** | 19 | 21 | 40 |
| **Annað** | 21 | 16 | 37 |
| **Íalt** | **337** | **279** | **616** |

Talvan omanfyri lýsir høvuðsmálbólkarnar, ið fáa tænastur. Málbólkurin "annað" er ein samansettur bólkur, har tað eru fá av hvørjum slagi, um ein málbólkur bert hevur upp til fimm borgarar, er tænastan farin undir annað. Hetta fyri ikki at eyðmerkja ávísar persónar.

Størsti málbólkurin fevnir um borgarar við menningartarni. Síðani eru tað borgarar við sálarsjúku, har konufólkini eru í meiriluta. Tá ræður um málbólkin autismu, eru tað nógv flest mannfólk, sum fáa tænastur. Omanfyri varð víst á, at tað eru nógv fleiri dreingir enn gentur undir 18 ár, sum fáa tænastu, og kann ein av orsøkunum til hetta vera børn við autismu, har tað er ein sannroynd, at dreingirnir fáa diagnosu fyrr enn genturnar.

Av teimum 616 borgarunum, eru tað einans 11 borgarar, sum hava ADHD. Havandi í huga, at tað bæði í Føroyum og í grannalondunum verður víst á, at tað eru nógv, ið fáa staðfest ADHD, so kann talið av borgarum, sum hava ADHD og fáa tænastu frá Almannaverkinum, tykjast lágt. Fyrivarni skal takast fyri, at nakrir borgarar hava fleiri diagnosur. T.d. kann ein borgari hava autismu og ADHD ella sálarsjúku og ADHD, og verður tá mett, um tað er tann eina ella hin diagnosan, sum er tann primera, og verður borgarin skrásettur í mun til tað.

Borgarar, sum hava seinheilaskaða, er ein lutfalsliga lítil bólkur, men talan er um vaksandi bólk.

Samanumtikið vísir talvan, at borgarar, sum fáa tænastu í Almannaverkinum eru ymiskir og tí mugu tænasturnar eisini vera fjøltáttaðar og fevna víða.

**Talva 3) Tal av borgarum, býtt eftir kyni og landafrøði pr. 1. oktober 2018**

| | Mannfólk | Konufólk | Íalt |
|---|---|---|---|
| **Eysturoy** | 61 | 52 | 113 |
| **Norðoyggjar** | 54 | 26 | 80 |
| **Streymoy** | 174 | 165 | 339 |
| **Suðuroy/Sandoy/Vágar** | 48 | 36 | 84 |
| **Íalt** | **337** | **279** | **616** |

Í hesari talvuni eru Føroyar býttar sundur í fýra landafrøðilig økir.

Talvan lýsir, at flestu borgarar, sum fáa tænastur, búgva í Streymoy við 55% og síðan Eysturoy við 18%. Býtið er nøkulunda javnt ímillum Norðoyggjar og Suðuroy/Sandoy/Vágar við ávikavíst 13 og 14% í part.

**Talva 4) Tal av borgarum, býtt eftir aldri og landafrøði pr. 1. oktober 2018**

| | Undir 18 ár | 18 ár og eldri | Íalt |
|---|---|---|---|
| **Eysturoy** | 27 | 86 | 113 |
| **Norðoyggjar** | 9 | 71 | 80 |
| **Streymoy** | 38 | 301 | 339 |
| **Suðuroy/Sandoy/Vágar** | 12 | 72 | 84 |
| **Íalt** | **86** | **530** | **616** |

Talvan vísir, hvussu aldursbýtið er í teimum ymisku landafrøðiligu økjunum.

Tølini benda á, at tað eru lutfalsliga nógv børn, sum bera brek, í Eysturoynni í mun til fólkatalið, og lutfalsliga nógvir vaksnir borgarar í høvuðsstaðarøkinum.

Higartil hevur tørvurin á sosialum tænastum verið størri enn fíggjarliga rásarúmið. Tí er eisini ein bíðilisti til tænasturnar. Í oktober 2018 vóru tað í alt 188 borgarar, sum stóðu á bíðilista til tænastur frá Almannaverkinum. Meginparturin av hesum hava tørv á búplássi, ið er størsta avbjóðingin hjá Almannaverkinum í løtuni. Eisini standa borgarar á bíðilista til stuðulstænastu, umlætting og virknistænastu.

## 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Hetta lógaruppskot er lutvíst eitt framhald av verandi virksemi, sum ikki hevur við sær fíggjarligar avleiðingar, og lutvíst verður talan um nýggjar skipanir og broytingar í verandi ásetingum og rættindum. Í hesum partinum verða fíggjarligu avleiðingarnar lýstar av teimum ásetingum, sum hava við sær broytingar.

Í sambandi við fíggjarligu avleiðingarnar, sum standast av hesum lógaruppskoti, skal skiljast ímillum lógarbundnar útreiðslur og rakstrarútreiðslurnar. Viðvíkjandi lógarbundnu útreiðslunum inniheldur uppskotið bæði herðingar og nýggj og betri rættindi, og t.v.s., talan er bæði um sparingar og um øktar útreiðslur fyri landskassan. Samlað sæð hevur lógaruppskotið við sær eina lítla meirútreiðslu fyri lógarbundnu útreiðslurnar hjá landinum.

Útreiðslur til tænastur eru rakstrarútreiðslur, og tænastuparturin í hesum lógaruppskoti áleggur tí ikki landinum beinleiðis útreiðslur. T.v.s., at broytingar í tænastuparturin hevur ikki í sjálvum sær fíggjarligar avleiðingar fyri landið – tað er upp til Løgtingið at raðfesta støðið á tænastunum umvegis fíggjarlógina á hvørjum ári. Niðanfyri er tó mett um fíggjarligu avleiðingarnar av nýggju ásetingunum í lógaruppskotinum, um tær skulu virka eftir ætlan.

Kapittul 1 og 2 áseta endamál, skyldur og virkisøki, og undantikið ráðgevingina, sum nú er ásett við lóg, so er talan ikki um ítøkiligar fyriskipanir, og fyrstu tveir kapitlarnir hava sum so ikki við sær fíggjarligar avleiðingar.

*2.1.1. Ráðgevingarskylda*
Almannaverkið hevur víst á, at fyri at kunna fremja ráðgevingarskylduna nøktandi, verður neyðugt at seta 2 sosialráðgevar í starv. Mettar útreiðslur til endamálið á komandi fíggjarlóg eru umleið 1 mió. kr.

*2.1.2. Veitingar*
Tey flestu, ið móttaka forsorgarhjálp, og sum frameftir fara at móttaka fyribils uppihaldshjálp, fara ikki at merkja nakra broyting í sambandi við, at lógaruppskotið verður sett í gildi. Høvuðstættirnir í skipanini við uppihaldsveitingunum fara at halda fram. Høvuðstreytirnar fyri at fáa rætt til uppihaldsveiting verða sostatt í stóran mun óbroyttar, og satsirnir verða óbroyttir. Tó verða treytirnar hjá giftum persónum broyttar, soleiðis at fyribils uppihaldshjálp verður veitt óheft av inntøku hjá hjúnafelaga. Tað ber ikki til at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av hesi broytingini, tí tað kunnu vera persónar, sum í dag ikki fáa veiting, og sum ikki eru í nakrari skipan, sum frameftir fara at fáa veiting.

Tað eru eisini nakrar herðingar, sum fara at ávirka rættindini til veiting til nakrar persónar. Undantøkini um ogn eru broytt og herd, og nakrir persónar, sum hava ogn, ið kann brúkast sum uppihaldsgrundarlag, fara ikki at fáa rætt til fyribils uppihaldsveiting. Persónar, sum sita dóm, fara í ávísan mun at fáa lægri veiting, treytirnar hjá hesum at fáa fíggjarligt ískoyti til bústað, verða herdar. Tað ber ikki til at siga, hvussu nógvir persónar fara at vera raktir av broytingunum, men væntandi verður talan um fáar persónar, og sparingin fyri landskassan av broytingini væntast at vera avmarkað.

Hjá teimum, sum í galdandi lóg hava inntøkur aftrat forsorgarhjálpini, verður inntøkan mótroknað krónu fyri krónu – uttan mun til um inntøkan er skattskyldug ella ikki-skattskyldug. Sambært lógaruppskoti verða ikki-skattskyldugar inntøkur faldaðar við 1,5 og síðani mótroknaðar í fyribils uppihaldshjálpini. Tað eru serliga kvinnur, sum eru í barsilsfarloyvi frá lesnaði, sum fáa ikki-skattskylduga veiting (lestrarstuðul) og forsorgarhjálp samstundis. Uppihaldshjálpin til hesar fer tí at lækka við uml. 1.800 kr., um tær hava eitt barn, uml. 2.300 kr., um tær hava tvey børn, og uml. 2.800 kr., um tær hava trý børn.

Í 2017 vóru í miðal 27 kvinnur um mánaðin, sum fingu forsorgarhjálp og lestrarstuðul samstundis. Við støði í hesum virksemi fer broytingin at hava við sær, at útreiðslur

landskassans fara at lækka við knappliga 1 mió. kr. um árið. Broytingin fer tó bert at galda fyri nýggj mál, og tað merkir, at fyrsta árið verður sparingin minni.

Í galdandi forsorgarlóg eru veitingarnar ásettar sum ein prosentpartur av hægstu dagpeningaveiting. Dagpeningaveitingin fylgir lønargongdini á privata arbeiðsmarknaðinum, og tað merkir, at veitingarnar hækka við sama prosentsatsi sum lønirnar hjá Føroya arbeiðarafelag. T.d. hækkaðu satsirnir við 2,56 % tann 1. mai 2019, ið er sama prosentvísa hækking, sum lønirnar hjá limum í Føroya arbeiðarafelag. Veitingarnar í lógaruppskotinum fara at hækka sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.

Lønarvøksturin er vanliga – í hvussu so er sæð yvir eitt longri áramál – hægri enn prísvøksturin. Hetta merkir sostatt, at uppihaldsveitingarnar væntandi frameftir ikki fara at hækka eins nógv sum við galdandi skipan. Tað ber ikki til at siga neyvt, hvussu lønargongdin og gongdin í prístalinum verður frameftir, og tí ber heldur ikki til at meta um fíggjarligu avleiðingarnar. Um javningin í forsorgarhjálpini t.d. hevði verið 1,5 % heldur enn 2,56 %, sum veitingarnar hækkaðu í 2018, so hevði sparingin fyri landskassan verið uml. 600 tús. kr. um árið.

Persónar, sum eru í búfyriskipan hjá tí almenna, og sum fáa forsorgarhjálp, fáa sambært galdandi skipan stuðul til útreiðslur, sum standast av uppihaldinum í búfyriskipan. Stuðulin er serliga til húsaleigu, felagsútreiðslur o.a. – hetta tí almannaveitingin er somikið lág, at hon ikki røkkur til. Hetta verður umskipað soleiðis, at veitingin hækkar, men so skal persónurin í størri mun gjalda fyri uppihaldið. Samlað sæð verður sostatt ikki talan um eina hækking av týdningi fyri landskassan.

Í tann mun, at talið av búfelagsskapum og vardum bústøðum økist, fara útreiðslurnar eisini at økjast, men tað er so ikki ein beinleiðis avleiðing av hesi lógini.

Samanumtikið fara broytingarnar viðv. uppihaldsveitingunum at vera áleið útreiðsluneutralar – møguliga verður talan um eina lítla lækking í útreiðslunum. Fyrsta árið verður tó talan um eina lítla meirútreiðslu, tí fleiri av broytingunum bert vera galdandi fyri nýggj mál.

*2.1.3. Endurbót vegna brek ella sjúku*

Skipanin við stuðli til hjálparráð eru gjørdar meira smidligar, tá borgarar flyta í bústaðir, sum skipaðir eru sambært hesum lógaruppskoti at búgva, og tað hevur við sær nakrar útreiðslur. Talan er um fáar persónar, sum møguliga koma at varðveita eina lyft, eina serliga song o.t., og her er sostatt talan um avmarkaðar meirútreiðslur.

Skipanin við stuðli til hjálparráð er harumframt broytt soleiðis, at persónur, sum býr á bústaði skipaður sambært hesum lógaruppskoti verður javnsettur við tey, ið ikki búgva á bústaði, sum er skipaður sambært hesum lógaruppskoti, tó undantikið sambært løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt. Hetta hevur við sær, at útreiðslurnar til hjálparráð fara at økjast. Hjálpartólartænasturnar á bústaði skipaður sambært forsorgarlógini hjá Almannaverkinum eru í dag ikki á sama støði sum hjá øðrum, ið ikki búgva á bústaði skipaður sambært forsorgarlógini, og kostnaðurin fyrsta árið væntast tí leysliga mett at økjast við 1,2 mió. kr. Árini frameftir fara útreiðslurnar leysliga mett at hækka við 300 tús. kr.

Í galdandi forsorgarlóg heldur landið útreiðslur til bústaðarbroytingar. Talan er um útreiðslur, sum hoyra undir hjálparráð. Frameftir verða tað kommunurnar, sum halda útreiðslur til persónar, sum hoyra til eldraøkið – t.v.s. persónar, sum eru í fólkapensjónsaldri. Umleið 40 % av útreiðslunum til bústaðarbroytingar í 2018 eru til eldri persónar, og við støði í hesum verður

mett, at landið sparir uml. 750 tús. kr. Metingin skal takast við fyrivarni, tí útreiðslurnar broytast lutfalsliga nógv frá ár til ár, umframt fordeilingin millum eldri og yngri einans hevur støði í útreiðslunum í 2018.

Skipanin við endurgjaldi fyri inntøkumiss, sum higartil einans hevur verið veitt foreldrum at børnum, sum bera brek, verður víðkað til eisini at fevna um ansing av persónum við seinheilaskaða, og sum ikki hava fingið bjóðað pláss í búfyriskipan, og ansing av persónum í terminalstøðu, sum ynskja at doyggja í heiminum.

Tað eru 3-4 persónar við seinheilaskaða, sum hava átrokandi tørv á røkt, og sum ikki fáa bupláss. Gongdin seinnu tíðina vísir, at tað árliga eru 3-4 persónar, sum hava átrokandi tørv á røkt, og har landið hevur trupulleikar at finna loysnir fyri tann skadda og teirra avvarðandi. Tað ber ikki til at siga, hvussu stórur tørvurin verður frameftir, og hvussu nógv av hesum fara at brúka og lúka treytirnar fyri at fáa endurgjald fyri inntøkumiss, men um tað eru 4 persónar, sum fáa veitingina, og sum fáa fulla upphædd í 12 mánaðir, verður árligi kostnaðurin fyri landskassan 1,2 mió. kr. Uml. 450 tús. kr. koma aftur til landið í skatti, men talan er um eitt alternativ til lønarinntøku, so skattainntøkurnar høvdu í ein ávísan mun komið aftur til landið, allíkavæl.

Endurgjald fyri inntøkumiss til persónar, sum í heiminum ansa doyggjandi, væntast í hvørjum einstøkum føri at vera veitt í avmarkað tíðarskeið – í mesta lagi í nakrar mánaðir. Talið av persónum, sum eru í terminalstøðu, og sum velja at doyggja heima, er ymiskt frá mánaði til mánað. Tað ber ikki til at siga, hvussu nógvir persónar fara at hava rætt til og brúka skipanina, men um tað í miðal eru 3-4 persónar, sum hvønn mánað eru í skipanini, og hesi hava rætt til fult gjald, verður árligi kostnaðurin fyri landið uml. 1 mió. kr. um árið.

Persónar við seinheilaskaða og persónar, sum eru doyggjandi, hava vanliga rætt til røktarviðbót sambært almannapensjónslógini. Ætlanin er, at í teimum førum endurgjald fyri inntøkumiss verður veitt, kann ikki samstundis vera veitt røktarviðbót. Tað merkir, at við støði í virkseminum dømunum omanfyri (4 persónar við seinheilaskaða og 3-4 doyggjandi) fara útreiðslur til fyritíðarpensjón at lækka við uml. 5-600 tús. kr.

Hægst møguliga endurgjald fyri inntøkumiss hækkar við uml. 2.700 kr. um mánaðin. Hetta kemur leysliga mett at kosta landskassanum knappliga 1 mió. kr. um árið.

Samanumtikið fara útreiðslur til endurbót at økjast við leysliga mett 2,5 mió. kr. Serligt fyrivarni skal takast fyri, at óvissa er um, hvussu nógv fara at brúka skipanina við endurgjaldi fyri inntøkumiss í sambandi við ansing av doyggjandi. Fyrsta árið væntast útreiðslurnar til hjálparráð tó at vera nakað hægri. Væntandi hækka útreiðslurnar við umleið 3 mió. kr. til endamálið á komandi fíggjarlóg.

Forsorgarlóg heimilar sambært § 15 stk. 3 at lata fíggjarligan stuðul, tá persónur, ávístur av lækna, hevur fingið uppihald á eftirbataheimi. Heimildin er strikað við hesum lógaruppskoti. Ístaðin verða umleið 350 tús. kr. fluttar frá Vanligari forsorg til Hvíldarheimið Nainu á komandi fíggjarlóg.

### *2.1.4 Tænastur*

Tænastuparturin í hesum lógaruppskoti fer í sjálvum sær ikki at økja um útreiðslurnar. Lógin verður, eins og forsorgarlógin er tað, at meta sum ein rammulóg, ið yvirskipað veitir heimild

fyri, hvørjar tænastu kunnu veitast. Rætturin til tænasturnar verður framvegis tengdur at tillutaðari játtan á fíggjarlógini. Í § 3, stk. 2 er ásett, at tænasturnar verða veittar innan játtaðar fíggjarkarmar.

Niðanfyri er ein stutt lýsing av kostnaðinum av at menna nýggju tænasturnar sambært lógini.

*Stuðulstænasta*
Mett verður, at samlaði kostnaðurin sum frálíður verður áleið 4 mió.kr. til fylgjaraskipan og borgarastýrda stuðulstænastu. Á komandi fíggjarlóg eiga at verða settar av 1 mió.kr.

*Tulkatænasta*
Hevur ikki øktar útreiðslur við sær.

*Viðlíkahaldsvenjing*
Heimild er fyri at skipa viðlíkahaldsvenjing frá 2021. Talan er um nýggja tænastu, sum ætlandi verður partur av endurvenjingartænastuni. Tænastan verður stig- og miðvíst útbygd, har játtan verður sett av sum frálíður. Mett verður, at samlaða játtanin til endamálið eigur at vera 12 mió. kr.

*Flutningstænasta*
Frá 2022 verður heimild at skipa fyri flutningstænastu, men tað fer at hava við sær nakað av útreiðslum. Tað ber ikki til at siga, í hvussu stóran mun heimildin verður brúkt. Samstundis verður Serflutningsskipan landsins eftirmett. Játtanin á fíggjarlógini fyri 2018 til Serflutningsskipan Landsins var 1,2 mió. kr. Í 2019 er játtanin 700 tús. kr.

*Heimaráðgeving*
Tann góða tilgongdin varð sett í verk í 2015 innan fyri verandi játtanarkarm hjá Almannaverkinum. Á fíggjarlógini fyri 2016 vóru eyðmerktar 1 mió. kr. til endamálið.

Neyðugt verður við tíðini at hækka játtanina við umleið 7 mió. kr. Á komandi fíggjarlóg eigur at verða sett av 1 mió.kr. til endamálið.

*Tænasta á bústøðum*
Ilt er at meta um, hvussu nógv tað fer at kosta at skipa tænasturnar á fyribils- og varandi bústøðunum soleiðis, at tænastan verður veitt sum grundtænasta - t.e. tænasta, sum verður veitt øllum búfólkunum -, og sum einstaklingarættað tænasta, t.e. tænasta, sum verður veitt einstaka búfólkinum.

Almannaverkið hevur leysliga mett, at kostnaðurin av at veita verandi búfólkum fylgjara til sosial tiltøk í 2 tímar um vikuna er áleið 6 mió. kr. Tilgongdin at umskipa tænastuna á verandi bústøðum fer at taka eina tíð. Mett verður, at tað tekur í minsta lagi 3 ár. Ætlanin er tó at seta skipanina í verk so hvørt sum nýggir bústaðir lata upp. Skiftisreglurnar áseta 5 ára freist at leggja um, eins og nýggir bústaðir, sum lata upp, skulu lúka treytirnar.

Á komandi fíggjarlóg eiga 1,5 mió.kr. at verða settar av til endamálið.

*2.1.5 KT-útreiðslur*

Almannaverkið hevur upplýst, at broytingarnar sum verða gjørdar í hesum lógaruppskoti fara at krevja tillagingar í kt-heildarskipanini hjá Almannaverkinum fyri umleið 0,5 mió. kr. Í broytingaruppskoti til fíggjarlógaruppskotið fyri 2020 er játtanin hækkað við 500 tús. kr. til endamálið.

*2.1.6 Hjálpitólamiðstøðin vegna broyting í hjálparráðum*

Skipanin við stuðli til hjálparráð verður broytt soleiðis, at persónur, sum býr á bústaði skipaður sambært hesum lógaruppskoti verður javnsettur við tann, sum býr á vanligum bústaði. Hetta hevur við sær, at trýstið á tænastu frá Hjálpatólamiðstøðini fer at økjast, soleiðis at neyðugt verður at seta fleiri starvsfólk, talan er um ein terapeut og tøknifólk í hálvari tíð.

Mett verður, at játtanin til Hjálpitólamiðstøðina má hækka við 725 tús. kr. á komandi fíggjarlóg.Samstundis lækka útreiðslurnar á bústøðunum vegna leigu á hjálpartólum við umleið 200 tús. kr.

*2.1.7. Námsfrøðilig eftirlit*

Sambært hesum uppskotinum skal ábyrgdin fyri námsfrøðiliga eftirlitinum flytast til Almannamálaráðið. Higartil hevur Almannaverkið goldið fyri hetta eftirlit. Eftirlitið hevur verið framt annaðhvørt ár, íalt fýra ferðir og kostnaðurin hevur ligið ímillum 100-500 tús. kr. alt eftir hvussu umfatandi eftirlitið hevur verið. Mett verður, at 250 tús. kr. skulu flytast frá Trivnaðartænastuni til Almannamálaráðið á komandi fíggjarlóg.

*2.1.8. Útreiðslur fyri kommunurnar*

Útreiðslur til bústaðarbroytingar eru ymiskar frá ár til ár, so trupult er at meta um fíggjarligu avleiðingina fyri kommunurnar. Árini 2012-2017 hava samlaðu útreiðslurnar í miðal verið umleið 2 mió. kr. árliga. Í 2018 eru knappliga 40 % av útreiðslunum til bústaðarbroytingar til fólkapensjónistar. Við støði í hesum fara árligu útreiðslurnar hjá kommununum at verða uml. 750 tús. kr. Metingin skal takast við fyrivarni, tí útreiðslurnar broytast lutfalsliga nógv frá ár til ár, umframt býtið millum eldri og yngri einans hevur støði í útreiðslunum í 2018. Afturat hesum kemur, at tað er einans bústaðarbroytingar vegna vantandi búpláss, ið kommunurnar skulu endurrinda.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Uppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri Almannaverkið, grundað á broyttar mannagongdir og arbeiðslag. Uppskotið hevur avleiðingar við sær í mun til verandi KT skipanir. Kostnaðurin av hesum tillagingum er m.a. treytaður av, hvussu/nær ymisku partarnir av lóggávuni fáa gildi.

Uppskotið hevur ikki stórvegis umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**

Uppskotið hevur ikki stórvegis fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

## 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

## 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki við sær serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

## 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

### *2.6.1. Veitingar*

Treytirnar fyri at fáa rætt til fyribils uppihaldshjálp eru linkaðar fyri persónar, sum eru giftir. Fyribils uppihaldshjálp verður sambært hesum lógaruppskoti veitt óheft av inntøku hjá hjúnafelaga.

Sambært higartil galdandi lóg verður forsorgarveitingin persóni, sum er giftur, og sum hevur børn, lækkað soleiðis: Forsorhjálpin lækkar við 50 % av inntøku hjá hjúnafelaga, sum er omanfyri uml. 12.500 kr. Hjá persóni, sum er giftur, og sum ikki hevur børn, lækkar forsorgarhjálpin soleiðis: Forsorgarhjálpin lækkar við 30 % av inntøku hjá hjúnafelaga, sum er omanfyri uml. 9.000 kr.

Dømi um giftan persón við børnum, sum móttekur forsorgarhjálp, og har hjúnafelagin hevur inntøku á 20.000 kr. um mánaðin: Satsurin er ásettur til 12.826 kr. Veitingin lækkar 50 % av muninum millum 20.000 kr. (inntøkan) og 12.826 kr. (satsurin). T.v.s., at forsorgarhjálpin lækkar úr 12.826 kr. niður í uml. 9.250 kr. Við hesi lógini kann persónurin varðveita fulla veiting í 6 fyrstu mánaðirnar.

Lógaruppskotið hevur eisini við sær herðingar, og einstakir persónar fara ikki at fáa rætt til uppihaldshjálp. Hetta kann vera tí, at tey hava ogn, sum kann brúkast til uppihalds. Talan er um ogn, sum í verandi forsorgarlóg er undantikin, og sum síggjast kann burtur frá í sambandi við forsorgarhjálp. Tað eru eisini einstakir persónar, sum í verandi skipan ikki hava rætt til forsorgarhjálp, sum við hesum uppskoti fáa rætt til fyribils uppihaldshjálp. Talan er um tey, sum fáa útgoldið eingangsupphædd upp til 150.000 kr. fyri álvarsama sjúku. Við verandi skipan eru hesi útgjøld at rokna sum ogn, men í hesum lógaruppskoti verða tey undantikin.

Treytirnar fyri mótrokning verða herdar hjá persónum, sum hava ikki-skattskyldugar inntøkur, samstundis sum tey fáa fyribils uppihaldshjálp. Tað eru serliga lesandi, sum eru í barsilsfarloyvi frá lesnaði, sum samstundis fáa lestrarstuðul og fyribils uppihaldshjálp. Við verandi skipan verður lestrarstuðulin, sum er ein ikki-skattskyldug veiting, mótroknað krónu fyri krónu. Frameftir verða ikkiskattskyldugar inntøkur faldaðar við 1,5 og síðani mótroknaðar í uppihaldshjálpini. Hetta merkir, at inntøkan eftir skatt lækkar og fer at vera á støði við onnur, sum móttaka fyribils uppihaldshjálp.

Talvan niðanfyri vísir trý dømir um inntøku eftir skatt hjá persónum, sum fáa fyribils uppihaldshjálp í ávikavist verandi forsorgarlóg og hesum lógaruppskoti.

Dømi 1 er ein sambúgvandi kvinna við einum barni, sum fær forsorgarhjálp vegna barnsburð.

Dømi 2 er ein sambúgvandi kvinna við einum barni, sum er í barsilsfarloyvi frá lesnaði og fær lestrarstuðul og forsorgarhjálp. Inntøkan eftir skatt er góðar 2.000 kr. hægri enn hjá henni, sum bara fær forsorgarhjálp.

Dømi 3 er ein kvinna í somu støðu sum dømi 2 men fær veiting sambært hesum lógaruppskoti. Inntøkan eftir skatt er uml. 300 kr. hægri enn hjá kvinnuni í dømi 1, og uml. 1.750 kr. lægri enn dømi 2.

T.v.s., at hetta lógaruppskot fer at hava við sær, at inntøkan eftir skatt hjá einum sambúgvandi persóni við einum barni lækkar við uml. 1.750 kr. um mánaðin. Um kvinnan hevur meira enn eitt barn, lækkar inntøkan nakað meira. Um kvinnan er støk, lækkar inntøkan somuleiðis nakað meira, men vart skal gerast við, at allar tær, sum í 2017 fingu forsorgarhjálp og lestrarstuðul samstundis, vóru sambúgvandi.

| | Dømi 1 | Dømi 2 | Dømi 3 |
|---|---|---|---|
| | Verandi skipan<br>Forsorg | Verandi skipan<br>Forsorg+ÚS | Vælferðarlóg<br>Fyribils uppih.+ÚS |
| ÚS | - | 5.437 | 5.437 |
| ÚS falda við 1,5 | - | 5.437 | 8.427 |
| Fyribils uppih./forsorg | 12.826 | 7.389 | 4.671 |
| Fyribils uppih./forsorg eftir skatt | 8.782 | 5.488 | 3.728 |
| Inntøka eftir skatt | 8.732 | 10.925 | 9.165 |

Í dømunum omanfyri er ikki roknað við barnastuðli. T.v.s., at barnafrádráttur og møguligt familjuískoyti kann leggjast aftrat.

*2.6.2. Endurbót*

Skipanin við endurgjaldi fyri inntøkumiss, sum higartil bert hevur verið veitt foreldrum at børnum, sum bera brek, verður víðka til eisini at fevna um tey, sum ansa persónum við seinheilaskaða, sum hava átrokandi røktartørv, men sum ikki fáa búpláss. Skipanin verður eisini víðkað til at fevna um tey, sum í heiminum ansa doyggjandi.

Talan er vanliga um familjur, sum eru í eini bráðfeingis støðu, og sum nú kunnu fáa hægri fíggjarligt endurgjald, tá tey fara av arbeiðsmarknaðinum fyri at røkta avvarðandi. Sambært galdandi lóggávu hevur persónurin, sum hevur tørv á røkt, rætt til røktarviðbót sambært almannapensjónslógini. Røktarviðbótin er ætlað at samsýna teimum, sum fremja røktina. Røktarviðbótin er gott 6.000 kr. um mánaðin (ikki skattskyldugt). Sambært hesum lógaruppskoti kann persónurin, sum ansar, fáa endurgjald fyri lønarmissin – tó í mesta lagi 25.000 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn og tvungið eftirlønargjald sambært løgtingslóg um eftirløn (skattskyldugt).

Hægst møguliga endurgjald fyri inntøkumiss hækkar soleiðis, at upphæddin broytist frá 25.000 kr. *íroknað* frítíðarløn til 25.000 kr. *umframt* frítíðarløn. Í praksis merkir hetta, at hægsta endurgjald hækkar úr uml. 22.300 kr. upp til 25.000 kr.

*2.6.3 Tænastur*

Almannaverkið hevur varliga mett útfrá kunnleika til borgarar, sum fáa veitingar og tænastur, umsóknir um endurvenjing og út frá tølum úr Danmark, at tað verða millum 300 og 400 persónar, sum hava tørv á viðlíkahaldsvenjing, og nýggja tænastan hevur við sær, at fleiri persónar kunnu uppihalda sær sjálvum við at arbeiða í framtíðini og klára seg uttan ella við minni hjálp frá landinum.

Eisini fer uppskotið at hava jaligar avleiðingar fyri familjur, sum hava barn, ið ber brek, og fyri maka hjá einum, sum hevur fingið niðursett virkisføri. Hesi skulu frameftir í størri mun stuðlast í at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin og fáa neyðuga hjálp til at taka sær av sínum so leingi sum gjørligt.

Uppskotið hevur eisini við sær, at persónar, sum hava tørv á tænastu fyri at virka í samfelagnum, í størri mun enn higartil kunnu skipa sín gerandisdag eftir egnum ynski. T.d. er møguleiki fyri, at borgarin sjálvur ger av, hvør skal vera stuðulspersónur, og nær stuðulstímarnir verða brúktir og til hvat.

## 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Lógaruppskotið fevnir um norðurlendska sáttmálan um almannahjálp og tænastur (bistandskonventión), ið Føroyar hava skyldu at fylgja.

Sambært norðurlendska sáttmálanum um almannahjálp og tænastur hevur norðurlendskur ríkisborgari rætt til uppihaldsveiting og sosialar tænastur í Føroyum á jøvnum føti við føroyingar. Hesin rættur er ásettur í § 5 í lógaruppskotinum, ið ásetir, at løgtingslógin er galdandi fyri persónar, ið lógliga uppihalda sær í Føroyum.

## 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Lógaruppskotið fevnir um Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek (Breksáttmálin).

Við lógaruppskotinum verða krøvini, sum eru ásett í Breksáttmálanum, ment við tað, at lógaruppskotið umframt at nágreina rættin til verandi sosialar tænastur eisini heimilar, at nýggjar sosialar tænastur verða veittar fólki, ið bera brek. Endamálið við at veita fleiri sosialar tænastur er at tryggja sjálvbjargni, lætta um gerandisdagin og tryggja, at persónar, ið bera brek, kunnu verða við í samfelagnum.

Við lógaruppskotinum verður m.a. tulkatænasta og flutningstænasta ásett við lóg. Hesi øki hava higartil ikki havt heimild í lóg. Eisini heimilar lógaruppskotið, at endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing skal veitast persónum, ið hava mistar førleikar. Eins og lógaruppskotið heimilar borgarastýrdari stuðulstænastu, námsfrøðiliga ráðgeving til familjur, ið hava barn, ið ber brek, og ansingarsamsýning ella endurgjald fyri at ansa persóni, ið hevur varandi brek ella sjúku, heima.
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar, ið ganga ímóti rættindum, ásett í Evropeiska mannarættindasáttmálanum, EMRS.

## 2.9. Markaforðingar

Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær nýggjar marknaforðingar.
Uppskotið hevur greiðar reglur um rættindi hjá útlendingum, herundir eisini norðurlendingum, og eigur hetta somuleiðis at virka fyri at avmarka marknaforðingar.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ásetingar um revsing til persónar og arbeiðsgevarar, ið dylja upplýsingar ella geva skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ið hava týdning fyri avgerð sambært hesum lógaruppskoti. Lógaruppskotið heimilar revsing við bót.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið áleggur ikki skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið heimilar egingjald til hoyritól, eins og uppskotið eisini heimilar landsstýrismanninum at veita tænastur mótvegis gjaldi.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur starvsfólki í almennum starvi fráboðanarskyldu til Almannaverkið, tá hesi fáa kunnleika til, at persónur hevur tørv á uppihaldshjálp ella tænastu, orsakað av likamligum ella sálarligum breki, ella um persónur á annan hátt livir undir ónøktandi korum.

Lógaruppskotið áleggur persóni, ið fær hjálp sambært lógaruppskotinum, skyldu at boða Almannaverkinum frá øllum broytingum í persónligu og fíggjarligu viðurskiftum sínum, ið kunnu hava ávirkan á hjálpina.

Eisini áleggur lógaruppskotið almennum myndugleikum, peningastovnum og øðrum privatum at lata upplýsingar, tá Almannaverkið hevur fingið samtykki frá persóni at biðja um hesar upplýsingar og í teimum førum, tá lógaruppskotið heimilar, at biðjast kann um upplýsingar, uttan at persónur hevur givið samtykki til hetta.

Umbøn um upplýsingar, uttan at persónur hevur givið samtykki, verður bert heimilað í málum um afturgjald av veiting, ið persónur hevur fingið av órøttum, tá hesin átti at verið vitandi um, at hetta var av órøttum. Í málum har persónur skal flytast á vardan bústað ímóti sínum vilja og í málum um uppihaldshjálp og fíggjarligan stuðul, har Almannaverkið, uttan at samtykki er fingið, kann biðja um upplýsingar frá øðrum almennum myndugleikum um fíggjarlig viðurskifti hjá persóni og hjúnafelaga.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann, stovn ella kommunu.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur myndugleikanum heimild til eftirlitsvitjanir á stovnum, herundir sjálvsognarstovnum.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tilskilað omanfyri.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

### Kapittul 1. Endamál og skyldur myndugleikans (§§ 1-4)

***Til § 1***
Endamálið við lógini er ásett í § 1.

Lógaruppskotið fevnir í høvuðsheitum um somu viðurskifti sum forsorgarlógin, sum við hesum lógaruppskoti verður sett úr gildi.

Tó verður nú ásett, at endamálið við lógaruppskotinum er at menna og endurmenna.

Endurmenning (rehabilitering) og menning (habilitering) snúgva seg grundleggjandi um at eggja, stuðla, og hjálpa fólki, sum fáa ella hava viðfødd brek ella hava sosialar trupuleikar til at fáa tað lív, tey sjálvi ynskja og megna.

Endamálið við ásetingini er tryggja, at allar veitingar, endurbót og tænastur sambært hesum lógaruppskoti verða skipaðar og veittar við hesum meginreglum í huga.

Endurmenning verður nýtt sum hugtak, tá talan um hjálp og stuðul, sum viðvirka til, at mistar førleikar verða endurvunnir, og fevnir sostatt um borgarar, sum hava fingið eitt brek.

Menning fevnir um borgarar, sum hava viðfødd og varandi brek, og sum hava brúk fyri hjálp, og stuðli til at hava eitt so sjálvstøðugt, støðugt og innihaldsríkt lív sum gjørligt.

Tað skal tó ikki skiljast sum, at endurmenning altíð hevur við sær, at tú endurvinnur mistar førleikar og at tú kemur at virka á sama hátt sum áður. Talan kann eisini verða um, at tú skalt stuðlast og eggjast til at læra teg at liva við teim avbjóðingum, sum eru, og hvussu tilber skipa arbeiðslív, familjulív, frítíðarlív o.s.fr. við teim førleikum og tí tilfeingi, sum eru.

Ein endurmenningar - ella menningartilgongd kann fevna um fleiri ymiskar tænastur frá einum ella fleiri myndugleikum, sum skulu málrættast í eina tíðaravmarkaða tilgongd.

Endurmenning og menning skulu skiljast sum ein málrættað og tíðaravmarkað tilgongd av samskipaðum veitingum og tilboðum, sum hava til endamáls at geva borgaranum neyðug amboð at megna egið lív, so sjálvstøðugt sum gjørligt og við so lítlari hjálp sum gjørligt. Ein endurmenningar - ella menningartilgongd kann fevna um fleiri ymiskar tænastur frá einum ella fleiri myndugleikum, sum skulu málrættast í eina tíðaravmarkaða tilgongd.

Eisini verður ráðgevingarskyldan hjá Almannaverkinum ásett við hesum lógaruppskoti.

Ráðgeving sambært § 1, nr. 1 hevur serliga eitt fyribyrgjandi og stuðlandi endamál, soleiðis at persónur kann fáa ráðgeving um, hvussu viðkomandi kann fyribyrgja ella koma úr ávísari støðu. Ráðgeving kann tí veitast við tí endamáli at fyribyrgja, at persónur fær sosialar trupulleikar, og at hjálpa viðkomandi at minka um ella koma burtur úr sosialum trupulleikum.

Endamálið við lógini er eisini at virka sum niðasta trygdarnet fyri persónar, ið hava troytt verandi møguleikar og ikki kunnu uppihalda sær og familjuni á annan hátt. Eisini er endamálið við lógini at veita persónum, ið bera brek, eru sjúku ella hava víðfevndar sosialar trupulleikar, neyðugar tænastur og endurbót (kompensatión) fyri at bøta um avleiðingarnar av brekinum ella sjúkuni.

***Ráðgevingarskylda***

***Til § 2***
Tá ein borgari hevur verið fyri almannahending, ber brek ella hevur sjúku, og tí hevur tørv á hjálp, skal Almannaverkið veita ráðgeving um, hvørja hjálp viðkomandi hevur rætt til. Endamálið við ráðgevingini er at fyribyrgja sosialar trupulleikar og at hjálpa borgaranum at megna ítøkiligar íkomnar avbjóðingar og gerast sjálvbjargin.Ráðgevingin hjá Almannaverkinum skal ikki bert veitast við støði í hesi lóg, men skal eisini fevna um hvørja hjálp, persónur kann fáa sambært aðrari lóggávu, ið Almannaverkið umsitur.

Ráðgevingin hjá Almannaverkinum skal fevna um samlaða tørv borgarans, og ráðgevingin skal tí bæði fevna um uppihaldsveitingar, heimild at veita fíggjarligan stuðul ella ískoyti, eins og ráðgevingin skal fevna um hvørjar tænastur, ið kunnu veitast sambært verandi tænastustøði.

Støðið fyri ráðgevingini verður tikið í ítøkiliga tørvi borgarans og kann tí fevna um fíggjarliga ráðgeving, undir hesum at tillaga verandi útreiðslur til framhaldandi fíggjarliga rásarúmið.

Er talan um persón, ið hevur serligan tørv, eitt nú vegna brek, varandi sjúku ella víðfevndar sosialar trupulleikar, er ráðgevingarskyldan ikki avmarkað til bert at fevna um henda persónin, men eigur eisini at verða veitt hjúnafelaga, foreldrum ella øðrum avvarðandi, ið borgarin hevur tætt tilknýti til.

Tað hevur týdning at veita hóskandi ráðgeving skjótast tilber í mun til at fyribyrgja og forða fyri, at støða hjá borgara versnar. Hetta bæði í mun til eina heildarráðgeving og í mun til ráðgeving vegna serligan tørv. Í frágreiðing til tænastupolitikk frá 2017 verður m.a. mælt til, at Almannaverkið í størri mun enn higartil kemur út, har borgarin er.

Almannaverkið skal ikki einans ráðgeva um ta hjálp, ið Almannaverkið kann veita, men skal eisini hava í huga at vísa borgara á tilboð frá privatum ella sjálvsognarstovnum og eisini øðrum almennum myndugleikum.

Almannaverkinum verður ikki við hesi áseting álagt at veita ráðgeving innan fyri virkisøki hjá øðrum almennum myndugleikum, men Almannaverkið skal við hesum hava í huga, at aðrir myndugleikar kunnu veita hóskandi ráðgeving og hjálp, t.d Barnaverndartænasturnar og eldrasamstørvini, ALS, Barsilsskipanin og Familjufyrisitingin. Eisini sjálvbodnir felagsskapir kunnu veita ráðgeving og hjálp, eitt nú Blái Krossur, Heilbrigdi og viðgerðarstovnurin Frælsi í sambandi við rústrupulleikar.

*Til § 2, stk. 4*
Við hesi áseting verður ásett, at Almannaverkið hevur serliga skyldu at veita foreldrum, ið hava fingið barn, ið ber brek ella hevur varandi sjúku, skjóta ráðgeving. Hesi foreldur kunnu vera í kreppustøðu og hava torført við at søkja sær røttu hjálpina sjálvi. Almannaverkið má sostatt hava ein aktivan leiklut at veita familjuni skjóta hjálp, og er ráðgeving eitt fyrsta stig ímóti røttu hjálpini. Ráðgevingarskyldan hjá Almannaverkinum skal tó tillagast støðuni hjá einstøku familjuni, eitt nú í mun, til nær foreldrini eru før fyri at taka ímóti ráðgeving.

Ásetingin í § 2, stk. 4 hongur saman við týdninginum at veita børnum og foreldrum skjóta hjálp, eins og talan er um at fyribyrgja, at støðan hjá familjuni versnar, og aðrar avbjóðingar taka seg upp.

Í hesum sambandi kann vísast til § 4, ið áleggur starvsfólki, ið útinna almenna tænastu ella starv at boða Almannaverkinum frá, tá hesi verða varug við, at persónur hevur tørv á hjálp sambært lógini.

Starvsfólk, ið útinna almenna tænastu, eru umframt starvsfólk í almennum starvi, eisini privatpraktiserandi og starvsfólk á sjálvsognarstovnum, ið røkja almennar tænastur.

*Til § 2, stk. 5*
Við ásetingini verður ásett, at ráðgevingarskyldan hjá Almannaverkinum fevnir um uppleitandi arbeiði. Orsøkin til hesa áseting er, at ávísir bólkar av fólki ikki megna at venda sær til Almannaverkið av sínum eintingum ella ynskja at halda seg burtur frá almennum myndugleikum. Eisini kunnu hesi hava trupulleikar at halda avtalur við Almannaverkið ella skilja ta ráðgeving, ið verður veitt teimum.

Ásetingin um uppleitandi arbeiði fevnir sostatt um hesar bólkar, ið verða mettir at hava tørv á serligari hjálp. Sum dømi kann nevnast persónar við sálarsjúku og persónar við rúsevnistrupulleikum. Almannaverkið hevur t.d. uppleitandi arbeiði í hitastovuni á Herberginum.

Uppleitandi arbeiði hevur til endamáls at fáa samband við og upplýsa sosialt útsettar borgarar um teirra møguleikar og rættindi. Almannaverkið fær av og á fráboðan um, at borgari livir undir óhóskandi og óvirðiligum umstøðum. Almannaverkið kann í hesum førum ikki taka ein borgara av ræði, men kann bjóða hjálp og tænastu, og er tað borgarin sjálvur, ið ger av, um hann vil taka ímóti hjálpini. Almannaverkið kann bert taka ein borgara av ræði, tá greið lógarheimild er fyri hesum sambært uppskoti til løgtingslóg um tvingsil, ið er lagt fram samstundis sum hetta lógaruppskot.

***Ætlan***

***Til § 3***
Sambært hesi áseting skal Almannaverkið veita hjálp við støði í einari ítøkiligari meting av viðurskiftum borgarans. Endamálið við ásetingini er eisini at tryggja, at tað er heildarstøða

borgarans, sum er í miðdeplinum, tá mett verður um tørvin hjá viðkomandi. Hevur persónur uppihaldsskyldu mótvegis børnum undir 18 ár, ella er í hjúnalagi, verður hetta tikið við í metingina.

Ásetingin í stk. 1, nr. 6 letur upp fyri, at Almannaverkið kann taka onnur viðurskifti við í metingina. Hjálpin skal veitast soleiðis, at borgarin fær, eitt fyri hann, so innihaldsríkt og sjálvstøðugt lív, sum tilber, og fær gagnnýtt teir førleikar, ið hann hevur.

Persónur hevur rætt til at vera við í viðgerðini av sínum egna máli. Almannaverkið skal tískil leggja málsviðgerðina soleiðis til rættis, at hetta í størst møguligan mun letur seg gera.

*Til § 3, stk. 2.*
Sambært stk. 2 er tað Almannaverkið, ið ger av, á hvønn hátt hjálpin skal veitast. Avgerðin tekur støði í tørvi og ynski hjá tí einstaka, sosialfakligari meting og fíggjarliga rásarúminum fyri tænastu hjá myndugleikanum. Almannaverkið skal taka atlit til tørv og ynski borgarans. Sjálvsavgerðarrættur borgarans skal í størst møguligan mun virðast. Samstundis er tó neyðugt at taka sosialfaklig atlit, eins og neyðugt er at leggja upp fyri tænastustøðinum, sum er fyri tænastuna, sum myndugleikin skal veita. Tað merkir, at tænastur ikki kunnu setast í verk uttan neyðuga játtan á fíggjarlógini.

Tænastur til børn, yngri enn 18 ár, verða altíð veittar í samráð við foreldramyndugleikan ella tann, ið hevur dagligu umsorganina av barninum um hendi, tá talan er um minni tænastur. Ein tænasta skal sostatt veitast soleiðis, at tænastan í mest møguligan mun verður tillagað viðurskiftunum í einstøku familjuni.

Børn, ið fáa fyribils bústað sambært hesi lóg, eru ikki at meta sum sett heiman. Tað eru foreldrini, sum sambært § 2 í fyriskipan um foreldramyndugleika og samveru hava umsorganina fyri barninum, og sum taka avgerð um persónligu viðurskifti barnsins.

Avgerðir um barnsins viðurskifti skulu sostatt ongantíð takast, uttan at foreldrini eru tikin við. Hetta bæði í mun til týðandi avgerðir, har foreldramyndugleikin skal vera við í avgerðini, og í mun til dagligu viðurskifti barnsins, har tey, ið hava dagliga umsorganina fyri barninum, verða tikin við uttan mun til, um tey hava foreldramyndugleikan ella ei.

*Til § 3, stk. 3.*
Ásetingin í stk. 3 um, at Almannaverkið skal gera eina ætlan fyri hvønn einstakan borgara, er nýggj, men Almannaverkið hevur tó seinnu árini arbeitt eftir hesum leisti. Almannaverkið hevur lagt seg eftir at gera sosialfakligar heildarmetingar og leggja ætlanir, og er hetta eitt amboð, ið verður brúkt til at lýsa støðu borgarans, setir karmar fyri veittu hjálpina, lýsir samskipan av ymsu veitingunum og tænastunum og ásetir tíðarkarm. Hetta merkir, at ætlanir skulu gerast fyri borgarar, ið hava ein samansettan tørv og tí hava tørv á ymiskum tænastum og veitingum. Tá persónur t.d. bert hevur tørv á fíggjarligum stuðli ella fíggjarligum ískoyti, skal Almannaverkið ikki gera eina virkisætlan fyri hesar persónar.

Almannaverkið umsitur eisini aðra sosial lóggávu enn hesa, og í tann mun, at talan er um persón, sum fær t.d. fyriskipan sambært lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk og lóg um almannatrygd og vælferð, eigur ætlanin at fevna um hesi øki eisini, eins og ætlanin eisini eigur at fevna um samskipan í mun til fyriskipanir frá øðrum myndugleikum og stovnum.

Sum dømi kann nevnast, at í sambandi við “Ta góðu tilgongdina” verður ein tvørgeiralig ætlan gjørd saman við foreldrunum. Allir partar, sum eru um barnið, eru við á árligum netverksfundum, og ætlanin verður dagførd so hvørt, sum støðan hjá barninum, familjuni ella myndugleikum broytist.

Tá talan er um børn, ið kunnu væntast at vera í almennu skipanini í longur tíðarskeið, er umráðandi, at ætlanin fevnir um gongdina frá einum lívsskeiði hjá barninum til tað næsta, soleiðis at yvirgangurin millum barnagarð, skúla og víðari menning eftir fólkaskúla verður so smidligur og væl fyriskipaður, sum tilber.

Tá talan er um samansett mál, skal Almannaverkið miða ímóti, at borgari, sum hevur tørv á tí, og sum ynskir tað, skal fáa knýtt ein fastan málsviðgera, sum samskipar tænastur og veitingar, sum viðkomandi fær frá Almannaverkinum.

Almannaverkið skal miða eftir, at málsviðgerin eisini samstarvar og samskipar tænastur, veitingar og viðgerðir, sum viðkomandi fær frá Almannaverkinum og øðrum myndugleikum.

Er talan um persón, sum sambært § 16 ella §74 a í revsilógini er dømdur til eftirlit og fær tilboð frá Almannaverkinum sambært § 49 ella § 50 í hesi løgtingslóg, er umráðandi, at ætlanin eisini fevnir um átøk, sum stuðla undir, at tann ungi fær neyðuga viðgerð frá øðrum myndugleikum undir hesum rúsviðgerð og psykiatriska viðgerð, og at dentur verður lagdur á, at persónurin kann fáa og varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin ella kemur undir útbúgving skjótast tilber og í seinasta lagi, tá dómurin er lokin.

Almannaverkið skal miða ímóti, at hesir persónar fáa knýtt ein málsviðgera, sum samskipar tænastur, veitingar og viðgerðir, sum viðkomandi fær frá Almananverkinum og øðrum myndugleikum.

***Fráboðanarskylda***

***Til § 4***
Talan er um framhald av verandi áseting í forsorgarlógini.

Í § 4 verða starvsfólk, ið útinna almenna tænastu ella starv áløgd at boða Almannaverkinum frá, tá hesi verða varug við, at persónur hevur tørv á hjálp sambært lógini.

Starvsfólk, ið útinna almenna tænastu, eru umframt starvsfólk í almennum starvi, eisini privatpraktiserandi og starvsfólk á sjálvsognarstovnum, ið røkja almennar tænastur. Fráboðanarskyldan hevur til endamáls at tryggja, at persónar, ið ikki eru førir fyri at taka sær av sær sjálvum, eitt nú vegna víðfevnandi sálarsjúku, menningartarn o.a., ikki líða neyð.

Við § 4 verður ásett, at fyrilitið fyri persóni, ið vegna týðandi sjúku, brek ella víðfevndum sosialum trupulleikum hevur tørv á veiting til uppihalds, ella hevur tørv á tænastum sambært lógini, eigur at koma fram um fyrilitið fyri tagnarskylduni í starvinum sambært § 27 og § 28 í fyrisitingarlógini.

Fráboðanarskyldan hongur eisini saman við skylduni hjá Almannaverkinum til uppleitandi arbeiði, soleiðis at Almannaverkið, tá fráboðan kemur sambært § 4, hevur skyldu at seta seg í samband við tann, ið fráboðað er um, og bjóða neyðugu hjálpina, hóast viðkomandi ikki sjálvur hevur sett seg í samband við Almannaverkið og søkt um ávísa hjálp.

§ 4, stk. 2 er galdandi í somu førum, sum nevnd í § 1. Tað er, um persónur hevur tørv á ráðgeving, fíggjarligari veiting, endurbót og sosialari tænastu. Sum dømi kann nevnast, at foreldur, ið fáa barn við breki ella varandi sjúku, ikki neyðturviliga hava tørv á endurbót ella sosialari tænastu fyrstu tíðina eftir føðingina, men kunnu hava tørv á ráðgeving.

**Kapittul 2. Virkisøki (§§ 5-9)**

***Til § 5***

§§ 5-9 í lógaruppskotinum áseta, hvørjir persónar eru fevndir av løgtingslógini.

Sambært § 5, stk. 1 í lógaruppskotinum er løgtingslógin galdandi fyri persón, sum uppiheldur sær lógliga í Føroyum. Talan skal sostatt vera um persónar, sum annaðhvørt hava uppihaldsloyvi ella sambært lóg hava rætt til at uppihalda seg í Føroyum. Tað er ikki í sær sjálvum nokk, at persónurin hevur uppihaldsloyvi ella á annan hátt rætt at uppihalda seg í Føroyum – persónurin skal vera til staðar í Føroyum fyri at hava rætt til veitingar eftir lógini, sbr. tó undantak til hesa meginreglu í § 6 í lógaruppskotinum. Rætturin hjá útlendingum at uppihalda seg í Føroyum er ásettur í útlendingalóggávuni.

Norðurlendskir ríkisborgarar kunnu uppihalda seg í Føroyum uttan at søkja um loyvi. Borgarar úr øðrum londum skulu søkja um uppihaldsloyvi, um teir skulu vera í Føroyum longur, enn ferðafólkaloyvið er galdandi.

Persónar, ið hava fingið uppihaldsloyvi við atliti at familjusameining, og persónar, ið hava arbeiðs- og uppihaldsloyvi, uppihalda seg lógliga í Føroyum.

Persónar, ið søkja um uppihaldsloyvi ella ikki tíðaravmarkað uppihaldsloyvi, sum hava fingið loyvi at uppihalda seg í Føroyum, meðan umsóknin verður viðgjørd (processuelt uppihald), uppihalda seg somuleiðis lógliga í Føroyum.

Persónar, ið sigla undir Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS), eru at meta sum arbeiðandi í Føroyum við tað, at hesir arbeiða umborð á føroyskt skrásettum skipum. Hesir persónar hava sostatt rætt til veitingar og tænastur sambært lógini í tann mun, at teir veruliga uppihalda seg í Føroyum. Veitingar og tænastur kunnu ikki flytast av landinum uttan í teimum undantaksførum, ið eru nevnd í lógini ella ásett í kunngerð.

Útlendingar, sum hevur lógligt uppihald í Føroyum, hevur sostatt rætt til veitingar eftir løgtingslógini í tann mun, treytirnar í lógini eru loknar. Hetta er galdandi, inntil viðkomandi ikki hevur lógligt uppihald longur.

Sambært § 5, stk. 1 eru veitingar harafturat treytaðar av, at persónurin ikki fær veitingar eftir aðrari lóggávu, og at persónurin ikki sjálvur megnar at uppihalda seg við øðrum inntøkum ella veitingum. Lógaruppskotið er at meta sum niðasta trygdarnetið í samfelagnum, og aðrar skipanir skulu tí hava verið royndar, áðrenn persónurin verður fevndur av hesi lóg.

Sum dømi kann nevnast, at persónur, ið er fevndur av løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m., bara kann fáa tær tænastur sambært hesum lógaruppskoti, sum løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. ikki heimilar. Tað sama er galdandi fyri veitingar eftir barnaverndarlógini og dagpeningalógini, sum verða mótroknaðar, áðrenn uppihaldsveiting verður rindað. Persónur, sum hevur rætt til dagpeningaveiting, veiting frá ALS ella aðra veiting, hevur ikki rætt til uppihaldsveiting ella endurgjald fyri inntøkumiss eftir hesi lóg, sbr. tó § 11 og viðmerkingarnar til hesa grein.

Tó er ásett í § 5, stk. 2, at persónur, ið er fevndur av løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m., og sum hevur fingið tænastu frá Almannaverkinum fram til, at viðkomandi kundi fáa tænastu sambært løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m., framhaldandi kann fáa tænastu frá Almannaverkinum, um endamálið við at veita tænastuna framvegis verður rokkið. Dømi um slíka støðu er, tá ið persónur hevur fingið tillutað vardan bústað frá Almannaverkinum, áðrenn viðkomandi gjørdist fólkapensjónistur. Hetta ger seg í dag serliga galdandi fyri persónar við menningartarni, sum búgva á sambýli. Sambært upplýsingum frá Almannaverkinum eru í dag 19 persónar í fólkapensjónsaldri, sum búgva í vardum bústaði hjá

Almannaverkinum. Undantakið fevnir tó ikki um endurvenjing, sum bara verður veitt persónum, ið eru úr 18 ár og upp til fólkapensjónsaldur. Fólkapensjónistar kunnu fáa hesa tænastu sambært løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m.

§ 5, stk. 2 er avmarkað til persónar í fólkapensjónsaldri. Hetta merkir, at Almannaverkið ikki kann veita framhaldandi tænastu til persónar, ið eru undir fólkapensjónsaldur, men sum hava rætt til tænastu sambært løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m.

***Til § 6***

Í § 6 verður veitt undantak frá meginregluni í § 5 um, at persónur skal uppihalda seg í Føroyum fyri at hava rætt til veitingar eftir lógini. Ásetingin heimilar landsstýrismanninum at áseta undantøk soleiðis, at tað sambært lógini kann veitast fyribils hjálp, meðan persónur er staddur uttanlands í styttri tíðarskeið.

Dømi um uppihald uttanlands, sum ikki ávirkar rættin til veitingar eftir lógini, er, tá:

- persónur skal hava samveru við egin børn, og samveran ikki kann vera í Føroyum,
- persónur fer uttanlands í læknaørindum,
- persónur skal vitja avvarðandi uttanlands, ið eru álvarsliga sjúk,
- persónur fer sum fylgjari við persóni, ið skal uttanlands í sjúkraørindum.

Harafturat kann ein persónur fara uttanlands í feriu. Nevnast kann í hesum sambandi, at danska Ankestyrelsen hevur tikið prinsippavgerð um, at í Danmark hava persónar rætt til 5 vikur feriu uttanlands, uttan at hetta ávirkar rættin til uppihaldsveiting.

Tað kunnu tó eisini vera aðrar støður, har ið almennir myndugleikar senda persónar í fyribils skipanir uttanlands, har tað er skilagott, at persónarnir varðveita veitingina úr Føroyum. Við ásetingini kann landsstýrismanninum í kunngerð at veita heimild fyri slíkum serligum støðum.

Treytin fyri, at hjálp kann veitast, meðan persónur er staddur uttanlands, er tó altíð, at uppihaldið ikki forðar fyri, at persónurin kann røkja sínar skyldur sambært lógini, t.d. fara undir arbeiðsfremjandi fyriskipan.

Í § 6, stk. 2 verður staðfest verandi siðvenja um, at persónur kann søkja um hjálp frá Almannaverkinum, hóast viðkomandi, tá ið søkt verður, ikki býr í Føroyum. Treytin fyri, at Almannaverkið kann taka slíka avgerð, er tó, at persónurin hevur serligt tilknýti til Føroyar, og at viðkomandi ætlar sær at vera í Føroyum í leingi.

Dømi um, at persónur hevur serligt tilknýti til Føroyar, er, tá ein persónur áður hevur búð leingi í Føroyum, og viðkomandi ynskir at flyta aftur til Føroyar. Persónar, sum ongantíð hava búð í Føroyum sjálvir, tó at teir hava familju í Føroyum, kunnu ikki metast at hava serligt tilknýti til Føroyar.

Almannaverkið kann ikki við heimild í § 6, stk. 2 viðgera umsókn um hjálp til persón, sum einki tilknýti hevur til Føroyar, áðrenn hann hevur uppihald í Føroyum. Almannaverkið kann í mesta lagi veita slíkum persónum ráðgeving um galdandi rætt í Føroyum.

Vísast skal tó til norðurlendska sáttmálan um almannahjálp og tænastur, ið ásetir, at londini skulu samstarva og hjálpa, tá ið persónur, fevndur av sáttmálanum, ynskir at ferðast ella flyta til annað Norðurland.

***Almannaveiting til útlendingar***

***Til § 7***

Í sambandi við uppihaldsveiting til útlendingar eru serligar avmarkingar galdandi. Avmarkingarnar hanga saman við, at ein útlendingur – sum meginregla – ikki skal liggja tí almenna til last. Út frá hesum verður ásett í § 7, stk. 1, 1. pkt., at bara persónur, ið hevur danskan heimarætt, ella persónur, ið hevur rætt til ikki tíðaravmarkað uppihaldsloyvi, hevur rætt til longurvarandi uppihaldsveiting.

Sambært § 7. stk. 1, 2. pkt. er longurvarandi uppihaldsveiting at skilja sum veiting, ið persónur fær, ella kann væntast at fáa, í eitt hálvt ár ella longur. Í flestu førum kann Almannaverkið innan eitt hálvt ár meta um útlitini fyri, at persónurin fer at klára seg sjálvan aftur.

Persónur, ið hevur havt fyribils arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum í 7 ár, hevur sambært útlendingalóggávuni rætt til at fáa ikki tíðaravmarkað arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Tað sama er galdandi fyri persón, ið hevur havt uppihaldsloyvi við atliti at familjusameining í 3 ár.

Tað, sum er avgerandi fyri rættin til longurvarandi uppihaldsveiting, er, at persónurin hevur rætt til ikki tíðaravmarkað uppihaldsloyvi. Ikki tíðaravmarkaða uppihaldsloyvið noyðist sostatt ikki at vera avgreitt fyri, at persónurin kann fáa longurvarandi uppihaldsveiting.

Fær útlendingur, sum ikki er fevndur av stk. 1, uppihaldsveiting í longurvarandi tíðarskeið, kann Almannaverkið sambært § 7, stk. 2, 1. pkt. heita á Útlendingastýrið um at taka uppihaldsloyvið hjá viðkomandi aftur. Avgerðarmyndugleikin hesum viðvíkjandi liggur tó hjá Útlendingastýrinum, og áheitanin frá Almannaverkinum er sostatt ikki bindandi fyri Útlendingastýrið.

Persónar, ið eru fevndir av einum viðkomandi sáttmála við onnur lond, hava eisini rætt til longurvarandi uppihaldsveiting, um sáttmálin tilskilar hetta, sbr. § 7, stk. 1, 2. pkt.

Sáttmálar við onnur lond á hesum øki er í høvuðsheitum norðurlendski sáttmálin um almannahjálp og tænastur. Tó eru Føroyar enn fevndar av sáttmála millum Danmark og Stórabretland og Norðurírland frá 27. august 1959 um sosiala trygd, hóast viðurskiftini í mun til Danmark nú eru fevnd av ES rættinum.

Allir persónar, ið hava lógligt uppihald í Føroyum, hava sambært meginregluni í § 5, stk. 1 rætt til uppihaldsveiting í styttri tíðarskeið, tá ið útlit eru fyri, at persónurin fer at klára seg sjálvan aftur.

Sambært § 7, stk. 3, 1. pkt. kann ein persónur, ið er fevndur av norðurlendska sáttmálanum um almannahjálp og tænastur, verða sendur heim vegna tørv á longurvarandi uppihaldsveiting, um familjuviðurskifti, tilknýti til heimlandi og viðurskiftini annars ikki tala ímóti hesum. Ein ítøkilig meting má gerast í hvørjum einstøkum føri, har dentur eisini kann verða lagdur á onnur viðurskifti enn tey, ið eru beinleiðis nevnd í ásetingini.

Persónur, ið er fevndur av áður nevnda sáttmála, kann tó ikki verða sendur heim vegna tørv á longurvarandi uppihaldsveiting, um viðkomandi hevur búð í Føroyum seinastu 3 árini, sbr. § 7, stk. 3, 2. pkt. Talan skal vera um samanhangandi bústaðartíð í Føroyum, men styttri uppihald uttanlands kunnu telja við í bústaðartíðini.

Sambært stk. § 7, stk. 4 kann ein persónur, sum ikki hevur lógligt uppihald í Føroyum, ella sum bara hevur rætt til at uppihalda seg í landinum í upp til 3 mánaðir, bara fáa stuðul til heimferð. Stuðul til heimferð fevnir eisini um mat, klæðir og aðrar neyðsynjavørur.

***Til § 8***
Almannaverkið kann sambært § 8, stk. 1 rinda persóni og familju hansara ferðaútreiðslur og útreiðslur til flyting í sambandi við flyting til útland. Stuðulin fevnir um útreiðslur til sjálva ferðina og tað at flyta innbúgv og lutir.

Fíggjarligur stuðul til ferðaútreiðslur kann rindast persóni, ið hevur rætt til uppihaldsveiting sambært lógini. Persónurin skal sostatt ikki hava inntøku ella ogn, ið kann nýtast til uppihalds ella til at rinda ferðaútreiðslurnar.

Stuðulin kann veitast, tá persónurin, í landinum sum flutt verður til, verður tryggjaður eina varandi arbeiðsinntøku og tískil kann sleppa undan at fáa uppihaldsveiting í Føroyum.

Stuðulin kann harafturat veitast, um persónurin er ríkisborgari, ella hevur serligt tilknýti til landið, ið flutt verður til. Talan kann eitt nú vera um, at persónurin er frá hesum landinum, ella hevur búð stóran part av lívinum í landinum. Um persónurin vil lata seg uppihalda hjá familju í útlandinum heldur enn at fáa uppihaldsveiting í Føroyum, skal hann sostatt hava møguleika fyri hesum.

Sambært § 8, stk. 2 kann fíggjarligur stuðul til ferð og flyting veitast persóni, ið er fluttur til Føroyar frá Danmark, Grønlandi ella øðrum Norðurlandi, og sum ynskir at flyta heimaftur. Einasta treytin er tá, at persónurin, ella hjúnafelagi hansara, ikki hevur ogn ella inntøku at rinda útreiðsluna fyri.

***Til § 9***
§ 9 heimilar Almannaverkinum at veita persóni, sum hevur lógligt uppihald í Føroyum, men sum uppiheldur sær í útlandi og er komin illa fyri í útlandinum uttan fíggjarligan møguleika at koma heimaftur, fíggjarligan stuðul til heimferð, tá ið viðurskiftini annars tala fyri hesum.

Ásetingin staðfestir eina siðvenju hjá Almannaverkinum, sum bara hevur verið nýtt einstakar ferðir.

Sum dømi kann nevnast persónur, sum ikki hevur teknað ferðatrygging, ið fær skaða í útlandi, og sum ikki hevur pening til sjúkraflutning heim ella pening til viðgerð og uppihald í útlandinum.

Endamálið við greinini er einans at fyribyrgja, at persónar í trongstøðu stranda í útlandi uttan møguleika fyri at koma heimaftur.

## Kapittul 3. Uppihaldsveiting (§§ 10-20)

***Til § 10***
Ásetingin í § 10 um uppihaldsskyldu mótvegis hjúnafelaga og børnum, yngri enn 18 ár, hongur saman við rættarstøðuni sambært lóg um rættarstøðu í hjúnalagi ( Lov nr. 56 af 18. marts 1925 om Ægteskabets Retsvirkninger, sum seinast broytt við anordning nr. 724 frá 12. juni 2017) og

sambært lov om børns retstilling (Lov nr. 200 af 18. maj 1960 om børns retsstilling, som senest ændret ved anordning nr. 398 af 20. april 2010)

Ásetingin í § 10 hevur til endamáls at tryggja, at hjálp sambært lógini verður veitt við støði í tí rættarstøðu, sum er millum hjún sambært lóg um rættarstøðu í hjúnalagi og millum foreldur og børn sambært lov om børns retstilling.

Í § 2 og 3 í lóg um rættarstøðu í hjúnalagi er ásett:

"**§ 2.** Det paahviler Mand og Hustru gennem Pengeydelse, gennem Virksomhed i Hjemmet eller paa anden Maade, at bidrage, hver efter sin Evne, til at skaffe Familien det Underhold, som efter Ægtefællernes Livsvilkaar maa anses for passende. Til underholdet henregnes, hvad der udkræves til Husholdningen og Børnenes Opdragelse saavel som til Fyldestgørelse af hver Ægtefælles særlige Behov.

**§ 3**. Kan Udgifterne til en Ægtefælles særlige Behov og Udgifterne ved de Hverv, som han efter Skik og Brug og Ægtefællernes Forhold har at varetage for Familiens Underhold, ikke dækkes af det Bidrag, han selv skal yde ifølge § 2, er den anden Ægtefælle pligtig at overlade ham de fornødne Pengemidler i passende Beløb ad Gangen. Dette gælder dog ikke, hvis en anden Ordning er paakrævet, fordi Ægtefællen har vist sig uskikket til at forvalte Penge, eller fordi andre særlige Grunde foreligger."

Í § 13 í lov om børns retstillinger ásett:

"**§ 13.** Forældrene er hver for sig forpligtet til at forsørge barnet. Barnet skal forsørges, opdrages og uddannes under hensyn til forældrenes livsvilkår og barnets tarv.

Stk. 2. Opfylder en af forældrene ikke forsørgelsespligten over for barnet, kan overøvrigheden pålægge ham at udrede bidrag til barnets underhold."

Lógin broytir sostatt ikki ta støðu, at hjún hava uppihaldsskyldu mótvegis hvørjum øðrum. Tó verður uppihaldsskyldan broytt og avmarkað í samanborið við forsorgarlógina, soleiðis fyribils uppihaldsveiting ikki er tengd at møguligari inntøku hjá hjúnafelaga. Tað merkir, at í mun til inntøku er persónur, sum er giftur og persónur, sum livir í parlagi, javnsettir. Ogn hjá møguligum hjúnafelaga kemur tó framum fyribils uppihaldsveiting, samanber § 20.

Við støði í verandi rættarstøðu millum hjún verður tí í § 10, stk. 2 eisini ásett, at uppihaldsskyldan millum hjún steðgar við sundurlesing og við hjúnaskilnað.

Í § 10, stk. 3 verður somuleiðis ásett, nær uppihaldsskyldan millum foreldur og børn steðgar. Sambært § 14, stk. 2 í lov om børns retstillinghava foreldur skyldu at veita barninum uppihald fram til 18. árið, ella inntil barnið fer í hjúnalag.

§ 10, stk. 3 vísir til verandi rættarstøðu sambært lov om børns retstilling, men veitir samstundis heimild fyri, at Almannaverkið kann veita gentu, yngri enn 18 ár, hjálp sambært lógini í viðgongutíðini, tó ikki fyrr enn 8 vikur eru til ásetta termin. Uppihaldsskyldan hjá foreldrum steðgar sambært hesi áseting ikki, fyrr enn barnið er føtt, men Almannaverkið kann, hóast fíggjarstøðuna hjá foreldrum, veita gentu hjálp í viðgongutíðini, tó ikki fyrr enn 8 vikur eru til ásetta termin. Hjálpin fevnir eisini um fíggjarligt ískoyti til pinkubarnaútgerð.

Eisini verður ásett, at foreldur, undir 18 ár, hava sjálvstøðug rættindi sambært lógini eftir, at barnið er føtt. Her verður munur ikki gjørdur á, um talan er um pápan ella mammuna at barninum.

***Til § 11***

Persónur, sum hevur verið fyri broyting í síni sosialu støðu (t.e. hevur verið fyri almannahending), og sum í einum avmarkaðum tíðarskeiði ikki er førur fyri at uppihalda sær, sínum hjúnafelaga og børnum, yngri enn 18 ár, kann fáa rætt til fyribils uppihaldsveiting. Almannahending kann vera sjúka, samlívsslit, viðgonga og føðing, arbeiðsloysi, vantandi barnaansing og annað. Dømini eru ikki úttømandi.

Ein avleidd almannahending kann eisini geva rætt til fyribils uppihaldsveiting. Tað er, tá ein persónur, sum viðkomandi hevur uppihaldsskyldu mótvegis, kemur fyri almannahending, sum forðar fyri uppihaldinum. T.d., um hjúnafelagin skal í sjúkuviðgerð uttanlands, og neyðugt er at fara við, og viðkomandi ikki hevur rætt til veiting eftir aðrari lóggávu. Fyribils uppihaldsveiting verður ikki veitt fyri almannahending hjá avvarðandi, sum ein ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis.

Fyribils uppihaldsveiting kann veitast í eitt avmarkað tíðarskeið. Avmarkingin er treytað av almannahendingini.

- Við sjúku verður veitingartíðarskeiðið ásett við støði í læknaváttanini.
- Við barnsburð kann fyribils uppihaldshjálp verða veitt líka leingi, sum farloyvistíðarskeiðið er sambært løgtingslóg um barsilsskipan.
- Við vantandi barnaansing kann uppihaldsveiting veitast, inntil kommunan hevur boðið barninum pláss á stovni ella dagrøkt.
- Við samlívssliti og líknandi orsøkum (t.d. við andláti) verður veitingartíðarskeiðið ásett út frá eini meting av fíggjarligu avleiðingunum av almannahendingini, men eigur tíðarskeiðið vegleiðandi ikki at fara út um 6-9 mánaðir.
- Við arbeiðsloysi verður tíðarskeiðið í mesta lagi sett at vera 3 mánaðir í senn.
- Við øðrum hendingum verður støða tikin til veitingartíðarskeið eftir eini meting av ítøkiliga málinum.

Ein persónur kann skifta ímillum orsøkirnar. T.d. ein persónur, sum fær fyribils uppihaldsveiting vegna barnsburð, kann, tá barsilsfarloyvistíðarskeiðið er runnið, og viðkomandi ikki hevur arbeiði, fáa uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi.

At fara undir útbúgving er ikki ein almannahending, og persónar undir útbúgving, og sum móttaka útbúgvingarstuðul, hava tí vanliga ikki rætt til fyribils uppihaldsveiting. At hava uppbrúkt rættin til útbúgvingarstuðul er heldur ikki ein almannahending, og tí kann ein persónur, sum t.d. skrivar serritgerð, men sum ikki hevur rætt til útbúgvingarstuðul, ikki fáa fyribils uppihaldsveiting. Um viðkomandi søkir um uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi, so er t.d. ein treyt at vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum og luttaka í virknisvenjing, og tað er ikki sameiniligt við at skriva serritgerð.

At arbeiðsgevari og arbeiðstakari gera avtalu um, at arbeiðstakari, t.d. vegna sjúku, fer í farloyvi, er ikki at skilja sum ein almannahending og gevur ikki rætt til fyribils uppihaldsveiting.

Fyri at fáa rætt til fyribils uppihaldsveiting skal almannahendingin hava við sær eina munandi fíggjarliga avleiðing. Ein almannahending gevur í sjálvum sær ikki rætt til fyribilsveiting, tí hon skal samstundis hava við sær, at fíggjarliga rásarúmið minkar.

*Dømi*: Ein stakur uppihaldari, sum arbeiðir niðursetta tíð við inntøku á 12.000 kr. um mánaðin, verður sjúkur. Viðkomandi fær tá rætt til dagpening vegna sjúku. Endurgjaldið frá

dagpeningaskipanini er 100 % av lønarmissinum. Fyribils uppihaldsveitingin til ein stakan uppihaldara er uml. 16.000 kr., men viðkomandi hevur ikki rætt til fyribils uppihaldsveiting, tí almannahendingin hevur ikki við sær eina fíggjarliga avleiðing. Men tá viðkomandi hevur móttikið dagpening vegna sjúku í 40 vikur, fær almannahendingin fíggjarliga avleiðing, tí tá dettur rætturin til dagpening burtur.

Ein persónur, sum verður arbeiðsleysur og sostatt fær veiting frá ALS, sum er 75 % av inntøkugrundarlagnum, hevur í útgangsstøðinum ikki rætt til fyribils uppihaldsveiting, hóast fyribils uppihaldsveitingin er hægri enn møguliga útgjaldið frá ALS. Tó kann ein persónur hava lágt inntøkugrundarlag í ALS, t.d. tí hann hevur verið stutta tíð á arbeiðsmarknaðinum, og veiting frá ALS kann tí vera so lág, at hon ikki umboðar inntøkuna, sum viðkomandi hevði á arbeiðsmarknaðinum. Í tílíkum føri kann viðkomandi fáa rætt til fyribils uppihaldsveiting (um treytirnar annars eisini eru loknar).

Ein persónur ella ein familja, sum í longur tíð hevur livað á einum lágum inntøkustøði, orsakað av eini almannahending, og har støðan við tíðini er blivin óhaldbar, kann fáa fyribils uppihaldsveiting.

Sambært § 11, stk. 2 eru persónar, sum eru í fyriskipan hjá tí almenna eftir § 45, § 46 ella eftir aðrari lóggávu, undantiknir treytini um, at almannahending skal vera farin fram fyri at fáa rætt til fyribils uppihaldsveiting.

§ 11, stk. 3 ásetir, at treytin fyri at fáa rætt til fyribils uppihaldsveiting er, at persónur ikki megnar at svara hvørjum sítt við øðrum inntøkum, og at allir arbeiðs- og inntøkumøguleikar eru troyttir. Dømini í § 11, stk. 3, nr. 1-4 eru ikki úttømandi. At aðrir inntøkumøguleikar altíð skulu troytast, áðrenn fyribils uppihaldsveiting verður veitt, merkir, at aðrar inntøkur altíð skulu takast framum, og ein møgulig fyribils uppihaldsveiting kemur aftrat. T.v.s., at fyribils uppihaldsveiting er ein ískoytisveiting. Tað kann vera persónur, sum hevur heilt lága arbeiðsinntøku, ella lesandi í barsilsfarloyvi, sum hevur rætt til lestrarstuðul í farloyvistíðarskeiðinum, tá verður arbeiðsinntøkan ella lestrarstuðulin veittur fyrst, og fyribils uppihaldsveitingin løgd aftrat upp til satsin, ásettur í § 12, stk. 1 (sí eisini § 21, stk. 1 og 2).

***Til § 12***

Upphæddin, sum verður veitt í fyribils uppihaldsveiting, er ásett í stk. 1 og 2.

Sambært stk. 3 verður fyribils uppihaldsveiting veitt frá 1. í mánaðinum eftir, at umsóknin er móttikin, og staðfest er, at treytirnar eru loknar - t.e., at almannahendingin er farin fram, umsøkjarin er arbeiðssøkjandi, sjúkrameldaður o.s.fr. Veitingin verður veitt fyri farna mánað og er til uppihalds frameftir, og tað vil siga, at tað er full upphædd, sum verður veitt – uttan mun til nær í mánaðinum, søkt verður og uttan mun til nær í mánaðinum, almannahendingin er farin fram. Fær viðkomandi løn útgoldna samstundis, verður lønin mótroknað í uppihaldsveitingini.

Hevur umsøkjari onki uppihaldsgrundarlag, inntil fyribils uppihaldshjálp verður útgoldin, kann bráðfeingishjálp verða veitt eftir § 19 (fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslu).

Við uppihaldsskyldu mótvegis barni er at skilja persónur, sum hevur børn búgvandi hjá sær, og persónur, sum rindar barnagjald sambært lov om børns retstilling, eisini hóast hann ikki hevur barnið búgvandi hjá sær.

Við sambúgvandi er at skilja persónur, sum býr saman við øðrum vaksnum persóni. Við vaksnum persóni er at skilja persónur, ið er 18 ár ella eldri. T.v.s., at tað er ikki parlagsstøðan, ið er avgerandi.

Uppihaldsveitingarnar sambært hesi lógini eru ásettar sum ein prosentpartur av hægstu uppihaldsveiting. Hægsta uppihaldsveiting er ásett í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

Um sosiala støðan broytist miðskeiðis í einum mánaði – t.d. ein persónur fer frá sambúgvandi til staka støðu, ella at barnið fyllir 18 ár, og uppihaldsskyldan broytist – tá verður nýggja støðan galdandi frá 1. í mánaðinum eftir, at støðan er broytt.

Persónur, sum situr dóm, hevur rætt til eina veiting, sum er 7% av hægstu uppihaldsveiting, um hann annars lýkur krøvini viðvíkjandi ogn o.ø. Um viðkomandi ikki hevur møguleika at arbeiða, er veitingin 13% av hægstu uppihaldsveiting. At tað ikki er møguligt at arbeiða kann t.d. vera orsakað av skaða/sjúku, ella at viðkomandi er avbyrgdur, ella at fyriskipanin er skipað soleiðis, at onki arbeiði er á staðnum.

***Varandi uppihaldsveiting***

***Til § 13***

Persónur, ið hevur varandi tørv á veiting til sítt og til familjunnar uppihald, kann fáa varandi uppihaldsveiting. Við varandi tørv er at skilja, at mett verður, at persónurin ikki aftur verður førur fyri sjálvstøðugt at uppihalda sær og sínari familju.

Varandi uppihaldsveiting er ásett at vera 75 % av hægstu uppihaldsveiting, tó ikki hægri enn veiting sambært § 12, stk. 1. T.d. er persónurin 25 ár ella eldri, sambúgvandi og ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, so hevði viðkomandi sambært § 12, stk. 1 havt rætt til 50 % av hægstu uppihaldsveiting. Tá kann varandi uppihaldsveitingin ikki vera hægri enn 50 % av hægstu uppihaldsveiting. Tó kann fíggjarligt ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur sambært § 15 leggjast aftrat uppihaldsveitingini, eisini hóast samlaða veitingin verður hægri enn veiting sambært § 12.

***Til § 14***

Treytin fyri at fáa tillutað varandi uppihaldsveiting er, at persónur av heilsuligum-, sosialum-, ella øðrum orsøkum, ikki kann ávísast arbeiði. T.v.s., at hann ikki skal vera førur fyri at átaka sær arbeiði.

Verður mett, at hjúnafelagin kann geva eitt munandi íkast til familjunnar uppihald, kann stuðul til útbúgving veitast sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. T.v.s., at persónurin kann móttaka varandi uppihaldsveiting, samstundis sum hjúnafelagin fær stuðul sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

***Fíggjarligt ískoyti til bústaðarútreiðslur***

Fíggjarligt ískoyti verður her nýtt, tá persónur afturat veiting ella inntøku skal hava ískoyti til uppihalds vegna fíggjarliga trongstøðu. Hinvegin verður fíggjarligur stuðul nýttur, tá persónur vegna brek ella sjúku hevur rætt til pening, sum endurbót fyri breki ella sjúkuna.

***Til § 15***

§ 15, stk. 1 gevur heimild at veita persóni við fleiri enn tveimum børnum at uppihalda ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur. Við høgar bústaðarútreiðslur er at skilja bæði rentur og avdráttir eins og høgar leiguútreiðslur.

Við í serligum førum er skilja persónur, sum hevur verið úti fyri almannahending, og har ískoyti verður veitt fyri at fyribyrgja munandi verri fíggjarligar umstøður og at geva viðkomandi møguleika at fóta sær aftur.

Í § 15, stk. 2 er ásett, at persónur, sum hevur týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar, kann fáa ískoyti til bústaðarútreiðsluna aftrat uppihaldsveitingini. Ásetingin gevur heimild til at veita ískoyti til serligar bólkar, har persónliga støðan hevur við sær høgar bústaðarútreiðslur, og har útlit ikki eru fyri at fáa annan bíligari og hóskandi bústað.

Tað kann vera persónur, sum hevur kropsligt brek, og har krøvini til bústaðin eru av ávísum slagi soleiðis, at ikki ber til at finna annan nýtiligan bústað. Ískoyti kann tí veitast til bústað, sum er serliga innrættaður ella er av slíkari støðd, at atlit eru tikin til tørvin hjá tí einstaka.

Tað kann vera ungur persónur við sálarligum trupulleikum, ið ikki kann búgva í kamari og deila køk og baðirúm við onnur. Hesin má tískil búgva í íbúð og hevur tí hægri bústaðarútreiðslur enn onnur ung.

Tað kann eisini vera persónur, sum er í slíkari sosialari støðu, at tað er neyðugt at taka serlig atlit at hansara bústaðartørvi og harvið eisini eina hægri bústaðarútreiðslu. Tað kann vera persónur, sum er sosialt sera ótilpassaður, og sum ikki fæst til lækna, og sum tí ikki hevur eina diagnosu, men har tað er ongin ivi um, at talan er um eyðsýndan sálarligan trupulleika.

Landsstýrismaðurin hevur sambært stk. 3 heimild at áseta nærri reglur um treytir fyri tillutan av fíggjarligum ískoyti til bústaðarútreiðslur, t.v.s., hvat er at skilja sum bústaðarútreiðsla, hvørjar bústaðarútreiðslur stuðul verður veittur til, og hvussu nógv kann veitast í ískoyti.

***Til § 16***

Við heimildini í § 16 kann fíggjarligur stuðul veitast til leypandi útreiðslur til húsaleigu í avmarkað tíðarskeið. Stuðulin kann ikki veitast sum stakútreiðsla sambært § 19, tí § 19 heimilar ikki leypandi útreiðslum. Ásetingin er serliga ætlað barnafamiljum og persónum við víðfevndum sosialum og sálarligum trupulleikum, sum eru í vanda fyri at verða sett út av bústaðnum vegna vantandi rindan av húsaleigu.

Hjálpin sambært § 16 er ikki treytað av, at persónur fær uppihaldsveiting sambært hesi lóg, ella at persónur hevur verið fyri einari almannahending.

Hevur persónur ella hjúnafelagi inntøku, ogn ella kann á annan hátt rinda útreiðslurnar, kann stuðul ikki veitast sambært § 16.

Skal umsitingaravtala gerast, er fortreytin, at viðkomandi er fevndur av lóggávu, ið heimilar, at tílík umsitingaravtala verður gjørd. Heimild er t.d. í § 62 í hesum uppskoti.

Ískoyti til húsaleigu kann í mesta lagi rindast tvær ferðir til sama persón. Við tvær ferðir er at skilja í tveir mánaðir. Sami persónur kann ikki venda aftur seinni og tá aftur fáa ískoyti til húsaleigu sambært hesi áseting.

***Til § 17***

Persónur, sum fær fyribils uppihaldshjálp sambært § 11, stk. 2, og sum er í fyriskipan hjá tí almenna eftir § 45, 46 ella eftir aðrari lóggávu, kann sambært § 17 fáa fíggjarligt ískoyti til

húsaleigu. Persónur, sum hevur bútilboð eftir §§ 45 ella 46 skulu sambært § 48 rinda húsaleigu. Persónar, sum fáa bútilboð frá sambært hesi lóg eru vanliga pensjónistar, og hesi hava tí eina inntøku, sum ger, at tey kunnu halda ymsar útreiðslur, sum standast av upihaldinum, so sum húsaleiga, mat o.t. Fyribils uppihaldshjálp til persónar við bútilboði er somikið lág, at tey ikki hava møguleika at halda allar hesar útreiðslur. Hesi kunnu við heimild í § 17 fáa fíggjarligt ískoyti til húsaleigu.

Við húsaleigu er at skilja húsaleiga umframt gjald fyri streym og hita. T.v.s., at stuðul verður ikki veittur til gjald til felagskassa.

Heimildin fevnir eisini um fíggjarligt ískoyti, har fleiri myndugleikar veita heildartilboð. T.d. har Mentamálaráðið veitir undirvísingartilboð, Almannamálaráðið veitir bútilboð og sosialpedagogiskan stuðul, og Heilsumálaráðið veitir viðgerð.

***Fíggjarligt ískoyti til persónar í varðhaldi***

***Til § 18***

Við heimildini í § 18, stk. 1 kann persónur, sum er varðhaldsfongslaður ella settur í varðhaldslíknandi fyriskipan, situr dóm ella er undir aðrari frælsisskerjandi fyriskipan sambært dómi, fáa ískoyti til rímiligar bústaðarútreiðslur, um so er, at tað verður mett at hava týdning fyri sosialu støðuna frameftir, at varðveitabústaðin í sambandi við útfaringarloyvi ella eftir leyslating. Tað skal hava týdning fyri at fáa persónin resosialiseraðan, at bústaðurin verður varðveittur. Stuðulin er treytaður av, at útreiðslan ikki kann haldast á annan hátt og er treytaður av, at dómurin ikki er longur enn 12 mánaðir.

Við rímiligar útreiðslur eru at skilja útreiðslur, sum eru samsvarandi tørvinum hjá persóninum, og sum verður mett at vera á støði við útreiðslustøðið á staðnum, har bústaðurin er.

§ 18, stk. 2 gevur heimild til at veita fíggjarligt ískoyti til persón, sum fær veiting sambært § 12, stk. 1, nr. 7, sum hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni og eisini er við til veruliga at uppihalda barninum. Tað merkir, at persónurin áðrenn dómin búði saman við barninum og harvið veruliga uppihelt tí. Ískoytið verður veitt eftir tørvi, t.v.s., at viðkomandi skal ikki hava inntøku ella ogn at nýta til endamálið.

Persónur, sum er settur í gjald sambært lov om børns retsstilling, kann ikki fáa ískoyti til at uppihalda barninum.

***Fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslu***

***Til § 19***

Ásetingin gevur heimild at veita persóni, sum hevur verið fyri almannahending, fíggjarligt ískoyti til neyðuga og rímiliga grundaða stakútreiðslu. Treytin er, at viðkomandi ikki sjálvur er førur fyri at halda útreiðsluna. Almannaverkið skal út frá eini tørvsmeting í hvørjum einstøkum føri meta um, hvørt persónurin hevur rætt til fíggjarligt ískoyti. Í hesum sambandi verður gjørt vart við, at § 20, stk. 2, fevnir ikki um tey, sum søkja um fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslu.

Í metingini av, um útreiðslan er rímilig, skal atlit takast til, um útreiðslan er vanlig og neyðug, og at persónar við lægri inntøku hava ráð at gjalda útreiðsluna.

Tað er, sum nevnt, ein treyt fyri at fáa ískoyti eftir § 19 stk. 1, at persónurin hevur verið fyri almannahending, men tað er ikki ein treyt at persónur eisini móttekur fyribils- ella varandi uppihaldshjálp. Støðan kann t.d. vera tann, at umsøkjarin fær arbeiðsloysistrygging, sjúkradagpening, tryggingarendurgjald ella líknandi, ið fevnir um vanligu uppihaldsútreiðslurnar, t.v.s. útreiðslur til mat, klæði og fastar framhaldandi útreiðslur, men at ein neyðug stakútreiðsla setir fíggjarstøðuna í vanda.

Ískoyti kann sambært stk. 2 eisini veitast at rinda útreiðslur til sjúkuviðgerð, heilivág, tannviðgerð og líknandi útreiðslur. Við líknandi útreiðslur er at skilja útreiðslur t.d. til fysioterapi, sálarfrøðiliga hjálp, fótarøkt og kiropraktik. Ískoyti er treytað av, at viðgerðin er fevnd av avtalu við Heilsutrygd. Ískoyti fevnir sostatt bert um egingjaldið.

Tað er ikki ein treyt fyri at fáa ískoyti sambært stk. 2, at viðkomandi skal hava verið fyri almannahending.

Treytin fyri at veita fíggjarligt ískoyti sambært stk. 1 og 2 er, at persónur og familja hansara við at rinda útreiðsluna frameftir verða munandi avmarkað at gerast fíggjarliga sjálvhjálpin. T.v.s., at øll inntøkan verður brúkt til framhaldandi fastar útreiðslur, og rindan av fyriliggjandi útreiðslu setir fíggjarviðurskiftini í vanda.

***Til § 20***

§ 20 ásetir, at tað er ein fyritreyt fyri at fáa rætt til fyribils- ella varandi uppihaldsveiting sambært § 11, stk. 1 ella 13, at umsøkjari og møguligur hjúnafelagi ikki eiga ogn, sum kann nýtast til uppihalds. Við ogn er at skilja tøkur peningur og virðir, sum eru lætt umsetilig. Tøkur peningur er t.d. reiður peningur, innistandandi, virðisbrøv og útgoldin eftirlønaruppsparing. Virðir, sum eru lætt umsetilig, eru fastognir umframt egnan bústað og kostnaðarmikið innbúgv.

Tey, sum fáa fyribils uppihaldsveiting sambært § 11, stk. 2, samanber § 12, stk. 2, eru ikki fevnd av avmarkingini við ogn í § 20, stk. 1.

Sambært § 20, stk. 2 er ásett, at persónur, sum fær fyribils uppihaldsveiting ella varandi uppihaldsveiting kann hava tøkan pening á 30.000 kr., uttan at verða mótroknaður. Við tøkan pening er at skilja reiður peningur ella innistandandi í peningastovni.

Ásetingin í § 20, stk. 3 um, hvat er at meta sum ogn, er ikki úttømandi. Hetta merkir, at aðrar ognir, enn tær í stk. 3 nevndu, kunnu metast sum ogn, eitt nú virðismiklir lutir og samlingar av ymiskum slagi, ið kunnu umsetast til pening.

§ 20, stk. 4 ásetir, hvørji virðir ikki skulu roknast sum ogn í sambandi við rætt til uppihaldsveiting. Hesi eru:

1. Peningur, sum stavar frá endurgjaldi fyri varandi mein og ikki-fíggjarligum skaða. Við ikki-fíggjarligan skaða er at skilja skaðar, sum verða mettir út frá subjektivum eyðkennum so sum tort og sviða. T.v.s., at tað ikki ber til beinleiðis at áseta fíggjarliga virðið av skaðanum,

2. tryggingarendurgjald upp til 150.000 kr. fyri hættisliga sjúku,

3. ogn frá eftirgjaldi av almannaveitingum.

Í sambandi við fyribils uppihaldshjálp er vinnutól, ið kann brúkast til framhaldandi uppihald, ikki at meta sum ogn. Tað kann t.d. vera ein útróðrarbátur ella hýruvognur, har tað er sannlíkt, at persónurin aftur kann brúka vinnutólið til at vinna til lívsins uppihald. Persónur, sum fær fyribils uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi kemur tó ikki undir hetta undantakið.

Tað vil siga, at hóast ein persónur hevur ognir, sum stava frá omanfyrinevnda, so kann viðkomandi fáa rætt til fyribils uppihaldsveiting. Fyribils uppihaldshjálp vegna arbeiðsloysi er tó ikki fevnt av hesum undantaki.

Fyri at upphædd sambært § 20, stk. 4 kann verða undantikin sum ogn, skal vera møguligt at gera upp, hvussu stór upphæddin er, tá almannahendingin fer fram ella um umsóknarmundið. Er upphæddin nýliga útgoldin, kann metast um upphæddina, hóast hon stendur á kontu, saman við øðrum flytingum, men er longur tíð fráliðin, er neyðugt, at upphæddin er skild at frá aðrari ogn.

### *Lækking av veiting*

***Til § 21***

Hjá persóni, sum hevur inntøku umframt fyribils uppihaldsveiting, verður egininntøkan drigin frá uppihaldsveitingini, áðrenn hon verður útgoldin. Inntøka, sum skal dragast frá, er ikki avmarkað t.d. til a-inntøku. Øll inntøka verður mótroknað undantikið tað, sum er ásett í stk. 3 og 4. Undantøkini fevna um barnastuðul so sum barnagjald, barnaískoyti til stakar uppihaldarar, familjuískoyti og hjálp frá privatum hjálparfelagsskapum.

Er inntøkan, sum ein persónur hevur aftrat uppihaldsveitingini, ikki skattskyldug, t.d. lestrarstuðul, verður upphæddin faldað við 1,5 og síðani drigin frá uppihaldsveitingini.

*Dømi*

Hjá einum støkum uppihaldara við einum barni, sum er í barsilsfarloyvi frá lesnaði, verður fyribils uppihaldsveitingin roknað soleiðis:

| | |
|---|---|
| Satsur stakur uppihaldari (fyribils uppihaldsveiting) | 16.491 kr. |
| Lestrarstuðul pr. mðr. er tilsamans | 7.005 kr. |
| Lestrarstuðul faldað við 1,5 | 10.507 kr. |
| Fyribils uppihaldsveitingin er 16.491 kr. frároknað 10.507 kr. = | 5.983 kr. |

Sambært stk. 3 kann persónur, sum fær fyribils uppihaldsveiting sambært § 11, stk. 2 (t.e. persónur, sum er í búfyriskipan hjá tí almenna), hava skattskylduga inntøku upp til 1.000 kr. um mánaðin, sum ikki hevur ávirkan á uppihaldsveitingina. T.v.s., at hjá hesum ber til at hava smávegis av inntøku, uttan at uppihaldsveitingin lækkar.

Sambært stk. 4 verður veiting sambært løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar, veiting sambært løgtingslóg um familjuískoyti og stuðul frá privatum felagsskapum ikki roknað sum inntøka. T.v.s., at persónur, sum móttekur fyribils- ella varandi uppihaldsveiting sambært § 11 ella 13, kann fáa hesar veitingar, uttan at uppihaldsveitingin lækkar.

### *Skyldu at taka av tilboði sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk*

***Til § 22***
Við hesi áseting verður ásett, at persónur, sum móttekur fyribils uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi, skal taka av tilboði um fyriskipan sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Persónur, sum móttekur fyribils uppihaldsveiting vegna sjúku, skal taka av tilboði um fyriskipan sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, um tað kann sameinast við sjúkuna ella avbjóðingarnar hjá viðkomandi.

Um persónur uttan haldgóða orsøk noktar at taka av tilboði um fyriskipan sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, kann Almannaverkið steðga fyribils uppihaldsveitingini.

Eisini er ásett, at tað er ein treyt fyri at fáa fyribils uppihaldsveiting vegna sjúku, at persónur fylgir møguligum ávísingum frá lækna.

### *Eftirmeting*

***Til § 23***
Sambært ásetingini skal Almannaverkið í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at persónur hevur fingið játtað fyribils uppihaldsveiting, meta, um grundarlag er fyri hjálp eftir aðrari lóggávu. T.d. um persónurin við egnum mátti seinni megnar at blíva sjálvforsyrgjandi, um viðkomandi lýkur treytirnar fyri at koma í fyriskipan sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, ella um søkjast skal um fyritíðarpensjón.

## Kapittul 4. Endurbót vegna brek ella varandi sjúku (§§ 24-30)

### *Endurgjald fyri meirútreiðslur*

***Til § 24***
Endurgjald fyri meirútreiðslur av at uppihalda barni, ið ber brek ella hevur varandi sjúku, er at meta sum ein fíggjarlig endurbót fyri tær forðingar og avmarkingar, ið brekið ella sjúkan hevur við sær, og er ein liður í at tryggja hesum børnum javnbjóðis møguleikar. Endamálið er at fyribyrgja, at brekið ella sjúkan hjá barninum versnar ella fær aðrar og meiri álvarsligar fylgjur, eins og endamálið er at stuðla undir, at familjan fær eina so vanliga tilveru sum møguligt, og at barnið kann vera sum longst heima.

Ásetingin gevur heimild til at veita endurgjald fyri ávísar og neyðugar meirútreiðslur, sum standast av at uppihalda barni heima, ið ber sálarligt ella likamligt brek ella hevur varandi sjúku. Familjurnar kunnu hava ein tørv og serligar útreiðslur, sum aðrar familjur ikki hava, og endurgjaldið skal vera endurbót fyri, at familjurnar nøkta henda tørv.

At barnið er heimabúgvandi merkir, at tað býr hjá foreldrum, fosturforeldrum ella øðrum, ið hava átikið sær skylduna at uppihalda tí og útvega barninum tað, sum tí tørvar fyri at liva: mat, klæði, song, skúlaútgerð, leikur, barnaansing o.s.fr.

At barnið hevur varandi sjúku nýtisti ikki at vera í fatanini ólekiligt ella at vera sjúkur fyri lívið, men vegleiðandi kann sigast, at sjúkan varar fleiri ár.

Sambært § 5, stk. 1 er lógin galdandi fyri persón, ið lógliga uppiheldur sær í Føroyum, og sum ikki hevur rætt til veiting og tænastur sambært aðrari lóggávu. Hetta merkir, at fíggjarligur stuðul til meirútreiðslur bert verður veittur til tann partin, ið foreldur veruliga rinda, og sum ikki verður hildin sambært aðrari hjálparfyriskipan hjá tí almenna. Parturin, ið Heilsutrygd rindar í sambandi við viðgerð, skal sostatt dragast frá stuðulsupphæddini.

Støddin á stuðlinum skal metast við støði í, hvussu stór meirútreiðslan er í tí einstaka førinum. Tí verður vanliga ikki latin nøkur føst upphædd. Meirútreiðslan verður endurgoldin, eftir at útreiðslan er skjalprógvað. Tað er altíð bíligasta ráðiliga loysnin, ið stuðul kann latast til.

Fíggjarligi stuðulin er ikki bundin av inntøkuviðurskiftunum hjá umsøkjara. Viðkomandi hevur rætt til at fáa endurgoldið alla meirútreiðsluna.

*Til § 24, stk. 1, nr. 1*
Við uppihaldsútreiðslur vegna brek ella sjúku er at skilja útreiðslur, ið eru ein neyðug avleiðing av brekinum ella sjúkuni, og sum er ein útreiðsla, sum liggur uttan fyri vanligu útreiðslurnar, ið standast av at uppihalda barni í heiminum. Endurgjald fyri meirútreiðslur verður tískil bert veitt til útreiðslur, ið familjan ikki hevði havt, um barnið ikki bar brek ella hevði sjúku. Familjan skal við stuðlinum ikki gerast betur fyri enn aðrar familjur

Tól, ið gerast alsamt vanligari hjá børnum at hava, eru ikki at meta sum ein meirútreiðsla. Sum dømi kann nevnast fartelefonir, sjónvarp, telda og teldil. Tó kann stuðul veitast, tá talan er um serliga tilevning, útgerð ella tænastu. Í hesum førum skal vanligi prísurin á tólinum dragast frá útreiðsluni, áðrenn stuðul verður veittur.

Sum dømi um, hvat er at meta sum ein meirútreiðsla, kann nevnast útreiðslur til serligan klæðnaútbúnað vegna óvanliga nógv slit, serligar skógvar, serligan kost ella kostískoyti vegna diabetes ella ovurviðkvæmi, flutningsútreiðslur, serligt tilevnaðar leikur, serlig skeið til foreldur, ið hava beinleiðis samband við ansing, røkt, uppaling, venjing, ríðing og stimbran o.a

*Til § 24, stk. 1, nr. 2*
Útreiðslur til viðgerð vegna brek ella sjúku eru at meta sum meirútreiðsla. Fyritreytin fyri at veita stuðul er vísandi til § 5, stk. 1 í lógini, at viðgerðin ikki hoyrir undir heilsuverkið ella kann veitast eftir aðrari lóggávu.

Kravið fyri at fáa stuðul til viðgerð er, at viðgerðin er sambært avtalu við Heilsutrygd. Talan er m.a. um viðgerð til fótterapi, viðgerð hjá sálarfrøðingi, fysioterapeuti, ergoterapeuti og kiropraktori.

Aðrar viðgerðir, ið ikki verða veittar sambært avtalu við Heilsutrygd, eru ikki fevndar av hesari ásetingini. Sum dømi um tílíkar viðgerðir kunnu nevnast Move and Walk og sokallaðar alternativar viðgerðir, hvørs háttalág byggir á ástøði og hugtøk, ið ikki rúmast innan náttúruvísindina.

Sama er galdandi fyri viðgerð, ið ikki er ein beinleiðis avleiðing av breki ella sjúku. Eitt barn kann hava tørv á ávísari viðgerð, tó at hetta ikki kann metast at vera brek ella sjúka. Sum dømi kann nevnast viðgerð fyri SI trupulleikar og sálarfrøðiligar viðtalur hjá sálarfrøðingi, eitt nú vegna tunglyndi.

Stuðulin til viðgerð fevnir somuleiðis um stuðul til skeið og upplæring í sambandi við viðgerð.

*Til § 24, stk. 2*

Í § 24, stk. 2 er ásett sum treyt fyri at veita stuðul til viðgerð, at viðgerðin er neyðug og sambært tilmæli frá viðkomandi lækna. Almannaverkið kann sostatt ikki veita fíggjarligan stuðul til viðgerð uttan so, at ein læknalig tilráðing liggur til grund.

Um barnið hevur brek ella sjúku, og er tilknýtt ávísum serlækna, so er tað serlæknin, ið er at meta sum viðkomandi lækni í lógarinnar høpi og skal grundgeva fyri, hví viðgerðin er neyðug. Verður barnið innlagt á sjúkrahús, og sjúkrahúsið mælir til ávísa viðgerð, so kann tað vera sjúkrahúslæknin, ið er viðkomandi lækni.

Er talan um barn, ið hevur varandi og støðuga sjúku ella brek, men sum ikki hevur regluligt samband við serlækna ella sjúkrahús av hesi orsøk, so kann kommunulækni barnsins vera viðkomandi lækni. Tá er ikki neyðugt, at barn skal fáa tilvísing til viðgerð frá serlækna, ið annars lítið ella einki samband hevur við barnið, um grundgevingin frá kommunulækna kann vera nøktandi til tess, at Almannaverkið kann taka avgerð á fullgóðum grundarlagi.

Er talan um at endurnýggja verandi umsókn til viðgerð, ið áður er játtað, kann Almannaverkið gera av at endurnýggja viðgerðina við støði í einari meting frá tí, ið hevur viðgjørt barnið. Metir Almannaverkið metingina frá viðgera ikki vera nøktandi, kann Almannaverkið biðja um læknaliga grundgeving fyri at endurnýggja umsóknina.

*Til § 24, stk. 3.*
Fíggjarligur stuðul til leypandi meirútreiðslur verður sum meginregla játtaður fyri í mesta lagi eitt ár í senn. Játtanarskeiðið skal tó tillagast tørvinum hjá einstaka barninum, og skal Almannaverkið tí gera eina ítøkiliga meting, treytað av, hvat stuðulin verður játtaður til.

Fyri at sleppa undan óneyðugum órógvi hjá familjum, ið hava barn við breki ella sjúku, kann Almannaverkið, tá barnið hevur støðugan og varandi tørv, avgera at leingja játtanarskeiðið. Sum dømi kann nevnast viðlíkaldsvenjing til børn við fjølbreki. Hesi børn kunnu eisini hava støðugan og varandi tørv á eitt nú blæum. Almannaverkið skal gera eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri.

### *Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku*

***Til § 25***
Við hesi ásetingini er heimild at veita endurgjald fyri inntøkumiss, til persónar, sum hava inntøkumiss, tí tey í heiminum ansa barni við breki ella varandi sjúku, doyggjandi ella persóni við seinheilaskaða.

Persónur, sum hevur rætt endurgjald fyri inntøkumiss sambært aðrari lóggávu, t.d. dagpening vegna sjúku, skal brúka tann møguleikan fyrst, samanber § 5 og serligar viðmerkingar til § 5.

*Til stk. 1, nr. 1, stk. 2 og stk. 3*
Endurgjald verður veitt fyri mista arbeiðsinntøku, tá tað vegna brek ella varandi sjúku er neyðugt at ansa barninum heima, ella at vera hjá barninum í ávíst tíðarskeið í sambandi við viðgerð. Sostatt kann talan vera um persón, sum fer av arbeiðsmarknaðinum fyri at vera um barnið fult og heilt, og talan kann vera um persón, sum fer í lægri starvsbrøk ella persón, sum er burtur frá arbeiði ávís tíðarskeið.

Ásetingin um endurgjald fyri inntøkumiss fevnir um børn, sum búgva heima. Tó kann endurgjald verða veitt til foreldur ella fosturforeldur at børnum, sum hava búpláss, tá tað í sambandi við viðgerð á sjúkrahúsi ella aðra viðgerð hevur týdning, at foreldur ella fosturforeldur eru um barnið.

Endurgjald fyri inntøkumiss verður sambært stk. 3 veitt til foreldur og fosturforeldur. Men tað kunnu vera støður, har foreldur av ymsum álvarsomum orsøkum, sum t.d. sjúku ella føðing, ikki kunnu átaka sær at ansa barninum heima ella fara við til viðgerðir. Undir slíkum umstøðum er heimild at veita endurgjald til annan persón, sum er knýttur at barninum, sum t.d. ommu, abba, systkin hjá foreldrum ella øðrum.

*Til § 25, stk. 1, nr. 2*
Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku kann veitast, tá persónur undir fólkapensjónsaldur, sum ynskir at doyggja heima, verður ansaður av persóni, sum ein hevur eitt serligt og tætt tilknýti til. Við heima er at skilja í heiminum hjá tí sjúka ella í heiminum hjá ansaranum.

Tað er ein treyt fyri at fáa endurgjald fyri inntøkumiss, at tann sjúki er røktarkrevjandi og ikki fær lekjandi viðgerð. Tann sjúki skal vera doyggjandi, og t.v.s., at hann væntast at liva í nakrar mánaðir. Røktartørvurin skal samsvara við eitt fulltíðarstarv, og tað merkir, at ansarin ikki skal hava aðrar arbeiðsinntøkur.

Endurgjald verður veitt í tíðarskeiðinum, sum ansarin røktar tann sjúka. Rætturin til endurgjald dettur burtur, samstundis sum ansarin steðgar at røkta tann sjúka. Er orsøkin, at tann ansaði doyr, hevur ansarin rætt til endurgjald í 14 dagar eftir andlátið.

*Til § 25, stk. 1, nr. 3*

Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku kann veitast persóni, sum ansar persóni undir fólkapensjónsaldur við seinheilaskaða, sum vegna vantandi bústað sambært §§ 45 ella 46 verður ansaður heima Við heima er at skilja í heiminum hjá tí sjúka ella í heiminum hjá ansaranum.Fær persónurin bjóðað búpláss men ikki tekur av, fellur rætturin til endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku burtur.

*Til § 25, stk. 4.*
Endurgjaldið verður sambært stk. 4 veitt, tá persónur er doyggjandi. T.v.s., at sjúkrahúsviðgerð er útlitaleys, og persónurin er røktarkrevjandi. Persónur, sum er so kognitivt skaddur, at viðkomandi ikki kann vera einsamallur heima, er eisini at rokna sum røktarkrevjandi.

*Til § 25, stk. 5*
Rætturin til endurgjald dettur burtur, tá ansingin steðgar. Er talan um ansing av barni, og barnið doyr, verður rætturin til endurgjald varðveittur í 3 mánaðir eftir andlátið. Við ansing av persóni við seinheilaskaða og við ansing av doyggjandi verður rætturin til endurgjald varðveittur í 14 dagar eftir, at tann ansaði er deyður.

*Til § 25, stk. 6*

Í § 25, stk. 6 er ásett, at endurgjald verður ikki veitt fyri tann partin av inntøkuni, sum er hægri enn 25.000 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn og umframt bundna eftirlønargjaldið sbrt. løgtingslóg um eftirløn. Endurgjaldið kann í mesta lagi vera 25.000 kr. um mánaðin, og harafturat kemur frítíðarløn og bundna eftirlønargjaldið. T.v.s., at endurgjaldið saman við frítíðarløn og eftirlønargjaldi tilsamans kann vera hægri enn 25.000 kr. um mánaðin.

Tann, sum hevur inntøku lægri enn 25.000 kr., fær fult endurgjald. Hjá honum, sum hevur inntøku, sum er hægri enn 25.000 kr., verður endurgjaldið ásett til 25.000 kr.

Tað er bert persónur, sum fær endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært stk. 1, nr. 1, sum kann fáa fara niður í lægri starvsbrøk ella fáa fyri einstakar dagar. Persónur, sum fær endurgjald sambært stk. 1, nr. 2 og 3, kann bert fáa endurgjald fyri at røkja røktaruppgávuna fulla tíð.

Hjá persóni, sum fer niður í lægri starvsbrøk ella fær endurgjald fyri einstakar dagar sambært stk. 1, nr. 1, kann endurgjald og møgulig arbeiðsinntøka í mesta lagi vera 25.000 kr. um mánaðin tilsamans (umframt frítíðarløn). T.d. ein persónur, sum hevur inntøku á 30.000 kr. um mánaðin, men sum ferð niður í hálva tíð, fær løn frá arbeiðsgevara á 15.000 kr. og endurgjald fyri inntøkumiss á 10.000 kr.

***Fíggjarligur stuðul til bil***

***Til § 26***

Stk. 1 hevur til endamáls at fáa greiða lógarheimild fyri galdandi siðvenju í sambandi við játtan av stuðli til bil. Almannaverkið játtar stuðul til bil til persónar við varandi avmarkaðum likamligum ella sálarligum førleika.

Treytirnar fyri at fáa játtað stuðul til bil eru, at møguleikarnir hjá tí einstaka persóninum at fáa ella røkja eitt starv ella taka eina útbúgving orsakað av brekinum eru munandi skerdir, ella at ein bilur í avgerandi mun bøtir um avleiðingarnar av brekinum hjá tí einstaka persóninum.

Stuðulin, ið verður veittur, er eitt rentufrítt lán á í mesta lagi 180.000 kr. Upphæddin verður tó prístalsjavnað í kunngerð. Meginreglan í sambandi við stuðul til bil er, at játtað verður stuðul til bíligasta nøktandi bilin.

Um serlig viðurskifti gera seg galdandi í sambandi við avmarkaða førleikan, kann Almannaverkið játta rentu- og avdráttarfrí lán til at gjalda munin millum galdandi upphædd í stk. 1 og ein dýrari bil, sambært stk. 2.

Stk. 3 staðfestir galdandi siðvenju, har Almannaverkið játtar stuðul til meirútreiðslur til vektgjald, tá ið talan er um bilar oman fyri 1300 kg. Við hesi broyting verða brúkarar av vanligum bilum javnsettir við brúkarar av stórum bilum, umframt at ikki longur er ivamál um, hvørt heimild er at játta stuðul til meirútreiðslur fyri vektgjald. Gjørt er greitt, at talan er um bilar, ið eru skrásettir áðrenn 1. januar 2017 ella endurskrásettir eftir 1. januar 2017. Endurskrásettur merkir, ein bilur, ið er tikin úr føroysku akfarsskránni og skrásettur aftur.

Stk. 4 er grundað á sama sjónarmið, ið ger seg galdandi í stk. 3, men ger greitt, at stuðul verður veittur til meirútreiðslu til umhvørvisgjald á bilum fevndir av nýggu skipanini um umhvørvisgjald.

Í stk. 5 kann landsstýrismaðurin áseta nærri fyrisitingarligar reglur um treytir og umstøður at fáa stuðul, afturrindan av láni, treytir fyri at játta stuðul til vektgjald og umhvørvisgjald o.a.

***Stuðul til bústaðarbroyting***

***Til § 27***

Endamálið við at játta stuðul til bústaðarbroytingar er at gera bústaðin egnaðan sum tilhald hjá viðkomandi. Fyri at vera innan fyri virkisøkið fyri bústaðarbroytingar er tað eitt krav, at persónurin á bústaðnum hevur munandi og varandi avmarkaðan likamligan ella sálarligan

førleika. Tørvurin skal vera ítøkiligur og staðfestur. Harumframt er tað eitt krav, at broytingin skal vera mett neyðug av Almannaverkinum, og at broytingin skal gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald. At broytingin skal gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald hjá persóninum, ið hevur tørv á bústaðarbroytingini, kann í roynd og veru merkja, at onnur, ið búgva í bústaðnum kenna tað sum, at bústaðurin er verðsnaður sum tilhald hjá teimum. T.d. at fermetratalið á stovuni minkar, tí eitt nýtt serliga útgjørt vesið tekur fermetrar frá stovuni.

Ásetingin er ikki aldurstreytað.

Stuðul verður veittur uttan mun til fíggjarligu viðurskiftini hjá viðkomandi. Stuðul verður veittur til bæði leigu- og eigarabústað. Stuðulin verður veittur eftir einari ítøkiligari meting av tørvinum á bústaðarbroyting. Stuðul verður ikki veittur til bústaðarbroyting, ið einans ber brá av umvæling, vanligum viðlíkahaldi ella nútímansgerð.

Dømi: Ein persónur við skerdum virkisføri, ið hevur trupulleikar at nýta baðikar, søkir um at fáa brúsuviki í staðin fyri. Metingin av at gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald kann tá vera, at stuðul verður játtaður til hondbrúsu, og at gólvið á vesinum samstundis verður gjørt gliðtrygt.

Dømi: Ein eldri persónur, ið býr í eldri húsum við 3 hæddum, megnar ikki longur at nýta vesi, ið er á loftinum, tí hann ikki fær gingið trappurnar. Metingin av at gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald kann tá vera, at miðhæddin, ið persónurin fær búleikast á, verður innrættað við einum vesi.

Hevur bústaðarbroytingin eina munandi virðisøking við sær, eisini fyri onnur, verður tann parturin av stuðlinum, ið samsvarar við virðisøkingina, veittur sum eitt rentu- og avdráttarfrítt lán, ið fellur til gjaldingar við eigaraskifti. Metingin av virðiøkingini tekur støði í virðinum av bústaðnum innan bústaðarbroytingin er framd og aftaná at hon er framd. Metingin verður umbiðin av Almannaverkinum og gjørd av veitara, ið hevur hollar royndir við keyp og sølu av fastogn í Føroyum. Heimild verður eisini givin landsstýrismanninum at áseta eitt prosentmark fyri, nær virðisøkingin er so munandi, at hon verður veitt sum eitt rentu- og avdráttarfrítt lán.

Í teimum heilt serligu førunum, har Almannaverkið hevur mett, at stuðul sambært stk. 1 ikki er nøktandi, kann Almannaverkið síðani gera av, at stuðul kann veitast til at gjalda útreiðslurnar at útvega ein annan bústað til persón við munandi og varandi avmarkaðum likamligum ella sálarligum førleika. Treytin fyri, at stuðul kann játtast at útvega persóni ein nýggjan bústað, er, at annar bústaður ikki kann ávísast. Henda treyt hevur t.d. týdning í mun til, um annar hóskandi bústaður kann ávísast umvegis almenna bústaðarfelagið.

Tann parturin av stuðlinum, ið samsvarar við munin millum virðismetingina av bústaðnum, ið viðkomandi hevði og bústaðnum, ið viðkomandi hevur útvegað sær, verður veittur sum eitt rentu- og avdráttarfrítt lán, ið fellur til gjaldingar við eigaraskifti. Metingin av virðisøkingini tekur støði í søluvirðinum av fyrrverandi bústaðnum og keypsvirðinum av núverandi bústaðnum. Metingin verður umbiðin av Almannaverkinum og gjørd av veitara, ið hevur hollar royndir við keyp og sølu av fastogn í Føroyum.

Sambært stk. 5 kann Almannaverkið gera av, at umsókn um stuðul til ávísa bústaðarbroyting ikki verður gingin á møti, undir nærri ásettum treytum.

Endamálið við hesum er at avmarka ábyrgdina hjá myndugleikanum fyri viðurskiftum, ið persónurin, ið søkir um stuðul til bústaðarbroyting, greitt átti at tikið hædd fyri. Krav er um, at tað skal verða eyðsýnt, at bústaðarbroytingin ikki hevur gjørt bústaðin betur egnaðan sum tilhald.

At tað skal verða ‘eyðsýnt’, er t.d. um ein persónur, ið hevur tørv á koyristóli, hevur útvegað sær eini onnur hús at búleikast í, ið eru í 3 hæddum og tørva eina bústaðarbroyting, ið er ein lyfta.

Afturat kravinum um, at tað skal vera ‘eyðsýnt’, er eitt krav um ávísa ítøkiliga vitan hjá persóninum, ið søkir um stuðul til bústaðarbroyting. Førleikar, praktiskar royndir, útbúgving, skjalfestar upplýsingar um heilsustøðuna og sálar- og menningarstøðan hjá persóninum eru tættir, ið hava týdning í metingini av um persónurin hevur ella átti at havt vitan um viðurskiftini.

At persónur ‘átti at verið vitandi um hesi viðurskifti’, er t.d. um ein persónur, ið hevur tørv á koyristóli, ella innan styttri tíð, ið er í mesta lagi 12 mánaðir, gerst koyristólsbrúkari og hevur ítøkiliga vitan um hettar, men hevur hóast alt útvegað sær eini onnur hús at búleikast í, ið eru í 3 hæddum og tørva eina bústaðarbroyting, ið er ein lyfta.

Harafturat skal bústaðarbroytingin hava ein munandi kostnað við sær. Hetta merkir at bústaðarbroytingin skal kosta 50.000 kr. ella meiri. Soleiðis eru lutfalsliga smáar bústaðarbroytingar, so sum niðurtøka av veggi o.a., undantiknar.

Undir einum skulu viðurskiftini, ið lýst eru omanfyri, metast sum grovt óskettin atburður.

Grovt ósketni verður vanliga mett sum ein óskettin atburður, ið víkir munandi frá einum atburði, ið eftir øllum líkindum at døma kann krevjast í sambandi við eina ítøkiliga støðu.

Almannaverkið ger eina ítøkiliga heildarmeting av umstøðunum og grundarlagnum undir avgerðini hjá persóninum at umbyggja bústað ella útvega annan bústað. At viðurskiftini skulu metast sum grovt ósketni, tekur metingin hjá Almannaverkinum hædd fyri møguligum linnandi umstøðum, ið kunnu metast sum minni ósketni (dk: simpel uagtsomhed) t.e. um bústaðarbroytingin t.d. kostar 75.000 kr. og ivi kann setast við um persónurin hevði nøktandi vitan um viðurskiftini, t.d. um tað ikki er greitt, um persónurin við vissu veit at hann gerst koyristólsbrúkari innan styttri tíð.

At talan er um, at umsókn um ávísa bústaðarbroyting ikki verður gingin á møti, merkir, at umsøkjarin kann tillaga eina aðra umsókn, møguliga í samráði við Almannaverkið, soleiðis at funnið verður útav um nøkur loysn er at finna, ið ger bústaðin betri egnaðan sum tilhald hjá persóninum, ið tørvar bústaðarbroytingina. Sleppast kann tó ikki undan møguleikanum fyri, at einasta loysnin er ein útvegaður bústaður í hesum høpi verður seldur.

Dømi um grovt ósketni: Ein familja býr í einum sethúsum í tveimum hæddum saman við einum barni, ið hevur fjølbrek. Familjan fer í holt við at innrætta ein óinnrættaðan kjallara. Bústaðarbroytingin kostar 400.000 kr. Familjan hevur bæði ítøkiliga vitan um tørvin hjá barninum og krøvini frá Almannaverkinum, og tað er eyðsýnt at samlaða bústaðarbroytingin fer útum tað, ið kann krevjast av at gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald hjá barninum. Familjan kann søkja einaferð enn um bústaðarbroyting, og Almannaverkið ger tá eina meting av, hvat kann gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald hjá barninum. Metingin kann verða, at tørvur er á einari bústaðarbroyting á 2. hædd, ið er veghæddin, ið kostar 100.000 kr.

Somu krøv, ið nevnd eru omanfyri, verða sett einum persóni, ið søkir um bústaðarbroyting vegna ein annan persón.

§ 27, stk. 6 heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um treytir og umstøður at veita stuðul sambært stk. 1 og 3, nær og í hvønn mun veitti stuðulin skal rindast aftur og nær afturgjaldskylduga upphæddin kann tryggjast við veðhaldi í ognini og um fyrning. Harafturat verður ásett eitt prosent fyri nær Almannaverkið metir, at virðisøking í mun til lán til bústaðarbroyting er ‘munandi’.

***Bústaðarsosialur tørvur***

***Til § 28***
Sambært § 28 kann persónur fáa ávíst ein leigubústað, um viðkomandi hevur bústaðarsosialan tørv. Ásetingin vísir til leigulógina, sum í § 24b heimilar Almannaverkinum ávísingarrætt til í minsta lagi 5. hvønn leigubústað hjá almennum bústaðafelag. § 24b í leigulógini áleggur samstundis Almannaverkinum at borga fyri ábyrgd leigarans mótvegis útleigara.

Sambært § 24b, stk. 7 kann Almannaverkið eftir somu treytum gera avtalu við privatan útleigara um ávísingarrætt til leigubústaðir. Slíkar avtalur skulu góðkennast av landsstýrismanninum.

§ 28, stk. 1 í hesum lógaruppskoti veitir persóninum rættindi, meðan § 24b í leigulógini veitir Almannaverkinum heimild at ávísa og skyldu at borga fyri ábyrgd leigarans.

Leiðreglurnar um bústaðarsosialan tørv vísa á, at talan er um persónar, ið hava slíkan tørv, at hesir ikki kunnu útvega sær ein bústað á jøvnum føti við onnur. Hugtakið fevnir breitt og kann við tíðini broyta týdning.

Bústaðarsosialur tørvur kann standast av heilsuligum ávum. T.d. persónar, ið vegna brek ella sjúku – undir hesum eisini sálarsjúku – hava tørv á einum serligt innrættaðum bústaði, ella vegna sítt brek ikki hava møguleika at útvega sær egnan bústað á jøvnum føti við onnur. Talan kann eisini vera um persónar, sum hava búð í einum vardum bústaði, men har tað nú verður mett, at persónurin hevur møguleika fyri at klára seg sjálvan.

Tað kunnu eisini vera sosialar orsakir til, at ein persónur ikki megnar at útvega sær ein bústað á jøvnum føti við onnur. Sum dømi kunnu nevnast persónar, ið verða fasthildnir í einari sosialari støðu vegna tað, at teir ikki megna at útvega sær ein bústað, persónar, sum eru fíggjarliga sperdir, og sum tørva hjálp at fáa síni viðurskifti skipað, persónar, ið hava tørv á stovnslíknandi fyriskipan í egnum heimi o.s.fr.

Fortreytin fyri, at Almannaverkið kann ávísa, er altíð, at persónurin megnar at búgva í sjálvstøðugum bústaði.

Ásetingin fevnir um leigubústaðirnar hjá almenna bústaðafelagnum, Bústaðir. Koma fleiri almenn bústaðafeløg, verða hesi eisini fevnd av ásetingini. Ásetingin fevnir harafturat um teir bústaðir, sum Almannaverkið hevur gjørt avtalu við privatan útleigara um sbrt. reglunum í leigulógini.

Vardir bústaðir, skipaðir sambært hesi løgtingslóg, og røktarbústaðir, skipaðir sambært løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m., eru ikki fevndir av ásetingini.

§ 5 í lógaruppskotinum tilskilar, at lógin ikki er galdandi fyri persónar, ið hava rætt til tænastu sambært aðrari lóggávu. Persónur, ið hevur bústaðarsosialan tørv, men sum eisini lýkur treytirnar til visitering sambært løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m., skal sostatt ikki ávísast eftir hesi áseting.

§ 28, stk. 2 tilskilar, at útreiðslurnar, ið standast av § 24b í leigulógini, skulu rindast sambært hesi løgtingslóg. Tað sama stendur í § 24b, stk. 6 í leigulógini, tó at leigulógin vísir til forsorgarlógina, sum henda lóg kemur í staðin fyri.

***Hjálparráð***
*Til § 29 stk. 1.*

Persónur við virkistarni, orsakað av likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku, kann fáa stuðul til hjálparráð. Skipanin við stuðli til hjálparráð er ætlað persónum í øllum aldursbólkum og er ikki aldurstreytað og heldur ikki treytað av ávísum bústaði. Tað vil siga, at rætturin kann troytast uttan mun til um persónurin býr á bútilboðið ella ikki.

Tað er tørvurin hjá tí einstaka, sum er avgerandi fyri, um persónur kann fáa stuðul til hjálparráð sambært hesi áseting, samanber tó stk. 3.

Stuðul til hjálparráð skal kompensera fyri virkistarni hjá persóni soleiðis, at persónurin kann fáa eitt – samanborið við onnur - so javnbjóðis lív sum møguligt.

Treytirnar fyri at fáa stuðul annars eru, at hjálparráði:

1) er neyðugt fyri at persónur fær ella varðveitir tilknýti til arbeiðsmarknaðin,
2) munandi bøtir avleiðingar av sjúkuni ella brekinum, ella
3) munandi lættir um gerandisdagin í heiminum.

Við hjálparráð er at skilja bæði kropsborin hjálparráð sum t.d. brillur, hoyritól, ymiskar protesur og serligan fótbúna, og um hjálparráð, ið verða veitt sum lán, sum t.d. koyristólar, samskiftisútgerð, røktarsong og ymisk flutningstól.

Hugtakið hjálparráð fevnir um hópin av tólum og lutum, sum eru framleidd ella verða nýtt til at bøta um likamligt ella sálarligt brek ella varandi sjúku.

Stuðul verður veittur til bíligasta nøktandi hjálparráð. Metingin av, hvat er tað bíligasta og nøktandi, verður gjørd í mun til tann einstaka og tørvin hjá viðkomandi.

*Til § 29, stk. 2*
Talan er um áseting, sum higartil hevur verið í kunngerð um stuðul til hjálparráð. Mett verður, at tá talan er um so avgerandi viðurskifti í mun til rættin hjá borgarum til stuðul til hjálparráð, so eigur treytin at verða lógarfest.

Ásetingin nágreinar, at við virkistarn, orsakað av likamligum ella sálarligum breki ella sjúku, er at skilja, at útlit ikki eru fyri, at heilsuviðurskiftini fara at betrast, og at tað frameftir fer at vera varandi tørvur á at bøta um brekið ella sjúkuna.

Ásetingin er framhald av verandi skipan, har treytin fyri at fáa stuðul til hjálparráð er, at talan er um varandi tørv, og at stuðul ikki kann latast til fyribils nýtslu av hjálparráðum sambært hesi løgtingslóg, uttan so, at nýtslan er sett í sambandi við eina endurvenjingartilgongd, samanber § 37.

*Til § 29, stk. 3*
Ásetingin ger greitt, at hjálparráð sambært stk. 1 ikki verður ikki veitt persóni, ið býr á røktarheimi ella eldrasambýli sambært løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. Tað vil siga, at tað er ábyrgdin hjá avvarðandi kommunu ella kommunala samstarvi at útvega neyðug hjálparráð, ið ikki eru persónligt tillagaði hjálparráð, sum partur av einum grundútbúnaði á røktarheimum og eldrasambýlum. Talan er um útgerð, sum kann brúkast av fleiri persónum sum t.d. lyftir, vesihækkarar, hvílistólar, røktarsengur, vanliga koyristólar, gangihjálpartól og vanliga trýstsársfyribyrgjandi útgerð. Tað er skyldan hjá kommunu ella kommunala samstarvi, sum veitir bústaðartilboðið, at tryggja, at neyðug útgerð er á bústøðunum og at gjalda fyri útgerðina.

Myndugleikar hava síðani 2010 havt møguleika fyri at leiga útgerð frá Hjálpartólamiðstøðini mótvegis gjaldi, og er ætlanin ikki at broyta hesa skipan.

Ásett er tó eisini, at persónur, sum býr á ellis- og røkarheimi ella eldrasambýli, ið er skipað sambært løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., hevur rætt til stuðul til persónlig tillagað hjálparráð.

Persónlig tillagað hjálparráð, t.d. ortopediskir skógvar, hoyritól o.l., ið skulu sertillagast tørvinum hjá tí einstaka, herundir eisini sergjørdir ella sertillagaðir koyristólar, eru at meta sum persónlig tillagað hjálparráð.

*Til § 29, stk. 4*
Higartil hevur skipanin verið soleiðis, at hjálpartól, sum ikki eru kropsborin, skulu latast inn aftur til Almannaverkið, tá persónur flytir á bústað, sum er skipaður sambært forsorgarlógini, løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.. Tólini, sum skulu latast inn kunnu vera t.d. gólvlyftir ella serlig song við luftmadrassu og baðiumstøður. Talan kann t.d. eisini verða um lyftir innan- og uttandura (atkoma).

Tað merkir, at hesir persónar fáa trupult at vitja aftur og gista hjá foreldrum ella maka, og í fleiri førum er hetta ógjørligt, tí tey hjálpartól, sum eru neyðug, ikki eru í uppruna heiminum longur.

Orðingin 'persónar, ið standa honum nær' er sett inn til tess at fevna um tær støður, har persónurin hevur búð hjá øðrum enn foreldrunum, t.d. ein maki.

Almannaverkið ger eina meting av, um tað er neyðugt, at hjálpartólið verður varðveitt í uppruna heiminum, og um persónurin í roynd og veru fær troytt hjálpartólið, ið er varðveitt ísv. atkomu og uppihald.

Talan er einans um at varðveita verandi hjálpartól.

Talan er um, at persónurin fær troytt hjálpartólið undir teimum fortreytum, ið vóru galdandi, áðrenn hann flutti úr bústaðnum. Sipað verður her til, um persónurin er viknaður ella verðsnaður so mikið, at hjálpartólið ikki longur tænir sínum endamálið í mun til atkomu og uppihald á uppruna bústaðnum.

Persónur, sum fær bústaðartilboð sambært løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., er ikki fevndur av hesi áseting.

*Til § 29, stk. 5*
Almannaverkið ger av, um hjálparráð verður varðveitt fyri 12 mánaðir í senn. Um hjálparráðið skal varðveitast, eftir at 12 mánaðir eru farnir, ger Almannaverkið eina nýggja meting av støðuni sambært stk. 4. Metingin hjá Almannaverkinum skal gerast innan játtanartíðarskeiðið á 12 mánaðir er av.

*Til § 29, stk. 6*
Í stk. 6 er ásett, at vanligt innbúgv ella brúkslutir ikki eru at skilja sum hjálparráð, hóast hesi verða nýtt í eini serstøðu. Stuðul til hjálparráð snýr seg um kompensasjón, t.v.s. ikki um at fáa stuðul til vanligar lutir, sum flest øll fólk hava tørv á. Tá er talan um um yvirkompensasjón.

Tí verður ásett, at vanligir brúkslutir ikki eru at meta sum hjálparráð, hóast hesir eru eitt sindur øðrvísi og í dýrara endanum av brúkslutum, sum flest øll fólk nýta.
Talan kann her vera um elektriskar dósaupplatarar, ergonomiskar uppvaskibustir, teldur o.a.

Myndugleikar hava síðani 2010 havt møguleika fyri at leiga t.d. innbúgv og útgerð frá Hjálpartólamiðstøðini mótvegis gjaldið, og ætlanin er, at verandi skipan heldur fram.

*Til § 29, stk. 7*
Talan er um framhald av verandi áseting.

Persónar, sum eru 18 ár og eldri, kunnu fáa stuðul til serkost og serlig klædnapløgg, sum eru at rokna sum hjálparráð.

Persónur, sum í heiminum uppiheldur barni við likamligum ella sálarligum breki ella sjúku, hevur sambært § 24 í hesi løgtingslóg rætt til at fáa endurgoldið neyðugar meirútreiðslur, ið eru ein beinleiðis avleiðing av brekinum ella sjúkuni. Meirútreiðslur til serkost ella serlig klæðir hjá børnum eru tískil ikki fevndar av hesi áseting.

Persónar, ið fáa stuðul til serkost, eru persónar, ið vegna sjúku ikki kunnu eta vanligan kost, og tí mugu eta serkost. Av tí, at tað kostar meira at eta serkost, verður stuðul veittur til meirútreiðslur av hesum, t.v.s. til tað, sum verður mett at vera munurin millum útreiðslur til “vanligan kost” og til serkostin. Serkostur skal ikki skiljast sum føðslutilskot, ið persónar eta í staðin fyri vanligan mat, tí hesi ikki orka at eta vanligan mat, ella sum ískoyti til vanligan mat.

Eingin lógarheimild er at veita stuðul til aðrar ítøkiligar meirútreiðslur til persónar, ið eru 18 ár og eldri, sambært hesi løgtingslóg.

Í framhaldi av hesum er tó greitt, at heimild er í § 8 a í løgtingslóg um almannapensjónir at veita stuðul til generellar meirútreiðslur til persónar, ið lúka krøvini um avlamisveiting.

Viðvíkjandi stuðli til meirútreiðslur til serkost til persónar við varandi breki ella sjúku er galdandi siðvenja, at persónar við cøliaki, cystiskari fibrosu og ovurviðkvæmi, annars fáa stuðul til meirútreiðslur av kosti.

Stuðulin verður veittur eftir útrokningum sambært donskum prís- og kostkanningum, tí at tílíkar kanningar ikki verða gjørdar í Føroyum.

Endurgjald fyri meirútreiðslur í hesum føri, snýr seg ikki um at kompensera fyri møguligum hægri prísstøði í Føroyum. Tað er grundleggjandi fyri hugtakið um meirútreiðslur at hava eina samanberingsrelasjón til "vanligan" tørv. Um ikki, so er einki grundarlag at veita stuðul eftir.

*Til § 29, stk. 8*
Heimildin hjá landsstýrismanninum at gera nærri reglur um hjálparráð verður varðveitt. Í sambandi við, at lóggávan varð broytt í 2010, varð umfatandi arbeiði gjørt við at orða nýggja kunngerð og vegleiðing um stuðul til hjálparráð umframt leiðbeining til ásetingar um markamót.

Nærri reglur eru í kunngerð um stuðul til hjálparráð frá 2010, sum seinast broytt í desember 2016, og í vegleiðing til kunngerð nr. 18 um stuðul til hjálparráð frá 2010. Harumframt er leiðbeining til ásetingar um markamót umframt rundskriv um leiguskipan hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Ætlanin er í høvuðsheitum, at galdandi reglur í kunngerðini verða galdandi frameftir. Tó verður ein broyting gjørd soleiðis at nágreina verður, at stuðul einans verður veittur til tannprotesir og ortodontiska tannviðgerð, um talan er um virkislig oyðileggjandi ella vakurleika misprýðandi avleiðingar av sjúkuni Sjøgrens Syndrom og læknafyriskipaðan heilivági, ið verður nýttur í beinleiðis sambandi við viðgerð av krabbameinssjúku. Sambært hesum verður talan tískil ikki um at veita stuðul ísv. heilivág móti vamli, morfika og øðrum heilivági, ið ikki er krabbameinsbasandi heilivágur.

Eisini verður nágreinað, at Almannaverkið einsamalt hevur heimild at halda við líka, umvæla, útskifta, dagføra og flyta hjálparráðið, ið er varðveitt í upprunaliga heiminum, eftir at persónurin er fluttur. Við flyting av hjálparáði meinast við umfatandi flyting har serførleikin hjá Almannaverkinum er neyðugur í mun til flytingina. At Almannaverkið einsamalt hevur heimild merkir, at skal hjálparráðiå umvælast, skal áheitan stílast til Almannaverkið, ið tekur sær av at umvæla hjálparráðið móti rokning, ið brúkarin rindar fyri. Almannaverkið verður á hendan hátt fyrsta liðið í mun til umvæling o.a.

Harafturat verða neyðugar tillagingar gjørdar í mun til broytingar, sum verða gjørdar í hesum lógaruppskoti, t.d. um at veita stuðul til hjálparráð til borgarar, sum fáa endurvenjing frá Almannaverkinum, og at áseta undantak fyri, at stuðul til hjálparráð kann latast aftaná, at borgarin hevur fingið hjálparráðið. Talan er um bein- og armprotesur og korsett.

Heimild er eisini at áseta egingjøld og at hava leiguskipan.

***Hoyritól***

**Til § 30**
Reglurnar um hoyritólsviðgerð og stuðul at keypa hoyritól frá privatum veitara eru beinleiðis framhald av reglunum í forsorgarlógini. Einans smærri málsligar tillagingar eru gjørdar í ásetingini.

*Til stk. 1*
Ásett er ein objektiv heiliráðábending fyri, hvussu nógv hoyrnin skal vera niðursett, áðrenn persónur hevur rætt til hoyritólsviðgerð sambært stk. 1. Heiliráðábendingin er hin sama sum í Íslandi og Danmark.

Ásett er í stk. 2, at persónur, 18 ár ella eldri, skal rinda eitt egingjald á 2.000 kr., tá hann skal hava eitt hoyritól frá tí almenna. Persónur, sum hevur tørv á hoyritóli til bæði oyru, skal sostatt rinda 4.000 kr.

Heldur enn at fáa hoyritólið frá tí almenna, hevur persónur, 18 ár og eldri, sambært stk. 3 møguleika fyri at at fáa stuðul á kr. 4.000 til at keypa hoyritól frá einum privatum veitara. Tó kann stuðulin ongantíð verða meir enn sjálvur kostnaðurin av hoyritólinum í smásølu. Persónur, sum hevur tørv á hoyritóli til bæði oyru, kann sostatt fáa stuðul á 8.000 kr.

Sambært stk. 4 hevur persónur, ið hevur fingið hoyritól frá tí almenna, rætt til at fáa nýtt hoyritól, tá 4 ár eru umliðin, síðani hoyritólið varð honum útflýggjað. Sama áramálið er galdandi fyri persón, ið hevur fingið fíggjarligan stuðul at keypa hoyritól frá privatum veitara. Stuðulin á 4.000 kr. verður latin, tá 4 ár eru umliðin, síðani hann keypti hoyritólið frá veitaranum. Tó kann persónur velja, um hann ynskir at fáa stuðul til keyp av hoyritóli ella nýtt hoyritól frá tí almenna við egingjaldi á 2.000 kr. fyri hvørt hoyritóli.

Stk. 5 er ein undantøkuáseting, ið gevur læknaliga sakkunnleikanum møguleika fyri at játta hoyritól í serligum førum, tá hoyritólið er neyðugt fyri, at persónur við virkistarni, orsakað av likamligum ella sálarligum breki ella sjúku, fær ella varðveitir tilknýti til arbeiðsmarknaðin, um hoyritólið munandi bøtir um avleiðingarnar av sjúkuni ella brekinum, ella hoyritólið munandi lættir um gerandisdagin í heiminum. Ásetingin merkir, at persónur kann sleppa undan egingjaldinum í stk. 2, heiliráðábendingini í stk. 1 og kravinum um, at 4 ár skulu vera umliðin, fyri at nýtt hoyritól ella stuðul til hoyritól kann veitast. Talan kann eitt nú vera um ein persón, ið vegna sítt sálarliga brek javnan brýtur hoyritólið, og at tað í hesum høpi verður mett sum ein óneyðuga stór byrða, at hann skal rinda eitt egingjald á 2.000 kr. hvørja ferð, honum tørvar nýtt hoyritól.

Stk. 6 gevur landsstýrismanninum heimild við kunngerð at nágreina mannagongdirnar í sambandi við játtan av hoyritóli og stuðli.

## Kapittul 5. Tænastur ( §§ 31-44)

### *Til § 31*

Ásett verður, at endamálið við øllum tænastum, sum verða veittar sambært hesi løgtingslóg, er at kompensera fyri brekinum hjá einstaka persóninum og at miða ímóti, at persónurin gerst so sjálvbjargin og sjálvhjálpin sum gjørligt, soleiðis at persónurin kann luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við aðrar borgarar.

At javnseta persónar, sum bera brek við tænastum, sum kompensera, merkir ikki, at borgarar, sum bera brek, skulu hava framíhjárætt, men at tænastan verður veitt við tí endamálið at javna eitt ójavnt upprunastøði.

Grundarlagið undir øllum tænastum hjá Almannaverkinum er sosialnámsfrøðiligt arbeiði, umsorgan og viðgerð. Dentur verður lagdur á at tilrættisleggja gerandisdagin, umhvørvið og arbeiðið, soleiðis at borgarin kann menna persónligar, praktiskar og sosialar førleikar, og stuðlar tænastan harvið borgaranum at hava eitt so sjálvstøðugt lív sum gjørligt. Flestu tænastur, sum verða veittar, hava eitt mennandi endamál, meðan aðrar tænastur hava sum endamál at lætta um.

Almannaverkið hevur seinastu árini lagt alsamt størri dent á, at tænastur umframt at kompensera fyri breki, eisini skal miða ímóti, at gera borgaran so sjálvbjargnan og

sjálvhjálpnan sum gjørligt. Á fakmáli verður hetta yvirskipað kallað endurmenning (rehabilitering) og menning (habilitering).

Endurmenning og menning snúgva seg grundleggjandi um at eggja, stuðla, og hjálpa fólki, sum fáa ella hava viðfødd brek til at fáa tað lív, tey sjálvi ynskja og megna. Endurmenning verður brúkt til at vinna aftur mistar førleikar og fevnir sostatt um borgarar, sum hava fingið eitt brek, meðan menning fevnir um borgarar, sum hava viðfødd og varandi brek.

Ásetingin kann í stóran mun tulkast sum ein varðveiting av verandi skipan, og at allar tænastur skulu veitast við tí endamáli, at borgarin varðveitur ella betrar sálarligar, likamligar ella sosialar førleikar.

Í § 31, stk. 2 verður ásett, at sosial tænasta verður veitt við støði í teimum førleikum, ið persónurin sjálvur hevur. Ein persónur, ið hevur tørv á sosialari tænastu skal ikki kompenserast fyri førleikar, ið hann hevur. Somuleiðis er umráðandi at halda fast við, at ein og hvør hevur ábyrgd fyri sær sjálvum, og tí eisini hevur skyldu at nýta sínar førleikar.

Eisini hevur ásetingin í § 31, stk. 2 til endamál at viðurkenna, at persónar, ið bera brek ella hava varandi sjúku, ofta eru meira bundnir og hava tættari felagsskap við síni avvarðandi enn onnur. Avvarðandi hava ofta ein stóran og týðandi leiklut í lívinum hjá persóni, ið ber brek, tó at hesin leiklutur ikki er formaliseraður.

Ein persónur, ið er 18 ár ella eldri, hevur sjálvræðisrætt, um hesin ikki er avmarkaður sambært verjumálslógini. Tá um leiklutin hjá avvarðandi ræður, er umráðandi, at Almannaverkið øðrumegin tryggjar sjálvsavgerðarrættin hjá persóni og hinumegin viðurkennir tann týðandi leiklut, ið avvarðandi hava. Eru avvarðandi, ið hava átikið sær ella vilja átaka sær at hjálpa einum persóni, ið ber brek, við ávísum viðurskiftum, eigur tænastan hjá Almannaverkinum at taka støði í hesum.

Leikluturin hjá avvarðandi kann vera sera ymiskur og tengdur at aldri, og hvar persónurin býr. Avvarðandi kunnu tí bæði virka sum talurør eins og hava meira praktiskar uppgávur í gerandis viðurskiftum.

Er ein persónur myndugur, eigur hann altíð sjálvur at gera av, hvønn leiklut avvarðandi skulu hava í hansara lívi.

Víst verður somuleiðis til ásetingina í § 36, stk. 3, ið sigur, at avvarðandi ikki kunnu setast sum stuðulsfólk at veita persóni borgarastýrda stuðulstænastu.

***Umsorganarskylda***

***Til § 32***

Endamálið við ásetingini er at lýsa, at Almannaverkið hevur eina virkna umsorganarskyldu móti teimum persónum, ið Almannaverkið varðar av. Umsorganarskyldan er grundarlagið undir at veita neyðuga røkt, umsorgan og sosialnámsfrøðiligan stuðul til persón, ið vantar evnini at skilja, hvat eitt samtykki merkir. Vavið og innihaldið av umsorganarskylduni er grundað á eina ítøkiliga meting av persóninum við atliti at hansara tørvi á hjálp, tign hansara, rætti hansara til sjálvsavgerð og rætti hansara til sosiala trygd. Ásetingin veitir grundarlag fyri, at Almannaverkið kann seta í verk neyðuga hjálp, ið samsvarar við tørvin og endamálið.

Umsorganarskyldan er virkin uttan mun til, um viðkomandi persónur samtykkir ella ei. Tó gevur ásetingin ikki heimild til at veita almenna umsorgan við tvingsli. Slík heimild skal altíð

vera greitt ásett í lóg. Umsorganarskyldan hevur á hendan hátt tætt samband við reglurnar um tvingsil, ið eru ásettar í aðrari lóg.

### *Virkisætlan*

***Til § 33***

Áseting um, at ein sokallað virkisætlan skal gerast, tá borgari fær tillutað eina tænastu frá Almannaverkinum. Talan er fyri stóran part um somu skipan, sum longu er í dag, og sum fyri ein part er skipað sambært kunngerð við heimildum í forsorgarlógini.

Heitið virkisætlan fevnir um verkætlan sambært verandi kunngerð um stuðulsfólkaskipan, endurvenjingarætlan sambært kunngerð um endurvenjing, virkisætlan sambært kunngerð um virknistænastur og virkisætlan, sum persónar, sum fáa tilboð á bú- og viðgerðarstovni ella búgva í vardum bústøðum, hava í mun til endamálið við tænastuni.

Ætlanin sambært § 3, stk. 3 er eina meira yvirskipað ætlan, sum skal gerast, tá talan er um persónar, sum hava samansettan tørv, og harvið eisini tørv á fleiri ymiskum tænastum og veitingum sambært hesi lóg.

Endamálið við eini virkisætlan er at áseta, hvussu málini, sum persónurin setir sær, kunnu røkkast við einstøku tænastuni, og nær málini skulu vera rokkin.

Tað kann t.d. verða ein persónur, sum hevur fingið seinheilaskaða og hevur tørv á endurvenjing, stuðul til hjálparráð, stuðulstænastu, og at familjan hjá viðkomandi hevur tørv á umlætting fyri at megna at hava persónin búgvandi heima. Í slíkum máli skal ein ætlan gerast sambært § 3, stk. 3, sum greinar verandi støðu hjá persóninum, hvønn tørv viðkomandi hevur, og hvørji mál, persónurin ynskir at røkka, og hvørjar tænastur og veitingar persónurin fær tillutað fyri at náa málunum.

So verður ein virkisætlan gjørd í mun til einstøku tænasturnar. Í mun til stuðulstænastu skal tað vera greitt, hvat endamálið er, hvørji mál persónurin hevur, og hvussu og nær málini skulu røkkast. Sama er galdandi fyri endurvenjing.

Er hinvegin talan um ein persón, sum hevur menningartarn og einans tørv á stuðulstænastu, so er ikki tørvur á at gera eina ætlan, men einans eina virkisætlan í mun til stuðulstænastuna.

Tað er í visitatiónini og í tilevningini av virkisætlanini, at tað verður staðfest, hvat endamálið er við tænastuni til hvønn einstakan persón, og hvat tænastan fevnir um.

Virkisætlanin ger greitt bæði fyri borgaran og myndugleikan, sum veitir tænastuna, hvat endamálið við tænastuni er, og tænastan skal leggjast til rættis saman við borgaranum. Á henda hátt verður tryggjað, at tænastan tekur støði úr ynskjunum hjá borgaranum samstundis, sum møguleiki eru fyri at veita eina munagóða tænastu.

Endamálið er eisini at geva starvsfólki eitt sosialnámsfrøðiligt ella heilsufakligt amboð, sum fakfólk brúka í sambandi við, at tænasturnar verða veittar.

Virkisætlanin fyri einstaka persónin gevur starvsfólki eina heildarmynd av støðuni og tørvinum hjá viðkomandi persóni og varpar ljós á tey øki, ið krevja serligan ans.

Endamálið við virkisætlanum er tí eisini at eftirmeta ta tænastu, ið verður veitt einstaka persóninum soleiðis, at dygdin á tænastuni altíð er á einum nøktandi fakligum støði, og rættartrygdin hjá borgaranum verður vard.

Tað hevur stóran týdning, at virkisætlanin verður tilevnað á einum støði, sum tænir endamálinum, og ikki hevur við sær óneyðuga skjalfesting, sum ikki gevur meining og ikki tekur óneyðuga orku frá starvsfólkum og persóninum sjálvum.

Samanumtikið er virkisætlanin eitt amboð, sum skal tryggja, at endamálið við tænastuni verður rokkið, ella eitt amboð til at meta, um tænastan skal broytast soleiðis, at persónurin kann varðveita ella betra sálarligar, likamligar ella sosialar førleikar og harvið luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við onnur.

Persónar, sum fáa tænastur sambært hesi lóg eru ymiskir og hava ymiskar og ofta sera umfatandi og samansettir trupulleikar. Tí er neyðugt, at virkisætlanin verður gjørd í mun til avbjóðingina hjá einstaka persóninum. Tað kann t.d. vera at persónur hevur best av at vera einsamallur í ávísum støðum, og at tað tá er týdningarmikið, at hann fær frið. Tað kann t.d. eisini vera støður, har tað er eitt ávíst starvsfólk, sum ikki røkkur viðkomandi persóni, og at tað er í møtinum teirra millum, at støðan gerst somikið spent, at neyðugt er við tvingsilsnýtslu. Tað kann eisini vera, at persónur hevur tørv á, at kamarið ella íbúðin verður innrættað á annan hátt í eitt ávíst tíðarskeið.

Virkisætlanin eigur at verða gjørd saman við einstaka borgaranum soleiðis, at endamálið kann røkkast. Um persónur ikki ynskir at viðvirka til at gera eina virkisætlan, so skal myndugleikin gera eina virkisætlan, sum starvsfólki arbeiðir útfrá.

*Til § 33, stk. 2*

Hevur persónur hevur verið fyri tvingsli sambært §§ 6, 10, 14, 15, 16, 18, 19 og 23 í tvingsilslógini, so skal ein virkisætlan gerast til tess at fyribyrgja at tvingsilsnýtsla ella frælsistøka verður neyðug. Talan er um bráðfeingis tvingsil t.d. harðskapsstøður o.líkn, inntriv sum er at halda persóni aftur á bústaði og føra hann aftur á bústaðin, flyting vegna hóttandi og vandamiklan atburð og læsing av býli um náttina.

Virkisætlanin skal m.a. innihalda ætlanir um, hvussu støðurnar, sum føra til tvingsilsnýtslu ella frælsistøku, kunnu fyribyrgjast og avtalur um, hvussu starvsfólk og møguliga onnur búfólk kunnu hjálpa viðkomandi á besta hátt.

Virkisætlanin eigur at verða gjørd saman við einstaka borgaranum soleiðis, at endamálið kann røkkast. Um persónur ikki ynskir at viðvirka til at gera eina virkisætlan, so skal myndugleikin gera eina virkisætlan, sum starvsfólki arbeiðir útfrá.

***Heimaráðgeving***

***Til § 34***

Við ásetingini í § 34 verður heimild nú veitt fyri at bjóða heimaráðgeving.

Endamálið við heimaráðgeving er at hjálpa og stuðla undir, at familjan klárar tær avbjóðingar, ið kunnu vera at fáa eitt barn, sum ber brek.

Tað eru eisini aðrar skipanir, sum lofta familjum í Føroyum, sum fáa barn, sum ber brek ella fær staðfest brek. Eitt nú er møguligt at fáa sálarfrøðiligar viðtalur við stuðli frá Heilsutrygd, og hevur Almannaverkið heimild sambært hesi lóg at gjalda foreldrapartin eftir nærri ásettum

treytum. Eisini bjóðar Barna og ungdómspsykiatriin “psykoeducatión” til børn, ung, foreldur og avvarðandi hjá børnum og ungum, sum fáa staðfest brek – autismu, ADHD ella sálarligt brek. Dentur verður lagdur á, at upplýsa foreldur og avvarðandi um brekið.

Avbjóðingarnar hjá familjuni vísa seg tó ofta í gerandisdegnum, og endamálið við ráðgeving er at viðvirka til, at gerandisdagurin hjá familjuni verður léttari og at familjan kann liva eitt so vanligt familjulív, sum til ber, og at barnið kann fáa neyðugan stuðul í familjuni undir røttum kørmum.

Persónur skal í hesum høpi skiljast sum foreldur, fosturforeldur ella onnur, sum hava dagliga umsorgan av barninum.

Dagliga umsorgan merkir, at barnið býr hjá persóninum, at persónurin er um barnið og tekur sær av teim viðurskiftum, sum foreldur vanliga gera.

Er talan um foreldur, sum ikki búgva saman, so kann ráðgeving verða givin bæði mammu og pápa, um tað eru viðurskifti, sum tala fyri tí.

Tað kann t.d. vera barn, sum býr skiftivís hjá mammu og pápa, hóast barnið formliga sæð hevur bústað hjá einum teirra. Dømi er eisini um, at barnið býr meginpartin av tíðini hjá mammuni, og er hjá pápanum annað hvørt vikuskifti. Í slíkum føri kann tað verða neyðugt, at mamman og pápin fáa, hvør sína ráðgeving.

Heimaráðgeving sambært hesi áseting er ikki ætlað familjum, sum einans hava týðandi sosialar trupulleikar, og sum tí fáa ráðgeving, viðgerð ella stuðul frá barnaverndartænastu sambært barnaverndarlógini.

Hinvegin kann ein familja, sum hevur týðandi sosialar trupulleikar, sum barnaverndartænastan hjálpir familjuni við, eisini fáa heimaráðgeving sambært hesi lóg, um familjan hevur eitt barn, sum ber brek. Í slíkum føri fær familjan bæði ráðgeving frá Almannaverkinum í mun til brekið hjá barninum og frá kommunalu barnaverndartænastuni í mun til foreldraførleikar.

*Til § 34, stk. 2 og 3*
Ráðgeving til allar familjur kann fara fram í heiminum og sum bólkaundirvísing saman við øðrum familjum, um ynski er til tess. Ráðgevingin kann sostatt tillagast til einstøku familjuna og leggja upp fyri, at støðan hjá familjum kann vera ymisk. Tað eru kanska eisini einstøk evni, sum hóska seg best at umrøða saman við øðrum familjum.

Ráðgevingin tekur støði í, at familjan kennir barnið best og veit, hvørjar styrkir og veikleikar barnið hevur. Ráðgevingin kann síðani, við støði í hesum, ráðgeva og vegleiða familjuni um, hvussu farast kann fram í mun til tær avbjóðingar, sum barnið hevur.

Tað kunnu t.d. vera børn, sum hava svøvntrupulleikar, orsakað av breki, har ráðgevin kann geva familjuni ráðgeving um, hvussu barnið kann hjálpast. Í onkrum førum kunnu foreldur hava torført við at samskifta við børnini, orsakað av brekinum. Nøkur børn kunnu hava torført við at hugsavna seg heima um skúlating ella vanligar húsarhaldsuppgávur, sum eru partar av familjulívinum, eitt nú at rudda kamar. Tað kunnu eisini vera børn, sum eru sera viðkvom fyri ljóði ella ljósi.

Uppgávan hjá ráðgevanum er at hjálpa familjuni við at finna ymiskar loysnir, sum hóska til júst hesa familjuna og at veita familjuni amboð til at handfara hesar avbjóðingar við.

Tí er umráðandi, at tað eru fakfólk við breiðari námsfrøðiligari og terapeutiskari vitan, sum veita familjum ráðgeving. Starvsfólk, sum virka sum ráðgevar, skulu eisini hava neyðug amboð

at koma inn í heimið hjá familjuni og hava eginleikar til at møta og rúma familjuni, har sum familjan er.

Farið verður undir stig- og miðvíst at skipa námsfrøðiliga ráðgeving til aðrar familjur, sum hava børn, sum bera brek.

***Stuðulstænasta***

***Til § 35***
Stuðulstænasta verður veitt vaksnum og børnum, sum hava likamligt ella sálarligt brek.

Stuðulstænastan kann somuleiðis veitast persónum, 18 ár ella eldri, ið hava víðfevndar sosialar trupulleikar. Hesir persónar eru í høvuðsheitum persónar, ið hava so mikið álvarsligar trupulleikar, at hesir ikki megna egið lív, eitt nú vegna sálarligar trupulleikar og rúsevnistrupulleikar, ella avleiðingar av hesum.

Stuðulstænasta er ikki ætlað børnum, ið eru fevnd av barnaverndarlógini, orsakað av víðfevndum sosialum trupulleikum. Barn, sum ber brek, kann fáa stuðulstænastu frá Almannaverkinum, samstundis sum barnaverndartænastan veitir familjuni hóskandi hjálp sambært barnaverndarlógini, um so er, at familjan hevur týðandi sosialar trupulleikar.

Tænastan er, sambært § 5, stk. 1 eins og higartil avmarkað til persónar undir fólkapenjsónsaldri, men kann sambært § 5, stk. 2 halda áfram eftir, at viðkomandi er vorðin fólkapensjónistur, um tænastan framhaldandi tænir endamálinum.

Mett verður um í hvørjum einstøkum førum, hvørt persónur hevur brek ella sosialar trupulleikar av slíkum slagi, at viðkomandi hevur tørv á stuðulstænastu. Stuðulstænasta er m.a. ætlað persónum við fjølbreki, menningartarni, sálarsjúku, seinheilaskaða, autismu, ADHD og alkoholdemensi. Persónar við rørslutarni og sansibreki (blind, deyv o.t) eru eisini fevnd av stuðulstænastum hjá Almannaverkinum. Harumframt kunnu eisini borgarar, sum t.d. hava varandi sjúku so sum demens, Alzheimers, parkinson, sclerosu, kol ella gikt fáa stuðulstænastu.

Tað er tó ikki diagnosan í sær sjálvum, ið er avgerandi fyri, um persónur hevur rætt til stuðulstænastu, men er tað tørvurin hjá tí einstaka, ið er avgerandi.

Persónar, sum búgva í vardum bústaði ella bú- og viðgerðartilboði sambært §§ 45 og 46, fáa stuðulstænastu sum partur av bústaðartilboðnum og eru tí ikki fevnd av ásetingini.

Stuðulstænasta sambært § 35 verður veitt sum ein til ein stuðul. Toymistilboð verður veitt sum virknistænasta sambært § 39 og 40.

Hjálpin skal veitast við støði í førleikunum og tørvinum hjá tí einstaka og skal veitast við virðing fyri sjálvræðisrætti hins einstaka. Hjálpin skal miða eftir hjálp til sjálvhjálp bæði í mun til tað persónliga og tað praktiska. Borgarin hevur sostatt sjálvur ein aktivan leiklut og ábyrgd í tí stuðulstænastu, ið hann fær.

*Námsfrøðilig leiðbeining*
Uppgávan hjá leiðbeinarum er at vera mentor og kontaktpersónur. Endamálið er at bjóða hjálp, sum stuðlar og styrkir um møguleikan fyri at fáa eitt virkið og innihaldsríkt lív bæði persónligt og sosialt.

Eisini er ein uppgáva hjá leiðbeinarum at veita sokallaði lá-gáttartilboð, sum eisini fevnir um uppleitandi arbeiði, og sum hevur til endamáls at byggja upp og skapa samband og álit millum borgarar, ið isolera seg heima og eru avskorin frá arbeiði, skúla og sosialum virksemi. Tað at fáa samband við borgaran, er avgerandi fyri skipanina við leiðbeinarum. Tá samband og álit er komið í lag millum stuðul og borgara er næsta stig at arbeiða mið og stigvíst við at menna og

styrkja persónligar og sosialar førleikar soleiðis, at borgarin kann skapa sær eina tilveru við innihaldi og sosialum sambondum.

*Praktisk hjálp*
Stuðulstænasta kann fevna um praktiska hjálp til at megna vanligar gerandisuppgávur. Nøkur hava tørv á stuðli til sjálvi at taka sær av persónligari røkt, at klæða seg í og at fáa sær at eta. Onnur hava tørv á stuðli til at halda hús við øllum tí, sum tað inniber. Onkur skal hava hjálp til innkeyp, meðan onnur skulu hava hjálp til at fara til lækna, tannlækna og sjúkrahúsviðgerð. Fyri hesar borgarar, kann ein stuðulstænasta hjálpa og stuðla viðkomandi til sjálvur at taka sær av hesum viðurskiftum. Stuðulstænasta kann eisini vera hjálp til av fáa trygg og skipaði persónlig fíggjarviðurskifti.

Markamót hevur verið millum røkt og stuðul, og serliga hava kommunur og land verið ósamd um, hvør skal veita borgarum, sum hava tørv á heimatænastu og stuðulstænastu, tænastu.

Í sambandi við, at heimatænastan er løgd til kommunurnar, eru umboð fyri land og kommunur vorðin samd um, at hugtøkini røkt og stuðul kunnu skilmarkast soleiðis:

*Røkt,* ið er ábyrgd hjá kommununum, er tænasta sum hevur til endamáls at hjálpa persóni við grundleggjandi uppgávum, so sum persónligari røkt og øðrum viðurskiftum, sum viðvíkja dagligari lívsførslu. Røktin kann umfata hjálp til persónligt reinførið og at tryggja, at borgari fær mat og drekka. Persónlig hjálp og røkt kann veitast við einum mennandi, aktiverandi og viðlíkahaldandi og linnandi endamáli við atliti at sjálvsavgerðarrætti borgarans.

*Stuðul,* ið er ábyrgd hjá landinum, er tænasta, sum við ráðgeving og vegleiðing, hevur til endamáls at viðlíkahalda og menna førleikar hjá borgaranum soleiðis, at hann hevur møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív. Tænastan verður veitt borgarum við serligum tørvi, og verða tilboðini tillagað tí einstaka við sjálvsavgerðarrætti borgarans fyri eyga.

*Fylgjari*
Stuðulstænastan kann fevna um fylgjara til persón, sum ikki megnar at ferðast uttan fyri heimið einsamallur.

Endamálið er, at viðkomandi kann fáa møguleika at luttaka í frítíðar- og mentanarlívi á jøvnum føti við onnur í samfelagnum. Við hesum fær persónurin, í størri mun enn higartil, møguleika fyri at velja, hvat hann hevur hug at brúka sína frítíð til, samstundis sum tað eisini leggur eina ávísa ábyrgd á borgaran um at skapa sær innihald í gerandisdegnum.

Tað áliggur Almannaverkinum í hvørjum einstøkum føri og saman við persóninum at meta um, um ein fylgjari er ein góð loysn. Treytin er, at persónurin sjálvur megnar at vísa á, hvørji tiltøk viðkomandi hevur hug at luttaka í, og at borgarin er tilvitaður um innihaldið í tiltøkunum.

Uppgávan hjá fylgjara er treytað av tørvinum hjá borgaranum. Tað kann t.d. vera at koyra bilin hjá viðkomandi, um hesin t.d. brúkar koyristól, og at hjálpa viðkomandi til og frá tiltakinum. Tað kann eisini vera at fara við viðkomandi á møti ella til festivalar. Uppgávan hjá einum fylgjara kann eisini fevna um at hjálpa viðkomandi at samskifta við onnur. Er talan um borgara, sum hevur tørv á hjálp til innkeyp ella at fara lækna, tannlækna ella sjúkahúsviðgerð, so er tá talan um praktiska hjálp og ikki eina fylgjarauppgávu.

*Hjávera og vøka*
Stuðulstænasta kann fevna um hjáveru og vøku til børn og vaksin við t.d. andingartóli, tetraplegikarar, seinheilaskadd, børn við serligum tørvi, sum ikki kunnu vera einsamøll, og vaksin, sum eru dement og ikki megna at vera einsamøll í heiminum.

Hjá summum er endamálið at vera armar og bein og at hjálpa teimum við flytføri. Hjá øðrum er endamálið at tryggja, at andingartólið er virkið og at tryggja náttarhvíld til foreldur og avvarðandi.

Hjávera og vøka kann verða veitt bæði í dag- og og náttartímum, og talan er fyri tað mesta um umfatandi fyriskipanir, sum fevna um nógvar tímar um vikuna.

Hjávera kann eisini verða veitt til einstøk høvi og eftir tørvinum hjá einari familju ella hjúnafelaga/maka, sum hevur umsorganarábyrgd fyri einum persóni, sum ikki kann ansast av øðrum, orsakað av brekinum. Tað kann t.d. vera ein stakur uppihaldari, sum hevur barn við umfatandi brek, og sum ikki hevur møguleika fyri, at onnur kunnu ansa barninum. Fyri at hann kann hava møguleika at hava eitt sosialt lív, kann hann fáa tillutað eitt avmarkað tal av tímum, soleiðis at barnið kann verða ansað. Almannaverkið kann eisini játta borgara við demensi hjáverutímar, fyri at makin ella avvarðandi skulu hava møguleika at sleppa út til tiltøk.

Tænastan verður veitt til einstøk høvi og eftir tørvinum hjá familjuni. Tað, sum eyðkennir tænastuna, er fleksibilitetur. Borgarin kann nýta tímarnar, tá tað liggur fyri. Higartil hevur tað altíð verið borgarin sjálvur, sum hevur funnið starvsfólk, sum kann átaka sær uppgávuna.

Persónar, sum fáa hjáveru og vøku, eru ofta persónar, sum hava umfatandi tørv á ymiskum tænastum bæði frá Almannaverkinum og frá øðrum myndugleikum. Borgarar, sum brúka andingartól, kunnu eisini hava tørv á heimatænastu til eitt nú persónliga røkt ella sjúkrarøkt. Kommunurnar hava ábyrgd av at veita heimabúgvandi borgarum í øllum aldri heimatænastu, sum er heimahjálp og heimasjúkrarøkt. Harumframt hava borgarar, sum brúka andingartól, ofta samband við Heilsuverkið.

Uppgávan hjá Almannaverkinum í mun til hjáveru og vøku fevnir ikki um persónliga røkt ella sjúkrarøkt. Tá talan er um børn, er persónlig røkt partur av stuðulstænastuni. Almannaverkið hevur ikki eftirlit við sjálvum andingartólinum og veitir ikki upplæring til starvsfólk, sum Almannaverkið hevur sett í starv til at veita hjáveru og vøku til persónar við andingartólum.

*Til § 35, stk. 2*
Ásetingin hevur til endamáls at avmarka stuðulstænastuna, soleiðis at um persónur býr á bústaði sambært §§ 45 og 46, kann stuðulstænasta ikki eisini vera veitt. Hetta er fyri at forða fyri, at dupulttænasta verður veitt til sama endamál.

Stuðulstænastan er somuleiðis avmarkað til virkisøki lógarinnar, samanber § 5, og tað merkir, at t.d. stuðulstænasta ikki verður veitt til persónar fólkapensjónsaldur, tí hesi eru fevnd av løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v. m. Tó kann stuðulstænasta verða veitt, um talan er um støðu, ið er fevnd av § 5 stk. 2.

*Til § 35, stk. 3*
§ 35, stk. 3 heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um, hvussu stuðulstænasta verður skipað, tillutan av tímum til ávísar uppgávur og rindan av útreiðslum fyri stuðulsfólkið í sambandi við sosial tiltøk o.a., ið stuðulsfólkið fer til saman við borgara.

Í mun til tal av tillutaðum tímum verður støði tikið í tørvinum hjá borgaranum. Tó kann eisini ásetast í kunngerð, at borgari hevur rætt til ávíst tal av tímum um mánaðin, eitt nú til fylgjara, eins og møguleiki kann veitast fyri at savna saman tímar til ávíst endamál.

Tað er rættiliga ymiskt, hvussu nógvir stuðulstímar verða játtaðir einstaka borgaranum sambært forsorgarlógini.

Sambært upplýsingum frá Almannaverkinum vóru tað pr. 1. oktober 2017 í alt 238 persónar, sum fáa ein til ein stuðul. 220 av hesum eru persónar millum 18- 67 ár.

Í løtuni fáa 19 borgarar við seinheilaskaða ein til ein stuðul. Av hesum eru tað 11, sum hava lættan ella miðal tørv, og sum fáa millum ein og 10 tímar um vikuna. 7 persónar fáa millum 10-60 tímar um vikuna, og í onkrum føri er neyðugt at skipa stuðul alt døgnið.

Eisini eru tað borgarar við likamligum breki, tetraplegikarar, vøddasvin, avlamin eftir ferðsluóhapp, sjúku, sum fáa ein til ein stuðul frá Almannaverkinum. Nøkur fáa stuðul alt samdøgrið, onkur fær 40 - 50 tímar um vikuna, og onnur fáa millum 10- 40 tímar um vikuna.

Almannaverkið heldur útreiðslurnar fyri stuðulsfólkið sambært nærri ásettum reglum. T.d. ferðaútreiðslur í bussi, atgongumerki til biograf, svimjing ella konsertir o.s.fr.

***Borgarastýrd stuðulstænasta***

***Til § 36***

Heimild er nú fyri, at stuðulstænasta sum praktiska hjálp, fylgjari og hjávera og vøka, kann skipast sum borgarastýrd stuðulstænasta, har borgarin sjálvur ger av, hvør verður stuðulspersónur hjá viðkomandi, og hvussu og til hvat játtaðu stuðulstímarnir verða brúktir.

Harvið fær borgarin størri ræði á egnum lívi og kann í størri mun enn higartil sjálvur tilrættaleggja sær gerandisdagin. Tað setir tó eisini krøv til borgarar at umsita slíka skipan.

Tí er treytin fyri at fáa borgarastýrda stuðulstænastu, at viðkomandi borgari ella tann, ið hevur dagligu umsorganina fyri einum barni, sjálvur megnar at gera av, hvør stuðulspersónurin skal vera, og hvat stuðulstímarnir skulu brúkast til og nær.

Tann, ið hevur dagligu umsorganina fyri einum barni, yngri enn 18 ár, er t.d. foreldur, fosturforeldur ellar annar persónur, ið er um barnið. Fortreytin fyri at fáa borgarastýrda stuðulstænastu er, at Almannaverkið kann gera av at veita hesa tænastu. Er barnið yngri enn 18 ár, og liva foreldrini ikki saman, og barnið er skiftivís hjá báðum foreldrum, mugu foreldrini vera samd um, hvør skal vera stuðul hjá barninum. Semjast foreldrini ikki um, hvør skal vera stuðul, kann stuðulstænastan ikki veitast sum borgarastýrd stuðulstænasta.

Almannaverkið gera av, um ein borgari skal hava stuðulstænastu, hvussu nógvar tímar viðkomandi skal hava, og um henda kann skipast sum borgarastýrd stuðulstænasta. Stuðulspersónurin verður eisini settur í starv hjá Almannaverkinum og verður løntur sambært sáttmála. Tað er tó persónurin sjálvur og dagligi umsorganarpersónurin, tá talan er um barn, sum eftir góðkenning frá Almannaverkinum avgera, hvør stuðulspersónurin skal vera, og hvussu játtaðu tímarnir skulu brúkast.

Innihaldið í borgarastýrdari stuðulstænastu er ikki tað sama sum ein tænasta, sum krevur sosialpedagogiskan ella heilsufakligan serkunnleika, og skal ikki fevna um røktaruppgávur, sum liggja uttan fyri tað, sum ein stuðul kann lærast upp til, ergo- og fysioterapi ella aðrar heilsufakligar seruppgávur ella sernámsfrøðiligar uppgávur, sum krevja sernámsfrøðiligar førleikar.

Stuðulin viðvirkar til, at borgarin fær framt tær praktisku uppgávurnar, sum viðkomandi sjálvur kundi framt, um hann ikki bar brek, og at borgarin kann luttaka á jøvnum føti við aðrar borgarar í frítíðar- og mentanarlívinum sum heild.

*Til § 36, stk. 3*

Í § 36, stk. 3 er ásett, at persónur, sum hevur tætt tilknýti til persón, sum skal hava stuðulstænastu, kann ikki setast sum stuðulsfólk. Stuðulstænasta verður veitt til uppgávur, sum liggja uttan fyri tað, sum familjan ella persónar, sum hava tætt tilknýti til persónin vanliga taka sær av. Tískil er ikki møguligt, at foreldur, hjúnafelagi ella avvarðandi kunnu átaka sær at veita borgarastýrda stuðulstænastu. Atlitið at tryggja privatlív og sjálvsavgerðarrætt borgarans og hjá familjuni talar eisini fyri, at persónar við tøttum tilknýti til borgaran, ið fær tænastu, ikki røkja uppgávuna.

Tað eru aðrar skipanir sambært hesi lóggávu og aðrari lóggávu, sum geva møguleika fyri, at familja kann fáa fíggjarligan stuðul til at taka sær av sínum børnum ella maka. T.d. er skipanin við, at foreldur kunnu fáa endurgjald fyri inntøkumiss upp til 25.000 kr. um mðr. fyri at vera heima og ansa barni, ið ber brek. Harumframt er nú eisini møguligt at fáa fíggjarligan stuðul til at fara av arbeiðsmarknaðinum at taka sær av persóni, sum er doyggjandi ella persóni við seinheilaskaða, sum ikki hevur fingið tillutað varandi bústað frá Almannaverkinum, men sum er á bíðilista.

Hjálparviðbót og røktarviðbót sambært almannapensjónslógini, eru eisini ætlað til, at ein persónur, sum hevur tørv á hjálp ella røkt, kann rinda onkrum fyri at taka sær av uppgávuni.

Starvsfólk, sum átaka sær borgarastýrda stuðulstænastu, eru ikki neyðturviliga námsfrøðingar ella heilsustarvsfólk, men eisini onnur, ið kunnu røkja ítøkiliga tørvin hjá borgaranum. Talan kann t.d. vera um persónar, sum hava royndir við at arbeiða við fólki, sum bera brek, og sum hava eginleikar at møta teimum, har tey eru. Tað kann t.d. eisini vera lesandi, sum ynskja at útbúgva seg sum námsfrøðingar ella innan heilsuverkið. Miðast skal eftir, at tann, sum settur verður hevur somu áhugamál, sum viðkomandi borgari, og skal helst vera í sama aldursbólki, sum viðkomandi borgari, tá talan er um vaksnan persón.

Øll, sum sett verða, skulu hava kunning og vegleiðing til arbeiðsøkið og kenna til rættindi og skyldur hjá starvsfólki og persóninum, sum fær stuðulstænastuna.

*Til § 36, stk. 4.*
§ 36, stk. 4 heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur fyri, hvussu borgarastýrd stuðulstænasta verður skipað, undir hesum góðkenning av stuðulsfólkum, ið verða sett í starv. Somuleiðis fær landsstýrismaðurin heimild at seta treytir fyri tillutan av borgarastýrdari stuðulstænastu, og hvussu nógvir tímar kunnu tillutast. Eisini fær landsstýrismaðurin heimild fyri at seta minsta tal av stuðulstímum og um neyðugt eitt mesta tal av stuðulstímum.

Treytin fyri, at stuðulstænasta kann skipast sum borgarastýrd, er, at persónur hevur sjálvur megnar at umsita rættin, og tískil skal viðkomandi hava kognitivar førleikar til at átaka sær uppgávuna.

Almannaverkið rindar útreiðslurnar fyri stuðulsfólkið sambært nærri ásettum reglum og treytum. T.d. ferðaútreiðslur í bussi, atgongumerki til biograf, svimjing ella konsertir o.s.fr.

***Endurvenjing***

***Til § 37***
Ásetingin í § 37 um endurvenjing  er framhald av verandi áseting í § 29 í forsorgarlógini um endurvenjing.

Heimildin hjá Almannaverkinum til at skipa og veita endurvenjing til borgarar 18 ár og eldri og upp til fólkapensjónsaldur, sum hava tørv á endurvenjing í sambandi við mistar førleikar, verður greið. Í høvuðsheitum eru tað fólk í aldrinum 18 til fólkapensjónsaldur, sum eru fevnd av hesi áseting, men í ávísum førum kann vera fakliga ráðiligt at veita ungum fólkum frá 16 ára aldri við mistum førleika endurvenjing, sum liður í einari arbeiðsbúgving sambært lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Hetta undantak er ásett í § 37, stk. 2.

Endurvenjing til persónar, yngri enn 18 ár, kann veitast sambært § 24 sum endurgjald fyri meirútreiðslur av barni, ið ber brek. Tílík endurvenjing verður veitt av privatum veitarum.

Persónur, sum er fólkapensjónistur, fær ikki endurvenjing sambært hesi lóg, men hevur sambært lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. møguleika fyri at fáa endurvenjing frá kommunu.

Endurvenjingin hevur til endamáls, at borgarin heilt ella partvíst endurvinnur sama førleika, sum áðrenn førleikin var mistur. Endamálið við endurvenjing í Almannaverkinum er, at borgarin kann fáa og varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin, ella at viðkomandi kann klára seg uttan ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

Fyri at endurvenjingin skal verða miðvís, er tað neyðugt, at fólk við førleikatarni hava eina endurvenjingarætlan. Ein endurvenjingarætlan hevur sum endamál at lýsa fýra tættir: Førleikan áðrenn førleikatarnið, lýsing av førleikatarninum, verandi førleika og mál fyri endurvenjingini. Vísast skal til, hvar endurvenjingin skal veitast, og hvussu langt tíðarskeið endurvenjingin verður mett at vara. Tað er umráðandi, at ætlanin verður gjørd í samráð við borgaran, og Almannaverkið skal taka støði í endurvenjingarætlanini, sum verður veitt av sjúkrahúsinum, tá ið borgarar verða útskrivaðir.

Almannaverkið fær framhaldandi heimild í § 66 í hesi lóg at keypa tænastu frá privatum veitarum ella øðrum myndugleikum fyri at kunna veita endurvenjing kring landið.

*Til § 37, stk. 3*
Treytin fyri at fáa stuðul til hjálparráð sambært § 29 er, at talan skal vera um varandi tørv. Ásetingin gevur heimild til at víkja frá treytini um, at talan skal vera um varandi tørv fyri at fáa stuðul til hjálparráð sambært § 29. Endamálið við endurvenjing er at endurvinna mistar førleikar og tí ber ikki til at staðfesta, at talan er um varandi tørv. Hjálparráðið kann stuðla undir, at ein persónur kann endurvinna mistar førleikar. Heimildin fevnir einans um endurvenjing frá Almannaverkinum og ikki øðrum myndugleikum.

*Til § 37, stk. 3*
Í § 37, stk. 3 verður landsstýrismanninum heimilað at áseta reglur og treytir um endurvenjing innan Almannaverkið. Ásetingar í hesi lóg eru bert galdandi fyri ta endurvenjing, ið fer fram í Almannaverkinum, og hevur tí ikki ávirkan á ta endurvenjing, ið fer fram í sjúkrahúsunum ella í kommununum. Dentur hevur tó verið lagdur á at samstarva við kommunur og Heilsu- og innlendismálaráðið fyri at tryggja, at borgarar ikki detta niðurímillum skipanirnar, og fyri at tryggja, at borgarin fær eina samskipaða og skynsama endurvenjing tvørtur um stovnar og sostatt gera tað greitt, hvørja endurvenjing ávikavist kommunur, Almannaverkið og Heilsuverkið veita borgarum.

Í 2017 varð kunngerð um endurvenjing sett í gildi, sum ásetir nærri reglur um endurvenjingarætlan, og áleggur Almannaverkinum at samstarva við aðrar myndugleikar.

Tað eru serliga reglur um endurvenjingarætlan og markamót til endurvenjing, veitta av heilsuverkinum og kommunum, sum hava týdning, og er ætlanin ikki at gera stórvegis broytingar í mun til verandi skipan.

***Viðlíkahaldsvenjing***

***Til § 38***

Talan er um nýggja áseting, sum heimilar viðlíkahaldsvenjing til borgarar, sum orsakað av breki ella sjúku hava skert virkisføri, ið munandi víkir frá aldurssvarandi virkisføri og hevur týðandi ávirkan á sjálvhjálpni.

Viðlíkahaldsvenjing sambært hesi áseting er málrættað venjing, sum skal forða fyri førleikamissi, og sum skal fasthalda ella betra um verandi førleika.

Viðlíkahaldsvenjing sambært hesi áseting er likamlig, meðan aðrar skipanir sambært hesi lóg, hava fokus á sálarliga viðlíkahaldsvenjing.

Skipanin er ætlað borgarum, sum hava umfatandi og varandi tørv, og sum ikki fáa viðlíkahaldsvenjing í dag.

Sum dømi um týðandi og skert virkisføri, ið munandi víkir frá aldurssvarandi virkisføri og hevur týðandi ávirkan á sjálvhjálpni er persónur, sum hevur ALS, sum er ein so mikið versnandi sjúka, at neyðugt er at gera viðlíkahaldsvenjingar fyri at útseta førleikamiss. Hinvegin kann ein persónur hava gikt, men við røttu viðgerð, hevur hetta ikki munandi fylgjur fyri virkisførið.

Viðlíkahaldsvenjing sambært hesi áseting er ætlað persóni, sum er 18 ár ella eldri og undir fólkapensjónsaldri.

Persónur, sum er fólkapensjónistur, fær ikki viðlíkahaldsvenjing sambært hesi lóg, men hevur sambært lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. møguleika fyri at fáa viðlíkahaldsvenjing frá kommunu.

Borgarar, sum fáa búpláss frá Almannaverkinum sambært §§ 45 og 46 í hesi lóg, eru ikki fevndir av ásetingini, tí viðlíkahaldsvenjing verður partur av grundtænastuni í bútilboðnum.

Børn eru heldur ikki fevnd av ásetingini, tí hesi fáa viðlíkahaldsvenjing frá privatum veitarum við stuðli frá Heilsutrygd, og kunnu foreldur sambært § 24 í hesi lóg fáa endurgoldið egingjaldið fyri viðgerð hjá ergoterapeuti ella fysioterapeuti eftir nærri ásettum treytum.

Viðlíkahaldsvenjing sambært hesi løgtingslóg er m.a. ætlað persónum, sum varandi hava:

- Seinheilaskaða, orsakað av vanlukku, apoplexi ella heilatumor
- Kroniska sjúku, eitt nú Parkinson, Sclerosu, ALS ella giktasjúku
- Hjartasjúku ella lungnasjúku
- Mistan kropsligan førleika, vegna skaða og/ella slit
- Viðføddan heilaskaða, kropsligt og/ella kognitivt brek

*Til § 38, stk. 2*
§ 38, stk. 2 ásetir, at viðlíkahaldsvenjing sambært hesum lógaruppskoti er málrættað so at viðkomandi persónur skal fáa og varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin og skal kunna klára seg uttan ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

*Til § 38, stk. 3*
Í § 38, stk. 3 verður ásett, hvussu langt tíðarskeið játtan til viðlíkahaldsvenjing Almannaverkið í mesta lagi kann játtað í senn. Almannaverkið kann játta styttri tíðarskeið, um viðurskiftini hjá persóninum tala fyri tí. Tað kann vera sjúka, sum ger, at tørvurin á viðlíkahaldsvenjing broytist skjótt. Almannaverkið kann tó eisini leingja eina játtan uttan stórvegis málsviðgerð, um viðurskiftini hjá persóninum tala fyri tí, t.d. um talan er um støðuga sjúku, har tørvurin á viðlíkahaldsvenjing ongantíð broytist, ella tí støðan hjá viðkomandi er eyðsæð fyri myndugleikan, eitt nú tí hann gongur til viðlíkahaldsvenjing.

Endamálið við hesi áseting er at gera tað lættari fyri persónar, sum hava tørv á viðlíkahaldsvenjing soleiðis, at hesi sleppa undan at brúka óneyðuga tíð og orku til umsóknir, eins og Almannaverkið sparir í málsviðgerðartíð.

Støðan hjá borgarum, sum hava tørv á viðlíkahaldsvenjing, er varandi, og tørvurin á viðlíkahaldsvenjing verður aloftast eisini varandi. Hinvegin so kann støðan eisini broytast munandi, og tá er gott, at støðan hjá borgaranum verður tikin upp m.a. fyri at fáa staðfest, um viðlíkahaldsvenjing framhaldandi tænir sínum endamáli. Almannaverkið hevur skyldu til at taka nýggja avgerð um viðlíkahaldsvenjing, áðrenn játtanarskeiðið endar, fyri at fyribyrgja, at borgari stendur uttan tilboð, orsakað av langari svartíð.

*Til § 38, stk. 4*
Í § 38, stk. 4 verður landsstýrismanninum heimilað at áseta reglur og treytir fyri at fáa viðlíkahaldsvenjing innan Almannaverkið, og um viðlíkahaldsvvenjingarætlanir og møguligt samstarv við sjúkrahúsverkið, kommunur og kommunal samstarv. Ásetingar í hesi lóg eru bert galdandi fyri ta viðlíkahaldsvenjing, ið fer fram í Almannaverkinum, og hevur tí ikki ávirkan á ta viðlíkahaldsvenjing, ið fer fram í sjúkrahúsunum ella í kommunu ella kommunlaum samstarvsøkjum.

***Virknistænasta***
***Til § 39***

Við hesi áseting fær Almannaverkið heimild at veita pláss á dagstovni og frítíðarheimi til barn, ið ber so týðandi brek, at barnið ikki kann vera á kommunalum dagstovni ella frítíðarheimi.

Endamálið við at veita dagstovnaplássið er, at foreldrini hava møguleika fyri at varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin og børn, sum bera brek, og sum ikki megna at vera í einum vanligum dagstovnaplássi, kunnu fáa ein innihaldsríkan og mennandi gerandisdag á jøvnum føti við sínar javnaldrar.

Sambært § 5 í dagstovnalógini hava kommunurnar skyldu at bjóða børnum við serligum tørvi pláss á dagstovni og dagrøkt á jøvnum føti við onnur børn, sum búgva í kommununi, um børnini kunnu integrerast í kommunalu ansingarskipanina. Tað er eisini ásett í § 5, stk. 2 í dagstovnalógini, at tað skulu veitast nøktandi hølisumstøður og námsfrøðilig tilboð til børn við serligum tørvi.

Spurningurin um, nær eitt barn kann integrerast á kommunalu ansingarstovnunum fer altíð verða svaraður út frá eini meting í hvørjum ítøkiligum føri og hongur eisini neyvt saman við tí

hugburði, sum samfelagið hevur til borgarar, ið bera brek. Seinnu árini hevur rákið í Føroyum verið, at myndugleikar og stovnar hava lagað seg eftir brekpolitisku meginreglunum um inklusión og hava skipað almennu tilboðini soleiðis, at tey eisini fevna um fólk, sum bera brek. Flest børn, sum bera brek, ganga á kommunalum dagstovni á jøvnum føti við onnur børn. Á nógvum dagstovnum kring landið eru sokallaðar serstovur, sum hýsa børnum, sum bera brek, og tí ikki megna at vera saman við hinum børnunum. Nøkur børn eru einans í serstovuni, meðan onnur børn kunnu vera partar av degnum ella vikuni saman við hinum børnunum og hava so tørv á at vera í serstovuni ein part av degnum ella partar av vikuni.

Meginreglan er, at børn, sum bera brek, skulu hava pláss á kommunalu ansingarstovnum.

Tað eru tó eisini børn, sum hava so umfatandi tørv, at tey ikki megna ella tola at vera saman við øðrum børnum, ella hava so umfatandi tørv á sernámsfrøðiligum stuðli, venjingum og røkt, at tey krevja heilt serlig hølisviðurskifti og starvsfólk, sum kommunalu tilboðini ikki megna at veita.

Talan er t.d. um børn, sum hava fjølbrek, ella børn, sum umframt umfatandi autismu, eisini hava aðrar diagnosur sum ADHD, angist o.s.fr. Dagstovnatilboðini hjá Almannaverkinum eru einans ætlað hesum børnum.

Tað er sostatt einans í teimum førum, har barnið hvørki megnar ella tolir at vera á dagstovni við øðrum børnum, at barnið fær tilboð sambært hesi lóg. Ítøkiligar metingar verða gjørdar frá máli til mál, og Almannaverkið tekur endaliga avgerð í hesum málum.

*Frítíðarheim*

Børn, sum ganga í skúla, hava møguleika fyri at fáa frítíðarskúlatilboð frá kommunum aftaná skúlatíð. Ætlanin við hesum tilboðum er eins og við dagstovnatilboðum at geva foreldrum møguleika at fáa børnini ansað og at veita teimum mennandi og stimbrandi tilboð, meðan foreldrini eru til arbeiðis. Kommunurnar gera sjálvar av, hvussu leingi børn kunnu fáa frítíðarskúlatilboð, men flestu kommunur bjóða børnum til og við 3. flokk tilboð.

Meginreglan er, at børn, sum bera brek, fáa frítíðarskúlatilboð á jøvnum føti við onnur børn, og tað er skyldan hjá kommunum at veita nøktandi hølis - og starvsfólkaviðurskifti til børn, sum bera brek. Nógv børn, sum bera brek, ganga í frítíðarskúla hjá kommununum.

Tað eru tó nøkur børn, sum hava so umfatandi tørv, at tey ikki megna ella tola at vera saman við hinum børnunum í frítíðarskúlanum. Talan kann t.d. vera um børn við fjølbreki ella børn, sum umframt umfatandi autismu eisini hava aðrar diagnosur sum ADHD, angist o.s.fr. Fyri, at foreldrini kunnu varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin, og fyri, at børnini eisini skulu hava møguleika fyri at verða í skipaðum og mennandi tilboðum aftaná skúlatíð, kann Almannaverkið veita teimum frítíðarskúlatilboð.

Tað er sostatt einans í teimum førum, har barnið hvørki megnar ella tolir at vera í frítíðarskúla við øðrum børnum, at barnið fær tilboð sambært hesi lóg. Ítøkiligar metingar verða gjørdar frá máli til mál, og Almannaverkið tekur endaliga avgerð í hesum málum.

Sum nevnt, bjóða kommunurnar vanliga børnum til og við 3. flokk frítíðarskúlatilboð. Eftir hetta verður mett, at børnini megna at vera einsamøll heima ella at koma til og frá frítíðarítrivi. Børn, sum bera brek, hava ofta tørv á einum skipaðum og mennandi tilboði aftaná 3. flokk, tí tey ikki á sama hátt megna at vera heima einsamøll ella at koma til og frá ymiskum frítíðarítrivum.

Fyri at børnini framhaldandi kunnu fáa eitt skipað og mennandi tilboð aftaná skúlatíð, og fyri at foreldrini kunnu halda fram við at arbeiða, kann Almannaverkið bjóða børnum, sum hava likamligt ella sálarligt brek ella sosialar trupulleikar, frítíðartilboð, til tey eru 18 ár.

Nøkur av børnunum fáa tilboð hvønn dag, meðan onnur fáa tilboð nakrar dagar um vikuna.

Sambært Almannaverkinum eru tað í løtuni 55 børn, yngri enn 18 ár, sum fáa frítíðartilboð kring landið frá Almannaverkinum.

*Foreldragjald*
Sambært § 39, stk. 2 fær landsstýrismaðurin heimild at áseta foreldragjald fyri pláss á dagstovni og frítíðarheimi hjá landinum. Hetta samsvarar við heimildina, ið kommunurnar hava sambært dagstovnalógini at áseta gjald. Landsstýrismaðurin kann tó avgera um hann ynskir at nýta heimildina at krevja gjald.

Heimildin avmarkar, hvussu høgt foreldragjald kann ásetast við tað, at foreldragjaldið skal ásetast í mun til, eitt samsvarandi kommunalt pláss. Sambært dagstovnalógini kann foreldragjaldið í mesta lagi vera 30 % av rakstrarútreiðslunum. Landsstýrismaðurin kann tí antin velja at taka støði í lægsta kommunala foreldragjaldinum, hægsta foreldragjaldinum ella at leggja seg á eitt miðalstøði. Eisini kann landsstýrismaðurin taka støði í foreldragjaldinum í tí kommununi, har tilboðið verður veitt.

Hóast rakstrarútreiðslurnar hjá landinum helst eru hægri enn kommunalu útreiðslurnar, av tí at størri starvsfólkaorka krevst, kann foreldragjaldið ikki setast hægri enn samsvarandi kommunalu gjøldini. Heimildin rúmar tó, at foreldragjaldið kann setast lægri.

Grundgevingin fyri at áseta heimild at krevja foreldragjald er, at foreldur, ið hava børn á dagstovni ella frítíðarheimi, rinda fyri hesa tænastu.

*Faklig nevnd*
Av tí, at talan er um markamót millum land og kommunur, setir landsstýrismaðurin sambært § 39, stk. 3 eina óhefta fakliga nevnd at gera tilmæli í teimum førum, ivamál er um, hvør myndugleiki eigur ábyrgdina.

Í førum, har ein kommuna ikki metir seg vera føra fyri at játta ansingarpláss til eitt barn, tí barnið hevur ein heilt serligan tørv, skal kommunan, áðrenn avgerð er tikin, sambært dagstovnalógini beina málið víðari til Almannaverkið. Um Almannaverkið í tílíkum førum ikki metir, at barnið skal hava tilboð sambært hesum lógaruppskoti, skal Almannaverkið leggja málið fyri nevndina. Øll mál, ið semja ikki er um millum kommununa og Almannaverkið, skulu leggjast fyri nevndina.

Landsstýrismaðurin velur 3 serfrøðingar til ávikavist limir og varalimir í nevndina. Nevndin verður vald fjórða hvørt ár og verður mannað við serfrøðingum, sum t.d. barnalækna, barnapsykiatara, sálarfrøðingi, heilsufrøðingi, námsfrøðingi, fysioterapeuti e.l.

Almannaverkið tekur avgerð eftir tilmæli frá nevndini. Avgerðin hjá Almannaverkinum kann kærast til Kærunevndina í almannamálum.

***Til § 40***
Endamálið við virknistænastu sambært § 40 er at geva borgarum, sum ikki hava møguleika at luttaka á vanliga arbeiðsmarknaðinum, orsakað av einum likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum, møguleika fyri at varðveita ella betra um persónligar førleikar ella lívskor við at arbeiða.

Virknistænasta kann eisini hava til endamáls at stuðla undir, at persónar gerast førir fyri at fara undir fyriskipanir sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

Virknistænasta viðvirkar harumframt til, at persónur fær møguleika fyri at hava ein gerandisdag, sum líkist gerandisdegnum hjá øðrum við uppbýti millum arbeiði og frítíð ella millum skúla og frítíð og at verða partur av felagsskapinum.

Persónar, ið kunnu fáa tilboð um virknistænastu, eru í høvuðsheitum fyritíðarpensjónistar, ið hava so týðandi skert likamligt ella sálarligt virkisføri, at hesir sum oftast ikki megna eitt nú arbeiðsvenjing ella fyrireikandi ella greinandi fyriskipanir sambært § 9 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

Felags fyri hesar persónar er, at teir í stóran mun hava tørv á fakfólki til at stuðla og vegleiða teimum bæði í mun til arbeiðsgongd og í mun til ítøkiligar arbeiðsuppgávur, ið verða tillagaðar førleikunum hjá tí einstaka. Tað kunnu t.d. vera borgarar, sum hava tørv á hjálp til at samskifta, tørva serliga umsorgan og røkt ella tørva stuðul til at vera saman við øðrum fólki. Mett verður ikki, at vanligi arbeiðsmarknaðurin ella fyriskipanir sambært lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk, megna at veita hesum borgarum neyðugar karmar og stuðul til at megna eitt arbeiði á jøvnum føti við onnur.

Seinnu árini hevur politiska ynski verið at skapa ein rúmligan arbeiðsmarknað soleiðis, at so nógvir føroyingar sum gjørligt, kunnu uppihalda sær sjálvum heilt ella lutvíst við at luttaka á vanliga arbeiðsmarknaðinum.

Í samsvari við politiska ynskið og endamálið við lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk, hevur Almannaverkið lagt størri dent á at skapa karmar fyri, at persónur við týðandi likamligum ella sálarligum breki - heldur enn at fáa tillutað fyritíðarpensjón, so skjótt viðkomandi er fyltur 18 ár - kann fáa tilknýtið til vanliga arbeiðsmarknaðin soleiðis, at persónurin kann uppihalda sær sjálvum heilt ella partvíst.

Tí eru tilboðini á verkstøðum og verkhúsum og frítíðartilboðum eisini ætlað teimum, sum koma undir ásetingarnar í § 8 og 9 í lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk og verður alsamt størri dentur lagdur á at fáa í lag samstarv við vanliga arbeiðsmarknaðin soleiðis, at hesir borgarar í størri ella minni mun kunnu luttaka á vanliga arbeiðsmarknaðinum.

Sum nakað nýtt verða tænastur, sum higartil hava verið skipaðar sum stuðulstænastur í toymum, frameftir skipaðar sum virknistænastur, har dentur verður lagdur á at skipa sosialnámsfrøðilig bólkatilboð til ung, sum hava til endamáls at geva teimum ein virknan og innihaldsríkan gerandisdag saman við øðrum, sum eru í somu støðu. Innihaldsliga verða tilboðini tey somu. T.d. kunnu ymisku frítíðartilboðini, sum eru eftir skúlatíð, nevnast og t.d. eisini mentortoymini, sum hava til endamáls at stuðla undir at ung, sum hava líkamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar, kunnu megna at fáa eitt prógv frá serliga skipaðum miðnámi.

Tað er ikki ein treyt fyri virknistænastu sambært hesi lóg, at persónar skulu vera sjúkugreinaðir, áðrenn tilboð kann veitast. Oftast vísir søgan, at viðkomandi hevur stórar trupulleikar og helst okkurt brek, uttan at orsøkirnar til hesar trupulleikarnar í hvørjum einstøkum føri neyvt kunnu staðfestast.

*Til § 40, stk. 3*
Tá borgari fær bjóðað eina virknistænastu, skal hon taka støði í virkisførleikunum, og dentur verður lagdur á, at borgarin við virknistænastuni kann varðveita og menna virkisførið.

Tískil eru eisini ymisk sløg av virknistænastum, og verða hesar veittar av Almannaverkinum, Dugna, Sjóndeplinum og Fountainhúsinum.

Virknistænasturnar hjá Almannaverkinum verða skipaðar sum vard verkstøð, verkhús ella frítíðartilboð.

Tænastan á vardum verkstøðum er eyðkend við at støði verður tikið í framleiðslu av ymiskum slagi fyri bæði privat virkir og almennar stovnar. Harumframt verðabrúkslutir framleddir til egnar sølubúðir.

Tænastan á verkhúsum eru eyðkend við, at veita stimbrandi og mennandi sosialnámsfrøðiligt virksemi umframt smávegis framleiðslu. Borgarar á verkhúsum framleiða tó vøru, sum verður seld. Hetta er t.d. brúksting, jólapynt o.s.fr.

Frítíðartilboð eru tilboð, sum verða veitt børnum eftir skúlatíð.

Kommunurnar bjóða vanliga børnum til og við 3. flokk frítíðarskúlatilboð. Eftir hetta verður mett, at børnini megna at vera einsamøll heima ella at koma til og frá frítíðarítrivi.

Børn, sum bera brek, hava ofta tørv á einum skipaðum og mennandi tilboði aftaná 3. flokk, tí tey ikki á sama hátt megna at vera heima einsamøll ella at koma til og frá ymiskum frítíðarítrivum.

Fyri at børnini framhaldandi kunnu fáa eitt skipað og mennandi tilboð aftaná skúlatíð, og fyri at foreldrini kunnu halda fram við at arbeiða, kann Almannaverkið bjóða børnum, sum hava likamligt ella sálarligt brek ella sosialar trupulleikar, frítíðartilboð, til tey eru 18 ár.

Nøkur av børnunum fáa tilboð hvønn dag, meðan onnur fáa tilboð nakrar dagar um vikuna.

Frítíðartilboð eru eisini klubbtilboð, sum verða veitt børnum og ungum um kvøldið. Mentortoymið er eisini eitt frítíðartilboð, sum er málrættað ungum, sum ganga á serliga skipaðum miðnámi. Frítíðartilboðini viðvirka til, at borgarin samstundis, sum persónligu og sosialu førleikarnir verða styrktir, eisini fær tilknýti til aðrar borgarar, sum eru í somu støðu. Frítíðartilboðini kunnu viðvirka til, at borgarin gerst partur av einum netverki, sum kann brúkast uttan fyri tað skipaða tilboðið, og kann tí bæði virka motiverandi og mennandi fyri borgaran.

Frítíðartilboð eru eisini fyri vaksnar borgarar, sum ikki megna at vera í verkhúsi ella á vardum verkstaði, men sum hava tørv á at koma út og vera saman við øðrum. Endamálið er, at borgarin verður partur av einum felagsskapi og at fáa ein gerandisdag, sum líkist honum, sum onnur hava.

Hesi tilboð eru t.d. tilhaldsstøð fyri eldri borgarar við menningartarni, ella fólki við sálarligum avbjóðingum, sum ikki megna at vera á vardum verkstaði ella verkhúsi, men sum kunnu gera ymiskt ítriv í samveru við aðrar borgarar, sum eru í somu støðu.

Nøkur av hesum tilboðum hava verið skipað sum stuðulstænasta sambært forsorgarlógini. Nevnast kunnu Heildin, sum er ætlað borgarum, sum hava seinheilaskaða, Fjálvi, sum er ætlað borgarum við sálarligum avbjóðingum og Skotarák, sum er ætlað borgarum við demens, sum ikki eru vorðnir fólkapensjónistar. Frameftir verða hesi tilboð skipað sum virknistænastur. Fyri borgaran kemur hetta ikki at merkjast stórvegis.

Umframt Almannaverkið so veita eisini sjálvsognarstovnar og sjálvboðin felagsskapur virknistænastur. Hesar skulu góðkennast sambært § 66 í hesi lóg. Í góðkenningini verður greitt, hvussu upptøka v.m. verður skipað. Higartil hava hesir stovnar og felagsskapir sjálvir skipað upptøkuna, og ætlanin er ikki at broyta henda leist. Almannaverkið vegleiðir og upplýsir

borgarar um tænastur, sum hesir veita, og sambært Almannaverkinum er gott samskifti og samstarv við hesi tilboð.

Dugni veitir virknistænastur, sum eru skipaðar sum endurbúgvingartilboð og arbeiðstilboð. Endurbúgvingartilboð hjá Dugna er ætlað persónum, sum hava rørslutarn ella lættari persónligar/sinnisligar/sosialar trupulleikar. Endamálið við endurbúgvingartilboðum hjá Dugna er at meta um og stuðla undir, at borgarin kann fáa tilknýti til vanliga arbeiðsmarknaðin, fáa tillagað starv ella koma undir útbúgving. Arbeiðstilboðini hjá Dugna eru ætlað fyritíðarpensjónistum, sum hava tørv á arbeiðstilboðum, sum gevur teimum innihald í gerandisdagin og fyribyrgja dapurskygni og einsemi. Virknistænasturnar hjá Dugna eru ikki ætlaðar fólki við menningartarni.

Sjóndepilin veitir persónum, sum eru sjónveikir ella blindir, virknistænastu. Eisini hevur Sjóndepilin virknistænastur til borgarar, sum umframt at vera sjónveikir ella blindir eisini hava lættari menningartarn. Virknistænasturnar hjá Sjóndeplinum fevna um dagtilhald og verkstað.

Fountainhúsið er skipað sum eitt arbeiðsrætta tilboð. Málið er, at fleiri fólk við sálarligum avbjóðingum fáa eina meiningsfulla tilveru, sum fyri tann einstaka gevur innihald í gerandisdagin og nakað at koma upp til. Hvør einstakur verður stuðlaður í at brúka egnar styrkir og menna egnar førleikar og fær møguleika at skapa nakrar positivar og varandi broytingar. Hetta gevur betur møguleika at megna eitt arbeiði, skúla og ein gerandisdag so sjálvstøðugan, sum tilber. Fountainhúsið er skipað eftir einum altjóða leisti fyri Fountainhús

*Til 40, stk. 4*
Tann, ið luttekur í framleiðslurættaðum arbeiðstilboði, fær samsýning, sum í minsta lagi er 6 %av grundløn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, frítíðarløn ikki íroknað. T.v.s., at samsýningin verður roknað soleiðis: 6 % av tímaløn (galdandi 1. mai 2018) 128,94 kr. = 7,74 kr. Samsýningin kann tó eisini vera hægri.

Borgarar, sum fáa virknistænastu, eru í høvuðsheitum fyritíðarpensjónistar, og er fyritíðarpensjónin endurbót fyri vantandi arbeiðsførleikar, meðan persónar, sum eru fevndir av arbeiðsfremjandi tiltøkum, ikki eru fyritíðarpensjónistar, men fáa uppihaldsveiting sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøkum.

Borgarar, ið hava eitt meira mennandi og stimbrandi tilboð fáa ikki samsýning.

Talan er um somu skipan, sum hevur verið í nógv ár, og sum varð skipað í kunngerð í 2015. Tað hevur verið ov tilvildarligt, hvør hevur fingið samsýning, og tí er Almannaverkið í ferð við at fáa hesi viðurskifti í rættlag soleiðis, at tað verður greitt fyri borgaran, hví viðkomandi fær ella ikki fær samsýning fyri virknistænastu. Tað verður ásett í virkisætlanini, sum skal gerast sambært § 33 í hesi lóg.

***Umlætting***

***Til § 41***
Umlætting er ein tænasta, hvørs endamál er at lætta um hjá foreldrum, hjúnafelaga/maka ella øðrum avvarðandi, sum eru umsorganarpersónar hjá persóni, sum hevur likamligt, sálarligt brek ella hevur sosialar trupulleikar. Umlætting kann eisini hava til endamáls at menna persónligar og sosialar førleikar hjá persónum, sum búgva einsamallir og hava avmarkað samband við onnur fólk.

*Til § 41, stk. 1, nr. 1 og nr. 2*

Málbólkurin sambært § 41, stk. 1, nr. 1 eru foreldur, hjúnafelagi/maki ella onnur avvarðandi, sum hava persón við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella sosialum trupulleika búgvandi. Avgerandi er, at tann, ið fær umlætting, hevur dagligu umsorganina fyri persóninum. Hetta merkir, at fosturfamilja eisini kann fáa umlætting sambært hesi lóg eins og biologisk foreldur, sum hava umsorganarábyrgd. Fosturfamilja, ið hevur trupult barn búgvandi, kann sambært § 15, stk. 1 í barnaverndarlógini fáa tilboð um umlætting hjá góðkendum fosturforeldrum til tess at lætta um. Hevur barnið týðandi likamligt ella sálarligt brek, so kann fosturfamilja fáa umlætting sambært hesi lóg á jøvnum føti við biologiska familju.

Málbólkur sambært § 41, stk. 1, nr. 2 er persónur við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum, sum býr einsamallur, og sum hevur avmarkað samband við onnur fólk. Hesi kunnu menna sosialar og persónligar førleikar við at koma til umlætting, vera saman við øðrum borgarum og fáa nakrar upplivingar. Tað kunnu eisini vera persónar, sum hava tørv á miðvísari endurvenjing í breiðasta týdningi.

Kommunurnar hava sambært § 10 í lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. ábyrgd av at veita umlætting til fólkapensjónistar.

Hetta merkir, at borgarin, *sum skal til umlætting,* er fólkapensjónistur.

Er talan um hjún, har persónurin, sum skal til umlætting, er fólkapensjónistur, so er tað kommunan, sum skal veita umlættingina, hóast hjúnafelagin, sum skal umlættast, ikki er fólkapensjónistur.

Er talan um foreldur, sum eru í fólkapensjónsaldri, sum hava vaksi barn, sum ber týðandi likamligt ella sálarligt brek ella hevur víðfevndar sosialar trupulleikar, búgvandi, so kunnu foreldrini fáa umlætting sambært hesi løgtingslóg.

At borgari fær aðrar tænastur frá Almannaverkinum - eitt nú stuðulstænastu og virknistænastu - hevur ikki ávirkan á, um hjúnafelagin ella makin kann fáa umlætting. Sama er galdandi fyri familjur. Tað er onki, sum forðar fyri, at ein familja, sum hevur barn, sum ber brek, búgvandi, sum fær umfatandi stuðulstænastu ella dagstovnatilboð – eisini kann fáa umlætting. Tað, sum er umráðandi, er, at umlættingin tænir endamálinum.

*Til § 41, stk. 2*
Umlætting fer fyri tað mesta fram á umlættingarstovnum, sum eru skipaðir kring landið. Tó er eisini møguleiki fyri at veita umlætting gerandisdagar, umframt summarumlætting eftir tørvi.

Tað kunnu eisini vera støður, har ein familja hevur tørv á náttarumlætting fyri at megna gerandisdagin og fyri at kunna varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Tá kunnu foreldrini fáa umlætting, skipað sum hjáveru og vøku í heiminum, ella er t.d. eisini møguleiki fyri, at barnið fer á eitt bútilboð at sova.

*Til § 41, stk. 3*
Til tess at røkka endamálinum við umlætting er neyðugt, at tænastan verður løgd til rættis saman við tí, sum fær tillutað tænastu. Tískil hevur tað týdning, at Almannaverkið og sjálvsognarstovnar leggja seg eftir at skipa og tilrættaleggja tænastuna saman við teimum, sum hava tørv á henni. Er tænastan ætlað foreldrum, so skulu hesi viðvirka í tilrættisleggjanini. Er hinvegin talan um ein persón, sum býr einsamallurog skal hava umlætting, so skal tænastan leggjast tilrættis saman við viðkomandi.

*Til § 41, stk. 4*
Í § 41, stk. 4 verður landsstýrismanninum heimilað at áseta gjald fyri umlætting. Vaksin, sum fáa umlætting, gjalda í løtuni 124 kr. um samdøgrið, meðan foreldur ikki gjalda fyri umlætting.

Tó verður í ávísum førum avtalað við foreldur, at børnini hava pening við, tá tey koma til umlætting soleiðis, at børnini kunnu rinda fyri eitt nú atgongumerkið til biograf, svimjing ella fyri at fara á matstovu o.s.fr.

Heimild verður nú fyri at krevja gjald frá vaksnum, sum eru til umlætting og frá foreldrum, sum fáa umlætting. Gjaldið verður ásett í kunngerð og verður javnað sambært áseting og javning. Heimildin fevnir eisini um at gera serligar reglur fyri t.d. børn, sum eru til umlætting, soleiðis at barnið skal hava pening við til t.d. atgongumerkið til biograf, svimjing ella at fara á matstovu o.s.fr.

***Tulkatænasta***

***Til § 42***
Ásett verður, hvørjum tulkur kann veitast. Kravið sambært stk. 1 er, at persónurin skal hava onga ella niðursetta hoyrn ella hava teknmál sum mál, eins og kravið er, at tað er orsakað av hesum, at viðkomandi hevur tørv á tulki, tá samskift verður við onnur.

Ásetingin í § 42, stk. 2 hevur til endamáls at skilmarka, nær tulking verður veitt uttan gjald. Tulkur er ókeypis fyri brúkaran, tá tulkurin er neyðugur fyri, at viðkomandi kann taka lut í samfelagslívi og sosialum lívi á jøvnum føti við onnur. Sum dømi um hetta kann nevnast samskifti við arbeiðspláss, eitt nú til starvsfólkafundir og luttøka til privat tiltøk. Tá tulkur verður bílagdur til almenn tiltøk, er tað fyriskiparin, ið rindar fyri hetta. Skúlaverkið rindar fyri tulkatænastu til næmingar. Heilsutrygd rindar tulk í sambandi við læknahjálp, og Mentamálaráðið rindar fyri, at loftmiðlatilfar verður teknmálstulkað. Hendan tænastan kann verða veitt av somu tulkatænastu, men mótvegis gjaldi, sí § 68, stk. 2.

Tulking verður í løtuni veitt sum teknmálstulking og skrivitulking.

§ 42, stk. 3 heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um treytir fyri at veita tulkatænastu, tal av tulkatímum, undir hesum býtislykil millum brúkarar og gjald fyri avleiddar útreiðslur.

Ætlanin er at seta í gildi kunngerð, sum greitt ásetir t.d. mesta tímatal til einstaka brúkaran um árið, til tess at tryggja eitt javnt býti av tulkatímum, sum eru til taks. Eisini skal tað vera greitt hvørjar treytir eru fyri at veita tulkatænastu, t.d. nær tulkur skal bíleggjast, og hvussu tulkurin kann avlýsast. Eisini verður greitt, hvussu farast skal fram, tá talan er um støður, sum krevja bráðfeingistulking. Umframt ásetingar um nær tørvur er á einum ella fleiri tulkum til uppgávna o.t.

***Flutningstænasta***

***Til § 43***
Heimild verður nú veitt fyri, at Almannaverkið í sambandi við avgerð um tænastu, eisini kann veita flutningstænastu til og frá tænastuni. Bæði børn og vaksin eru fevnd av flutningstænastuni.

Treytin fyri at fáa flutningstænastu er, at viðkomandi ikki sjálvur kann brúka almennar ella privatar flutningsskipanir ella at koyra í egnum bili til tænasturnar. Hetta skal skiljast soleiðis, at talan er um persón, sum, orsakað av brekiella av fíggjarligum ávum ikki kann brúka almennar ella privatar flutningsskipanir ella koyra í egnum bili.

Almennar flutningsskipanir eru t.d. bussleiðin millum bygdir, kommunalar bussleiðir og Serflutningsskipan landsins, sum er ein flutningsskipan fyri fólk, ið bera brek. Vestmanna, Tórshavnar- og Klaksvíkar kommunur eru fevndar av Serflutningsskipan Landsins. Serflutningur verður einans veittur innan fyri eitt øki, og ikki millum tey økini, ið eru fevnd av skipanini. Privat flutningsskipan er privatur hýruvognur.

Tey, sum sjálvi megna at ferðast antin í egnum bili, við almennu bussleiðini, privatum hýruvogni ella um viðkomandi hevur familju ella onnur, sum kunnu hjálpa við flutningi, so skal persónurin brúka tær skipanirnar og kann ikki fáa játtað flutningstænastu frá Almannaverkinum.

Ætlanin er, at Almannaverkið í sambandi við avgerðir um tænastur, eisini skal viðgera spurningin um, hvussu persónur, sum skal hava eina tænastu, skal koma til og frá tænastuni. Megnar borgarin ikki sjálvur at brúka almenna ella privata flutningstænastu orsakað av brekinum ella fíggjarligum viðurskiftum, so kann Almannaverkið játta, at persónurin umframt tænastuna eisini fær játtað flutningstænastu til og frá tænastuni.

Nógvar av teimum tænastum, sum Almannaverkið veitir, verða veittar í heiminum hjá borgaranum ella í einum vardum bústaði. Almannaverkið hevur í dag bilar, sum starvsfólk, sum skulu heim til borgaran, brúka eftir tørvi og flestu vardu bústaðirnir hava eisini bil, sum kann brúkast til at flyta borgaran við.

Tó eru nakrar tænastur, sum verða skipaðar soleiðis, at borgarin skal ferðast til tænastuna. Talan er t.d. um virknistænastur og endurvenjing. Í summum førum verða borgarar heintaðir og fluttir til tænastuna.

Tað kann t.d. vera ein persónur, sum hevur fingið heilaskaða og so mikið niðursettan virkisførleika, at viðkomandi ikki sjálvur megnar at koyra egnan bil ella at brúka bussleiðina. Persónurin fær játtað endurvenjing og endurvenjingin skal fara fram í endurvenjingarhølunum í Tórshavn hjá Almannaverkinum. Hesin persónurin hevur tørv á flutningi til og frá endurvenjingarhølunum og kann sambært hesi áseting nú fáa játtað flutningstænastu í sambandi við endurvenjing hjá Almannaverkinum.

Tað kann eisini vera ein persónur, sum hevur menningartarn og býr í kommunu, sum ikki hevur almenna flutningstænastu og sum ikki sjálvur megnar at koyra egnan bil. Viðkomandi fær játtað virknistænastu frá Almannaverkinum og skal hvønn dag til og frá tænastuni.

Persónurin, sum er fyritíðarpensjónistur, kann hava torført við rinda fyri hýruvogn til og frá tænastuni hvønn dag. Í slíkum føri kann Almannaverkið gera av, at persónurin kann fáa flutningstænastu til og frá virknistænastuni.

Tað er í visitatiónini til tænastur, at gjørt verður av, um persónur kann fáa flutningstænastu, og treytin er, at aðrir møguleikar eru troyttir. Tað er Almannaverkið, sum tekur hesa avgerð.

At hava eina vælvirkandi og landsfevnandi flutningstænastu kann vera ein avbjóðing fyri ein stovn sum Almannaverkið. Tað krevur nóg mikið av flutningsførum, at flutningsførini verða hildin og javnan skift út, og at bilførarar eru til at koyra flutningsførini.

Ætlanin er tí, at flutningsskipanin verður útveitt til onnur enn Almannaverkið at reka. Veitarin fær skyldu til at útvega hóskandi flutningsfør og at veita nøktandi koyring kring alt landið. Fyri at tryggja at talan verður um dygdargóða skipan, verða krøv sett til veitaran um t.d. flutningsfør og bilførarar. Sí annars viðmerkingar til § 66 og § 67.

*Til § 43, stk.2*
Sambært § 43, stk. 2 fær landsstýrismaðurin heimild at áseta nærri reglur um treytir fyri, at borgari kann fáa flutningstænastu og hvussu umfatandi flutningstænastan kann vera.

Eisini er heimild fyri at avmarka flutningstænastu sambært hesi lóg í mun til flutning, sum aðrir myndugleikar veita – t.d. flutning til og frá skúla og flutning, sum borgarin, sjálvur ella familjan kann taka sær. Her verður hugsað um at skilmarka, hvørjar flutningsuppgávur liggja innanfyri tað, sum familjur vanliga hava í mun til frítíðarítriv, og nær talan eigur at vera um eina flutningstænastu, sum landið skipar fyri.

Harumframt er heimild fyri at áseta brúkaragjald fyri flutningstænastu.

Ætlanin er, at gjaldið verður ásett við einum hámarki, og at gjaldið verður ymiskt, treytað av um flutningurin er innan kommunumark, millum bygdir ella millum oyggjar.

Hámarkið verður ætlandi ásett út frá metingum um, hvat er rímiligt í mun til eina almenna tænastu, sum hevur til endamáls at kompensera fyri, at persónur, ið ber brek, ikki megnar at brúka aðrar flutningstænastur. Samstundis skal havast í huga, at onnur, sum brúka almennar flutningstænastur í flestu førum rinda brúkaragjald fyri tænastuna.

Tískil er ein møguleiki, at hámarkið verður ásett soleiðis, at gjaldið ikki er hægri enn gjald fyri at nýta almenna bussleið. Ein avbjóðing í so máta er, at flutningsskipan er ymisk kring landið innan fyri kommunurnar. Tað eru ikki allar kommunur, sum hava bussleið, og onkur kommuna bjóðar ókeypis buss. Ein máti at áseta gjald fyri flutningstænastu innan kommunumark er at taka støði í gjøldum, sum kommunur, sum hava bussleið, og sum krevja gjald fyri hesa. Gjaldið kann ásetast við støði í antin lægsta, hægsta brúkaragjaldi ella í mun til eitt miðal støði.

Í mun til gjald millum oyggjar er ein loysn, at gjaldið verður ásett í mun tað, sum rindað verður við Strandfaraskipum Landsins millum oyggjar.

### *Hjálp í sambandi við harðskap*

***Til § 44***
Heimildin fevnir um kvinnur og menn, ið hava tørv á hjálp vegna harðskap, men higartil er kreppumiðstøð einans skipað fyri kvinnur og børn í Kvinnuhúsinum í Havn.

Umframt at veita kvinnum og børnum teirra fyribils gisting á Kvinnuhúsinum, bjóðar Kvinnuhúsið eisini ráðgeving, vegleiðing, samrøður og sálarfrøðiligar viðtalur til persónar, sum hava verið fyri harðskapi í parlagi ella nærsambondum.

Kvinnuhúsið bjóðar somuleiðis bólkasamrøður, ið hava til endamáls at veita hjálp til sjálvhjálp. Bólkasamrøður verða ikki bert veittar teimum, ið uppihalda sær á Kvinnuhúsinum, men øllum kvinnum, ið nýta tey ambulantu tilboðini á Kreppumiðstøðini.

Hevur persónur, ið hevur verið fyri harðskapi í parlagi ella nærsambondum, tørv á meira sálarfrøðiligari viðgerð enn tí, ið Kreppumiðstøðin kann veita, ella ynskir persónur ikki at venda sær til Kreppumiðstøðina, kann Barnaverndartænastan veita ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til foreldur og børn. Hetta tó bert, um Barnaverndartænastan metir, at tørvur er á hesum. Barnaverndartænastan veitir hjálp, tá børn liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning.

Persónur, ið ikki hevur børn, kann tó ikki fáa sálarfrøðiliga viðgerð frá Barnaverndartænastuni. Hesir persónar kunnu umframt viðgerðina frá Kreppumiðstøðini fáa ávísing frá kommunulækna og harvið fáa stuðul til sálarfrøðiligar viðtalur frá Heilsutrygd. Í tílíkum førum er tó egingjald, ið landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur ásett. Persónar, ið hava børn, kunnu á sama hátt fáa ávísing frá lækna til sálarfrøðiliga viðgerð umvegis Heilsutrygd. Sí kunngerð um fíggjarligt ískoyti til sálarfrøðiliga viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi, sum broytt við kunngerð nr. 29 frá 4. apríl 2016.

Kreppumiðstøðin krevur eitt minni gjald fyri uppihald. Við hesi áseting verður lógarheimild veitt fyri at krevja gjald fyri uppihald.

Kvinnufelagið skipar og rekur Kvinnuhúsið í Havn, og virksemið fær stuðul umvegis fíggjarlógina. Umframt fastsett starvsfólk verður stórur partur av virkseminum røkt við sjálvbodnari og óløntari arbeiðsmegi.

## Kapittul 6. Bústaðir ( §§ 45-52)

### *Fyribils bústaðir*

***Til § 45***
§ 45, stk. 1 heimilar Almannaverkinum at veita børnum og vaksnum ein fyribils bústað. Fyribils bústaðir verða skipaðir sum bú- og viðgerðarstovnar og kunnu eisini skipast sum stovnslíknandi fyriskipanir inni í egnum heimi.

Almannaverkið ger av at veita persóni uppihald á bú- og viðgerðarstovni ella á stovnslíknandi fyriskipan. Avgerð verður tikin í tørvinum hjá tí einstaka.

Børn, sum fáa fyribils bústað á bú- og viðgerðarstovni sambært hesi lóg, eru ikki umsorganaryvirtikin, men bera brek ella hava ein tørv, ið viðførir, at teimum tørva sosialpedagogiskan stuðul, viðgerð og/ella røkt. Tilboðið verður veitt í samráð við foreldrini.

Børn, sum eru sett heiman, tí hesi liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, verða hinvegin innskrivað á bú- og viðgerðarstovn sambært barnaverndarlógini. Tað kann eisini koma fyri, at børn, ið verða innskrivað á bú- og viðgerðarstovn sambært barnaverndarlógini, eisini bera brek, men avgerandi fyri hesi mál eru sosialu avbjóðingarnar í familjuni, herundir m.a. vantandi foreldraførleiki.

*Til § 45, stk. 2*
Endamálið við einum fyribils bústaði er at greina støðuna hjá einum borgara við tí fyri eyga at veita viðkomandi rættar og nøktandi tænastur. Tískil er neyðugt, at tað verður greitt tilskilað, hví persónurin hevur tørv á fyribils bústaði, og hvat endamálið við fyribils bústaðnum skal vera.

Harumframt er endamálið við fyribils bústaði, við sosialpedagogiskari viðgerð at stuðla undir persónliga menning hjá persónum við týðandi likamligum ella sálarligum virkistarni og víðfevndum sosialum trupulleikum, undir hesum at menna og uppbyggja sosialar førleikar.

Eisini skal ein fyribils bústaður menna og stuðla undir evnir og førleikar soleiðis, at viðkomandi kann nema sær víðari lærdóm ella arbeiði og annars at liva eitt so sjálvstøðugt lív sum gjørligt.

Fyribilsbústaður kann somuleiðis veitast sum liður í eini endurvenjingartilgongd, sum hevur til endamáls við miðvísari endurvenjing at gera tað møguligt, at borgarin kemur at búgva í egnum bústaði,ella fyri at fáa staðfest, at persónur hevur tørv á einum vardum bústaði.

Í serligum førum og einans tá onki pláss er tøkt, kann ein fyribils bústaður eisini veitast persónum, sum bíða eftir einum vardum bústaði sambært § 46.

Til ber ikki at seta avmarkingar á, hvussu leingi fyribils bústaður kann veitast sambært § 45.

Uppihald á fyribils bústaði kann veitast í eitt frammanundan ásett avmarkað tíðarskeið. Eisini kann uppihaldið steðga, tá mett verður, at endamálið við uppihaldinum er rokkið, ella tá mett verður, at endamálið ikki verður rokkið, og persónurin tí hevur tørv á einum meira varandi bústaði.

Í serligum førum og einans tá onki pláss er tøkt, kann ein fyribils bústaður eisini veitast persónum, sum bíða eftir einum vardum bústaði sambært § 46.

*Til § 45, stk. 3*

Tænastan á fyribils bústaðnum er sama slag av tænastu, sum verður veitt sambært § 35 og fevnir m.a. um:

1) námsfrøðiliga leiðbeining í mun til at røkka yvirskipað persónlig mál
2) umsorgan og praktiska hjálp til dagligar uppgávur og fíggjarviðurskifti,
3) fylgjara til sosial tiltøk,
4) vøka og hjávera,
5) persónliga røkt
6) endurvenjing
7) viðlíkahaldsvenjing

Tænastan á fyribils bústøðum verður tó skipað sum ein grundtænasta, sum er knýtt at bústaðartilboðnum og verður veitt øllum búfólkunum og ein einstaklingarættað tænasta, sum verður veitt hvørjum einstøkum búfólki sær fyri at náa málinum, sum er ásett í virkisætlanini.

Á henda hátt verður tryggja, at einstøku bútilboðini verða meira málrættaði ávísum málbólkum umframt at størri fokus verður á tørvin og ynskini hjá einstaka búfólkinum.

Ein grundtænasta kann t.d. vera:

- Náttarvakt á staðnum
- Starvsfólk alt samdøgrið
- Slag av viðgerðarhætti ella metodu(m)
- Felags átøk/tiltøk ætlað til allan búfólkabólkin

Einstaklingarættað tænasta kann t.d. vera: Stuðul til ávíst (enda)mál

- Okkurt sum viðkomandi ynskir at menna/læra
- Stuðul at koma til tiltøk/aktivitet

Tað, sum eyðkennir einstaklingarættaða tænastu, er, at hvør einstakur hevur tørv á hesi tænastu afturat grundtænastuni. Einstaklingarættaða tænastan verður ásett í virkisætlanini fyri hvør einstakan persón.

Persónur, sum fær fyribils bústað, kann sjálvur velja hvør fylgjarin skal vera og hvat fylgjarin skal brúkast til og nær. Í § 45 stk. 6 er ásett, at persónur, sum hevur tætt tilknýti til persón, sum

skal hava fylgjara, kann ikki setast sum fylgjari. Fylgjarin tekur sær uppgávum, sum liggja uttan fyri tað, sum foreldur, hjúnafelagið, avvarðandi ella persónar, sum hava tætt tilknýti til persónin vanliga taka sær av.

*Til § 45, stk. 4*
Fyribils bústaður kann verða veittur á bú- og viðgerðarstovni ella í stovnslíknandi fyriskipan.

Higartil eru skipaðir tríggir bú- og viðgerðarstovnar í Suðurstreymi, sum veita tilsamans 18 persónum tilboð. Av hesum eru tað 4 børn undir 18 ár.

Stovnslíknandi fyriskipanir kunnu m.a. fevna um sosialnámsfrøðiligar verkætlanir ella smidlig tilboð, ið eru knýtt at einum verandi tilboði, har i persónar, ið ikki búgva á fyribils bústaði, kunnu koma til ávísar fyriskipanir, ella har tilboðini, ið bú- og viðgerðarstovnur veitir, verða veitt í heiminum hjá viðkomandi. Ein stovnslíknandi fyriskipan kann eisini vera matrikkulleys.

***Vardir bústaðir***

***Til § 46***
*Til § 46, stk. 1 og 3*
Vardir bústaðir eru at meta sum bústaðir, sum er heim borgarans ein stóran part av lívinum. Orsøkin til, at heitið longur varandi bústaður verður nýtt, er, at persónar á vardum bústaði, kunnu, eins og onnur fólk, fáa ein so mikið stóran tørv, at hesin ikki longur er hóskiligur, og tørvur verður á at flyta til annan meira hóskiligan bústað, ið t.d. er útgjørdur at veita neyðuga røkt.

Vardur bústaður kann veitast persóni, sum hevur týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar. Um persónur hevur týðandi brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar verður mett út frá tørvinum á umsorgan, hjálp og stuðli til dagligt virksemi, undir hesum tørvinum á persónligari røkt.

Vardur bústaður er m.a. ætlaður fólki við fjølbreki, menningartarni, sálarsjúku, seinheilaskaða og autismu. Avgerandi er, at persónur hevur tørv á umsorgan, hjálp og stuðli til dagligt virksemi, umframt møguligan tørv á persónligari røkt. Tað er ikki diagnosan í sær sjálvum, ið er avgerandi fyri, um persónur skal hava vardan bústað, men er tað tørvurin hjá tí einstaka, ið er avgerandi.

Endamálið við varda bústaðnum er at skapa eitt heim har borgarin við neyðugari hjálp og stuðli kann búleikast og liva eitt fyri hann sjálvstøðugt, støðugt, innihaldsríkt og virkið lív.

Vardir bústaðir verða skipaðir sum búfelagsskapir og sum sambýlir.

Búfelagsskapir eru sermerktir við samanbygdum ella tættliggjandi sjálvstøðugum íbúðum við egnari inngongd og møguligum felagshøli. Búfelagsskapir eru ætlaðir persónum, sum eru væl fyri, men tó í ávísan mun hava tørv á, at starvsfólk er um tey.

Tveir nýggir búfelagsskapir eru bygdir seinastu árini og eru hesir eyðkendir við, at fólk hava sína egnu íbúð, og at ein íbúð verður brúkt til starvsfólk og felagshølið hjá búfólkunum.

Sambýli eru sermerkt við sjálvstøðugum íbúðum, felagshøli og felags virksemi. Hesi eru fyri fólk, sum hava tørv á nógvari hjálp og stuðli frá starvsfólki. Sambýli kunnu somuleiðis skipast sum røktarbústaðir, ætlað fólki, ið umframt nógvan sosialpedagogiskan stuðul eisini hava tørv á persónligari røkt.

Flestu av bútilboðunum hjá Almannaverkinum eru skipað sum sambýli eftir gomlu reglunum har ongin skilmarking var millum sambýli og búfelagsskapir.

Virkisætlanin, sum skal gerast sambært § 33 í mun til einstøku tænasturnar, ásetir endamálið við varda bústaðnum og eisini, um tað er ein búfelagsskapur ella sambýli, sum viðkomandi borgari fær og fevnir eisini um átøk, sum stuðla undir, at endamálið verður rokkið.

Málbólkurin fyri vardan bústað sambært § 46 er í høvuðsheitum persónar frá 18 ár og upp til fólkapensjónsaldur.

Persónur, yngri enn 18 ár, kann fáa vardan bústað, um hetta verður mett neyðugt í einstaka førinum. Tó eru bústovnar til børn í høvuðsheitum at meta sum bú- og viðgerðarstovnar og verða skipaðir sambært § 45.

Persónur, sum er fólkapensjónistur, kann ikki fáa tillutað vardan bústað sambært hesi lóg. Persónur, ið hevur búð sjálvur, eigur at fáa pláss á røktarheimi í nærumhvørvinum, eins og onnur.

Hevur persónur áðrenn fólkapensjónsaldur búð á vardum bústaði hjá landinum, er heimild í § 5, stk. 2 fyri at veita hesum persóni framhaldandi bústað sambært hesi lóg, eftir at hann hevur nátt fólkapensjónsaldur. Treytin fyri, at persónur kann halda áfram í vardum bústaði hjá landinum, er, at endamálið við uppihaldinum frameftir eisini verður rokkið.

Tá tørvurin broytist, og tá vardi bústaðurin ikki røkkur sínum endamáli, skal fólkapensjónisturin flyta til hóskandi røktarbústað, og kommunan yvirtekur tá ábyrgdina av honum.

Eins og víst er á undir serligu viðmerkingunum til § 5, er ætlanin at loysa markamótstrupulleikan millum land og kommunur soleiðis, at kommunurnar fáa ábyrgdina av persónum undir fólkapensjónsaldri, ið hava varandi sjúku, ið er í menning og gongur afturá, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið. Málbólkurin er m.a. fólk við Alzheimers, demens og sclerose á 2. stigi. Víst verður til tingmál nr. 135/2018 um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m.

Borgarar, sum bera fjølbrek, og borgarar, sum hava seinheilaskaða, sum eisini kunnu metast at vera røktarkrevjandi, fáa tó vardan bústað frá landinum sambært hesi lóg.

Sambært § 68, stk. 1 kann kommuna keypa pláss frá Almannaverkinum til tess at røkja sínar skyldur sambært løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. Sama heimild er í § 67 veitt Almannaverkinum at keypa pláss á kommunalum røktarheimi, t.d. tá atlit tala fyri at veita einum borgara bústað í nærumhvørvinum. Fortreytin fyri at nýta heimildirnar í § 67 og § 68 er, at Almannaverkið og kommunurnar gera avtalu um at keypa tøk pláss frá hvøjrum øðrum.

*Til § 46 stk. 2, 5 og 6*

Tænastan á varda bústaðnum er er sama slag av tænastu, sum verður veitt sambært § 35 og fevnir m.a. um:

1) námsfrøðiliga leiðbeining í mun til at røkka yvirskipað persónlig mál
2) umsorgan og praktiska hjálp til dagligar uppgávur og fíggjarviðurskifti,
3) fylgjara til sosial tiltøk,
4) vøka og hjávera,
5) persónliga røkt
6) endurvenjing
7) viðlíkahaldsvenjing

Tænastan á fyribils bústøðum verður tó skipað sum ein grundtænasta, sum er knýtt at bústaðartilboðnum og verður veitt øllum búfólkunum og ein einstaklingarættað tænasta, sum verður veitt hvørjum einstøkum búfólki sær fyri at náa málinum, sum er ásett í virkisætlanini.

Á henda hátt verður tryggja, at einstøku bútilboðini verða meira málrættaði ávísum málbólkum umframt at størri fokus verður á tørvin og ynskini hjá einstaka búfólkinum.

Ein grundtænasta kann t.d. vera:

- Náttarvakt á staðnum
- Starvsfólk alt samdøgrið
- Slag av viðgerðarhætti ella metodu(m)
- Felags átøk/tiltøk ætlað til allan búfólkabólkin,

Einstaklingarættaða tænastan kann so t.d. vera:

- Stuðul til ávíst (enda)mál
- Okkurt sum viðkomandi ynskir at menna/læra
- Stuðul at koma til tiltøk/aktivitet

Tað, sum eyðkennir einstaklingarættaða tænastu, er, at hvør einstakur hevur tørv á hesi tænastu afturat grundtænastuni. Einstaklingarættaða tænastan verður ásett í virkisætlanina.

Persónur, sum fær vardan bústað kann sjálvur velja, hvør fylgjarin skal vera og hvat fylgjarin skal brúkast til og nær. Eisini er ásett, at persónur, sum hevur tætt tilknýti til persón, sum skal hava fylgjara, kann ikki setast sum fylgjari. Fylgjarin tekur sær uppgávum, sum liggja uttan fyri tað, sum foreldur, hjúnafelagið, avvarðandi ella persónar, sum hava tætt tilknýti til persónin vanliga taka sær av.

***Serlig bútilboð***

***Til § 47, stk. 1 og 2***

Ásetingin um serlig bútilboð er framhald av verandi áseting í forsorgarlógini, men endamálið við skipanini verður beinleiðis ásett. Landið hevur ábyrgd av at veita persóni við víðfevndum sosialum trupulleikum, sum ikki megna at útvega sær ella fasthalda ein varandi bústað, bútilboð. Endamálið við serligum bútilboði er at veita umsorgan og hjálp til dagligt virksemi. Eisini verður nágreinað, at serlig bútilboð kunnu skipast sum dag- og náttartilboð. Lóggávan er nú í samsvari við verandi skipan.

Landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta gjald fyri húsaleigu, íroknað streym og olju, fyri serlig bútilboð umframt kostgjald. Hetta er sama skipan, sum í dag er ásett í kunngerð um serlig bútilboð. Sambært kunngerð um serlig bútilboð rinda búfólk fyri uppihaldið, og er upphæddin ásett ymiskt fyri tilboð um bústað í longur tíðarskeið og um fyribils bústað, og um tilboðini veita kost ella ikki. Gjøldini verða javnað sambært í løgtingslóg um áseting um javning av almannveitingum.

Sambært § 47, stk. 3 letur landið stuðul sambært nærri ásettum reglum til sjálvbodnar felagsskapir, sum so veita serlig bútilboð. Talan er um framhald av verandi skipan.

Í dag eru 3 felagsskapir, sum fáa stuðul frá landinum til serlig bútilboð. Frelsunarherurin og Blái Krossur hava virksemi í Tóshavn, meðan felagsskapurin Solo deo Gloria veitir serlig bútilboð í Klaksvík. Almannaverkið fær umsóknir og viðgerð hesar eftir reglum, ásettar í kunngerð um serlig bútilboð. Ætlanin er ikki at gera stórvegis broytingar í mun til verandi umsiting.

***Húsaleiga og felags útreiðslur***

*§ 48, stk. 1*
Persónur á fyribils bústaði sambært § 45 og á vardum bústøðum sambært § 46 hevur skyldu at rinda húsaleigu og í felagskassa.

Skipanin er nærum tann sama, sum er galdandi í dag, har rindað verður húsaleiga og í felagsskassa.

*Børn*
Heimildin fevnir eisini um børn, sum fáa fyribils bústað sambært § 45.

Í løtuni verður ikki rindað fyri uppihaldið hjá børnum, hóast foreldur framhaldandi hava uppihaldsskyldu mótvegis børnunum og heimild er at áseta gjald. Í ávísum førum er avtalað millum bútilboð og foreldur, hvørjar skyldur foreldrini hava í mun til at keypa klæðir og annað til barnið.

*Ung*
Persónar, sum eru 18 ár og eldri kunnu fáa fíggjarligan stuðul umvegis § 17 í hesum lógaruppskoti til at rinda við. Hetta er serliga ætlað ungum, sum eru 18 ár og eldri, sum fáa fyribils bústað á bú- og viðgerðarstovni og sum ikki eru fyritíðarpensjónistar. Ískoytið verður í hesum førum brúkt til at rinda húsaleigu og felags útreiðslur á bústaðnum og ávirkar ikki raksturin á bú- og viðgerðarstovninum.

*Til § 48 stk. 2*
Heimild at áseta húsaleigu, íroknað streym og olju fyri bústaðin. Talan er um bústaðir, sum eru ymiskir bæði í stødd og í góðsku, og oftani er tað ikki gjørligt at velja sær bústað, tí so fá pláss eru. Húsaleigan verður serliga ásett í mun til stand og fermetratal.

Greinin ásetir, at húsaleigan fevnir eisini um viðlíkahaldsútreiðslur. Sambært vanligum reglum eru viðlíkahaldsútreiðslur hjá leigara avmarkaðar til, at hølini verða latin aftur í sama standi, sum tey vóru í, tá leigumálið byrjaði, tað merkir at umvælingar vegna slit og elli, ið kemst av vanligum brúki, uttandura viðlíkahaldskostnaður, viðlíkahald av føstum installatiónum og tílíkum ikki skal vera partur av húsaleiguni. Hesa útreiðslu ber útleigari.

Til tess at forða fyri at húsaleiga hækkar ov nógv í einum vegna vantandi regluliga hækking er ásett, at húsaleigan verður javnað á hvørjum ári. Hetta er tó ikki galdandi fyri streym og olju, sum fylgja vanligu príssveiggjunum fyri hesar vørur.

*Til § 48 stk. 3*
Felags útreiðslur verða ásettar í mun til, hvørjar felags útreiðslur er á bústaðnum. Ásett er, at felags útreiðslur í minsta lagi skulu fevna um endurnýggjan av felags innbúgvi.

Hetta merkir, at búfólk skulu rinda eina upphædd, sum skal brúkast til endurnýggjan av felags innbúgvi. Upphæddin verður sett á eina serliga kontu og avrokning verður ikki gjørd, tá persónur flytir.

Felags útreiðslur kunnu annars verða ymiskar. Ásett verður í reglugerð á hvørjum bústaði sær, hvørjar aðrar útreiðslur eru fevndar av inngjaldi til felagsútreiðslur. Reglugerðin verður gjørd av Almannaverkinum ella sjálvsognarstovnunum og búfólkunum í felag. Hetta er liður í at tryggja sjálvsavgerðarrættin hjá teimum, sum búgva á staðnum, soleiðis at tey í størri mun kunnu skipa síni viðurskifti, sum tey ynskja tað. Borgarar, sum fáa bútilboð sambært hesi lóg hava ymiskt førleikastøðið og tænastan á ymisku bústøðunum er eisini skipað eftir tørvinum hjá búfólkunum.

Er talan um búfólk, sum hava umfatandi tørv, kann væntast, at størri partur av útreiðslunum hjá teimum eru partur av felagsútreiðslunum. Hinvegin eru felagsútreiðslurnar á bústøðunum, har fólk við lættari tørvi á stuðli, minni.

Tá nýggj fólk flyta inn, er greitt, hvat rindast skal til í felagskassan, og tá fólk flyta út, hvat skal avroknast við felagskassan. Av tí at talan er um reglugerð, er hampuliga lætt at tillaga reglugerðina, tá ynski og ætlanir um broytingar eru.

*Til § 48, stk. 4*
Heimild at áseta nærri reglur um húsaleigu, íroknað streym og olju fyri hvørt fermetratal. Ætlanin er at áseta ein fermetraprís fyri nýbyggjarí og nýumvælingar, har standurin er heilt góður. Húsaleigaá gomlum bústøðum verður ásettur eftir øðrum fermetraprísi, tí standurin ikki er tann sami, sum í nýggjum. Eisini heimilar greinin at húsaleiga verður ásett innan fyri fermetraintervallir, t.d. bústaðir millum 15-20 m2 hava ein kostnað, 21-25 m2 ein kostnað osfr.

*Lækka húsaleigu*
Møguligt verður at áseta reglur um at lækka húsaleiguna grundað á inntøkuviðurskifti leigarans. Í ávísum føri kann tørvur vera á at lækka húsaleiguna hjá tí einstaka, grundað á inntøkuviðurskifti hansara. Her er serliga hugsað um støðuna, tá persónur fer frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón. Um viðkomandi ikki hevur aðrar inntøkur, kann húsaleigan gerast ov høg til at hann megnar at avhalda stórvegis aðrar útreiðslur, samstundis sum hann ikki fær broytt uppá støðu sína við at flyta í annan bíligari bústað.

Ætlanin er, at húsaleigan, sum fólkapensjónstar, sum fáa vardan bústað frá Almannaverkinum, skal verða á sama støði sum fólkapensjónistar rinda fyri eitt kommunalt búpláss á ellis- og røktarheimi. Á henda hátt verða fólkapensjónistar, sum fáa búpláss fá ávikavist landinum og kommununum javntstillaðir. Hetta merkir so eisini at leggjast skal upp fyri lægri inntøkum fyri húsaleigu í rakstrinum á vardu bústøðunum hjá Almannaverkinum og sjálvsognarstovnum sum hýsa fólkapensjónistum.

*Leigureglar*
Bústaðartilboð sambært hesi lóg eru ikki fevnd av leigulógini. Heimild er fyri at áseta nærri reglar um at nýta leigusáttmála millum leigara og myndugleika, hvat leigusáttmálin skal innihaldao g hvør leigusáttmáli skal brúkast o.sfr. Almannaverkið hevur leigusáttmálar við persónar, sum búgva á fyrbils- og vardum bústøðum.

*Felagsútreiðslur*
Harumframt fevnir heimildin um at áseta nærri reglur um felagsútreiðslur, m.a. mannagongdina, tá broytingar skulu gerast, um regluliga endurskoðan av hvat verður rindað í felagskassa, hvussu roknskapur við felagsútreiðslum skal gerast, hvør er heimilaður at umsita felagsskassan, um avlop í felagskassa og tílíkt.

Eisini fevnir heimildin um at áseta nærri reglur um at gera serligar reglur um kost í serligum bútilboðum.

*Foreldragjald*
Heimildin at áseta foreldragjald er í roynd og veru framhald av verandi heimild at áseta gjald sambært § 27 og 32 í forsorgarlógini. Higartil hevur heimildin ikki verið nýtt.

Foreldur, sum hava børn, sum fáa bútilboð sambært hesi lóg varðveita foreldramyndugleikan og harvið eisini forsyrgjaraskylduna hóast barnið ikki longur býr heima. Hetta merkir m.a. eisini, at foreldur varðveita barnafrádrátt, hóast barnið flytur út. Børn, sum fáa bú- og viðgerðartilboð hava higartil búð ókeypis, men foreldur hava í størri og minni mun keypt klæðir o.l. til børnini.

Í sambandi við at fleiri bú - og viðgerðarstovnar eru skipaðir, og børn hava fingið hesi tilboð, fær landsstýrismaðurin nú heimild at áseta gjald. Støðið kann t.d. takast í barnagjald sambært lov om børns retsstilling.

*Skilhald*
Haraftrat hevur myndugleikin eina heimild at skipa viðurskiftini fyri bútilboð uttan lógarheimild. Talan er um reglur, ið snúgva seg um skilhald, og sum skulu tryggja, at bútilboðið virkar eftir ætlan. Hetta er galdandi fyri eitt nú búfelagsskapir, sambýli o.a.

Heimildin er torfør og liggur upp at viðurskiftum, ið annars krevja greiða lógarheimild – t.d. inntriv, ið mugu metast sum tvingsil ella frælsistøka.

Tískil kann sigast, at gerast kunnu reglur um nýtslu av rúsdrekka, rúsevnum og øðrum viðurskiftum, ið hava við bútilboðið at gera. Eisini nær friður skal valda o.a. Tó er, sum nevnt omanfyri, torført hjá starvsfólki at nýta heimildina, og frægasta loysnin er heldur at skipa viðurskiftini í lóggávu soleiðis, at ivi ikki er um, nær heimildin er í lagi, og nær hon fer ov langt. Sum dømi ber ítøkiliga til at áseta, at heimild er í lóggávu at gera skilhaldsreglur og samstundis áseta, hvussu vítt hesar reglur kunnu fara.

***Móttøkuskylda og tryggjaðar búfyriskipanir***

***Til § 49***
Sambært § 16 í revsilógini, kunnu persónar við sálarligum breki – bæði týðandi og minni týðandi – ikki revsast, um teir hava framt brotsverk. Sama er galdandi, um persónurin varð í einari sinnisstøðu, ið má sammetast við eitt sálarligt brek. Um persónurin verður revsaður sambært § 16 í revsilógini, er heimild hjá rættinum í eitt nú § 68 at døma viðkomandi aðra hóskandi revsing enn vanliga fongsulsrevsing. Endamálið er at fyribyrgja, at viðkomandi fremur brotsverk aftur. Talan kann vera um at seta persón í rúsevnisviðgerð, hava eftirlit við persóni, geva honum sálarliga viðgerð ella, um neyðugt, seta hann í eina tryggjaða búfyriskipan.

Sambært § 74 a í revsilógini kunnu persónar fáa aðra fyriskipan enn vanliga fongsulsrevsing, um teir eru yngri enn 18 ára gamlir og hava framt álvarslig brotsverk. Talan er um eina fyriskipan, ið skal lofta ungum við víðfevndum sosialum trupulleikum, ið hava ilt við at fóta sær í samfelagnum.

Tað er uppgávan hjá ákæruvaldinum at leggja fram málskrav um, at ákæruvaldið metir, at persónurin skal hava ein dóm, ið best hóskar til hansara sálarliga brek. Rætturin tekur síðani

støðu til málskravið, og Almannaverkið skal veita eina tænastu til persónin, ið sampakkar við dómin.

Almannaverkið hevur skyldu at laga seg eftir avgerð rættarinnar og veita bústaðartilboð til viðkomandi persón. Í roynd og veru merkir hetta, at hesir persónar ikki verða settir á ein bíðilista sum aðrir persónar, ið fevndir eru av hesari lóg. Móttøkuskyldan skal síggjast sum ein liður í at hava eitt vælvirkandi rættarsamfelag – soleiðis skilt, at tann persónur, ið ikki er mettur at verða egnaður til vanliga fongsulsrevsing, verður settur í aðra fyriskipan.

Almannaverkið veitur bústaðartilboðið sum ein bústað sambært lógini, og kann um neyðugt, gera av at viðkomandi skal hava eina tryggjaða búfyriskipan í eitt nærri ásett tíðarskeið.

Ásett verður í kunngerð, at persónar, ið fáa bústaðartilboð, eisini fáa eitt sosialnámsfrøðiligt viðgerðartilboð við einum brotsfyribyrgjandi endamálið.

Haraftrat verður ásett, at Almannaverkið skal gera eina ætlan til persónin, har t.d. rúsviðgerð, psykiatrisk viðgerð o.a. er ein liður. Tá viðgerðartilboðið fevnir um fleiri ymsar geirar, verður ásett ein skylda at samstarva og reglur um samskipan, soleiðis at tilgongdin er so smidlig sum møguligt og ætlanin tænir sínum endamálið.

Almannaverkið hevur eisini ábyrgd av at persónurin verður visiteraður á rætta stað. Soleiðis skilt, at um Almannaverkið ikki metir seg kunna hýsa viðkomandi undir nøktandi umstøðum, ella nøktandi viðgerð kann veitast honum, er heimild fyri, at Almannaverkið rindar fyri uppihald til persónin á hóskandi bútilboði og fyriskipan í Danmark.

***Til § 50***
Áseting um, at Almannaverkið hevur heimild at leggja eitt tilmæli sambært § 51 fyri tvingsilsnevndina um, at ein persónur, ið skal fáa bústaðartilboð frá Almannaverkinum, fær eitt bústaðartilboð, ið er skipað sum ein tryggjað búfyriskipan. Landsstýrismaðurin skal góðkenna, at slíkar búfyriskipanir verða skipaðar.

Ein tryggjað búfyriskipan merkir sambært ásetingini, at vindeygu og úthurðar eru læstar, alt ella nærum alt samdøgrið, grundað á eina meting av ítøkiliga tørvinum á trygdarfyriskipan. Til ber ikki at læsa kømur ella búeindir, ið ikki eru at meta sum sjálvstøðugir partar av einum bústaði. Á tann hátt ber t.d. ikki til, at eitt opið sambýli hevur nøkur “opin” kømur og nøkur “stongd” kømur. Treytin er, at tryggjaða búfyriskipanin er galdandi fyri ein sjálvstøðugan bústað ella eina sjálvstøðuga eind av einum bústaði.

***Til § 51***
Áseting um nær Almannaverkið kann leggja eitt tilmæli sambært § 50 fyri tvingsilsnevndina.

Tvingsilsnevndin er myndugleiki, ið er skipaður sambært tvingsilslógini. Føroya Kærustovnur er skrivstova hjá nevndini. Tvingsilsnevndin tekur sær av at góðkenna avgerðir hjá Almannaverkinum og sjálvsognarstovnum um tvingsilsinntriv og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin hjá persóni, ið er fevndur av hesi lóg.

Tilmæli kann leggjast fyri tvingsilsnevndina, um Almannaverkið skal veita eitt bútilboð til ein persón, ið er fevndur av móttøkuskylduni hjá Almannaverkinum sambært § 49.

Haraftrat kann tilmæli leggjast fyri tvingsilsnevndina, um Almannaverkið metir, at viðkomandi persónur kann gera kropsligan skaða á seg sjálvan ella onnur, at neyðuga hjálpin ikki kann veitast honum á staðnum, har hann búleikas,t og at aðrar loysnir hava verið royndar uttan úrslit. Havast skal í huga meginregluna um minsta inntrivið.

Í sjálvum tilmælinum skal Almannaverkið greiða frá grundgevingini fyri hví myndugleikin metir tryggjað búfyriskipan er neyðug

Til tess, at tvingsilsnevndin kann viðgera málið skjótast gjørligt, er neyðugt, at Almannaverkið lýsir grundarlagið til fulnar. Tikið kann verða til dømir og annað skjalprógv fyri, at viðkomandi persónur ikki er egnaður til vanliga búfyriskipan, men neyðturviliga skal hava eina tryggjaða. Harafturat skal Almannaverkið meta um tíðarkarmin fyri uppihaldinum á tryggjaðu búfyriskipanini.

Greiðast skal frá viðkomandi heilsuupplýsingum ella øðrum viðkomandi upplýsingum, undir hesum skjalprógv fyri einum møguligum sálarligum virkistarni o.a.

Eisini er eisini ásett, at Almannaverkið skal greiða frá, hvørjar tænastur viðkomandi hevur fingið, áðrenn avgerðin varð tikin um at leggja tilmæli fyri tvingsilsnevndina, og hvussu Almannaverkið metir, at tænasturnar framhaldandi fara at verða veittar, tá viðkomandi hevur fingið eina tryggjaða búfyriskipan.

Orsøkin til hettar krav er, at tvingsilsnevndin fær gjørt eina meting av, um tær tænastur, ið viðkomandi persónur higartil hevur fingið, tæna sínum endamáli í mun til verandi búfyriskipan hjá persóninum. Samstundis fær tvingsilsnevndin mett um, hvussu tænasturnar framhaldandi fara at verða veittar. Skilt soleiðis, at Almannaverkið fær greitt frá, hvussu tey meta, at tænasturnar betur fara at tæna sínum endamáli í einari tryggjaðari búfyriskipan.

Kann tryggjað búfyriskipanin ikki veitast í Føroyum er ásett, at Almannaverkið hevur møguleika at keypa tryggjaða búfyriskipan í øðrum parti av ríkinum, t.e. Danmark ella Grønlandi. Treytin er tó, at viðkomandi persónur lýkur visitatiónskrøvini í viðkomandi lóggávu, ið er galdandi í Danmark og Grønlandi.

Landsstýrismaðurin fær heimild at áseta nærri reglur um, hvussu tryggjaðar búfyriskipanir verða skipaðar, og hvussu tær verða góðkendar sum slíkar. Haraftrat verða ásettar nærri reglur kring tíðarskeiðið, ið persónurin er á einari tryggjaðari búfyriskipan, hvussu leingi avgerðin hjá tvingsilsnevndini hevur gildi, og hvussu karmarnir kring eina tryggjaða búfyriskipan verða lagdir til rættis, t.d. serligar skilhaldsreglur v.m.

***Til § 52***
Almannaverkið kann leita sær hjálp frá løgregluni í sambandi við, at Almannaverkið hevur móttøkuskyldu fyri persóni sambært § 49. Talan nýtist ikki at vera um støður, har tørvurin er bráðfeingis, og vandin ítøkiligur og týðandi. Tað er nøktandi, at avvarðandi starvsfólk ikki meta seg fáa loyst støðuna undir tryggum umstøðum, og uttan at ein møgulig vandafull støða tekur seg upp. T.d. kann vitan frammanundan hjá starvsfólki um harðskap og hóttanir frá hesum persóni í øðrum samanheingi vera nóg mikið til, at løgreglan verður boðsend at hjálpa við at útinna avgerðina.

Eitt dømi um støðu, har løgreglan eigur at verða boðsend, er: um persónur skal flytast úr Føroyum til Danmarkar á eitt hóskandi bupláss. Ráðiligt er ikki í slíkum føri, at eitt vanligt starvsfólk er fylgjari hjá einum persóni, ið er dømdur á eina fyriskipan, og tískil skal eitt løgreglufólk fylgja persóninum upp á pláss, soleiðis at borgast kann fyri trygdini á ferðini. Annað dømi er, um ein persónur skal flytast yvir eitt longri strekki í Føroyum ella flytast sjóvegis, so eigur løgreglan at verða boðsend til tess at tryggja ferðina hjá persóninum, avvarðandi starvsfólki og øðrum.

## Kap. 7. Upplýsingarskylda, reglur um afturgjald o.a. (§§ 53-60)

***Upplýsingarskylda og reglur um afturgjald***
***Til § 53***

Ásetingin skipar hvussu Almannaverkið kann fáa neyðugar upplýsingar til vega í sambandi við avgerðir, ið Almannaverkið skal taka. Hevur Almannaverkið ikki nøktandi upplýsingartilfar, kann Almannaverkið taka stig til at fáa til vega hesar upplýsingar, soleiðis sum greitt er frá niðanfyri.

Sambært hesi ásetingini kann Almannaverkið áleggja persóni at vera við til at upplýsa málið, soleiðis at persónur sjálvur skal biðja um upplýsingar og lata Almannaverkinum hesar.

Í mun til ásetingina um samtykki, so kann ein myndugleiki altíð sambært fyrisitingarlógini biðja ein borgara um samtykki at innheinta upplýsingar, ið eru viðkomandi fyri eitt mál.

Ásetingin er í hesum førum bert upplýsandi fyri borgaran. Tó er tað ásetingin um, at peningastovnar, læknar, sálarfrøðingar og onnur privat, ið ikki eru fevnd av fyrisitingarlógini, hava skyldu at lata umbidnu upplýsingar, ið er meira viðkomandi í hesum førum. Ein peningastovnur, kann tí ikki sýta at lata Almannaverkinum umbidnu upplýsingarnar, tá Almannaverkið hevur fingið samtykki frá borgaranum.

Samtykki at innheinta upplýsingar skal verða so mikið nágreiniligt, at persónurin veit, hvat slag av upplýsingum verða heintaðar, frá hvørjum tær verða heintaðir, og hvat fyri mál upplýsingarnar hoyra til. Samtykki er altíð neyðugt, uttan mun til um talan er um loyniligar upplýsingar ella reint persónligar upplýsingar.

Almannaverkið skal í sambandi við heintan av upplýsingum meta um, hvørjar ítøkiligar upplýsingar, ið verða mettar neyðugar fyri málsviðgerðina. Í hesum sambandi skal lutfalsmeginreglan í persónsupplýsingarlógini havast í huga, soleiðis at tær upplýsingar, ið verða heintaðar eru viðkomandi og nøktandi og ikki fevna um meira enn neyðugt.

Ásett er ikki til fulnar, hvørjum Almannaverkið kann krevja upplýsingar frá. Á tann hátt hevur Almannaverkið víðar heimildir at krevja upplýsingar heintaðar.

At Almannaverkið kann krevja allar neyðugar upplýsingar fingnar til vega merkir, at tað ikki hevur týdning, hvussu upplýsingarnar eru háttaðar. Upplýsingarnar kunnu t.d. vera frágreiðingar, úttalilsi, úrskrift úr lækna- ella sjúkradagbók ella innlit í skráir.

Rættarlig avhoyring sambært § 1018 í rættargangslógini er bara galdandi í mun til teir myndugleikar, ið Almannaverkið kann krevja upplýsingar frá. Rættarlig avhoyring kann tískil ikki krevjast av einum persóni, t.d. persóninum, ið skal hava hjálp sambært ásetingini

*Til § 53, stk. 2*

Talan er um áseting, ið gevur Almannaverkinum heimild at krevja upplýsingar frá øðrum almennum myndugleikum, um upplýsingarnar skulu nýtast í sambandi við vanligt eftirlit hjá myndugleikanum ella til viðgerð av einstøkum máli hjá persóni. Almannaverkið hevur við ásetingini eisini heimild at krevja somu upplýsingar hjá hjúnafelagnum. Almannaverkið hevur heimild at krevja hesar upplýsingar, uttan mun til um persónurin ella hjúnafelagin geva sítt samtykki til tað.

*Til § 53, stk. 3*

Tá talan er um at flyta ein persón sambært tvingsilslógini, hevur Almannaverkið tørv á at lýsa málið til fulnar. Um persónurin ikki ynskir at medvirka ella ikki er førur fyri at medvirka, kann Almannaverkið umbiðja sær viðkomandi upplýsingar uttan samtykki, ið tann privati ella myndugleikin síðani hevur skyldu at lata. Hettar eru í høvuðsheitum upplýsingar, ið kunnu varpa ljós á tær umstøður, ið tala fyri, at viðkomandi noyðist at flyta av bústaði sínum á annan bústað, t.d. upplýsingar um hansara heilsustøðu.

*Til § 53, stk. 4*

Tá persónur hevur verið innlagdur á sjúkrahús og eftirfylgjandi skal hava tænastu frá Almannaverkinum, er neyðugt, at Almannaverkið fær fyrireikað, at persónur verður útskrivaður. Tískil verður heimild veitt fyri, at sjúkrahús kunnu kunna Almannaverkið um, at persónur nú verður útskrivaður, uttan at noyðast at biðja um samtykki frá viðkomandi. Hetta lættir eisini munandi um tær støður, har persónur ikki er førur fyri at geva sítt samtykki.

Er persónur á vardum bústaði og skal innleggjast á sjúkrahús og útskrivast aftur til varda bústaðin, er umráðandi, at starvsfólk á bústaðnum fáa samskift við sjúkrahúsið um innlegging og útskriving. Ásetingin heimilar ikki sjúkrahúsinum uttan samtykki at lata upplýsingar um diagnosu, viðgerð og medisinering.

***Til § 54***

Sambært ásetingini hevur ein persónur skyldu til at boða frá broytingum, ið kunnu hava týdning og ávirkan á hjálpina, ið persónurin fær frá Almannaverkinum.

Persónur, sum av órøttum hevur móttikið uppihaldsveiting, fíggjarligt ískoyti ella fíggjarligan stuðul, skal rinda upphæddina aftur. Treytin er, at persónur átti at verið vitandi um, at peningurin er útgoldin av órøttum.

Kravið, ið verður sett, til at persónurin átti at verið vitandi um viðurskiftini, er tað sama kravið, ið sett verður, tá onkur er illvarin (ond tro). Tað merkir, at viðkomandi visti ella átti at vita, at hann átti at geva ávísar upplýsingar til Almannaverkið. Tá metast skal um hesi viðurskifti, hevur tað týdning at fáa staðfest, hvørjar upplýsingar, ið myndugleikin hevur givið persóninum í sambandi við hansara upplýsingarskyldu. Til tess at Almannaverkið kann siga, at persónurin átti at vita ella visti um ávís viðurskifti, skal Almannaverkið skrivliga hava greitt persóninum frá, hvørjar broytingar eru viðkomandi at upplýsa um, og um, hvørjar avleiðingar vantandi upplýsing kann hava við sær.

Almannaverkið hevur próvbyrðuna fyri, at persónurin er illvarin.

Dømi: Ein persónur søkir um bústaðarbroyting til eini hús, men letur vera við at upplýsa, at hann hevur eini onnur hús í sama umhvørvi, ið hann húsast í, og ið eru egnaði sum tilhald hjá viðkomandi. Fær persónurin av órøttum stuðul til bústaðarbroyting, kann Almannaverkið lyfta próvbyrðuna um, at persónurin er illvarin við at upplýsa honum um treytirnar fyri at fáa bústaðarbroyting, áðrenn stuðulin verður játtaður. Viðkomandi kann tó verða góðvarin, um hann eitt nú ikki húsaðist í seinna húsinum, ella tað ikki greitt kundi sigast, at annað húsi var betur egnað enn hitt sum tilhald hjá viðkomandi.

Dømi: Ein persónur søkir um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku at ansa einum nærskyldum, ið ynskir at doyggja heima. Tann, ið ansar viðkomandi, hevur ikki aðrar arbeiðsinntøkur í byrjanini, men fær síðani møguleika at arbeiða heima við teldu. Tá hann ikki letur hesa

upplýsing til Almannaverkið, er hann illvarin, um hann framvegis fær endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku. Viðkomandi kann verða góðvarin, um skrivliga upplýsingin frá Almannaverkinum í sambandi við umsóknina er ógreið.

***Til § 55***

Ásetingin skipar til fulnar, undir hvørjum umstøðum fíggjarliga veitingin og stuðulin skal gjaldast aftur. Almannaverkið kann taka avgerð um afturgjald sambært einari ítøkiligari meting.

Almannaverkið skal í seinasta lagi tá fíggjarligi stuðulin verður veittur, kunna persónin um, at fíggjarligi stuðulin skal gjaldast aftur.

Dømi um óskil í fíggjarviðurskiftum hjá persóni er, um viðkomandi velur at rinda skuld, ið ikki er gjaldkomin, stutt áðrenn søkt verður um fíggjarliga veiting ella stuðul frá Almannaverkinum. Haraftrat er tað at meta sum óskil, um viðkomandi livir í óhógvi og hevur ein oyðslutan levnað. Almannaverkið eigur í seinasta lagi, tá fíggjarligi stuðulin verður veittur, at upplýsa persónin um, at fíggjarligi stuðulin skal gjaldast aftur.

'Uttan neyðuga orsøk' merkir, at orsøkin skal verða saklig. Dømi um sakliga orsøk er lógligt forfall.

'Innan rímiliga tíð' merkir nær farast kann undir afturgjald. Um tað eitt nú sæst í teimum upplýsungum, ið myndugleikin hevur til taks, at ein umsøkjari fer at fáa týðandi tøkupening eftir 4 mánaðum, er hetta at meta sum rímilig tíð. Hugtakið er sostatt tengt at fíggjarstøðuni hjá viðkomandi; t.e. nær tøkupeningurin kann sigast at rúma einum afturgjaldi.

Almannaverkið skal kunna um afturgjaldsskylduna samstundis við at hjálpin verður veitt. Tó ikki í sambandi við nr. 6, ið snýr seg um at persónur seinni, t.v.s. aftaná at hjálpin er veitt, fær útgoldið endurgjald, hjúnafelagagjald ella aðra upphædd, ið kann nýtast til uppihald. Treytin er at tað fevnir um sama tíðarskeið og sama endamál sum hjálpin.

***Til § 56***

Sambært § 56, stk. 1 verður heimild at áseta rentutilskriving fyri gjøld, ið eru fallin til gjaldingar. Renturokningin fyri almenn krøv verður nýtt. Rentulógin verður ikki nýtt. Grundgevingin fyri hesum er, at tá tað er TAKS, sum innheintar skuldina, verður kravið lagt inn í innkrevjingarskipanina hjá TAKS, og her er rentusatsurin líka fyri øll almenn krøv.

§ 56, stk. 1 vísir til § 54, stk. 2, ið eru krøv, ið skulu gjaldast aftur, eins og til § 55, stk. 1, ið eru tey krøv, ið, Almannaverkið kann avgera, skulu gjaldast aftur.

Hesi krøv kunnu vera uppihaldsveiting sambært §§ 11 og 13 fíggjarligt ískoyti sambært §§ 8, 9 og 15 – 19, fíggjarligt endurgjald sambært §§ 24 og 25 eins og fíggjarligur stuðul sambært §§ 26, 27, 29 og 30.

Fíggjarligt ískoyti til avdráttir til egnan bústað skal rindast aftur sambært § 57 í lógini.

Harafturat er ásett í at Almannaverkið hevur heimild at gera afturgjaldsskipan fyri viðkomandi. Tað merkir, at í fyrstu atløgu verður persónurin biðin um at rinda skuldina. Kann persónurin ikki rinda alla skuldina í einum, kunnu Almannaverkið og persónurin gera avtalu um afturgjaldsskipan grundað á ítøkiligu fíggjarligu støðuna hjá persóninum.

*Til § 56, stk. 2*

Ásetingin heimilar, at afturgjaldskrøv, ið eru fallin til gjaldingar saman við rentutilskriving verða innheintað við panting.

*Til § 56, stk. 3*

Ásetingin áleggur TAKS at fremja pantingina. Hetta merkir ítøkiliga, at TAKS fremur pantingina, eisini í teimum málum har skattskyldugar veitingar skulu innheintast, og har henda innheintingin ikki kann ganga ígjøgnum innkrevjingarskipanina. Innheinting av A-inntøkum má gerast manuelt, uttan so, at TAKS fær eina skipan at innheinta A-inntøkur.

Uppihaldsveitingar verða útgoldnar sum A-inntøkur. Fíggjarligur stuðul, fíggjarligt endurgjald og fíggjarligur stuðul (endurbót) verða ikki útgoldin sum A-inntøka og kann leggjast í innkrevjingarskipanina hjá TAKS, treytað av, at skipanin hjá TAKS verður tillagað hesum .

*Til § 56, stk. 4*

Henda ásetingin heimilar TAKS at innheinta falna skuld við at afturhalda í A-inntøku hjá einum persóni. Hesi krøv kunnu sostatt leggjast í innkrevjingarskipanina hjá TAKS, treytað av, at skipanin verður tillagað hesum.

***Til § 57***

Sambært § 56 skal persónur, ið hevur fingið fíggjarligan stuðul at rinda avdráttir til egnan bústað, rinda henda stuðulin aftur. Almannaverkið kann í hesum førum ikki gera eina ítøkiliga meting um, hvørt ískoytið skal rindast aftur eins og í § 55.

Ásetingin er í samráði við meginregluna um, at almannaveiting ikki verður veitt til virðisøking av ognum.

Aðrar útreiðslur til bústað, sum t.d. rentur ella fíggjarligt ískoyti til ábøtur er ikki fevnt av hesi áseting, men er fevnt av § 55, har Almannaverkið eftir einari ítøkiligari meting kann gera av, at stuðulin skal rindast aftur. Metir Almannaverkið, at ábøturnar eru við til økja um virðið á ognini, kann Almannaverkið veita fíggjarligt ískoyti við afturgjaldskyldu.

Sambært § 57, stk. 2 skal persónur, ið hevur fingið fíggjarligt ískoyti til goymslugjald, rinda Almannaverkinum ískoytið aftur. Ásetingin hongur saman við, at persónur vanliga bert fær ískoyti til goymslugjald einaferð.

Verður alt goymslugjaldið ikki goldið aftur, skal tann útgoldni parturin rindast Almannaverkinum aftur.

*§ 57, stk. 3*

Fær persónur fíggjarligt ískoyti til goymslugjald, er vanlig mannagongd, at Almannaverkið rindar goymslugjaldið beinleiðis til útleigara.
Til tess at tryggja sær, at útleigari rindar Almannaverkinum goymslugjaldið aftur, eigur Almannaverkið at kunna útleigara. Rindar útleigari av misgáum goymslugjaldið til leigara heldur enn til Almannaverkið, heftir útleigari ikki fyri mistakinum, og má Almannaverkið heinta peningin inn frá tí, ið hevur fingið goymslugjaldið játtað.

Afturgjaldskyldan er galdandi fyri terminsútreiðslur fyri vanligar eigarabústaðir og avgjøld í sambandi við lutaíbúðir. Fyri lutaíbúðir er hetta galdandi uttan mun til, um luthavari kann rokna ein part av rakstrarúrslitinum hjá lutaíbúðafelagnum upp í sína skattskyldugu inntøku. Tað, ið er avgerandi, er, um fíggjarligi stuðulin til at rinda avgjøld, ger, at viðkomandi persónur fær eina uppsparing.

***Úttøka, útgjald  o.a***

***Til § 58***
Sambært § 58 skal persónur hava fingið tilsøgn um fíggjarligan stuðul, áðrenn persónur kann seta seg fyri útreiðsluni. Persónur kann ikki seta seg fyri einari útreiðslu fyri síðan at vænta, at Almannaverkið rindar útreiðsluna.

Heimild er tó at veita undantak frá kravinum um tilsøgn.

Við bráðfeingistørv er at skilja t.d. heilsuvandi, ogn fer fyri skeyti o.t., og at skal frávik gerast, skal søkjast beint aftaná, at viðkomandi hevur átikið sær útreiðsluna.

*Til § 58, stk. 2*
Játtan um uppihaldsveiting og fíggjarligt ískoyti verður veitt frá tí degi, at umsóknin er móttikin á Almannaverkinum. Hetta merkir, at uppihaldsveiting og fíggjarligt ískoyti kann rindast fyri eitt tíðarskeið, ið liggur aftur í tíð.

Vanlig mannagongd er, at uppihaldsveiting og fíggjarligt ískoyti verður útgoldið seinast í tí mánaði, at avgerð er tikin.

***Til § 59***
Sambært § 59 kann úttøka og onnur rættarsókn ikki gerast í veitingum, tí hendan er ætlað sum ein sosial veiting, ið skal tryggja lívsuppihaldið hjá tí óarbeiðsføra persóninum og eisini sum ein fíggjarlig endurbót fyri brek ella sjúku, ið persónur hevur. Henda lóg er at meta sum uttasta trygdarnetið, og tí skal ikki vera møguligt hjá kreditorum at fáa fatur í hesum peningi.

***Til § 60***
Við hesi áseting fær Almannaverkið rætt at yvirtaka rættin at móttaka hjúnafelagagjald, ið persónur er álagdur at rinda hjúnafelaga ella fyrrverandi hjúnafelaga. Treytin fyri, at Almannaverkið kann yvirtaka rættin at móttaka hjúnafelagagjaldið, er, at persónur fær uppihaldsveiting sambært lógini.

Er persónur, ið ikki longur hevur uppihaldsskyldu mótvegis hjúnafelaga í sambandi við sundurlesing ella hjúnaskilnað, álagdur at rinda hjúnafelagagjald, kann Almannaverkið somuleiðis yvirtaka rættin at móttaka hjúnafelagagjaldið.

Heimildin hjá Almannaverkinum at yvirtaka rættin at móttaka hjúnafelagagjald er avmarkað til bert at fevna um tær støður, har persónur fær uppihaldsveiting. Heimildin hjá Almannaverkinum at yvirtaka rættin at móttaka hjúnafelagagjald fevnir tískil ikki um tær støður, har persónur eitt nú fær samdøgurstænastur ella aðrar tænastur frá Almannaverkinum. Persónur, ið fær samdøgurstænastur frá Almannaverkinum, fær samstundis uppihaldsveiting, antin sambært hesari ella aðrari lóg.

Ásetingin heimilar somuleiðis Almannaverkinum at yvirtaka rættin at móttaka barnagjald, ið foreldur eru áløgd at rinda. Talan er um støður, har Almannaverkið veitir fyribils bústað, soleiðis at tað veruliga er Almannaverkið, ið uppiheldur barninum.

Ásetingin í § 60, stk. 2 er í samsvari við § 18, stk. 2, 2. pkt. í lov om børns retsstilling:

“Retten til at kræve bidrag fastsat og til at indkræve bidraget har den, der afholder udgifterne ved barnets forsørgelse, såfremt den pågældende har eller ved forældremyndighedens ophør havde forældremyndigheden over barnet eller lovligt har barnet i pleje. I det omfang det offentlige afholder udgifter til barnets forsørgelse, tilkommer retten den pågældende offentlige myndighed eller institution.”

Í § 60, stk. 3 er ásett, at um persónur ella barn, ið verður uppihildin sambært lógini, ikki móttekur hjúnafelagagjald ella barnagjald, kann Almannaverkið biðja um, at hjúnafelagagjald og barnagjald verður ásett, eins og Almannaverkið kann biðja um, at eitt møguligt ásett gjald verður hækkað. Almannaverkið skal tá venda sær til rætta myndugleika, ið er Familufyrisitingin.

Metir Almannaverkið, at ein avtala millum hjúnafelagar um hjúnafelagagjald er gjørd við tí endamáli at forða fyri, at Almannaverkið kann nýta sín rætt at móttaka peningin, so kann Almannaverkið seta hesa avtaluna til viks og biðja um, at onnur rímilig avtala verður gjørd. Sama er galdandi í mun til avtalur millum foreldur um barnagjald.

**Kapittul 8. Umsitingarligar reglur (§§ 61 – 72)**

***Til § 61***

Almannaverkið er avgerðarmyndugleiki í sambandi við avgerðir, ið tiknar verða sambært hesi lóg. Undantikið eru avgerðir um upptøku, og nær fyriskipan endar, ið eru avgerðir, ið avvarðandi sjálvsognarstovnar taka.

Landið rindar fyri raksturin á fleiri sjálvsognarstovnum, og samstundis er Almannaverkið við í avgerð um upptøku. Hesin leistur er umráðandi til tess at tryggja at vald og gjald fylgjast, soleiðis at landið ikki rindar til fólk, ið hava ávísan tørv, men har tørvurin vísir seg at vera ein annar.

Talan er um avgerðir, fevndar av fyrisitingarlógini.

Í tann mun, avgerðir skulu takast um útinnandi arbeiði (praktisk forvaltningsvirksomhed) eitt nú í mun til dagliga virksemið í einari búfyriskipan, so er tað leiðarin, ið tekur avgerðina um hetta, uttan mun til, um búfyriskipan er skipað av Almannaverkinum ella av sjálvsognarstovni.

Tó verður víst á, at landsstýrismaðurin hevur eftirlit við virkseminum hjá sjálvsognarstovnum sambært § 69 í lógini.

***Umsiting av uppihaldsveiting***
***Til § 62***

Ásetingin veitir Almannaverkinum heimild at umsita uppihaldsveiting sambært lógini.

Almannaverkið fær við hesi heimild ikki óavmarkaðar heimildar at taka avgerð um umsiting av uppihaldsveitingini. Almannaverkið hevur sostatt bert ræði á:

- At gjalda veitingina út í minni ratum,
- At rinda fastar útreiðslur, ið persónur hevur, og
- At veitingin verður útgoldin við vørum ella bíleggingarseðlum (rekvisitiónir)

Hetta merkir, at Almannaverkið kann gera av, at veitingin t.d. skal gjaldast út hvørja viku ella 2 ferðir um mánaðin. Hetta er serliga í teimum førum, har persónur ikki megnar at fáa peningin at røkka til allan mánaðin, eitt nú vegna rúsevnistrupulleikar.

Í sambandi við, at uppihaldsveitingin skal útgjaldast, kann Almannaverkið stovna fíggjarkontu, har tað verður lagt upp fyri ymsum komandi útreiðslum.

Almannaverkið kann eisini rinda fastar útreiðslur fyri borgaran og síðan gjalda restina út, antin í einum ella fleiri umførum. Talan er um fastar útreiðslur, ið borgarin sjálvur hevur sett seg fyri.

Í mun til størri og komandi útreiðslur sambært fíggjarætlanini kann peningur standa eftir á kontuni ella verða fluttur til aðra kontu, sum Almannaverkið umsitur til útreiðslur, ið ikki verða goldnar mánaðarliga.

Eins og nevnt í lógarheimildini eru skyldur mótvegis útleigara eitt týðandi atlit at taka. Hetta er við tí fyri eyga, at fyribyrgja, at persónur, umframt verandi trupulleikar eisini verður heimleysur, og harvið fær enn fleiri trupulleikar. Aðrar fastar útreiðslur kunnu eisini fevna um útreiðslur til rentur og avdráttir, útreiðslur til matarskipan, heimahjálp e.a. Treytin er tó, at persónur sjálvur hevur sett seg fyri útreiðsluni.

Almannaverkið kann ikki við heimild í hesi áseting av sínum eintingum binda borgarar til ávísar útreiðslur, eitt nú til matarskipan, reingerð e.l. og síðan rinda útreiðsluna, áðrenn restin av veitingini verður útgoldin. Borgarin skal sjálvur hava sett seg fyri útreiðsluni.

Áðrenn Almannaverkið tekur avgerð sambært hesi áseting, skal Almannaverkið í samsvari við lutfalsmeginregluna vegleiða og stuðla á annan hátt, eitt nú við at hjálpa borgaranum at gera sjálvvirkandi gjaldsavtalur og annars at fáa skil á sínum fíggjarligu viðurskiftum.

Metir Almannaverkið, at vegleiðing og stuðul ikki fer at bøta um viðurskifti borgarans, kann Almannaverkið beinanvegin taka avgerð um umsiting av uppihaldsveitingini.

***Til § 63***
Áseting um at landið heldur útreiðslurnar sambært hesari lóg.

Tó afturrinda kommunurnar landinum útreiðslur, ið standast av, at Almannaverkið veitir hjálp vegna vantandi barnaansing. Eisini er ásetingin víðkað til eisini at fevna um útreiðslur, sum landið hevur av at játta stuðul til bústaðarbroytingar ísv. búpláss sambært § 14 , stk. 1 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., til persón í fólkapensjónsaldri, har bústaðarbroyting er neyðug til tess at gera bústaðin egnaðan sum tilhald, t.d. har baðirúm er á loftinum, og persónurin ikki longur megnar at koma upp á loft, og kommunan ikki hevur tøkt pláss á røktarheimi ella eldrasambýli o.tíl. at vísa á. Higartil hava hesar útreiðslur verið hildnar av landinum, men av tí at málsøkið heimatænasta og eldrarøkt er lagt út til kommunurnar at umsita, verður mett rættast, at kommurnar eisini bera útreiðslurnar til bústaðarbroyting til borgarar yvir 67 ár, um kommunan ikki hevur tøkt pláss á ellisheimið, og bústaðarbroytingin harvið er neyðug.

***Ráðgevandi ráð***

***Til § 64***

Við hesi áseting verður landsstýrismanninum heimilað at seta ráð at veita landsstýrismanninum ráð og vegleiðing í brekpolitiskum spurningum og í viðurskiftum hjá fólki, ið bera brek. Higartil hevur Ráðið fyri Brekað havt henda leiklutin.

Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta reglur um virksemi hjá ráðnum, hvør skal manna ráðið, og hvussu ráðið verður skipað. Landsstýrismaðurin kann sostatt sjálvur avgera, hvør skal manna eitt tílíkt ráð. Talan kann vera um umboð fyri myndugleikar, feløg ella einstaklingar, ið hava ávísa vitan.

***Brúkararáð***

***Til § 65***

Við hesi áseting verður ásett, at brúkararáð eiga at verða stovnað, soleiðis at persónar, ið fáa tænastur sambært lógini, verða tryggjaiar ávirkan á viðurskifti, ið viðvíkja teimum sjálvum, undir hesum á ta tænastu, ið teimum verður veitt. Við ásetingini fær Almannaverkið ábyrgd fyri at taka stig til, at brúkararáðini verða stovnað. Talan er um eina skipan, sum í dag er galdandi innan ávísar tænastur. Við hesi ásetingini verður ásett, at brúkararáð kunnu skipast innan allar tænastur.

Persónar kunnu ikki tvingast at manna eitt brúkararáð. Ásetingin er sostatt bert eitt tilboð og leggur ábyrgdina at taka stig til at stovna brúkararáð yvir á Almannaverkið, hetta fyri at tryggja persónum møguleikan at verða hoyrd og hava ávirkan.

Brúkararáð eru serliga týdningarmikil, har persónar fáa samdøgurstænastur, men brúkararáð kunnu eisini skipast undir øðrum tænastum, eitt nú undir virknistænastum.

Persónar skulu takast við í viðurskifti, ið viðvíkja teimum sjálvum. Hetta kann, alt eftir virkisførimum hjá tí einstaka, gerast við, at persónur umboðar seg sjálvan ella verður umboðaður av avvarðandi, har viðkomandi ikki sjálvur eru førur fyri at røkja egin áhugamál og taka avgerðir um felags viðurskifti. Tá talan er um barn, eru tað foreldrini, ella onnur, um barnið er sett heiman, ið umboða áhugamálini hjá barninum.

Avvarðandi hava í flestu førum ein týðandi leiklut í lívinum hjá persónum, ið bera brek, og umsorganin røkkur oftast nógv longri, enn tað tíðarskeiðið, har persónurin annars vildi havt eitt sjálvstøðugari lív. Tískil eru borgaraávirkan og avvarðandisamstarv tætt samantengd. Alt eftir hvørjar fortreytir og aldur persónar, ið bera brek, hava, kunnu brúkararáð skipast sum: borgararáð, blandað borgara- og avvarðandiráð ella avvarðandiráð.

*Borgararáð*

Á vardum bústøðum og fyribils bústøðum og øðrum tænastum, har borgarar hava fyritreytir fyri sjálvir at hava ávirkan, skal vera eitt forum, har avgerðir verða tiknar um felags viðurskifti. Í verki kann talan vera um tvey ymisk fora: annaðhvørt at allir borgararnir eru við á borgarafundum, sum eru avtalaðir frammanundan, ella tað kann skipast ein borgaranevnd við persónum, sum hava til uppgávu at umboða allan bólkin.

*Blandað borgara- og avvarðandiráð*

Tað skulu setast á stovn blandað borgara- og avvarðandiráð á vardum bústøðum, serligum bústøðum og øðrum tænastum, har nøkur - men ikki øll – búfólk eru før fyri at røkja egin áhugamál og taka avgerðir um felags mál.

*Avvarðandiráð*
Tað skulu setast á stovn avvarðandiráð á vardum bústøðum, serligum bústøðum og øðrum tænastum, har ongi av búfólkunum eru før fyri at røkja egin áhugamál og taka avgerðir um felags mál, og har tænasta verður veitt børnum, yngri enn 18 ár.

*Uppgávur hjá brúkararáðunum*
Uppgávan hjá ráðunum er at skapa størst møguligan trivnað í gerandisdegnum, við at umboða áhugamálini hjá borgarunum og við at vera teirra málgagn og at arbeiða fyri at styrkja samstarvið millum borgarar, avvarðandi og starvsfólk.

Hvørja ávirkan einstøku ráðini hava, er treytað av, hvat slag av tilboði talan er um, og hvørjar fyritreytir borgararnir hava.

Borgara- og avvarðandiráðini skulu hoyrast í mun til eftirlitsfrágreiðingar, sum verða gjørdar í sambandi við eftirlit, og skulu kunnast um ætlaðar broytingar í bústaðarviðurskiftum.

Áðrenn nýggj starvsfólk skulu setast, skal hvørt ráðið kunnast og hoyrast, um tey halda tørv vera á starvsfólki við serligum førleikum/útbúgving, men limirnir í ráðunum skulu ikki luttaka í setanarsamrøðum ella í endaligu avgerðini, av tí at Almannaverkið er setanarmyndugleikin.

Borgara- og avvarðandiráðini kunnu, umframt uppgávuna at vera málgagn hjá borgarunum, átaka sær aðrar uppgávur, sum at skipa fyri virksemi fyri borgarunum t.d.:

- mentanarlig og sosial tiltøk innanhýsis og í nærumhvørvinum
- uttandura virksemi fyri borgarar
- innrætting av felagshølum
- at skapa siðvenju á staðnum

Borgara- og avvarðandiráðini kunnu ikki leggja seg út í leiðsluavgerðarrættin.

Tænasturnar hjá Almannaverkinum eru ymiskar og verða skipaðar ymiskt. Tí ber illa til at áseta neyvar og eins reglur fyri, hvussu ráðini skulu skipast. Leiðslan fyri einstøku tænasturnar gera av, hvussu nógvir limir manna ráðini, og tað er upp til ráðini, hvussu tey velja at skipa virksemið. Mælt verður til, at ráðini skulu hava ólíka tal av limum fyri at minka um vandan fyri, at atkvøðugreiðslur fáa líka nógvar atkvøður fyri og ímóti. Mælt verður eisini til, at talið av limum verður 5 ella 7.

Umframt persónar og/ella umboð fyri persónar, ið fáa tænastu, fevna brúkararáðini eisini um starvsfólk, ið veita tænastu.

Samsýning verður ikki veitt umboðum í brúkararáðum. Starvsfólk luttaka sum liður í sínum arbeiði.

***Góðkenning***

***Til § 66***
Ásetingin heimilar, at onnur enn Almannaverkið kunnu stovna og reka ávísar tænastur sambært hesi lóg og, at Almannaverkið kann keypa tænastur frá hesum veitarum til tess at røkja tær skyldur, ið Almannaverkið hevur sambært lógini.

Tað eru í dag ávísir sjálvsognarstovnar, ið skipa tilboð sambært verandi forsorgarlógini, eitt nú bútilboð og umlætting til persónar við likamligum ella sálarligum breki. Tað er ymiskt, hvussu virksemi verður skipað bæði í mun til rakstur og í mun til ábyrgdarbýti.

Ávísir sjálvsognarstovnar eru skipaðir við egnari játtan á fíggjarlógini og hava egna leiðslu.

Aðrir sjálvsognarstovnar eiga og umsita hølini, meðan virksemið verður rikið av Almannaverkinum. Harumframt eru eisini sjálvsognarstovnar, sum hava egin hølir, og reka virksemi við játtan, sum verður latin umvegis Almannaverkið.

Flestu sjálvsognarstovnar, sum veita sosialar tænastur, eru frá tíðini, áðrenn tað almenna skipaði hesar tænastur. Í flestu førum eru sjálvsognarstovnar sprotnir úr miðvísum arbeiði hjá áhugafelagsskapum, sum hava tikið stig til at veita ávísum bólkum tænastur.

Sjálvsognarstovnar, ið veita virknistænastu eru: Dugni og Sjóndepilin og Fountainhúsið.

Sjálvsognarstovnurin Dáin í Klaksvík veitir umlætting.

Sjálvsognarstovnurin Sólteigur og Eysturstræti og Tórshavnar Privata Vistarheim veita sambýlispláss til persónar við sálarsjúku.

Sjálvsognarstovnarnir Dáin, Sólteigur og Eysturstræti og Tórshavnar Privata Vistarheim fáa játtan til rakstur umvegis játtanina hjá Trivnaðartænastuni hjá Almannaverkinum.

Dugni og Sjóndepilin hava sjálvstøðuga rakstrarjáttan á fíggjarlógini meðan Fountainhúsið fær stuðulsjáttan á fíggjarlógini.

Frelsunarherurin, Blái Krossur og felagsskapurin Gloria eru sjálvsognarstovnar, sum m.a. veita serlig bútilboð til persónar við víðfevndum sosialum trupulleikum, sum ikki eru førir fyri at útvega sær ella fasthalda ein varandi bústað. Stuðul verður latin til endamálið á fíggjarlógini.

Við hesi heimild verður framhaldandi møguligt, at onnur enn Almannaverkið kunnu skipa og veita tænastur sambært hesi lóg, tó at landsstýrismaðurin við hesi áseting fær greiðar heimildir at seta krøv og treytir til tær tænastur, ið verða veittar. Samstundis verða ásetingar um góðkenning samlaðar í eina grein.

Landsstýrismaðurin fær við hesi áseting heimild at góðkenna: virknistænastur, umlætting, flutningstænastu, fyribils- og varandi bústaðir umframt serlig bútilboð og hjálp í sambandi við harðskap. Talan er um tænastur, ið longu eru skipaðar, tó undantikið flutningstænasta, ið er tænasta, ið hóskandi kundi verið skipað av privatum.

*Til § 66, stk. 2*
Í § 66, stk. 2 verður ásett, hvat landsstýrismaðurin kann seta treytir um í sambandi við góðkenning av tænastum. Hesar treytir fevna um skipan av tænastuni, t.e. hvat tænastan fevnir um, hvør málbólkurin er, hvussu upptøka ella tillutan av tænastum verður skipað, staðseting, hølisviðurskifti, undir hesum stødd, atkoma, útbúnaður, standur. Eisini skal góðkenningin fevna um, hvussu tænastan verður fíggjað, og um borgarin skal rinda eitt gjald fyri tænastuna. Eisini skal greitt býtið vera millum ábyrgdina hjá tænastuveitaranum, undir hesum møguligum stýri og ábyrgdina hjá Almannaverkinum.

***Keyp og veiting av tænastum***

***Til § 67***

Við hesi áseting verður ásett, at Almannaverkið ímóti gjaldi kann gera avtalu um tænastur frá almennum ella privatum veitarum, til tess at røkja sínar skyldur sambært hesi lóg.

Heldur enn at veita slíka heimild undir viðkomandi tænastum, verður heimild Almannaverksins at keypa tænastur samlað í hesa grein.

Tær tænastur, ið talan helst kann gerast um eru:

- endurvenjing
- viðlíkahaldsvenjing
- umlætting
- flutningstænasta
- fyribils bústaðir
- vardir bústaðir

Ásetingin hongur saman við, at Almannaverkið hevur skyldu at veita øllum borgarum í Føroyum tænastur, og í teimum førum, har fólkagrundarlagið í einum øki er ov lítið til at skipa eina tænastu, kann Almannaverkið keypa hesa tænastu frá privatum.

Eisini kann hugsast, at tað er mest skynsamt at keypa tænastu frá øðrum, heldur enn at Almannaverkið sjálvt skipar hesar. Dømi um slíka tænastu kann vera flutningstænasta.

Politiski myndugleikin hevur tikið støðu til, at borgarar í Føroyum skulu hava tænastur í Føroyum. Ásannandi, at persónar kunnu hava so mikið serstakan tørv, at førleiki ikki er í Føroyum at veita neyðugu tænastuna, verður heimild veitt Almannaverkinum í § 61, stk. 2 at keypa neyðuga tænastu uttanlands. Dømi um tænastur, sum í dag verða keyptar uttanlands, eru stuðulstænastur, pláss á bú- og viðgerðarstovni og á tryggjaðum búfyriskipanum. Í Danmark verða heildartilboð í størri mun veitt enn í Føroyum, soleiðis at skilja, at persónur á somu fyriskipan kann fáa psykiatriska viðgerð, sosialpedagogiska viðgerð og skúlagongd.

Harumframt rindar Almannaverkið fyri borgarar, sum búgva og hava búð á vardum bústaði í Danmark síðan sektsti og sjeyti árunum.

Kunngerð við heimild í § 196 í donsku servicelógini við heitinum “Bekendtgørelse om døgnophold i tilbud i Danmark eller på Færøerne” hevur nærri ásetingar um, hvussu viðurskiftini rundanum avtalur millum føroyskar myndugleikar og danskar kommunur skulu skipast. Ásett er m.a. at tað eru føroyskir myndugleikar, sum taka avgerð um innihaldið í tænastuni, herundir eisini um møguligar broytingar skulu gerast í innihaldinum í tænastuni. Eisini fevnir kunngerðin um virkisætlan, ferðing millum Danmark og Føroyar og eftirlit við tænastunum. Kunngerðin er dagførd eftir avtalu millum Almannamálaráðið og Sosialministeriet í Danmark.

Avtala millum Almannaverkið og privatan veitara skal vera skrivlig og skal fevna um fylgjandi viðurskifti:

1) Innihald í tænastuni: Greitt skal vera, hvørja tænastu Almannaverkið keypir, og hvat tænastan fevnir um.
2) Treytir fyri tænastuni: Avtalan skal áseta, nær og hvar tænastan verður veitt
3) Tíðarskeið: Avtalan skal fevna um, nær tænastan byrjar og endar, og nær tænastan skal endurskoðast.

4) Gjaldstreytir: Avtalan skal fevna um gjaldstreytir, soleiðis at partarnir vita, nær, hvar og hvussu gjaldið skal rindast, eitt nú um goldið verður eftir uppgerð ella mánaðarliga, hálvárliga ella árliga frammanundan ella aftaná, tænasta er veitt

5) Uppsøgn og broyting av avtalu. Avtalan skal áseta, hvussu avtalan kann sigast upp, endurskoðast ella broytast,

Viðurkend tænasta, ið aðrir almennir veita, t.d. kommunur og Heilsuverk, krevur ikki góðkenning frá landsstýrismanninum.

*Til § 67, stk. 2*
Meginreglan er, at borgarar í Føroyum skulu hava tænastur í Føroyum. Ásannandi, at persónar kunnu hava so mikið serstakan tørv, at førleiki ikki er í Føroyum at veita neyðugu tænastuna, ella at grundarlag ikki er fyri at skipa tænastuna, tí talan er um avmarkað tal av fólki, sum hevur tørv á tænastuni, verður heimild framhaldandi veitt Almannaverkinum í § 61, stk. 2 at keypa neyðuga tænastu uttanlands. Talan kann t.d. vera um persónar, sum verða dømdir til eftirlit á bú- og viðgerðarstovni, og sum Almannaverkið sambært § 49 og § 50 hevur skyldu til at veita búpláss til. Talan kann eisin vera um persón, sum hevur so mikið serstakan tørv, at grundarlag ikki er fyri at skipa tænastu til viðkomandi í Føroyum. Tað er Almannaverkið, sum út frá eini meting í hvørjum einstøkum føri, avger um ein persónur skal hava tilboð uttanlands, ella um nøktandi tilboð er ella kann skipast í Føroyum.

Dømi um tænastur, sum í dag verða keyptar uttanlands, eru stuðulstænastur, pláss á bú- og viðgerðarstovni og á tryggjaðum búfyriskipanum. Í Danmark verða heildartilboð í størri mun veitt enn í Føroyum, soleiðis at skilja, at persónur á somu fyriskipan kann fáa psykiatriska viðgerð, sosialpedagogiska viðgerð og skúlagongd.

Harumframt rindar Almannaverkið fyri borgarar, sum búgva og hava búð á vardum bústaði í Danmark síðan seksti og sjeyti árunum.

Kunngerð nr. 715 af 31. mai 2017 - "Bekendtgørelse om døgnophold i tilbud i Danmark eller på Færøerne" hevur nærri ásetingar um, hvussu viðurskiftini rundanum avtalur millum føroyskar myndugleikar og danskar kommunur skulu skipast. Ásett er m.a., at tað eru føroyskir myndugleikar, sum taka avgerð um, at persónur skal hava tænastu í Danmark, og tað eru føroyskir myndugleikar, sum avgera innihaldið í tænastuni, herundir eisini um møguligar broytingar skulu gerast í innihaldinum í tænastuni. Eisini fevnir kunngerðin um virkisætlan, ferðing millum Danmark og Føroyar og eftirlit við tænastunum.

***Til § 68***
§ 68 heimilar Almannaverkinum at veita tænastur til aðrar myndugleikar mótvegis gjaldi. Talan er um tænastur til borgarar, ið Almannaverkið ikki hevur skyldu at veita til sambært lógini.

Sambært stk. 1 kann kommuna keypa pláss frá Almannaverkinum til persón, ið kommunan hevur ábyrgd av, men har Almannaverkið hevur tøk pláss, ella har tørvurin hjá borgaranum er av slíkum slagi, at hesin best verður nøktaður á búplássi undir Almannaverkinum.

*Til § 68, stk. 2*

Í tann mun, Almannaverkið hevur skipað ávísa tænastu, ið er fevnd av kapitli 5 í hesi lóg, kann Almannaverkið mótvegis gjaldi veita hesa tænastu til almennar myndugleikar, sum virkað sambært aðrari lóggávu og geiraábyrgd. Tær tænastur, ið talan kann vera um, eru:

- endurvenjing
- viðlíkahaldsvenjing
- umlætting
- flutningstænasta
- tulkatænasta
- fyribils bústaðir
- vardir bústaðir
- virknistænasta

Almannaverkið hevur í fyrstu atløgu skyldu at veita egnum borgarum tænastur, men í tann mun, at Almannaverkið hevur tøka orku og rúmd, kunnu t.d. kommunur og sjúkrahúsverk keypa tænastur frá Almannaverkinum til tess at røkja sínar egnu skyldur.

Aðrir almennir myndugleikar hava sambært geiraábyrgdini skyldu at veita somu tænastu til tulkabrúkarar sum til aðrar borgarar. Við hesi ásetingini verður geiraábyrgdin staðfest, soleiðis at skilja, at aðrir myndugleikar og stovnar kunnu keypa tulkatænastu frá Teknmálstulkatænastuni, ið liggur undir Almannaverkinum, til tess at røkja sínar skyldur. Almannaverkið hevur ikki skyldu at veita tulkatænastu til myndugleikar og stovnar, ið virka sambært geiraábyrgd. Í mun til tulkatænastu so er heimild fyri, at eisini privat, ið ikki virka sambært myndugleikaábyrgd, kunnu keypa tulkatænastu frá Almannaverkinum.

*Til § 68, stk. 3*

Landsstýrismaðurin kann avgera, til hvønn kostnað hesar tænastur verða seldar og undir hvørjum treytum. Gjaldið skal ikki vera hægri enn útreiðslurnar, sum eru av virkseminum í sambandi við ta ítøkiligu tænastuna ella útreiðsluna.

***Eftirlit***

***Til § 69***

Landsstýrismaðurin hevur vanligt geira eftirlit við Almannaverkinum og avvarðandi sjálvsognarstovnum, ið virka sambært hesi lóg. Geiraeftirlitið skal tryggja, at Almannaverkið og sjálvsognarstovnar støðugt virka sambært teimum ásetingum, ið eru ásettar í hesi lóg ella í kunngerð við heimild í hesi lóg.

Landsstýrismaðurin skipar eisini fyri eftirliti, m.a. at eitt námsfrøðiligt eftirlit er við innihaldinum av teimum tilboðum og tænastum, ið Almannaverkið, avvarðandi sjálvsognarstovnar og privatir veitarar veita sambært hesari lóg ella í kunngerð við heimild í hesi lóg. Eftirlitið fevnir eitt nú um, hvussu bygnaðurin virkar, hvussu búfólk trívast og mennast, um hølisviðurskifti eru hóskandi, um fakliga støðið hjá starvsfólki er nøktandi, og hvussu samstarv við aðrar myndugleikar virkar. Harafturat fevnir eftirlitið um tryggjaðar búfyriskipanir í roynd og veru eru tryggjaðar og um fyriskipanin er hóskandi. Eisini kann eftirlitið fevna um inntriv verða framd í samsvari við góðkenning og ásetingar sambært løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin.

Aðaltátturin í sambandi við eftirlitið er, at tað er óheft og hevur eina fakliga høga dygd.

Landsstýrismaðurin er ikki avmarkaður í mun til hvussu eftirlitið verður skipað, undir hesum námsfrøðiliga eftirlitið, og kann um neyðugt skipa soleiðis fyri, at eftirlitið verður fingið til vega frá útlendskum, privatum ella almennum veitara. Eftirlitið kann haraftrat bæði verða skipað sum fráboðað og ófráboðað eftirlit.

Landslæknin fremur heilsufakligt eftirlit. Heilsufakliga eftirlit landslæknans er skipað sambært § 4 í kongelig anordning nr. 634 af 20. juli 1995, om ikrafttræden på Færøerne af lov om Sundhedsvæsenets Centralstyrelse.

Sambært § 26 í autorisatiónslógini er ásett, at Sundhedsstyrelsen (í Føroyum Landslæknin) hevur eftirlit við løggildum heilsustarvsfólkum. Løggild heilsustarvsfólk, ið virka sambært hesi lóg, eru t.d. sjúkrarøktarfrøðingar, ergoterapeutar, fysioterapeutar, heilsurøktarar, eins og kliniskir diætistar og fótterapeutar eisini kunnu starvast í skipanini.

Av tí, at heilsufakligt eftirlit er ásett í omanfyrinevndu lógum, verður tað ikki ásett í hesi lóg.

***Revsing***

***Til § 70***
Ásetingin merkir, at viðkomandi persónur kann dømast, um ikki viðurskiftini eru av sovorðnum slagi, at dømast kann sambært revsilógini, t.d. § 279 um svik ella § 171 um skjalafalsan.

Heimildin at revsa við bót endurspeglar týdningin av at hjálp sambært lógini altíð nøktar ein sannan tørv og fer á rætta stað. Harafturat er revsingin ein ávaring um at sýna rættvorðnan atburð í mun til latan av upplýsingum til myndugleikan.

Talan er harafturat um, at gerningurin hevur volda myndugleikanum ein fíggjarmiss. Støddin á fíggjarmissinum er ikki avgerandi í mun til revsingina. Persónliga fyritreytin fyri revsingarbæri hjá persóninum er, at gerningurin kann metast sum grovt ósketni. Grovt ósketni verður vanliga mett sum ein óskettin atburður, ið víkir munandi frá einum atburði, ið eftir øllum líkindum at døma kann krevjast í sambandi við eina ítøkiliga støðu.

Tað merkir, at persónurin skal hava eina ávísa vitan um, í hvønn mun hansara skeivu og villleiðandi upplýsingar ella dyljing hevur avgerandi týdning fyri málsviðgerðina.

Ein fyritreyt fyri vitanini hjá persóninum er, at Almannaverkið ger greitt nágreiniliga, hvørjar upplýsingar eru neyðugar í sambandi við viðgerðina av málinum. Haraftrat er tað ein fyritreyt, at Almannaverkið fær gjørt persóninum púra greitt, hvørjar broytingar í hansara viðurskiftum kunnu hava týdning í mun til veitta stuðulin. Orsøkin til hetta er, at tað er ábyrgdin hjá Almannaverkinum at lýsa málið til fulnar og tískil eisini ábyrgdin hjá Almannaverkinum at gera av hvørjar upplýsingar, ið persónurin skal lata í sambandi við málsviðgerðina. Ein arbeiðsgevari kann sambært ásetingini revsast við bót, um ikki harðari revsing er uppiborðin eftir aðrari lóggávu. Hetta er t.d., um hann ikki ynskir at vísa Almannaverkinum eitt dagført yvirlit yvir teir persónar, ið hann hevur í starvi. Í hesum sambandi er eisini ásett, at løgfrøðiligir persónar kunnu revsast sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

Støddin á bótini fyri brot sambært hesi áseting er kr. 2.000 kr. Er líknandi brot framt fyrr, kann bótin hækka upp í 4.000 kr.

***Kærumyndugleiki***

***Til § 71***
Ásetingin um kærumyndugleika fevnir ikki um reglur um, at ávísar kærur hava steðgandi virknað. Hetta merkir, at ein kæra til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum sambært hesi lóg, sum útgangsstøði ikki fær steðgandi virknað. Tó kann Kærunevndin sambært óskrivaðum reglum avgera í ítøkiligum førum, at ein kæra skal hava steðgandi virknað. Tað, sum talar fyri at geva eini kæru steðgandi virknað, er m.a., um kærurætturin annars verður gagnleysur. Um avgerðin hjá myndugleikanum hinvegin missir sín týdning við eini avgerð um at loyva steðgandi virknaði, talar hetta fyri, at avgerðin ikki fær steðgandi virknað.

***Ígildissetan og skiftisreglur***

***Til § 72***
Áseting um gildiskomu og skiftisreglur. Lógin kemur í gildi 1. januar 2020. Tó verður ásetingin um viðlíkahaldsvenjing ikki sett í gildi fyrr enn 1. januar 2021 og flutningstænasta í 2022. Hetta tí at tað krevur væl av fyrireiking at fáa hesar ásetingar at virka.

Tær kunngerðir, ið ikki stríða í móti ásetingum í hesi lóg hava framhaldandi gildi. Talan er um kunngerð nr. 20 frá 21. mars 2017 um endurvenjing innan Almannaverkið, kunngerð nr. 13 frá 12. februar 2013 um ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur, kunngerð nr. 114 frá 27. november 2012 um virknisvenjing, arbeiðsbúgving, tillagað starv, leiðbeinaraskipan o.a., kunngerð nr. 18 frá 22. mars 2010 um stuðul til hjálparráð, kunngerð nr. 94 frá 24. juni 2009 um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, kunngerð nr. 96 frá 18. november 2008 um stuðul til hoyritól, kunngerð nr. 51 frá 4. juni 2008 um serlig bútilboð, kunngerð nr. 15 frá 6. mars 2007 um afturgjaldsskyldu í sambandi við bústaðarbroytingar, kunngerð nr. 16 frá 6. mars 2007 um stuðul til at keypa bil o.a. sambært forsorgarlógini og kunngerð nr. 31 frá 1. mai 2006 um fakliga nevnd til børn við serligum tørvi

Hesar kunngerðir detta burtur: Kunngerð nr. 37 frá 22. mars 1993 um fráboðanarskyldu, kunngerð nr. 38 frá 22. mars 1993 um ráðgevingar- og vegleiðingarskyldu sambært forsorgarlógini, kunngerð nr. 3 frá 3. januar 2005 um skipan av bústovnum, kunngerð nr. 2 frá 3. januar 2005 um skipan av sambýlum, kunngerð nr. 1 frá 3. januar 2005 um valdsnýtslu á stovnum fyri fólk við víttfevnandi likamligum ella sálarligum brekum, kunngerð nr. 139 frá 19. september 1997 um forsorgarstuðul til fólk undir útbúgving, kunngerð nr. 116 frá 19. desember 2006 um stuðulsfólk til persónar við serligum tørvi, ið búgva heima, kunngerð nr. 39 frá 22. mars 1993 um mannagongd hjá kommununum viðvíkjandi útvegan av upplýsingum v.m. eftir forsorgarlógini, kunngerð nr. 89 frá 30. august 2016 um fíggjarligan stuðul, kunngerð nr. 44 frá 6. mai 2009 um stuðul til útreiðslur til ávísar viðgerðir til børn sambært forsorgarlógini og kunngerð nr. 123 frá 20. november 2015 um virknistænastu.

Almannamálaráðið, 23. desember 2019

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Ummælisviðgerð
Fylgiskjal 2: Almannaverkið
Fylgiskjal 3: Alzheimerfelagið
Fylgiskjal 4: Stýrið fyri Dáan
Fylgiskjal 5: Dátueftirlitið
Fylgiskjal 6: Deyvafelag Føroya
Fylgiskjal 7: Dugni
Fylgiskjal 8: Etiska ráðið
Fylgiskjal 9: Fakfelagssamstarvið
Fylgiskjal 10: Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar
Fylgiskjal 11: Javni
Fylgiskjal 12: Fíggjarmálaráðið
Fylgiskjal 13: Fysioterapeutfelag Føroya
Fylgiskjal 14: Vinnuhúsið
Fylgiskjal 15: Heilafelagið
Fylgiskjal 16: Heilsuhjálparafelag Føroya
Fylgiskjal 17: Heilsurøktarafelagið
Fylgiskjal 18: Heilsutrygd
Fylgiskjal 19: Heilsu- og Innlendismálaráðið
Fylgiskjal 20: Kommunufelagið
Fylgiskjal 21: Kriminalforsorgin
Fylgiskjal 22: Kvinnuhúsið
Fylgiskjal 23: Landsfelag Pensjónista
Fylgiskjal 24: MEGD
Fylgiskjal 25: Mentamálaráðið
Fylgiskjal 26: Parkinsonfelagið
Fylgiskjal 27: Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Fylgiskjal 28: Sosialráðgevarafelag Føroya
Fylgiskjal 29: Udlændinge- og Integrationsministeriet
Fylgiskjal 30: Føroya Landfúti
Fylgiskjal 31: Justitsministeriet